HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

**Løgtingið**

6. apríl 2018
Mál: 17/00872-54
Tygara skriv:
Viðgjørt: PB

**Løgtingsmál nr. XX/2017: Løgtingslóg um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni (náttúrumargfeldislógin)**

(Uppskot til)

**Løgtingslóg**

**um**

**fyrisiting av margfeldinum í náttúruni**

**(Náttúrumargfeldislógin)**

**Yvirlit:**

Kapittul 1. Endamál og gildisøki o.a. (§§ 1-3)
Kapittul 2. Almennar ásetingar um burðardygt brúk (§§ 4-14)
Kapittul 3. Fyrisiting av sløgum (§§ 15-24)
Kapittul 4. Fremmandar lívverur (§§ 25-29)
Kapittul 5. Økisvernd (§§ 30-48)
Kapittul 6. Útvald náttúrusløg (§§ 49-52)
Kapittul 7. Ílegutilfar (§§ 53-54)
Kapittul 8. Myndugleiki eftir lógini, eftirlit o.a. (§§ 55-62)
Kapittul 9. Handhevjan og tvingsilstiltøk (§§ 63-69)
Kapittul 10. Ásetingar at enda (§§ 70-72)

## Kapittul 1
## Endamál og gildisøki o.a.

*Endamálið við lógini*

**§ 1.** Endamálið við lógini er at røkja tað lívfrøðiliga, landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldið og tær vistfrøðiligu tilgongdirnar í tí føroysku náttúruni við burðardyggum brúki og vernd, eisini so at náttúran kann vera støði undir virki, mentan, heilsu og trivnaði hjá Føroya fólki nú og í framtíðini.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • E-mail: himr@himr.fo

*Gildisøki*

**§ 2.** Lógin fevnir um føroyskt landøki, eisini áir, vøtn, ósar og løkir, og føroyskt sjóumveldi.

*Stk. 2.* Á landgrunninum og á tí ytru føroysku landleiðini galda §§ 1, 3 til 5, 7 til 10, 14 til 16, 53 og 54, so langt tær passa, og við teimum avmarkingum, sum altjóðarættur setur.

*Allýsingar*

**§ 3.** Í hesi lógini skulu hesi hugtøkini skiljast soleiðis:

1) Dýr: dýr í breiðari merking, m.a. súgdýr, fuglur, fiskur og ryggleys dýr.
2) Fremmand lívvera: lívvera, sum ikki hoyrir til nakað slag ella nakran stovn, sum finst natúrliga á staðnum.
3) Heysting: at henta ella savna inn plantur ella plantupartar (eisini ber og fruktir) í útilívi og vinnu.
4) Innflutningur: at føra í land úr økjum uttan fyri gildisøkið hjá lógini.
5) Ílegutilfar: ílegur og annað arvatilfar í øllum lívfrøðiligum tilfari, sum kann flytast til aðrar lívverur við ella uttan tøkniliga hjálp, tó ikki ílegutilfar frá menniskjum.
6) Lívfrøðiligt margfeldi: margfeldið av vistskipanum, sløgum og ílegubrigdum innan fyri sløgini og tey vistfrøðiligu sambondini teirra millum.
7) Lívvera: einstaklingur (*individ*) av plantum, dýrum og smáverum, íroknaðir allir partar, sum kunnu nørast ella flyta ílegutilfar.
8) Náttúrumargfeldi: lívfrøðiligt margfeldi, landslagsmargfeldi og jarðfrøðiligt margfeldi, sum ikki í høvuðsheitum er úrslit av ávirkan frá menniskjum.
9) Náttúruslag: einsháttað slag av náttúru, sum fevnir um allar livandi lívverur og umhvørvistættirnar, sum har virka, ella serstøk sløg av náttúrufyribrigdum umframt serstøk sløg av jarðfrøðifyribrigdum.
10) Plantur: leggstreingjaplantur, mosi, algur, soppar og skónir.
11) Ryggleys dýr: dýr við ongum ryggi.
12) Slag (*species*): bólkur av livandi lívverum flokkaður eftir lívfrøðiligum metingarstøði.
13) Stovnur: bólkur av einstaklingum av sama slagi, sum um somu tíð liva innan fyri eitt avmarkað øki.
14) Tøka: øll avlíving ella burturtøka úr náttúruni av heilum lívverum ella pørtum av lívverum, sama hvat endamálið er.
15) Útseting: at seta út, tilvitað at sleppa út ella at tveita sum burturkast lívverur í náttúruna ella í eina afturlatna skipan, har eingin vissa er fyri, at tær ikki sleppa út.
16) Veiða: at fanga ella drepa vill dýr til gagnnýtslu.
17) Vistfrøðiligt funktiónsøki: øki – mørkini kunnu broytast við tíðini – sum hevur eina vistfrøðiliga funktión fyri eitt slag, til dømis sum gýtingarøki, vakstrarøki, øki, har ið fuglur søkir sær føði, ferðingarleið, hamskiftisøki, náttarhvíldarøki, makingarøki, yngliøki, vetrartilhaldsøki og búøki.
18) Vistfrøðiligur standur: støða og gongd við atliti at funktiónum, bygnaði og framleidni, har ið eitt náttúruslag finst, í mun til ítøkiligar ávirkanartættir.
19) Vistskipan: ein meira ella minni greidliga avmarkað og einsháttað náttúruskipan, har plantusamfeløg, dýrasamfeløg og smáverusamfeløg virka í samspæli sínámillum og við tað ikki-livandi umhvørvið.

## Kapittul 2
## Almennar ásetingar um burðardygt brúk

*Fyrisitingarmið fyri náttúrusløg og vistskipanir*

**§ 4.** Miðast skal eftir at varðveita margfeldið av náttúrusløgum í teimum natúrligu útbreiðsluøkjunum og við tí margfeldið av sløgum og tær vistfrøðiligu tilgongdirnar, sum eyðkenna hvørt náttúruslagið. Eisini skal miðast eftir at varðveita funktiónir, bygnað og framleidni hjá vistskipanunum, í so stóran mun sum tað verður mett at vera rímiligt.

*Fyrisitingarmið fyri sløg*

**§ 5.** Miðast skal eftir at varðveita sløgini og teirra ílegumargfeldi við framtíðini í huga, og at sløgini skulu finnast í lívførum stovnum í sínum natúrligu útbreiðsluøkjum. Í tann mun tað krevst til at røkka hesum, skulu eisini tey vistfrøðiligu funktiónsøkini hjá sløgunum og hinar vistfrøðiligu fyritreytirnar, sum tey ikki fáa verið fyriuttan, varðveitast.

*Stk. 2.* Fyrisitingarmiðið í stk. 1 geldur ikki fyri fremmandar lívverur.

*Stk. 3.* Tá ið talan er um tamd og vand sløg, skal sitast fyri ílegumargfeldinum við tí í hyggju at tryggja tilfeingisgrundarlagið fyri framtíðina.

*Almenn varsemisskylda*

**§ 6.** Øll hava skyldu til at fara fram við varsemi og gera tað, sum rímiligt er, til, at tað slepst undan, at náttúrumargfeldið verður fyri skaða, sum er ímóti fyrisitingarmiðunum í §§ 4 og 5. Verður virksemi útint sambært loyvi frá almennum myndugleika, er varsemisskyldan at rokna sum lokin, um fyritreytirnar fyri loyvinum framvegis eru til staðar.

*Meginreglur fyri almennum avgerðum í §§ 8 til 12*

**§ 7.** Meginreglurnar í §§ 8 til 12 skulu havast sum grundarlag sum leiðreglur, tá ið almennur myndugleiki verður útintur, eisini tá ið fyrisitingarstovnur veitir studning og í sambandi við fyrisiting av fastognum hjá tí almenna. Metingin sambært 1. pkt. skal síggjast í avgerðini.

*Vitanargrundarlagið*

**§ 8.** Almennar avgerðir, sum viðvíkja náttúrumargfeldinum, skulu, so langt sum tað er rímiligt, byggja á vísindaliga vitan um stovnsstøðuna hjá sløgum, útbreiðsluna og tann vistfrøðiliga standin hjá náttúrusløgum og virknaðin av árinum. Kravið til vitanargrundarlagið skal vera rímiligt alt eftir málinum og vandanum fyri, at náttúrumargfeldið verður fyri skaða.

*Stk. 2.* Myndugleikarnir skulu harafturat leggja dent á vitan, sum er grundað á royndir hjá ættarliðum, sum hava livað av og í samspæli við náttúruna, og sum kann styðja upp undir burðardygt brúk, og at náttúrumargfeldið verður vart.

*Meginreglan um fyrivarni*

**§ 9.** Verður avgerð tikin, hóast nøktandi vitan ikki er til taks um, hvørji árin avgerðin kann hava á náttúruna, skal miðast eftir at sleppa undan møguligum munandi skaða á náttúrumargfeldið. Er vandi fyri álvarsligum ella óbótaligum skaða á náttúrumargfeldið, skal vitanartrot ikki brúkast sum grundgeving fyri at útseta ella lata vera við at seta í verk fyrisitingartiltøk.

*Heildartrýstið á vistskipanina*

**§ 10.** Metast skal um eitt árin á eina vistskipan við støði í heildartrýstinum, sum vistskipanin er ella verður fyri.

*Tann, sum varðar av virksemi, sum er umhvørvinum at skaða, ber kostnaðin*

**§ 11.** Tann, sum varðar av virkseminum,ber kostnaðin av at forða fyri ella avmarka skaða á náttúrumargfeldið, sum virksemið er atvold til, tá ið tað ikki er órímiligt alt eftir virkseminum og skaðanum.

*Umhvørvisgóð tøkni og rakstrarhættir*

**§ 12.** Til at sleppa undan ella avmarka skaðilig árin á náttúrumargfeldið skal støði takast í rakstrarháttum, tøkni og staðseting, sum eftir eini heildarmeting av fyrrverandi, verandi og komandi brúki av margfeldinum og fíggjarligum viðurskiftum geva tey bestu samfelagsligu úrslitini.

*Dygdarkrøv til náttúrumargfeldi*

**§ 13.** Landsstýrismaðurin kann áseta leiðbeinandi dygdarkrøv til náttúrumargfeldi, m.a. til útbreiðsluna av einum slagi ella náttúruslagi og til tann vistfrøðiliga standin hjá einum náttúruslagi.

*Stk. 2.* Verður eitt dygdarkrav, sum er ásett eftir hesi lógini, ikki lokið, ella er vandi fyri, at tað ikki verður lokið, eigur landsstýrismaðurin í samráð við aðrar avvarðandi myndugleikar at gera eina ætlan fyri, hvussu tað kortini kann verða lokið. Ætlanin kann m.a. snúgva seg um at áseta

nærri reglur við heimild í hesi ella øðrum lógum.

*Onnur týðandi samfelagsáhugamál*

**§ 14.** Tiltøk eftir hesi lógini skulu vigast upp ímóti øðrum týðandi samfelagsáhugamálum.

## Kapittul 3
## Fyrisiting av sløgum

*Meginregla fyri fyrisiting*

**§ 15.** Veiða og onnur tøka av natúrliga villum dýrum kann bara fara fram sambært lóg ella avgerð við heimild í lóg. Í øllum virksemi skal sleppast undan, at vill dýr og teirra reiður ella búgv verða fyri óneyðugum skaða og líðing. Sleppast skal eisini undan, at vill dýr verða jagstrað óneyðuga.
*Stk. 2.* Heysting og onnur tøka av villum plantum er loyvd, tá ið hon ikki hóttir stovnin á staðnum ella er avmarkað við lóg ella avgerð við heimild í lóg.
*Stk. 3.* Ásetingarnar í stk. 1 og 2 eru ikki til hindurs fyri lógligari ferðslu, landbúnaðarvirksemi ella øðrum virksemi, sum er í samsvari við varsemisskylduna í § 6.
*Stk. 4.* Veiða, heysting og onnur gagnnýtsla, sum er fevnd av løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, er ikki fevnd av reglunum um veiðu og tøku í §§ 16, 18 og 19.

*Veiða*

**§ 16.** Avgerðir um at loyva veiðu av villum súgdýrum og fugli verða tiknar við heimild í viðkomandi veiðulóggávu.
*Stk. 2.* Veiða kann bara loyvast, tá ið slagið sambært tí bestu tøku skjalfestingini framleiðir eitt avlop, sum kann veiðast burðardygt.
*Stk. 3.* Tá ið avgerð verður tikin um at loyva veiðu og um mannagongdina í sambandi við veiðu, skal dentur harumframt leggjast á funktiónina, sum slagið hevur í vistskipanini, og ávirkanina, sum veiðan kann hava á tað lívfrøðiliga margfeldið annars. Dentur skal eisini leggjast á týdningin, sum slagið hevur fyri vinnu, frítíðarlív og veiðusiðvenju í tí viðkomandi økinum, og á skaða, sum slagið ger.
*Stk. 4.* Stk. 2 og 3 galda ikki fyri veiðu av fremmandum lívverum.

*Onnur tøka eftir meting hjá landsstýrismanninum*

**§ 17.** Landsstýrismaðurin kann við kunngerð ella fyrisitingaravgerð loyva tøku av villum súgdýrum og fugli umframt fiski í áum og vøtnum:

1) til at verja plantur, dýr og vistskipanir, sum finnast natúrliga í náttúruni,
2) til at verja fyri skaða á grøði, húsdýr, fisk, vatn ella aðra ogn,
3) til at tryggja almenn heilsuatlit og trygdaratlit ella onnur týðandi almenn áhugamál,
4) til at endurreisa stovnar,
5) til gransking, undirvísing ella flokkanarvirksemi, ella
6) sum eru fremmandar lívverur.

*Stk. 2.* Avgerð eftir stk. 1, nr. 1 til 6, kann bara takast, um tøkan ikki hóttir lívførið hjá stovninum, ella tað ikki ber til at røkka endamálinum á annan nøktandi hátt. Landsstýrismaðurin kann leggja treytir við einum loyvi til tøku.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann av sínum eintingum seta í verk tøku við teimum endamálum, sum nevnd eru í stk. 1, nr. 1 til 4 og 6, sbr. stk. 2. Tøkan kann um neyðugt fara fram á ognini hjá øðrum. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur fyri slíkari tøku.

*Tøka av ryggleysum dýrum*

**§ 18.** Um ikki annað er ásett, er loyvt at

1) avlíva ryggleys dýr, sum eru til ónáðir ella skaða,
2) avlíva fremmand ryggleys dýr og
3) taka ryggleys dýr, um tað ikki hóttir stovnin í økinum.

*Stk. 2.* Tá ið landsstýrismaðurin setur í verk tiltak eftir stk. 1, nr. 1 ella 2, kann hetta um neyðugt fara fram á fastogn hjá øðrum.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta reglur ella taka avgerð um veiðu og aðra tøku av ryggleysum landdýrum.
*Stk. 4.* Veiða og onnur gagnnýtsla av villum ryggleysum dýrum í sjónum og í áum, vøtnum, ósum og løkum er ikki fevnd av hesi ásetingini.

*Tøka av plantum*

**§ 19.** § 15, stk. 2, er ikki til hindurs fyri, at plantur verða burturtiknar til at verja fyri skaða á heilsuna hjá fólki og dýrum, á grøði ella aðra ogn, til at taka burtur fremmandar lívverur ella til at tryggja týðandi samfelagsáhugamál.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann á ognini hjá øðrum seta tiltøk í verk til at verja fyri skaða sum nevndum í stk. 1 og taka stig til burturtøku til at verja natúrlig sløg og vistskipanir.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann gera kunngerð ella taka avgerð um heysting ella aðra tøku av plantum, sum ikki er fevnd av reglum í ella hevur heimild í aðrari lóg.

*Stk. 4.* Heysting og onnur gagnnýtsla av villum plantum í sjónum og í áum, vøtnum, ósum og løkum er ikki fevnd av hesi ásetingini.

*Ferðsla uttangarðs*

**§ 20.** Til at forða fyri at plantur ella dýr verða fyri skaða ella ampa, kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta reglur fyri, hvussu størri tiltøk uttangarðs skulu skipast, fyri órógvandi virksemi og fyri ferðslu, sum í serligan mun kann valda skaða.

*Raðfest sløg*

**§ 21.** Landsstýrismaðurin kann við kunngerð útnevna nærri tilskilað sløg sum raðfest. Tá ið avgerð verður tikin hesum viðvíkjandi, skal stórur dentur leggjast á,

1) um stovnsstøðan ella stovnsgongdin hjá slagnum ikki samsvarar við miðið í § 5, stk. 1,
2) um slagið hevur munandi part av síni natúrligu útbreiðslu ella íleguserey ðkennir í Føroyum, ella
3) um altjóða skyldur eru knýttar at slagnum.

*Stk. 2.* Tá ið talan er um sløg í sjónum, verður ásetingin í stk. 1, nr. 2, bara brúkt í serligum førum.

*Stk. 3.* Tá ið tað er skjalfest, at støðan ella gongdin hjá einum slagi eftir vísindaligum metingarstøði ikki samsvarar við fyrisitingarmiðið í § 5, stk. 1, skal landsstýrismaðurin – av sínum eintingum, ella tá ið ein felagsskapur ella onnur við rættarligum áhuga krevja tað – meta, um avgerð eftir stk. 1 eigur at verða tikin.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann við kunngerð gera av, at ein raðfesting eftir stk. 1, nr. 1, fellur burtur, tá ið stovnsmiðið í § 5, stk. 1, er rokkið.

*Innihaldið í verndini*

**§ 22.** Ein kunngerð um raðfest sløg eftir § 21, stk. 1, kann

1) áseta forboð fyri allari tøku, skaða á ella oyðilegging av einum raðfestum slagi ella ávísum stovnum av einum raðfestum slagi, og at reglurnar í §§ 15 til 20 bara skulu galda, í tann mun sum kunngerðin ásetur.
2) áseta reglur fyri vernd av ávísum sløgum av vistfrøðiligum funktiónsøkjum, sum eru minni í vavi. Fyrilitini, sum áløgd verða, skulu ikki hava munandi ampa við sær fyri brúk, sum er í gongd. Seta fyrilitini til samans avmarkingar, sum eftir avgerðina hava munandi ampa og miss við sær, kann jarðareigarin krevja, at økið verður vart eftir kapitli 5, ella at undantak verður gjørt frá raðfestingini fyri økini, sum talan er um, eftir stk. 5. Ásetingin er ikki galdandi í ella á sjónum.
3) seta krøv um at gera greiðu fyri, hvørjar avleiðingar ætlað inntriv í funktiónsøkini hjá einum slagi hava fyri slagið, eisini at gera greiðu fyri øðrum funktiónsøkjum, sum kunnu gera sítt til at tryggja, at slagið verður vart í samsvari við § 5, stk. 1.

*Stk. 2.* Kunngerðin kann áseta reglur um røktartiltøk í samsvari við § 44, tá ið tað krevst til at verja slagið. Almennar studningsskipanir skulu, alt tað er gjørligt, gera sítt til at tryggja, at eitt raðfest slag verður vart.

*Stk. 3.* Verða reglur ásettar um vernd av ávísum sløgum av vistfrøðiligum funktiónsøkjum hjá raðfestum sløgum sambært stk. 1, nr. 2, har sum virkin røkt ella onnur sløg av tiltøkum eru ein fyritreyt fyri at varðveita funktiónsøkið, skal landsstýrismaðurin leggja fram virkisætlan til

at tryggja slík økir. Tað almenna kann gera nærri avtalu við jarðareigara ella rættindahavara um at røkja eitt vistfrøðiligt funktiónsøki hjá raðfestum sløgum.
*Stk.4.* Samstundis við kunngerð eftir § 21 skal landsstýrismaðurin meta, um tað fyri at varðveita slagið og tess ílegumargfeldi er neyðugt at taka fleiri avgerðir um vistfrøðilig funktiónsøkir eftir hesi lógini ella øðrum lógum.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann gera undantak frá kunngerð eftir § 21, um tað ikki ger standin ella gongdina hjá stovninum verri, ella um týðandi samfelagsatlit gera tað neyðugt.

*Handil o.a.*

**§ 23.** Til at varðveita dýrasløg og plantusløg, sum natúrliga liva vill, og til at halda altjóða skyldur, kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta reglur fyri innflutningi, útflutningi, flutningi, sølu og varðveitslu ella ognarhaldi av livandi ella deyðum eintøkum ella pørtum av slíkum.

*Varðveitslutiltøk uttan um búøkið og fyri tamd og vand sløg*

**§ 24.** Er eitt slag í beinleiðis vanda fyri at verða oytt, skal landsstýrismaðurin meta, um umframt avgerð eftir § 21 varðveitslutiltøk skulu setast í verk uttan um búøkið, um tað kann gera sítt til, at slagnum verður lív lagað í náttúruni.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta reglur fyri serligum varðveitslutiltøkum fyri tamd og vand sløg til at styðja upp undir miðið í § 5, stk. 3.

## Kapittul 4
## Fremmandar lívverur

*Varsemiskrav*

**§ 25.** Tann, sum hevur ábyrgdina, tá ið livandi ella lívførar lívverur verða settar út í umhvørvið, skal fara fram við varsemi og, alt tað er gjørligt, royna at forða fyri, at útsetingin fær óhepnar avleiðingar fyri tað lívfrøðiliga margfeldið. Verður sett út sambært loyvi frá almennum myndugleika, er varsemisskyldan at rokna sum lokin, um fyritreytirnar fyri loyvinum framvegis eru til staðar.
*Stk. 2.* Tann, sum fer undir virksemi ella tiltak, sum kann hava við sær, at livandi ella lívførar lívverur spjaðast ella sleppa út, hagar ið tær ikki liva natúrliga, skal í rímiligan mun taka stig til at forða fyri, at hetta hendir.
*Stk. 3.* Kemur skaði á lívfrøðiligt margfeldi ella vandi fyri álvarsligum skaða á lívfrøðiligt margfeldi fyri, orsakað av at fremmandar lívverur verða settar út ella ótilætlað sleppa út, skal tann, sum hevur ábyrgdina, beinanvegin boða landsstýrismanninum frá og taka stig samsvarandi §§ 63 og 64, uttan so at slík skylda at boða frá og taka stig er galdandi eftir aðrari lóg.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta reglur um virksemi ella tiltøk, sum kunnu hava við sær vanda fyri, at lívverur, sum ikki liva natúrliga á einum stað, spjaðast ella ótilætlað sleppa út, og um fráboðanarskylduna eftir stk. 3.

*Innflutningur*

**§ 26.** Livandi ella lívførar lívverur kunnu bara flytast inn í landið við loyvi frá landsstýrismanninum, sbr. tó 2. pkt. Tó krevst ikki loyvi eftir hesi lógini til at flyta inn fremmand dýr, sum eru fevnd av ásetingum í ella við heimild í løgtingslóg um innflutning og hald av vandamiklum dýrum o.ø.
*Stk. 2.* Er endamálið við innflutninginum at seta út í náttúruna, skal umsóknin um loyvi gera greiðu fyri, hvørji árin útsetingin kann hava á tað lívfrøðiliga margfeldið. Landsstýrismaðurin kann leggja treytir við loyvinum.
*Stk. 3.* Loyvi kann ikki gevast, um orsøk er at halda, at innflutningurin fer at hava munandi óhepnar avleiðingar við sær fyri tað lívfrøðiliga margfeldið.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta reglur um innflutning eftir stk. 1, eisini um krøv til umsókn og treytir fyri loyvinum. Landsstýrismaðurin kann eisini í kunngerð áseta, at ávísar lívverur ella bólkar av lívverum kunnu flytast inn uttan loyvi eftir hesi greinini, og kann í tí førinum krevja fráboðan. Landsstýrismaðurin kann eisini í kunngerð áseta forboð fyri at flyta ávísar

lívverur inn, um tað verður mett at vera neyðugt, fyri at sleppast kann undan munandi óhepnum avleiðingum fyri tað lívfrøðiliga margfeldið.

*Útseting og søla*

**§ 27.** Tað er ongum loyvt uttan við heimild í § 28 ella loyvi frá landsstýrismanninum at seta út

1) lívverur av sløgum og undirsløgum, sum ikki finnast natúrliga í Føroyum,
2) vill súgdýr og fugl av sløgum, undirsløgum ella stovnum, sum ikki frammanundan finnast natúrliga í einum øki, og
3) lívverur, staðføst stamma undantikin, á sjógv ella í áir, vøtn, ósar og løkir, heldur ikki manngjørdar hyljar, uttan so at loyvi er givið eftir løgtingslóg um aling av fiski v.m.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann, tá ið plantur, sum settar verða út í privatar urtagarðar, eru undantiknar, í kunngerð áseta reglur um krøv um loyvi til at seta út lívverur, sum ikki frammanundan finnast natúrliga á staðnum. Landsstýrismaðurin kann eisini í kunngerð áseta forboð fyri at seta út og selja ávísar lívverur, tá ið tað verður mett at vera neyðugt til at sleppa undan óhepnum avleiðingum fyri tað lívfrøðiliga margfeldið.
*Stk. 3.* Umsókn um loyvi til at seta út sambært stk. 1 og sambært kunngerð við heimild í stk. 2, 1. pkt., skal gera greiðu fyri árinunum, sum útsetingin kann hava á tað lívfrøðiliga margfeldið. Landsstýrismaðurin kann leggja treytir við loyvinum. Loyvi kann ikki gevast, um orsøk er at halda, at útsetingin fer at hava við sær munandi óhepnar avleiðingar fyri tað lívfrøðiliga margfeldið. Loyvi kann heldur ikki gevast í ósamsvari við forboð ásett við heimild í løgtingslóg um innflutning og hald av vandamiklum dýrum § 1, stk. 1. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta krøv til umsóknina.

*Útseting uttan serligt loyvi*

**§ 28.** Verður varsemiskyldan eftir § 25 hildin, er loyvt uttan serligt loyvi eftir hesi lógini at seta út

1) lívverur, sum eru innfluttar við loyvi eftir § 26, stk. 1, sbr. stk. 2, við útseting í hyggju,
2) plantur í privatar urtagarðar og
3) plantur í almennar grasagarðar og onnur velt økir, um planturnar í lítlan mun kunnu væntast at breiða seg út um økið, og spjaðingin ikki kann væntast at hava óhepnar avleiðingar við sær fyri tað lívfrøðiliga margfeldið.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta, at nærri tilskilaðar lívverur ella bólkar av lívverum kunnu setast út uttan serligt loyvi, um útsetingin ikki kann væntast at hava óhepnar avleiðingar við sær fyri tað lívfrøðiliga margfeldið. Í tí føri kann fráboðan krevjast og rætturin at seta út uttan loyvi avmarkast til nærri ásett øki.
*Stk. 3.* Útseting eftir stk. 1 kann ikki fara fram í ósamsvari við kunngerð eftir § 27, stk. 2.

*Onnur lóggáva*

**§ 29.** Loyvir eftir hesi lógini sleppa ongum undan møguligum loyvum til innflutning ella útseting, sum krevjast eftir aðrari lóggávu. Krevur innflutningur ella útseting loyvi eftir fleiri lógum, eiga myndugleikarnir eftir hesi og øðrum lógum at fáa samskipaða málsviðgerð í lag. Landsstýrismaðurin kann skipa slíka samskipan við kunngerð.
*Stk. 2.* Metingar eftir hesum kapitlinum skulu ikki fevna um atlit at lívi og heilsu hjá plantum, dýrum og fólki, sum eru fevnd av aðrari lóggávu.

## Kapittul 5
## Økisvernd

*Økisverndarmið*

**§ 30.** Verndarøkir á landi, í áum, vøtnum, ósum og løkum og í ella á sjónum eftir hesum kapitlinum skulu gera sítt til at varðveita

1) fjølbroytnisbreiddina av náttúrusløgum og landsløgum,
2) sløg og ílegumargfeldi,
3) hótta náttúru og vistfrøðilig funktiónsøkir hjá raðfestum sløgum,

4) størri heilar vistskipanir, eisini so at tær kunnu vera atkomandi til einfalt útilív,
5) økir við serstøkum náttúrusøguligum virðum,
6) náttúru, sum er merkt av brúki gjøgnum tíðirnar (røktarlandsløg), ella sum eisini hevur mentanarsøgulig virðir, og at skipa brúk, sum ger sítt til at varðveita náttúruvirðini,
7) vistfrøðiligar og landslagsligar samanhangir innanlands og altjóða ella
8) tilvísingarøkir til at fylgja gongdini í náttúruni.

*Stk. 2.* Tá ið avgerð verður tikin eftir aðrari lóg um at verja náttúruna í einum øki, eigur dentur at leggjast á endamálini í stk. 1. Eru slíkar avgerðir eftir aðrari lóg liður í eini ætlan, sum fevnir um økir, sum eru vard við avgerð eftir hesi lógini, kann landsstýrismaðurin áseta reglur til at tryggja, at verndin eftir teimum ymsu lógunum verður samskipað samsvarandi endamálinum við ætlanini.

*Kunngerðir um verndarøkir*

**§ 31.** Landsstýrismaðurin skipar tað einstaka verndarøkið, sbr. §§ 32 til 36, við kunngerð.
*Stk. 2.* Kunngerðin ásetur endamálið við verndarøkinum, eisini náttúruvirðini og mentanarvirðini, sum verndin skal varðveita, og standin, sum miðað verður eftir at røkka við verndini, mørkini um verndarøkið, ávirkaðar ognir, og hvussu økið kann verða brúkt. Kunngerð um verndarøki í ella á sjónum skal tilskila, um verndarendamálið fevnir um havbotnin, vatnsúluna, vatnskorpuna ella eina samanseting av hesum.
*Stk. 3.* Tann landafrøðiliga víddin á verndarøkinum skal samsvara við verndarendamálið. Tá ið mørkini um verndarøkið verða ásett, skal dentur leggjast á at varðveita vistfrøðiligar funktiónir av týdningi fyri verndarendamálið, og hvussu væl vistskipanin tolir árin uttanífrá.
*Stk. 4.* Innan fyri karmin, sum geldur fyri hvønn verndarflokkin, kann landsstýrismaðurin í kunngerðini forbjóða ella áseta reglur fyri virksemi ella ferðslu, sum í sjálvum sær ella saman við øðrum brúki kann virka ímóti verndarendamálinum. Ásetast kunnu eisini ásetingar um, at sumt virksemi ikki kann fara fram, uttan at umsókn frammanundan er send fyrisitingarmyndugleikanum, og hesin síðan hevur givið loyvi. Landsstýrismaðurin kann áseta serligar reglur fyri ymsar partar av økinum, tá ið tað er í samsvari við funktiónina, sum økisparturin hevur í mun til verndarendamálið.
*Stk. 5.* Verndarkunngerðin skal ikki vera til hindurs fyri, at burðardygt brúk, sum styðjar upp undir verndarendamálið í einum øki, kann halda fram.

*Tjóðgarðar*

**§ 32.** Sum tjóðgarðar kunnu verjast størri náttúruøkir, sum bera í sær serstakar ella umboðandi vistskipanir ella landsløg, sum í høvuðsheitum ikki hava verið fyri tyngri náttúruinntrivum.
*Stk. 2.* Í tjóðgørðum skal eingin varandi ávirkan á náttúruumhvørvið ella mentanarminnir fara fram, uttan so at slík ávirkan er ein fyritreyt fyri at halda verndarendamálið. Kunngerðin sambært § 31 skal verja landslagið við plantum, dýrum, jarðfrøðiligum fyribrigdum og mentanarminnum fyri útbygging, verkløgum, dálking og øðrum virksemi, sum kann skaða verndarendamálið, og tryggja møguleikan at uppliva náttúruna í frið og náðum. Verndin er ikki til hindurs fyri ferðslu til gongu við fyriliti. Slík ferðsla kann bara avmarkast ella forbjóðast í avmarkaðum økjum í einum tjóðgarði, og bara tá ið tað krevst til at verja plantur ella dýr, mentanarminnir ella jarðfrøðilig fyribrigdir.
*Stk. 3.* Uppkast til umsitingarætlan skal leggjast fram samstundis við verndarkunngerðina. Er tað eisini viðkomandi at gera røktarætlan, skal hon vera partur av umsitingarætlanini.

*Landslagsverndarøkir*

**§ 33.** Sum landslagsverndarøkir kunnu verjast náttúrulandsløg ella røktarlandsløg, sum hava vistfrøðiligt, mentanarligt ella upplivingarligt virði ella eru samleikaskapandi. Upp í landslagið verða

eisini tald mentanarminnir, sum gera sítt til at geva landslagnum tess sermerkir.
*Stk. 2.* Í einum landslagsverndarøki er ikki loyvt at fara undir nakað virksemi, sum einsamalt ella saman við øðrum virksemi kann broyta sermerkir ella dámin í landslagnum munandi. Virksemi, sum er í gongd, kann halda fram og mennast innan fyri karmin, sum 1. pkt. setur. Nýtt virksemi skal lagast eftir landslagnum. Dentur skal leggjast á heildarávirkanina frá virksemi í økinum. Í kunngerðini kunnu vera ásetingar um, hvat ið einsamalt ella saman við øðrum virksemi kann broyta sermerkir ella dámin í landslagnum munandi, um krøv til landslagsliga eftirlagan og um aðra ferðslu enn gongu.
*Stk. 3.* Viðvíkjandi teimum pørtunum av landslagsverndarøkinum, har brúk er ein týðandi fyritreyt fyri at halda endamálið við verndini, skal í seinasta lagi samstundis við verndaravgerðina sambært stk. 1 uppkast til røktarætlan leggjast fram til at tryggja endamálið við verndini. Ætlanin kann fevna um avtalu um brúk av økjum, stakfyribrigdir og rakstrarhættir. Í ætlanini ella avtaluni kunnu vera ásetingar um at samsýna privatum, sum hjálpa til at røkja økið.
*Stk. 4.* Uppkast til umsitingarætlan skal leggjast fram samstundis við verndarkunngerðina. Er tað eisini viðkomandi at gera røktarætlan, skal hon vera partur av umsitingarætlanini.

*Náttúrufriðøkir*

**§ 34.** Sum náttúrufriðøkir kunnu verjast økir, sum

1) bera í sær hótta, sjáldsama ella viðkvæma náttúru,
2) umboða eitt ávíst slag av náttúru,
3) á annan hátt hava serligan týdning fyri lívfrøðiligt margfeldi,
4) eru eitt serligt jarðfrøðiligt fyribrigdi ella
5) hava serligt náttúruvísindaligt virði.

*Stk. 2.* Sum náttúrufriðøkir kunnu eisini verjast økir, sum við fríari menning ella virknum endurreisingartiltøkum kunnu fáa náttúruvirðir sum tey, sum nevnd eru í stk. 1.
*Stk. 3.* Í einum náttúrufriðøki er ongum loyvt at gera nakað, sum minkar um tey í verndarendamálinum nevndu verndarvirðini. Eitt náttúrufriðøki kann alfriðast fyri øllum virksemi, tiltøkum og ferðslu. Í kunngerðini kunnu vera ásetingar um mentanarminnir í náttúrufriðøkinum.
*Stk. 4.* Verður avgerð tikin um náttúrufriðøki, sum krevur virkin endurreisingartiltøk, ella náttúrufriðøki, har brúk er ein fyritreyt fyri at røkja verndarendamálið, skal samstundis við verndarkunngerðina uppkast til røktarætlan leggjast fram til at tryggja verndarendamálið. Ætlanin kann fevna um avtalu um brúk av økjum, stakfyribrigdir og rakstrarhættir. Í ætlanini ella avtaluni kunnu vera ásetingar um at samsýna privatum, sum hjálpa til at røkja økið.

*Lívøkisverndarøkir*

**§ 35.** Sum lívøkisverndarøkir kunnu verjast økir, sum hava ella kunnu fáa serligan týdning sum vistfrøðilig funktiónsøkir hjá einum ella fleiri nærri tilskilaðum sløgum. Forboð kann ásetast fyri virksemi og ferðslu, sum kann ávirka ella órógva slagið ella tess lívskor. § 34, stk. 4, geldur samsvarandi.

*Verndarøkir í ella á sjónum*

**§ 36.** Verndarøkir kunnu skipast í ella á sjónum til at verja verndarvirðir í ella á sjónum, eisini náttúruvirðir, sum eru vistfrøðiligar fyritreytir fyri sløgum, sum liva á landi.
*Stk. 2.* Sum verndarøkir í ella á sjónum kunnu verjast økir, sum

1) bera í sær sermerktar ella umboðandi vistskipanir, og sum ikki hava verið fyri stórum náttúruinntrivum,
2) bera í sær hótta, sjáldsama ella viðkvæma náttúru,
3) umboða eitt ávíst náttúruslag,
4) á annan hátt hava serligan týdning fyri lívfrøðiligt margfeldi,
5) eru eitt serligt jarðfrøðiligt fyribrigdi,
6) hava serligt náttúruvísindaligt virði, ella
7) hava serligan týdning sum vistfrøðiligt funktiónsøki hjá einum ella fleiri nærri tilskilaðum sløgum.

*Stk. 3.* Verndarøkir í ella á sjónum kunnu skipast fyri at halda eitt ella fleiri av miðunum í § 30, stk. 1.

*Stk. 4.* Tá ið verndarøkir verða skipað í ella á sjónum, skal tað tilskilast, um endamálið við verndini og avmarkingar fevna um botnin, vatnsúluna, vatnskorpuna ella eina samanseting av hesum. Annars galda §§ 30 og 31 og §§ 37 til 48 samsvarandi, í tann mun tær hóska til.
*Stk. 5.* Í einum verndarøki í ella á sjónum er ongum loyvt at gera nakað, sum minkar um verndarvirðini, sum nevnd eru í verndarendamálinum. Eitt verndarøki í ella á sjónum kann verjast fyri øllum virksemi, dálking og brúki við teimum avmarkingum, sum altjóðarættur setur. Avmarkingar av virksemi skulu vera í rímiligum lutfalli við endamálið við verndini.
*Stk. 6.* Sjóøkir, har ið verndin bara snýr seg um nærri ásettar reglur fyri útinnan av fiskiveiði, verða skipað sambært løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi.

*Altjóða støða fyri verndarøkir*

**§ 37.** Landsstýrismaðurin kann geva einum verndarøki eftir hesi lógini serstaka støðu sambært einum galdandi altjóða sáttmála um vernd av náttúruumhvørvi ella røktarumhvørvi. Virknaðurin, sum viðkomandi sáttmáli knýtir at slíkari støðu, geldur eisini sum føroyskur rættur.

*Málsviðgerð*

**§ 38.** Tá ið farið verður undir verndararbeiði eftir hesum kapitlinum, skal, innan fyri karmin, sum stk. 2 og §§ 39 og 40 seta, fáast í lag málsviðgerð við so góðum samstarvi sum gjørligt við eigarar, rættindahavarar, ávirkað vinnuáhugamál, umboð fyri fólkið á staðnum, kommununa og aðrar viðkomandi myndugleikar. Tað sama geldur, tá ið jarðareigari ella rættindahavari sjálvur bjóðar øki fram til vernd. Málsviðgerðin skal skapa sum mest av greidleika um endamál og verndarvirðir, brúk á staðnum og kunnleika um verndarvirðir, økismørk og avleiðingar av verndini. Sum liður í málsviðgerðini skal eisini vitan um onnur møgulig virðir í økinum savnast inn.
*Stk. 2.* Sambandið við kommunalt planarbeiði, sum farið verður undir samstundis eftir planlóggávuni, skal greiðast í samráð við kommununa. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta reglur um samskipaða viðgerð av planum eftir planlóggávuni og vernd eftir hesi lógini.

*Kunngering av ætlaðum verndaruppskotum*

**§ 39.** Landsstýrismaðurin skal kunngera verndaruppskotið við teimum týdningarmestu avleiðingunum, sum tað væntast at fara at hava, alment á ein hátt, sum er hóskandi til at kunna almenningin og ávirkað áhugamál um uppskotið. Eigarar og rættindahavarar skulu, alt tað er gjørligt, kunnast beinleiðis og skrivliga og hava rímiliga freist at koma við viðmerkingum, áðrenn uppskot verður tilevnað.
*Stk. 2.* Tíðliga í málsfyrireikingini, og í góðari tíð fyri kunngeringina, skal landsstýrismaðurin royna at fáa samstarv í lag við almennar myndugleikar, felagsskapir o.o. við serligum áhuga í tiltakinum. Arbeiðið at orða kunngerð skal fara fram í samstarvi við viðkomandi týðandi myndugleikar.

*Hoyring um uppskot til verndarkunngerð*

**§ 40.** Viðkomandi landsmyndugleikar, kommunur og fakstovnar undir landinum umframt felagsskapir, sum mettir verða at hava týðandi áhuga, skulu hoyrast um uppskotið til verndarkunngerð. Jarðareigarar og rættindahavarar skulu hava serliga fráboðan. Uppskotið skal leggjast fram til alment eftirlit á minst einum lætt atkomandi stað og kunngerast á ein hátt, sum er hóskandi til at kunna almenningin og møgulig ávirkað áhugamál um uppskotið.
*Stk. 2.* Hoyringaruppskotið skal lýsa økið, sum uppskotið fevnir um, m.a. verndarendamálið, verndarvirðini, hvussu økið er avmarkað, onnur virðir enn náttúruvirðir og avleiðingarnar, sum uppskotið væntast at fáa, og seta eina freist upp á minst tveir mánaðir at geva ummæli. Er talan um smáar broytingar í galdandi kunngerðum, kann víkjast frá hesi freistini.
*Stk. 3.* Fráboðanin til jarðareigarar og rættindahavarar skal umframt tær í stk. 2 nevndu upplýsingarnar fevna um allar upplýsingar, sum mett verður, at eigarunum og rættindahavarunum tørvar til at røkja síni áhugamál á fullgóðan hátt.

*Virksemi tá ið málsviðgerðin er byrjað*

**§ 41.** Tá ið eitt verndaruppskot er kunngjørt eftir § 39, kann ein fyrisitingarstovnur uttan nærri grundgeving havna eini umsókn um loyvi o.a. til virksemi í einum øki, sum er fevnt av uppskotinum. Loyvi kann bara gevast, um virksemið ongan nevningarverdan týdning hevur fyri uppskotið. Tá ið týðandi samfelagsáhugamál gera tað neyðugt, kann landsstýrismaðurin kortini geva loyvi til virksemið.

*Stk. 2.* Samstundis við ella eftir kunngering eftir § 39 kann landsstýrismaðurin fyri alt ella partar av verndarøkinum, sum uppskotið fevnir um, áseta fráboðanarskyldu fyri virksemi, sum loyvi ikki krevst til eftir aðrari lóg. Fráboðanarskyldan verður kunngjørd á sama hátt sum verndaruppskotið. Hoyring fer fram, eftir at fráboðanarskyldan er sett í verk, fyri at gera av, um fráboðanarskyldan skal standa við, og um nærri reglur eiga at verða ásettar fyri fráboðanarskylduna.

*Stk. 3.* Tá ið kunngering eftir § 39 er farin fram, kann ein almennur myndugleiki ikki veita virksemi í einum øki, sum er fevnt av verndaruppskotinum, studning. Landsstýrismaðurin kann gera undantak frá hesum, um virksemið ikki hevur nevningarverdan týdning fyri ella gagnar uppskotinum.

*Stk. 4.* Virknaðurin av stk. 1 til 3 er avmarkaður til fýra ár, frá tí at uppskotið er kunngjørt. Landsstýrismaðurin kann leingja virknaðin í mesta lagi tvey ár.

*Bráðfeingisvernd*

**§ 42.** Til at forða fyri skaða á verndarvirðir kann landsstýrismaðurin við kunngerð seta í verk bráðfeingisvernd av ávísum økjum.

*Stk. 2.* Er eitt ávíst náttúruslag í vanda fyri at hvørva, kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta avmarkingar og forboð fyri virksemi og ferðslu, sum kann hótta náttúruslagið uppaftur meira.

*Stk. 3.* Fyri kunngerðir um bráðfeingisvernd eftir stk. 1 og 2 galda §§ 38 til 40 ikki. Tá ið avgerð verður tikin um bráðfeingisvernd, skal málsviðgerðin halda fram uttan ógrundaðan steðg. Virknaðurin av eini kunngerð um bráðfeingisvernd er avmarkaður til fýra ár, frá tí at kunngerðin er kunngjørd. Landsstýrismaðurin kann leingja virknaðin av kunngerðini um bráðfeingisvernd í mesta lagi tvey ár.

*Grundgeving fyri og kunngering av verndarkunngerðum*

**§ 43.** Í eini kunngerð eftir § 31 skal grundgevingin gera greiðu fyri, hvat náttúrumargfeldi og hvørji onnur virðir ið vard verða í og við verndaravgerðini, og hvussu avgerðin ger sítt til at halda føroysk mið og møguligar altjóða skyldur.

*Stk. 2.* Kunngerðir eftir §§ 31 og 42 skulu umframt at lýsast í Kunngerðablaðnum kunngerast á ein hátt, sum er hóskandi til at kunna almenningin og ávirkað áhugamál. Jarðareigarar, rættindahavarar og kommunur í verndarøkinum skulu hava serliga fráboðan um kunngerðina. Kunngeringin og fráboðanin skulu kunna um rættin til endurgjald eftir § 47 og freistina eftir § 48, stk. 1.

*Stk. 3.* Verndaravgerðin skal tinglýsast.

*Stk. 4.* Verndaravgerðir skulu vera alment atkomandi í talgildum líki við viðkomandi kortum.

*Røkt av verndarøkjum*

**§ 44.** Í verndarøkjum eftir hesum kapitlinum kann landsstýrismaðurin skipa fyri røkt og uppmerking av verndarøkinum. Fyrisitingarmyndugleikin skal, um tað er gjørligt, gera avtalu við jarðareigaran um, at hann røkir nærri ásettar røktaruppgávur. Fyrisitingarmyndugleikin kann eisini gera avtalu við áhugaðar felagsskapir ella onnur um, at tey røkja slíkar røktaruppgávur.

*Stk. 2.* Sum røkt kunnu fremjast tiltøk til at varðveita ella røkka náttúrustandinum ella røktarstandinum, sum er endamálið við verndini, eisini tiltøk til at beina ferðslu, beina fyri gróðri og væla um eftir náttúruinntriv. Røktartiltøk, sum bera í sær, at natúrligt tilfeingi verður veitt ella heystað, ella at standurin, sum náttúran er í, tá ið farið verður undir verndararbeiðið, sbr. § 39 ella § 42, stk. 1, broytist munandi, kunnu ikki fara fram eftir hesi greinini.

*Stk. 3.* Ávirka røktartiltøk privata ogn ella rættindir í verndarøkinum, skal eigarin ella

rættindahavarin, alt tað er gjørligt, hava fráboðan frammanundan.
*Stk. 4.* Fíggjarligir fyrimunir, sum standast av røktartiltøkum, ognast jarðareigaranum ella rættindahavaranum.
*Stk. 5.* Uppkast til ætlan fyri røkt av verndarøkinum skal, um tað er gjørligt, leggjast fram, samstundis við at verndarkunngerðin verður ásett.

*Undantak frá verndarkunngerð*

**§ 45.** Landsstýrismaðurin kann gera undantak frá eini verndarkunngerð, um tað ikki er ímóti endamálinum við verndini og ikki kann ávirka verndarvirðini nevningarvert, ella um trygdaratlit ella atlitið at týðandi samfelagsáhugamálum gera tað neyðugt.
*Stk. 2.* Tá ið onnur týðandi samfelagsáhugamál verða vigað upp ímóti atlitinum at verndarøkinum, skal dentur serliga leggjast á týdningin, sum verndarøkið hevur fyri tað samlaða netverkið av verndarøkjum, og um eitt verndarøki av sama slag kann skipast ella mennast aðrastaðni. Tann, sum varðar av virkseminum, kann fáa álagt at bera rímiligan kostnað av at røkja, skipa ella menna slíkt øki av sama slag.
*Stk. 3.* Krevst loyvi til virksemið bæði eftir verndarkunngerðini og eftir aðrari lóggávu, kann tann, sum varðar av virkseminum, velja at søkja um loyvini samstundis. Í slíkum førum skal avgerð fyrst takast eftir verndarkunngerðini, um ikki annað er ásett í verndarkunngerðini ella samtykkinum hjá landsstýrismanninum.
*Stk. 4.* Umsókn um undantaksloyvi eftir stk. 1 skal fevna um neyðuga skjalfesting fyri, hvørji árin ið virksemið fær á verndarvirðini. Í undantaksloyvi eftir stk. 1 skal grundgevingin fyri avgerðini vísa, hvussu fyrisitingarmyndugleikin hevur mett um árinini, sum undantakið kann fáa á verndarvirðini, og hvussu stórur dentur er lagdur á hetta.

*Virksemi uttanfyri, sum kann valda skaða inni í einum verndarøki*

**§ 46.** Kann virksemi uttan fyri verndarøkið, sum loyvi krevst til eftir aðrari lóg, ávirka verndarvirðini í einum verndarøki, skal dentur leggjast á atlitið at hesum verndarvirðunum, tá ið avgerð verður tikin um at geva loyvi, og tá ið treytir verða ásettar. Fyri annað virksemi er varsemisskyldan eftir § 6 galdandi.

*Endurgjald til eigarar og rættindahavarar í verndarøkjum*

**§ 47.** Ein eigari ella rættindahavari í ogn, sum heilt ella fyri ein part verður vard sum tjóðgarður, landslagsverndarøki, náttúrufriðøki, lívøkisverndarøki ella verndarøki í ella á sjónum, hevur rætt til endurgjald frá landinum fyri fíggjarligan miss, tá ið verndin darvar brúk, sum er í gongd. Fyri brúk, sum loyvi krevst til frá almennum myndugleika, geldur rætturin til endurgjald bara, um loyvi er givið, áðrenn kunngering eftir § 39 er farin fram.
*Stk. 2.* Eru treytirnar eftir stk. 1, loknar, og setur eigari ella rættindahavari fram krav um endurgjald, sbr. § 48, stk. 1, verður endurgjaldið fyri miss í brúki, sum er í gongd, ásett. Tá ið mett verður um tann fíggjarliga missin, skal verndaravgerðarmundið havast sum grundarlag.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð nágreina, hvat ið er at rokna sum brúk, sum er í gongd, fyri ávíst virksemi.

*Mannagongd fyri áseting av endurgjaldi*

**§ 48.** Landið skal, í seinasta lagi eitt ár eftir at verndaravgerðin er tikin, geva eigara ella rættindahavara, sum innan fýra mánaðir, frá tí at verndaravgerðin varð tikin, hevur sett fram skrivligt krav um hetta, tilboð um endurgjald eftir § 47. Áðrenn landið gevur tilboð eftir 1. pkt., skal landið tilnevna tvey óheft, serkøn metingarfólk at meta um tann fíggjarliga missin, sum stendst av, at verndin darvar brúk, sum er í gongd. Landsstýrismaðurin kann í serligum førum leingja ella endurnýggja freist, sum farið verður út um.
*Stk. 2.* Tekur eigari ella rættindahavari ikki av tilboðnum, kann hann, í seinasta lagi seks mánaðir eftir at tað varð givið, seta fram krav fyri landsstýrismannin um at fáa landið at biðja um rættarliga meting til at áseta endurgjald eftir § 47. Verður farið út um freistina í stk. 2, kann landsstýrismaðurin í

serligum førum leingja ella endurnýggja freistina.
*Stk. 3.* Í sambandi við fyrstu meting fyri rættinum tekur landið neyðugar útreiðslur hjá eigara ella rættindahavara upp á seg. Biður landið um yvirmeting, skal landið taka neyðugar útreiðslur hjá eigara ella rættindahavara í sambandi við rættarviðgerðina upp á seg. Biður eigari ella rættindahavari um yvirmeting, og fær hann betri úrslit enn eftir tí fyrru metingini, ber landið útreiðslurnar. Biður jarðareigari ella rættindahavari um yvirmeting, og fær hann verri úrslit enn eftir tí fyrru metingini, kann hann fáa álagt at taka útreiðslurnar hjá landinum upp á seg, men kann heilt ella fyri ein part sleppa undan endurgjaldsskyldu, um týdningarmiklar grundir gera tað rímiligt.

## Kapittul 6
## Útvald náttúrusløg

*Útvald náttúrusløg*

**§ 49.** Til at fremja endamálið í § 4 kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta, at ávís náttúrusløg skulu hava støðu sum útvald í øllum ella pørtum av landinum. Í kunngerðini kunnu ásetast nærri treytir fyri, hvørjar fyrikomingar av náttúruslagnum skulu vera fevndar av reglunum í hesum kapitlinum.
*Stk. 2.* Í sambandi við avgerðina, um eitt náttúruslag skal veljast út, skal dentur serliga leggjast á, um
1) náttúruslagið er fyri eini gongd ella í einum standi, sum ikki samsvarar við miðið í § 4,
2) náttúruslagið hevur stóran týdning fyri eitt ella fleiri raðfest sløg,
3) náttúruslagið hevur munandi part av síni útbreiðslu í Føroyum, ella
4) altjóða skyldur eru knýttar at náttúruslagnum.

*Stk. 3.* Tá ið tað er skjalfest, at standurin ella gongdin hjá einum náttúruslagi eftir vísindaligum metingarstøði í stóran mun ikki samsvarar við miðið í § 4, skal landsstýrismaðurin – av sínum eintingum, ella tá ið ein felagsskapur ella onnur við rættarligum áhuga krevja tað – meta, um kunngerð eftir stk. 1 skal ásetast.
*Stk. 4.* Verður eitt náttúruslag útvalt, har virkin røkt ella onnur tiltøk eru ein fyritreyt fyri at varðveita náttúruslagið, skal landsstýrismaðurin leggja fram virkisætlan til at tryggja náttúruslagið.

*Tann almenni týdningurin av útveljingini*

**§ 50.** Tá ið varsemisskyldan sambært § 6 verður útint, skal serligt fyrilit havast fyri fyrikomingum av útvaldum náttúrusløgum, so at tað slepst undan, at útbreiðslan av náttúrusløgunum og tann vistfrøðiligi standurin hjá fyrikomingunum verða gjørd verri.
*Stk. 2.* Tá ið almennur myndugleiki verður útintur, eisini tá ið fyrisitingarstovnur veitir studning og í sambandi við fyrisiting av fastognum hjá tí almenna, skal serligt fyrilit havast fyri fyrikomingum av útvaldum náttúrusløgum, so at tað slepst undan, at útbreiðslan av náttúrusløgunum og tann vistfrøðiligi standurin hjá fyrikomingunum verða gjørd verri. Áðrenn avgerð verður tikin um at gera inntriv í eina fyrikoming av einum útvaldum náttúruslagi, skal greiða gerast fyri avleiðingunum fyri tað útvalda náttúruslagið. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta reglur fyri, hvussu ein slík avleiðingagreining skal útinnast og viðgerast.
*Stk. 3.* Tá ið mett verður, um útbreiðslan ella tann vistfrøðiligi standurin hjá einum útvaldum náttúruslagi verða gjørd verri, skal dentur leggjast á týdningin, sum fyrikomingin hevur fyri ta samlaðu útbreiðsluna av og dygdina á náttúruslagnum, og um ein sambærilig fyrikoming kann gerast ella mennast aðrastaðni. Tann, sum varðar av virkseminum, kann fáa álagt at bera rímiligan kostnað av at røkja, gera ella menna eina slíka fyrikoming.
*Stk. 4.* Góðkendar býarskipanir og byggisamtyktir, sum greiða økisbrúkið fyri eina fyrikoming av einum útvaldum náttúruslagi, og sum eru samtyktar, eftir at kunngerð eftir § 49 er ásett, koma fram um reglurnar í stk. 1 til 3.
*Stk. 5.* Tað almenna kann gera nærri avtalu við jarðareigara ella rættindahavara um røkt av eini fyrikoming av einum útvaldum náttúruslagi.

*Fráboðanarskylda í sambandi við landbúnaðarvirksemi*

**§ 51.** Ávirkar landbúnaðarvirksemi, sum loyvi ikki krevst til eftir aðrari lóggávu, fyrikomingar av útvaldum náttúrusløgum, skal kommunan hava fráboðan, áðrenn farið verður undir virksemið. Kommunan skal hava svarað, áðrenn virksemið kann fara í gongd. Kommunan skal meta um virksemið eftir reglunum í § 50, stk. 2 og 3. Kemur kommunan eftir, at virksemið kann hava við sær, at útbreiðslan av náttúruslagnum og tann vistfrøðiligi standurin hjá fyrikomingunum verða gjørd verri, kann hon nokta fyri virkseminum ella geva nærri boð um, hvussu virksemið skal fara fram.

*Kunngering*

**§ 52.** Loyvi til virksemi í fyrikomingum av einum útvaldum náttúruslagi skal kunngerast á ein hátt, sum er hóskandi til at kunna almenningin, og annars á tann hátt, sum ásettur er í tí einstøku lógini. Tá ið talan er um útvald náttúrusløg í sjónum, fer kunngeringin fram á ein hátt, sum er hóskandi til at kunna ávirkað áhugamál um loyvið.

## Kapittul 7
## Ílegutilfar

*Fyrisiting av ílegutilfari*

**§ 53.** Ílegutilfar úr náttúruni er eitt felags tilfeingi, sum er ogn hjá Føroya fólki og verður fyrisitið av landinum. Gagnnýtslan skal vera umhvørvi og fólki at so stórum gagni sum gjørligt, bæði úr føroyskum og altjóða sjónarhorni, har dentur eisini verður lagdur á, at fyrimunirnir av at gagnnýta ílegutilfar verða hóskiliga býttir.

*Tøka og gagnnýtsla av ílegutilfari úr náttúruni*

**§ 54.** Landsstýrismaðurin kann áseta, at loyvi krevst frá landsstýrismanninum til at taka lívfrøðiligt tilfar úr náttúruni við tí í hyggju at gagnnýta ílegutilfarið ella at gagnnýta slíkt tilfar. Er loyvi fingið til tøku, krevst ikki nýtt loyvi til seinni gagnnýtslu, men treytirnar fyri loyvinum galda samsvarandi fyri tann, sum seinni fær tilfarið ella úrslitini frá tøkuni. Tøka til almenn søvn og til brúk og framhaldandi góðsking í landbúnaði krevur einki loyvi.

*Stk. 2.* Stk. 1 skerjir ikki rættin hjá eigara ella øðrum rættindahavara á øðrum grundarlagi at nokta atgongd at

1) tí lívfrøðiliga tilfarinum ella
2) jørðini,

sum ílegutilfarið verður tikið úr.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann við loyvinum sambært stk. 1 gera undantak frá ásetingunum í kapitli 3.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta, hvørjar upplýsingar ið vera skulu í umsóknini. Í kunngerðini kunnu eisini ásetast nærri reglur fyri, hvørjar treytir ið setast kunnu. Treytir kunnu m.a. ásetast um, at fyrimunir av at gagnnýta ílegutilfar, sum tikið er úr náttúruni í føroyskum øki, skulu ognast landinum. Kunngerðin kann eisini áseta, hvussu áhugamálini hjá jarðareigarunum og fólkinum á staðnum verða vard á rímiligan hátt. Treytir, sum krevjast til at tryggja, at endamálið í § 53 verður hildið, kunnu setast fyri framhaldandi gagnnýtslu av tilfari.

*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um ílegutilfar í almennum søvnum.

## Kapittul 8
## Myndugleiki eftir lógini, kæra, eftirlit o.a.

*Myndugleiki eftir lógini*

**§ 55.** Landsstýrismaðurin er ovasti myndugleiki eftir hesi lógini.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann heimila stovni undir sær ella øðrum landsstovni at útinna heimildirnar, sum sambært hesi lógini liggja hjá landsstýrismanninum.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann í samráð við kommunurnar áseta, at kommunan skal vera myndugleiki eftir nærri ásettum ásetingum í ella við heimild í lógini. Landsstýrismaðurin kann leiðbeina kommunurnar, hvussu myndugleiki, sum verður avhendur sambært ásetingum í ella við heimild í kapitli 5, skal útinnast. Landsstýrismaðurin kann áseta, at ein serliga sett nevnd skal vera fyrsitingarmyndugleiki fyri eitt øki, sum er vart við heimild í kapitli 5.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur fyri útinning av avhendum myndugleika ella uppgávum eftir lógini.

*Kæra*

**§ 56.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um kæru, og at avgerðir eftir hesi lógini og reglum ásettum við heimild í hesi lógini bara skulu kunna kærast til ávísa kærunevnd.

*Eftirlit*

**§ 57.** Landsstýrismaðurin er eftirlitsmyndugleiki og hevur eftirlit við, hvørjum standi náttúran er í, og við, at tað, sum ásett er í og við heimild í lógini, verður hildið. Eftirlitsmyndugleikin ger av, á hvørjum økjum eftirlit skal førast. Eftirlitsmyndugleikin skal føra eftirlit í so stóran mun, at tað kann avdúka brot á ásetingarnar í lógini.

*Stk. 2.* Tá ið eftirlit verður ført, skal tann, sum eftirlit verður havt við, ella tann, sum hevur ábyrgdina av virkseminum, veita eftirlitsmyndugleikanum neyðuga hjálp og kunning. Eftirlitsmyndugleikin kann steðga fólki og førum, tá ið tað krevst til at útinna eftirlitið. Dentur skal leggjast á at føra so munadygt eftirlit, sum umstøðurnar krevja, við so lítlum ampa fyri náttúruna sum gjørligt.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin skal við ráðum, leiðbeining og kunning virka fyri at fremja endamálini við hesi lógini.

*Kanningarvirksemi*

**§ 58.** Tá ið tað krevst til at útinna uppgávur eftir lógini, skulu eftirlitsmyndugleikin og løgreglan hava ótarnaða atgongd at ogn, har ið virksemi fer fram, sum kann ávirka náttúrumargfeldið, ella har ið náttúrmargfeldið verður mett at vera ávirkað. Eftirlitsmyndugleikin kann eisini krevja at fáa skjøl og annað tilfar, sum kann hava týdning fyri uppgávur eftir lógini, útvegað til kanningar.

*Upplýsingar- og fráboðanarskylda*

**§ 59.** Øll, sum hava gjørt ella gera nakað, sum kann ávirka náttúrumargfeldið, hava, tá ið landsstýrismaðurin biður um tað, og uttan at tagnarskylda hindrar tí, skyldu til at geva landsstýrismanninum tær upplýsingar, sum honum tørvar til at útinna sínar uppgávur eftir hesi lógini.

*Stk. 2.* Kemur skaði á lívfrøðiligt margfeldi ella vandi fyri álvarsligum skaða av slíkum slagi fyri orsakað av virksemi, sum er fevnt av ásetingum í hesi lógini, skal tann, sum ábyrgdina hevur, skjótast gjørligt boða landsstýrismanninum frá, uttan so at vandin longu er steðgaður ella skaðin bøttur.

*Innaneftirlit*

**§ 60.** Til at tryggja at krøv, sum ásett eru í ella við heimild í lógini, verða hildin, kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta reglur um innaneftirlit og innaneftirlitsskipanir.

*Broyting og afturtøka av loyvum*

**§ 61.** Landsstýrismaðurin kann strika ella broyta treytirnar í einum loyvi, sum givið er eftir lógini, ella seta nýggjar treytir og, um neyðugt, taka loyvið aftur, um

1) tað krevst til at forða fyri óvæntaðari, munandi skaðiligari ávirkan á náttúrumargfeldið,
2) minkast kann um ta skaðiligu ávirkanina, uttan at tað hevur órímiligan kostnað við sær fyri tann, sum varðar av virkseminum,
3) tað við nýggjari tøkni ber til at minka munandi um vansarnar fyri náttúrumargfeldið,
4) broyting krevst til at lúka dygdarkrøv, sum ásett eru eftir § 13,
5) tann, sum varðar av virkseminum, brýtur ásetingar, sum ásettar eru í ella við heimild í lógini, og rættarbrotið er munandi, endurtekur seg ella er áhaldandi, ella
6) tað annars er heimilað eftir annars galdandi reglum.

*Stk. 2.* Eitt loyvi kann í øllum førum takast aftur ella broytast, tá ið liðin er tíggju ár, síðan tað varð givið. Landsstýrismaðurin kann linka avmarkingar og treytir í einum loyvi, um tað av royndum er greitt, at tað kann gerast, uttan at náttúrumargfeldið verður fyri skaðiligari ávirkan av týdningi.

*Stk. 3.* Tá ið avgerð verður tikin eftir stk. 1 og 2, skulu útreiðslurnar, sum ein broyting fer at hava við sær fyri tann, sum varðar av

virkseminum, og fyrimunir og vansar, sum broyting annars fer at hava við sær, havast í huga.

*Umhvørvisavgerðaskrá*

**§ 62.** Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta, at ein umhvørvisavgerðaskrá skal gerast, og at avgerðir skulu skrásetast í skránni. Skráin skal m.a. fevna um avgerðir eftir §§ 22, stk. 5, 31, stk. 1, 42, stk. 1 og 2, og 45, stk. 1, og avgerðir, sum nevndar eru í § 52, 1. pkt.

## Kapittul 9
## Handhevjan og tvingsilstiltøk

*Rætting og bøtandi tiltøk*

**§ 63.** Landsstýrismaðurin kann áleggja tí, sum hevur ábyrgdina, at fáa aftur í rættlag ella steðga viðurskiftum, sum ikki eru í samsvari við lógina ella avgerð við heimild í lógini.

*Stk. 2.* Tann, sum við at gera ímóti lógini ella avgerðum við heimild í lógini er atvold til vanda fyri, at náttúrumargfeldið versnar, skal seta tiltøk í verk til at forða fyri, at tað hendir. Er náttúrumargfeldið longu versnað, fevnir skyldan um at forða fyri, at viðurskiftini versna uppaftur meira, og – um tað er gjørligt – við upptøku, rudding, burturbeining, slætting og øðrum hóskandi tiltøkum at fáa náttúrumargfeldið aftur í sama stand sum frammanundan. Tiltøk, sum í sjálvum sær kunnu verða umhvørvinum at skaða av týdningi, kunnu bara setast í verk eftir samtykki frá landsstýrismanninum ella álegging eftir stk. 1.

*Stk. 3.* Skyldan at fyribyrgja, væla um og endurreisa er ikki galdandi, í tann mun tað út frá útreiðslunum og virknaðinum av tiltøkunum, náttúruavleiðingunum av rættarbrotinum og skyldini og fíggjarstøðuni hjá tí, sum hevur framt rættarbrotið, hevði verið serliga órímiligt.

*Stk. 4.* Tiltøk eftir hesi greinini kunnu snúgva seg um at avlíva fremmandar lívverur, sum rættarbrotið snýr seg um, ella at flyta livandi lívverur aftur til upprunastaðið.

*Óvæntaðar umhvørvisavleiðingar av lógligum virksemi*

**§ 64.** Vísir virksemi í samsvari við lógina ella avgerð við heimild í lógini seg at hava munandi óvæntaðar avleiðingar við sær fyri náttúrumargfeldið, skal tann, sum hevur ábyrgdina, seta rímilig tiltøk í verk til at forða fyri ella avmarka skaða ella vansar.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áleggja tí, sum hevur ábyrgdina, innan eina ásetta freist at fremja tiltøk sum tey, sum nevnd eru í stk. 1. Tá ið tað ikki er tí, sum hevur ábyrgdina, til serligan ampa, kann landsstýrismaðurin geva boð um at endurreisa standin, sum náttúrumargfeldið var í frammanundan.

*Beinleiðis fremjing*

**§ 65.** Lýður tann, sum hevur ábyrgdina, ikki eini boð, sum bera í sær áleggingar sum tær, sum nevndar eru í § 63, stk. 1, ella § 64, stk. 2, kann landsstýrismaðurin bera so í bandi, at tiltøkini verða sett í verk. Landsstýrismaðurin kann eisini bera so í bandi, at tiltøkini verða sett í verk, tá ið tað hevur skund til at verja náttúrumargfeldið ella tað ikki ber til at siga, hvør ið hevur ábyrgdina.

*Stk. 2.* Tann, sum hevur ábyrgdina, kann fáa álagt at bera útreiðslurnar av tiltøkum eftir stk. 1. Kravið er tvingsilsgrundarlag fyri úttøku.

*Brúk av ogn hjá øðrum*

**§ 66.** Tá ið tað krevst til at fremja tiltøk eftir §§ 63, 64 ella 65, kann ogn hjá tí, sum hevur ábyrgdina, ella – um neyðugt – fastogn hjá øðrum, verða brúkt.

*Stk. 2.* Verður sambært stk. 1 fastogn hjá øðrum brúkt, skal tann, sum hevur ábyrgdina, veita tí, sum eigur fastognina, endurgjald fyri miss orsakað av skaða og ampa. Landið veitir trygd fyri upphæddini.

*Stk. 3.* Tá ið tað krevst til at útinna røktartiltøk eftir § 44, kann landsstýrismaðurin brúka motorferðslu á fastogn, sum ikki er fevnd av verndarøkinum.

*Tvingsilsbøtur*

**§ 67.** Til at tryggja at tað, sum ásett er í ella við heimild í hesi lógini, verður framt, kann landsstýrismaðurin taka avgerð um tvingsilsbøtur.

*Stk. 2.* Tvingsilsbøtur kunnu áleggjast, tá ið brot á eina áseting er staðfest. Tvingsilsbøturnar byrja at telja, tá ið tann, sum hevur ábyrgdina, ikki heldur freistina at fáa viðurskiftini, sum landsstýrismaðurin hevur ásett, aftur í rættlag. Tvingsilsbøtur kunnu áleggjast frammanundan, tá ið tað av serligum ávum er neyðugt, og byrja í tí føri at telja, tá ið eitt møguligt rættarbrot byrjar. Ásetast kann, at tvingsilsbøturnar telja, so leingi tey ólógligu viðurskiftini standa við, ella at tær falla til gjaldingar fyri hvørt rættarbrotið. Tvingsilsbøtur telja kortini ikki, tá ið tað, orsakað av viðurskiftum, sum tann, sum hevur ábyrgdina, ikki kann lastast fyri, ikki ber til at lúka treytirnar. Tvingsilsbøtur kunnu áleggjast sum leypandi bøtur ella sum stakbøtur.
*Stk. 3.* Tvingsilsbøtur verða álagdar tí, sum hevur ábyrgdina av rættarbrotinum. Er rættarbrotið framt vegna felag ella samtak, privatan ella almennan stovn, skulu tvingsilsbøtur vanliga áleggjast hesum. Eru tvingsilsbøtur álagdar einum felag, sum er partur av einum samtaki, kunnu álagdar tvingsilsbøtur eisini krevjast inn hjá móðurfelag. Kravið er tvingsilsgrundarlag fyri úttøku.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann gera av at sleppa áløgdum tvingsilsbótum.

*Umhvørvisendurgjald*

**§ 68.** Tann, sum brýtur ásetingar í ella við heimild í hesi lógini ella ásetingar, sum skulu fremja mið og meginreglur í hesi lógini, skal, tá ið landsstýrismaðurin áleggur tað, gjalda landinum umhvørvisendurgjald.
*Stk. 2.* Avgerð um at áleggja umhvørvisendurgjald skal takast, og støddin á endurgjaldinum ásetast, við støði í eini heildarmeting av, hvønn týdning náttúruvirðini, sum talan er um, hava, hvussu stórur náttúruskaðin er í vavi, og hvussu leingi hann hevur staðið við, áløgdum revsitiltøkum mótvegis tí, sum hevur framt rættarbrotið, og umstøðunum annars. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta reglur fyri einfaldaðari álegging eftir fast ásettum takstum fyri ávís rættarbrot.
*Stk. 3.* Álegging um náttúruendurgjald er tvingsilsgrundarlag fyri úttøku. Endurgjaldskravið kann eisini takast upp í sambandi við revsimál. Verður endurgjaldskravið lagt fyri rættin í sambandi við revsimál, borgarliga lógsókn ella kæru um úttøkuviðgerð, kann rætturin royna endurgjaldskravið til fulnar. Í fráboðan um áleggingina skal kunnast um reglurnar í hesum stykkinum.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann sleppa kravinum um náttúruendurgjald.
*Stk. 5.* At onkur fær álagt at gjalda náttúruendurgjald, er ikki til hindurs fyri at áleggja revsitiltøk sum t.d. gjald fyri rættarbrot.

*Revsing*

**§ 69.** Við bót ella fongsli upp í eitt ár verður revsaður tann, sum við vilja ella av ósketni brýtur ásetingar í ella við heimild í §§ 15 til 16, §§ 18 til 20, § 22, stk. 1, nr. 1 og 2, § 23, § 25, stk. 2 til 4, §§ 26 til 28, §§ 31 til 36, § 42, § 51, § 54, § 57, stk. 2, 1. pkt., §§ 58 til 63 ella ger ímóti álegging eftir § 64.
*Stk. 2.* Grovt brot á stk. 1 verður revsað við bót ella fongsli upp í tvey ár. Tá ið mett verður, um rættarbrotið er grovt, skal serligur dentur leggjast á, um tað hevur verið atvold til munandi skaða á náttúrumargfeldið ella vanda fyri slíkum skaða, um skaðin á náttúrumargfeldið verður mettur at vera óbótaligur, hvussu stóra skyld tann, sum hevur framt rættarbrotið, hevur, og um hann hevur sett fyribyrgjandi ella tálmandi tiltøk í verk.
*Stk. 3.* Ber eitt brot á eina ella fleiri av ásetingunum, sum nevndar eru í stk. 1, samstundis í sær brot á reglur í øðrum lógum, galda reglurnar í náttúrumargfeldislógini um revsing bara, í tann mun sambærilig revsing ikki er heimilað í viðkomandi lóg.
*Stk. 4.* Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar verða revsaðir sambært reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

## Kapittul 10
## Ásetingar at enda

*Gildiskoma*

**§ 70.** Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð, nær ið henda løgtingslógin kemur í gildi.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta ymisk gildiskomumund fyri ymsar ásetingar ella ymsar bólkar av lívverum.

*Skiftisreglur*

**§ 71.** Avgerðir við heimild í ásetingum í náttúrufriðingarlógini, sum settar verða úr gildi, tá ið henda lógin kemur í gildi, verða verandi í gildi, til landsstýrismaðurin tekur aðra avgerð. Brot á avgerðir sum nevndar í 1. pkt. verða revsað eftir higartil galdandi reglum. Mál, sum eru til viðgerðar hjá verandi friðingarmyndugleikum eftir náttúrufriðingarlógini, tá ið henda lógin kemur í gildi, verða viðgjørd og avgjørd eftir higartil galdandi reglum. So langt tær passa, galda §§ 31, stk. 4, 44 og 45, eisini fyri eldri avgerðir um friðing við heimild í higartil galdandi náttúrufriðingarlóg.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta skiftisásetingar fyri tillaging frá lóggávu, sum fer úr gildi, til hesa lógina.

*Broytingar í øðrum lógum*

**§ 72.** Hesar broytingar verða gjørdar í øðrum lógum:

1. Løgtingslóg nr. 83 frá 25. mai 2009 um aling av fiski v.m., sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 14. desember 2012, verður broytt soleiðis:

Í § 11, litra b, verður *løgtingslóg um náttúrufriðing* broytt til *løgtingslóg um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni*.

2. Løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 15. mai 2014, verður broytt soleiðis:

Í § 6 verður *friðingarnevndin smb. Ll. nr. 48 frá 1970* broytt til *landsstýrismaðurin*.

Í § 7 verður *friðingarnevndini* broytt til *landsstýrismanninum*.

Í § 9 verður *Friðingarnevndin* broytt til *Landsstýrismaðurin*.

Í § 12 verður *friðingarnevndina* broytt til *landsstýrismannin*.

# Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

## 1.1. Orsøkir til uppskotið

Náttúran er tí føroyska samfelagnum virðismikil, og margfeldið í náttúruni er ein fyritreyt fyri náttúrutilfeinginum, sum á mangan hátt er grundarlag undir okkara lívstreytum og trivnaði. Náttúran skapar eisini karmar fyri náttúruupplivingum og ferðavinnu.

Í septembur 2015 samdust øll tey 193 limalondini í ST um 17 burðardygg menningarmál, sum londini skulu miða eftir at røkka fyri 2030. Tað yvirskipaða endamálið við menningarmálunum er at geva øllum heimsins íbúgvum eitt virðiligt lív og fremja burðardygga atferð, so at jørðin verður latin komandi ættarliðum í góðum standi. Eitt av teimum fimm høvuðsendmálunum við menningarmálunum er at verja jørðina við at seta í verk ætlanir fyri, hvussu tilfeingið best verður gagnnýtt burðardygt til frama fyri komandi ættarlið. Heimsmál nr. 14 og 15 snúgva seg um at verja lívið ávikavist í havinum og á landi, og í undirpunktunum til tað 15. heimsmálið er m.a. ásett, at londini skulu gera sítt til at varðveita vistskipanir, steðga afturgongdini í lívfrøðiligum margfeldi og brúka náttúruna burðardygt í samsvari við altjóða avtalur. Landsstýrið arbeiðir við at gera eina støðulýsing at hava sum grundarlag undir eini ætlan fyri, hvussu Føroyar kunnu røkka teimum 17 málunum.

ST-sáttmálin um lívfrøðiligt margfeldi varð samtyktur á heimsfundinum í Rio De Janeiro í 1992. Í Johannesburg tíggju ár seinni staðfestu stjórnarleiðarar úr 155 londum, at sáttmálin er týdningarmesta amboð hjá heimssamfelagnum til at tryggja tað lívfrøðiliga margfeldið í heiminum. Fólkatingið setti í 1993 sáttmálan í gildi fyri alt ríkið, og seinni sama ár samtykti løgtingið, at Føroyar taka undir við tí donsku staðfestingini av sáttmálanum. Sáttmálin var ein avleiðing av ampanum, sum heimssamfelagið hevur av, at tað lívfrøðiliga margfeldið í heiminum støðugt minkar. Sáttmálin leggur dent á, at sáttmálalondini við vernd og burðardyggari menning skulu virka ímóti hesi gongdini.

Sáttmálin um lívfrøðiligt margfeldi setti nýggjan karm um heildarnáttúrufyrisiting og var fyrsta stóra altjóða umhvørvisavtala, sum so greitt varpaði ljós á sambandið millum brúk og vernd. Men hóast sáttmálin er settur í gildi í Føroyum, og løgtingið hevur tikið undir við honum, sæst hetta mestsum ikki aftur í føroyskari náttúrulóggávu.

Við uppskotinum til løgtingslóg um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni verður nýtt støði lagt undir røkt av margfeldinum í tí føroysku náttúruni í samsvari við sáttmálan um lívfrøðiligt margfeldi. Umframt lívfrøðiligt margfeldi hevur lógaruppskotið til endamáls at verja landslagsmargfeldi og jarðfrøðiligt margfeldi, og sum felagshugtak fyri alt margfeldi í náttúruni verður hugtakið náttúrumargfeldi brúkt.

Tað var longu á sumri 2000, at landsstýrismaðurin í umhvørvismálum setti ein arbeiðsbólk at lýsa støðuna og galdandi lóggávu á m.a. náttúruverndarøkinum og koma við uppskotum um ábøtur. Í 2001 læt arbeiðsbólkurin eina frágreiðing úr hondum, sum m.a. staðfesti, at náttúrufriðingarlógin frá 1970 als ikki nøktaði tørvin á náttúrufyrisiting í Føroyum. Arbeiðsbólkurin mælti til at gera eina tíðarhóskandi náttúruverndarlóg og at raðfesta altjóða avtalur á náttúru- og umhvørvisøkinum. Ein fyrsta roynd at orða eitt uppskot til føroyska náttúruverndarlóg varð gjørd í 2004, men hetta uppskotið kom ongantíð fyri tingið. Í 2008 varð aftur ein roynd gjørd. Hesa ferð var uppskotið til hoyringar, men kom ikki fyri tingið. Í 2011 varð eitt andstøðuuppskot til náttúruverndarlóg lagt fyri tingið, men uppskotið varð tikið aftur. Síðan hevur arbeiðið at orða føroyska náttúruverndarlóg at kalla ligið í dvala.

Í samgonguskjalinum frá 2015 setti landsstýrið sær fyri at uppraðfesta náttúruvernd til gagns fyri verandi og komandi ættarlið, og í fylgiskjalinum til samgonguskjalið varð ásett, at føroysk náttúruverndarlóg skuldi smíðast og fyrisitingin av føroyskari náttúruvernd skipast betur.

Í mars 2017 setti landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum ein arbeiðsbólk at orða uppskot til nýggja føroyska náttúruverndarlóg. Í arbeiðsbólkinum sótu umboð fyri Heilsu- og innlendismálaráðið, Umhvørvisstovuna, Mentamálaráðið og Kommunufelagið.

Ásannandi tann ovurstóra týdningin, sum tann føroyska náttúran hevur fyri tað føroyska samfelagið og Føroya fólk nú og framtíðini, miðaði stjórnarráðið alt frá byrjan eftir at fáa til vega ein lógarkarm, sum endurspeglar, at Føroyar taka náttúruna í eins stórum álvara og grannalondini. Galdandi náttúrufriðingarlóg er so ótíðarhóskandi og ófullfíggjað, at talan í stóran mun er um at bróta upp úr nýggjum. Tí varð eisini miðað eftir einum nútímans lógarkarmi, sum leggur upp fyri altjóða miðum á tí náttúru- og umhvørvisrættarliga økinum. Og tí var tað serliga hesum, ið hugt varð eftir, tá ið hugt varð eftir íblástri í lóggávu í grannalondunum.

Eftir at hava kannað lóggávuna í grannalondunum gjørdi arbeiðsbólkurin í samráð við landsstýrismannin av at brúka ta norsku *naturmangfoldloven* frá 2009 sum fyrimynd og leist. Tann norska lógin er nútímans og framsøkin, hvat náttúruvernd viðvíkur, og leggur samstundis stóran dent á atlit at brúki og vinnu umframt onnur samfelagsatlit. Komið varð eftir, at *naturmangfoldloven*, bæði hvat bygnaði og innihaldi viðvíkur, í stóran mun hóskar til føroysk viðurskiftir og avbjóðingar, og at hon ber í sær hent verndaramboð, sum kunnu verða føroyskari náttúruvernd at stórum gagni. Tí styðjar uppskotið til náttúrumargfeldislóg seg í stóran mun upp at bygnaðinum og teimum grundleggjandi hugtøkunum í *naturmangfoldloven*.

Tað er eingin loyna, at Føroyar eru eftirbátur, tá ið ræður um at sita fyri margfeldinum í náttúruni. Galdandi lóggáva leggur í sera lítlan mun um upp fyri vernd av margfeldi, men leggur serliga dent á atlit at vakurleika og sjáldsemi.

Við uppskotinum til náttúrumargfeldislóg verður miðað eftir at leggja nýtt støði undir føroyska náttúrufyrisiting. Hóast uppskotið í stóran mun brýtur upp úr nýggjum, kemur tað í staðin fyri partar av galdandi løgtingslóg um náttúrufriðing frá 1970. Av tí at summi viðurskiftir í náttúrufriðingarlógini ikki verða mett at hóska natúrliga saman við evnisøkinum fyri náttúrumargfeldislógina, verða partar av náttúrufriðingarlógini tó verandi í gildi. Mælt verður til, at hesi viðurskiftini sum frá líður verða fevnd av nýggjari planlóggávu og útilívslóggávu.

## 1.2. Galdandi lóggáva

Náttúruvernd er skipað sambært løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing við seinni broytingum. Uppskotið til náttúrufriðingarlóg varð gjørt í fimmtiárunum og sent landsstýrinum tann 15. august 1959. Lógin, sum samtykt varð í 1970, hevur við heilt fáum undantøkum sama orðaljóð sum uppskotið frá 1959. Lógin er gjørd við støði í táverandi lóggávu á økinum í hinum Norðurlondunum.

Náttúrufriðingarlógin er býtt upp í fimm partar eftir innihaldi. Fyrsti partur hevur ásetingar um verju av náttúruni, um at inntriv bara kunnu fara fram sambært loyvi frá friðingarmyndugleikanum, og um hvørji atlit ið takast skulu, tá ið slík loyvir verða givin. Annar partur hevur ásetingar um friðing, t.e. hvørji øki, lutir o.a. ið friðast kunnu, og hvussu ið friðingar kunnu verða framdar. Triði partur fevnir um friðingarmyndugleikarnar, t.e. tær staðbundnu friðingarnevndirnar og Yvirfriðingarnevndirnar. Fjórði og fimti partur eru um málsviðgerð í ávikavist friðingarnevndunum og Yvirfriðingarnevndini.

Eftir galdandi lóggávu eru fyrisitingarmyndugleikarnir sostatt landsstýrið, tær staðbundnu friðingarnevndirnar og Yvirfriðingarnevndin. Uppgávurnar hjá landsstýrinum fevna eitt nú um at áseta nærri reglur í kunngerð og at velja limir í friðingarnevndirnar og Yvirfriðingarnevndina. Tær staðbundnu friðingarnevndirnar viðgera mál um loyvi til bygging, vegagerð o.a. í teimum økjum, sum fevnd eru av §§ 2-4, og mál um friðing eftir § 6. Yvirfriðingarnevndin skal staðfesta allar avgerðir, sum tiknar verða í teimum staðbundnu friðingarnevndunum, eisini hóast eingin kæra er. Samstundis er Yvirfriðingarnevndin kærumyndugleiki fyri avgerðir hjá teimum staðbundnu friðingarnevndunum. Avgerðir hjá Yvirfriðingarnevndini eru endaligar og kunnu eftir lógini ikki leggjast fyri dómstólarnar. Yvirfriðingarnevndin kann tó taka mál upp til nýggja viðgerð.

Flestu mál, sum viðgjørd verða í teimum staðbundnu friðingarnevndunum og Yvirfriðingarnevndini, eru umsóknir um verkætlanir o.a. í økjum, har ið tað eftir lógini krevst loyvi frá friðingarmyndugleikunum. Tað snýr seg um umsóknir um at byggja seyðahús o.a., at seta antennur upp og at gera vegir, gøtur, brýr o.a. Eisini verða broytingar í byggisamtyktum, sum fevna um økir, sum fevnd eru av § 2 í lógini, í onkrum førum lagdar fyri friðingarnevndirnar til ummælis, hóast einki krav er um hetta í lógini. Millum málini, sum krevja drúgva viðgerð, teljast størri verkætlanir, t.d. vatnorkuútbyggingar hjá SEV, men eisini eitt nú vegir og gøtur. Mál um at friða økir eru fá í tali, men krevja vanliga eisini drúgva viðgerð.

Har ið galdandi lóggáva serliga byggir á atlit at vakurleika og sjáldsemi, byggir uppskotið til náttúrumarfeldislóg serliga á atlit at burðardyggum brúki og vernd av margfeldinum í náttúruni. Har ið galdandi lóggáva verður umsitin av leikfólki í teimum staðbundnu friðingarnevndunum og fakfólki í Yvirfriðingarnevndini, leyst av tí politisku skipanini og uttan fyri fyrisitingarlógina, verður tann nýggja lógin ætlandi fyrisitin av kønum fakfólki í landsfyrisitingini undir ábyrgd hjá landsstýrismanninum.

Við uppskotinum til náttúrumargfeldislóg verður soleiðis miðað eftir at leggja nýtt støði undir føroyska náttúrufyrisiting. Hóast uppskotið í stóran mun brýtur upp úr nýggjum, kemur tað í staðin fyri partar av galdandi náttúrufriðingarlóg. Av tí at summi viðurskiftir í náttúrufriðingarlógini ikki verða mett at hóska natúrliga saman við evnisøkinum fyri náttúrumargfeldislógina, verða partar av náttúrufriðingarlógini tó verandi í gildi. Mælt verður til, at hesi viðurskiftini sum frá líður verða fevnd av nýggjari planlóggávu og útilívslóggávu.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Tað yvirskipaða endamálið við lógaruppskotinum er fáa til vega dagførda lóggávu, sum setur greiðar lógarkarmar fyri, hvussu ið sitið verður fyri tí føroysku náttúruni við øllum hennara margfeldi. Endamálið er at røkja tað lívfrøðiliga, landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldið og tær vistfrøðiligu tilgongdirnar í tí føroysku náttúruni við burðardyggum brúki og vernd, eisini so at náttúran kann vera støði undir virki, mentan, heilsu og trivnaði hjá Føroya fólki nú og í framtíðini

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógaruppskotið er ein týðandi liður í at fremja sáttmálan um lívfrøðiligt margfeldi í føroyskari lóggávu. Miðað verður eftir at leggja eitt heildarfevnandi, langskygt og bindandi løgfrøðiligt støði undir burðardygt brúk og vernd av margfeldinum í tí føroysku náttúruni.

Uppskotið er ætlað at koma í staðin fyri partar av galdandi náttúrufriðingarlóg, men fevnir nógv víðari enn so og brýtur í stóran mun upp úr nýggjum. Í uppskotinum verða ásett fyrisitingarmið fyri náttúrusløg og dýra- og plantusløg, meginreglur fyri burðardyggum brúki av margfeldinum í náttúruni og reglur um m.a. fremmandar lívverur, økisvernd, útvald náttúrusløg og ílegutilfar.

Uppskotið tekur støði í náttúruvirðunum, men á ein hátt, sum tryggjar, at tørvurin hjá Føroya fólki kann verða nøktaður og samfelagsligir tørvir røktir. Dentur verður kortini lagdur á, at náttúran setur karmar, sum vit noyðast at geva okkum far um, um tað ikki skal fáa avleiðingar fyri okkum sjálv ella komandi ættarlið.

Eftir uppskotinum skal lógin galda fyri alt margfeldi í náttúruni, t.e. vistskipanir, náttúrusløg, dýra- og plantusløg og ílegumargfeldi innan fyri stovnar av sløgum. Hóast lógin skal galda fyri alt margfeldi, fer ætlandi sum frá líður at bera til, m.a. við ásetingum í lógini um vitanargrundaða fyrisiting, at geva greiðar ábendingar um, hvørji sløg og náttúrusløg ið tað hevur størstan týdning at røkja. Lógin ásetur felags fyrisitingarmið og meginreglur fyri burðardyggum náttúrubrúki, felags veiðu- og heystingarreglur, felags reglur um fremmandar lívverur og reglur fyri tøku og gagnnýtslu av ílegutilfari. Aftur at tí miðar lógin eftir at samskipa arbeiðið at verja margfeldið í náttúruni, við tað at geirarnir, sum ávirka ella gagnnýta náttúrutilfeingi, í síni fyrisiting skulu leggja dent á felags mið og meginreglur og reglur um útvald náttúrusløg.

Lógaruppskotið leggur upp fyri, at náttúran er broytilig, og at tað krevur ymislig amboð at røkka endamálinum um at steðga afturgongd í tí lívfrøðiliga margfeldinum. Uppskotið til náttúrumargfeldislóg útvegar fleiri nýggj amboð til at røkka málinum, sum fevna um alt frá strangari vernd til almenn krøv um burðardygt brúk. Amboðini kunnu í høvuðsheitum flokkast í trý stig:

- Strangar reglur: Økisvernd (kap. 5) og raðfest sløg (§§ 21 og 22)
- Ítøkiligar reglur viðvíkjandi burðardyggum brúki:
  Reglur um serstaka náttúru (kap. 6 um útvald náttúrusløg) ella serligar hóttanir (kap. 4 um fremmandar lívverur) ella ávirkan, sum kann gerast ov víðfevnd, um ikki meginreglur verða ásettar fyri veiðu og heysting (kap. 3 um fyrisiting av sløgum). Dygdarkrøv til náttúrumargfeldi eftir § 13 kunnu snúgva seg um eina samanseting av hesum.
- Almennar reglur um burðardygt brúk:
  Fevna um alla náttúru. Fyrisiting skal byggja á eina samanseting av reglum í geiralógum og náttúrumargfeldislógini (kap. 2 um almennar ásetingar um burðardygt brúk).

Niðanfyri verður tikið saman um høvuðsstættirnar í lógaruppskotinum og tær broytingar, sum uppskotið ber í sær sammett við galdandi lóggávu:

- Kapittul 1 – Endamál og gildisøki o.a. (§§ 1-3)
- Kapittul 2 – Almennar ásetingar um burðardygt brúk (§§ 4-14)
- Kapittul 3 – Fyrisiting av sløgum (§§ 15-24)
- Kapittul 4 – Fremmandar lívverur (§§ 25-29)
- Kapittul 5 – Økisvernd (§§ 30-48)
- Kapittul 6 – Útvald náttúrusløg (§§ 49-52)
- Kapittul 7 – Ílegutilfar (§§ 53-54)
- Kapittul 8 – Myndugleiki eftir lógini, kæra, eftirlit o.a. (§§ 55-62)
- Kapittul 9 – Handhevjan og tvingsilstiltøk (§§ 63-69)
- Kapittul 10 – Ásetingar at enda (§§ 70-72)

*Endamál og virkisøki*
Lógarkapittul 1 byrjar við eini endamálsáseting. Ásetingin er breitt og alment orðað, við tað at lógin ásetur reglur um bæði burðardygt brúk og náttúruvernd. Endamálið er, at náttúran við sínum lívfrøðiliga, landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldi og vistfrøðiligu tilgongdum skal verða vard

fyri framtíðina, eisini soleiðis at hon kann vera støði undir virki, mentan, heilsu og trivnaði nú og í framtíðini.

Tað landafrøðiliga gildisøkið er ásett við fyriliti fyri tí altjóðarættarliga markinum, sum gongur, har ið tann innara landleiðin endar (12 fjórðingar). Lógin geldur á landi, eisini í áum, vøtnum, ósum og løkum, og á tí innaru føroysku landleiðini. So langt tær passa, og við teimum avmarkingum, sum altjóðarættur setur, galda summar ásetingar eisini á landgrunninum og á tí ytru føroysku landleiðini.

*Almennar ásetingar um burðardygt brúk*
Lógarkapittul 2 hevur almennar ásetingar um fyrisiting eftir náttúrumargfeldislógini og eftir øðrum lógum, sum bera við margfeldið í náttúruni. Ásetingarnar miða eftir at geva burðardyggum brúki eitt meira ítøkiligt innihald við atliti at miðum og meginreglum.

Í lógarkapitli 2 eru ásett fyrisitingarmið fyri náttúrusløg og sløg. Miðið fyri náttúrusløg snýr seg um at varðveita margfeldið av náttúrusløgum í teimum natúrligu útbreiðsluøkjunum og við tí margfeldið av sløgum og tær vistfrøðiligu tilgongdirnar, sum eyðkenna hvørt náttúruslagið.

Miðið fyri dýra- og plantusløg er, at sløgini og teirra ílegumargfeldi skulu varðveitast við framtíðini í huga, og at sløgini skulu finnast í burðardyggum stovnum í sínum natúrligu útbreiðsluøkjum. Í tann mun tað krevst til at røkka hesum endamálinum, skulu eisini vistfrøðilig funktiónsøkir hjá sløgunum og aðrar vistfrøðiligar fyritreytir, sum tey ikki fáa verið fyriuttan, varðveitast.

Fyrisitingin av náttúruni – bæði av privatum og almennum pørtum – skal í mestan mun leggjast soleiðis til rættis, at hesi endamálini verða rokkin. Fyrisitingarmiðini fyri náttúrusløg og dýra- og plantusløg áleggja ikki fyrisitingini ella privatum nakrar beinleiðis skyldur, men hava týdning fyri lógartulking og meting eftir náttúrumargfeldislógini og øðrum lógum, umframt tá ið nýggjar reglur verða gjørdar.

Hóast fyrisitingarmiðini ikki áleggja beinleiðis skyldur, seta tey karmar fyri, hvussu ið virkað verður eftir øðrum ásetingum í náttúrumargfeldislógini ella øðrum lógum. Ein slík áseting er ásetingin um almenna varsemisskyldu. Ásetingin staðfestir ábyrgdina og skylduna hjá tí einstaka at fara fram við varsemi. Skyldan at fara fram við varsemi fevnir í fyrra lagi um eina skyldu at royna at kunna seg um, hvørji náttúruvirðir ið kunnu verða fyri skaða. Hetta er ein fyritreyt fyri, at varsemisskyldan kann vera munadygg. Í seinna lagi fevnir varsemisskyldan um eina skyldu at gera tað, sum rímiligt er, til at tað slepst undan, at náttúrumargfeldið verður fyri skaða.

Lógin ásetur nakrar týðandi meginreglur – vitanargrundarlagið og umhvørvisrættarligar meginreglur - sum skulu havast sum grundarlag, tá ið myndugleiki verður útintur eftir náttúrumargfeldislógini og øðrum lógum. Meginreglurnar eru:

- meginreglan um vitanargrundarlagið
- meginreglan um fyrivarni
- meginreglan um heildartrýstið á vistskipanina
- meginreglan um, at tann, sum varðar av virksemi, sum er umhvørvinum at skaða, ber kostnaðin
- meginreglan um umhvørvisgóða tøkni og rakstrarhættir

Landsstýrismaðurin fær heimild at áseta leiðbeinandi dygdarkrøv til náttúrumargfeldi. Eitt slíkt krav kann knýtast at fyrikomingini av ávísum náttúrusløgum ella dýra- og plantusløgum ella at

øðrum viðurskiftum, sum hava týdning fyri margfeldið í náttúruni. Dygdarkravið er leiðbeinandi, tá ið almennur myndugleiki verður útintur.

At enda í lógarkapitli 2 er ásett, at tiltøk eftir náttúrumargfeldislógini skulu vigast upp ímóti øðrum týðandi samfelagsáhugamálum.

*Fyrisiting av sløgum*
Í lógarkapitli 3 eru reglur um fyrisiting av sløgum. Í § 15 verður ein almenn fyrisitingarmeginregla ásett fyri veiðu, heysting og aðrari tøku av sløgum. Fyri sløg á landi ber fyrisitingarmeginreglan í sær, at reglur um veiðu, heysting og aðra tøku av dýrum og plantum fáa kjølfesti í náttúrumargfeldislógini. Tá ið talan er um ryggleys dýr og plantur á landi, verður miðað eftir eini meira liðiligari skipan, sum skal tryggja eina fyrisiting, sum kann útinnast á ráðiligan og hóskandi hátt.

Tá ið talan er um villar lívverur í sjónum og í áum, vøtnum, ósum og løkum, er atgongdin til veiðu, heysting og aðra gagnnýtslu fevnd av løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Tað ber í sær, at reglurnar í náttúrumargfeldislógini um veiðu, heysting og aðra tøku í §§ 16, 18 og 19 ikki galda fyri lívverur í sjónum og í áum, vøtnum, ósum og løkum. Hinvegin verða reglurnar í § 1 (endamálið við lógini) og lógarkapitli 2 brúktar saman við sjófeingislógini í sambandi við metingar og avgerðir hjá fiskivinnumyndugleikanum viðvíkjandi atgongdini at tøku eftir sjófeingislógini.

Tað verður sett sum treyt fyri at geva loyvi til veiðu og heysting, at slagið sambært tí bestu atkomandi vitanini framleiðir eitt avlop, sum kann veiðast burðardygt. Í sambandi við avgerðir um veiðu og heysting skal dentur harafturat leggjast á funktiónina, sum slagið hevur í vistskipanini, og týdningin, sum slagið hevur fyri vinnu og frítíðarlív.

Ítøkiligar avgerðir um veiðu verða tiknar við heimild í viðkomandi veiðulóggávu innan fyri teir í náttúrumargfeldislógini ásettu karmarnar.

Lógaruppskotið heimilar eisini aðra tøku av villum súgdýrum og fugli umframt fiski í áum, vøtnum, ósum og løkum enn veiðu, eitt nú til at verja fyri skaða á fólk ella ogn, tá ið ávísar treytir eru loknar.

Landsstýrismaðurin fær kunngerðarheimild at útnevna nærri tilskilað dýra- og plantusløg sum raðfest. Er eitt slag hótt, hevur myndugleikin skyldu til at meta, um tørvur er á raðfesting, og um raðfesting eigur at verða sett í verk.  Tá ið sløg verða raðfest, kunnu reglurnar eisini verja vistfrøðilig funktiónsøkir á landi, men ikki í sjónum. Atlitini, sum áløgd verða, skulu ikki gera tað munandi tvørligari at útinna brúk, sum er í gongd.

Er tørvur á virknum tiltøkum til at verja og røkja raðfest sløg og teirra funktiónsøkir, skulu virkisætlanir gerast.

*Fremmandar lívverur*
Við lógarkapitli 4 verður miðað eftir at fáa í lag eitt heildarregluverk fyri innsløðing av fremmandum lívverum. Talan er um eitt regluverk við felags meginreglum og reglum fyri ymsum sløgum av innsløðingum og alskyns sløgum av lívverum.

Fyri innflutning og útseting av fremmandum lívverum sum avleiðing av tilvitaðum gerðum hjá fólki verða soljóðandi reglur skotnar upp:

- eitt varsemiskrav til øll, sum seta lívverur út, ella sum hava ábyrgd av virksemi, sum kann hava við sær, fremmandar lívverur spjaðast ella sleppa út
- eitt krav um, at umsókn um útseting skal gera greiðu fyri árinunum, sum útsetingin kann hava á tað lívfrøðiliga margfeldið
- eitt krav um, at loyvi ikki kann gevast, um orsøk er at halda, at innflutningurin ella útsetingin fer at hava við sær munandi óhepnar avleiðingar fyri lívfrøðiligt margfeldi

Einstøk undantøk skulu kunna gerast frá kravinum um loyvi til at seta út. Eitt nú tá ið talan er um at seta út lívverur, har ið innflutningsloyvi longu er givið undir tí fyritreyt, at lívveran skal setast út í umhvørvið. Harumframt er útseting av plantum í urtagarðar og onnur velt økir undantikin, í tann mun tað ikki verður mett, at planturnar fara at spjaðast út um økið. Útseting við loyvi eftir løgtingslóg um aling av fiski v.m. (alilógini) er somuleiðis undantikin. Tað krevst heldur einki loyvi eftir náttúrumargfeldislógini at flyta inn fremmand dýr, sum eru fevnd av ásetingum í ella reglum ásettum við heimild í løgtingslóg um innflutning og hald av vandamiklum dýrum o.ø. Innflutningur av sonevndum *eksotiskum dýrum* er sambært reglum ásettum við heimild í løgtingslóg um innflutning og hald av fremmandum dýrum í útgangsstøðinum forboðin, og Heilsufrøðiliga starvsstovan, sum umsitur lóggávuna, kann bara geva undantaksloyvi, tá ið talan er um eksotisk dýr, sum ikki kunnu verða m.a. føroyskum gróðri og føroyskum dýralívi at skaða, verða tey slept leys í náttúruni.

Fyri allar flokkar av sløgum verða skotnar upp reglur, sum geva landsstýrismanninum heimild til – uttan at fyrisitingarmeginreglan er til hindurs fyri tí – at basa fremmandum lívverum, sum hótta natúrligar plantur og dýr ella onnur týðandi samfelagsáhugamál. Reglurnar galda, sama hvussu lívverurnar, sum talan er um, eru endaðar í tí føroysku náttúruni. Ásetingar um at basa fremmandum lívverum eru ikki savnaðar í lógarkapitli 4 burturav. Nógv av teimum neyðugu tiltøkunum galda eisini í øðrum viðurskiftum, sum eru fevnd av lógini. Ásetingar um hetta eru serliga at finna í kapitli 2, 3, 5 og 9.

*Økisvernd*
Lógarkapittul 5 um økisvernd kemur í stóran mun í staðin fyri § 6 í galdandi náttúrufriðingarlóg. Reglurnar eru nútímansgjørdar, og har ið náttúrufriðingarlógin gav heimild til at friða økir, gevur náttúrumargfeldislógin í staðin heimild at skipa ymisk sløg av verndarøkjum.

Ásetingarnar um økisvernd fevna bæði um vernd á landi, eisini í áum, vøtnum, ósum og løkum, og vernd í ella á sjónum á tí føroysku landleiðini. Avgerðir um økisvernd verða lýstar við kunngerð.

Uppskotið hevur eina almenna áseting við økisverndarmiðum. Miðini snúgva seg fyrst og fremst um verndartørvin hjá náttúruni, eisini náttúru, sum er merkt av mannabrúki gjøgnum tíðirnar. Økisvernd skal ikki tryggja ávís sløg av brúki fram um onnur. Í tann mun brúk av náttúruni verður nevnt í økisverndarmiðunum, er tað fyri at leggja dent á, at talan skal vera um brúk, sum hevur gagnliga ávirkan á verndarvirðini. Tað er ein fyritreyt fyri økisverndini í sjálvari sær, at tað hevur virði eftir ávísum treytum at verja ávís økir betur enn onnur.

Miðini fevna eisini um at knýta vistfrøðilig netverk. Eisini skulu økir og náttúrusløg, sum kunnu varðveitast eftir øðrum ásetingum í náttúrumargfeldislógini og øðrum lógum, kunna verða partur av slíkum netverkum.

Í verndarkunngerðini skulu vera reglur um virksemi og ferðslu, sum er ímóti verndarendamálinum. Økisvernd verður eftir uppskotinum býtt í teir fimm verndarflokkarnar tjóðgarð, landslagsverndarøki, náttúrufriðøki, lívøkisverndarøki og verndarøki í ella á sjónum. Hóast

mentanarminnir kunnu vera vard sum partur av tjóðgarði ella landslagsverndarøki, eru fornminnir og bygningar framvegis friðað eftir reglunum í løgtingslóg nr. 10 frá 16. september 1948 um friðan av fornminnum og bygningum.

Sum tjóðgarðar kunnu verjast stór náttúruøkir, sum ikki hava verið fyri munandi náttúruinntrivum, og sum hava serstakar dygdir.

Tá ið talan er um landslagsverndarøkir, er tað landslagið sum heild, sum er í miðdeplinum. Landslagsvernd kann tó fyri heil økir ella partar av økjum samskipast við onnur verndarøkir. Í tí sambandi kunnu serliga lívøkisverndarøkir vera viðkomandi. Landslagsvernd er eftir uppskotinum eitt lint verndarslag, við tað at virksemi, sum er í gongd, aloftast kann halda fram. Landslagsvernd kann bæði fevna um náttúrulandslag og røktarlandslag.

Verndarflokkurin náttúrufriðøki skal verja økir, sum bera í sær hótta, sjáldsama ella viðkvæma náttúru, umboða eitt ávíst náttúruslag, á annan hátt hava serligan týdning fyri lívfrøðiligt margfeldi, hýsa serstøkum jarðfrøðiligum fyribrigdum ella hava serstakt náttúruvísindaligt virði. Verndarflokkurin fevnir eisini um økir, sum ikki eru órørd, men hava týdning fyri margfeldið í náttúruni. Talan kann vera um økir, sum hava verið fyri tekniskum inntrivum, men sum kortini hava varðveitt munandi vistfrøðiligar funktiónir, og har best er at sleppa undan fleiri tekniskum inntrivum. Talan kann eisini vera um økir, har ið røktartreytað lívfrøðiligt margfeldi umboðar týðandi náttúruvirðir, og har ið økir eiga at verða vard strangliga fyri tekniskum inntrivum, samstundis sum virkin røkt verður sett í verk.

Náttúrufriðøkir eru ein strangur verndarflokkur, har virksemi í stóran mun kann avmarkast, um tað krevst til at røkka verndarendamálinum.

Tá ið talan er um verndarflokkin lívøkisverndarøki, er tað tørvurin hjá tí einstaka dýra- ella plantuslagnum, sum er í miðdeplinum. Lívøkisvernd kann brúkast til øll dýra- og plantusløg.

Fyri at leggja upp fyri muninum á landi og sjógvi eru verndarøkir í ella á sjónum ein verndarflokkur fyri seg. Ásetingin er lagað til viðurskiftini í sjónum. Tað verður mett at vera smidligari við bara einum verndarflokki fyri sjógvin heldur enn fleiri sum á landi. Umframt at verja verndarvirðir í sjónum kunnu verndarøkir skipast í ella á sjónum fyri tryggja virðir í sjónum, sum eru vistfrøðiligar fyritreytir fyri sløgum, sum liva á landi.

Í lógaruppskotinum er ein almenn áseting um, at undantak kann gerast frá eini verndarkunngerð, um tað ikki er ímóti endamálinum við verndarkunngerðini og ikki kann ávirka verndarvirðini nevningarvert, ella um trygdaratlit gera tað neyðugt. Tað skal síggjast í grundgevingini fyri undantakinum, hvussu ið mett er um avleiðingarnar fyri umhvørvið. Eisini um týðandi samfelagsáhugamál gera tað neyðugt, kann undantak gerast frá verndini.

Uppskotið heimilar eisini landsstýrismanninum at seta í verk fyribilsvernd til at forða fyri skaða á verndarvirðir ella til at byrgja fyri, at hótt náttúrusløg hvørva. Ein avgerð um fyribilsvernd kann í mesta lagi vara fýra ár, men kann leingjast í mesta lagi tvey ár.

Uppskotið heimilar fyrisitingarstovnum at havna umsóknum um loyvi til virksemi í einum øki, sum er fevnt av einum kunngjørdum verndaruppskoti. Loyvi kann bara gevast, um tiltakið ikki hevur nevningarverdan týdning fyri uppskotið. Tá ið týðandi samfelagsáhugamál gera tað neyðugt, kann landsstýrismaðurin kortini loyva virkseminum. Fyri virksemi í einum øki, sum eitt verndaruppskot fevnir um, og sum loyvi ikki krevst til, fær landsstýrismaðurin heimild at áseta fráboðanarskyldu.

Uppskotið ásetur serligar málsviðgerðarreglur fyri økisvernd, sum leggja dent á samstarv við jarðareigarar, rættindahavarar, ávirkað vinnuáhugamál og fólk á staðnum. Harumframt er umráðandi, at arbeiðið við verndarætlanum eftir náttúrumargfeldislógini verður samskipað við planlegging eftir planlóggávuni, eisini eini komandi dagførdari planlóggávu, serliga tá ið farið verður undir verndarætlanararbeiðið. Hugsanin er, at náttúrumargfeldislógin og ein dagførd planlóggáva sum frá líður skulu geva eitt betri grundarlag at meta, hvussu brúk og vernd av einum náttúruøki kunnu tryggjast á burðardyggan hátt.

Uppskotið ásetur einsháttaðar reglur fyri endurgjaldi í sambandi við ræðisavmarkingar, sum standast av økisvernd. Høvuðsreglan er, at ein eigari ella rættindahavari í einum verndarøki hevur rætt til endurgjald frá landinum fyri fíggjarligan miss, sum stendst av, at brúk, sum er í gongd, verður darvað. Við serligum endurgjaldsreglum fyri økisvernd verður miðað eftir at minka um sakarmálskostnaðin, tá ið endurgjald verður uppgjørt.

*Útvald náttúrusløg*
Lógarkapittul 6 um útvald náttúrusløg skal tryggja, at hótt og viðkvom náttúrusløg verða vard við burðardyggum brúki.

Skipanin verður merkt av eini greiðari raðfesting, við tað at summi náttúrusløg verða mett at vera týdningarmiklari enn onnur. Við skipanini verður miðað eftir størri fyrivarni og munadyggari fyrisiting, har ið náttúruvirðir verða ávirkað. Ásetingarnar eru ætlaðar at vera ein leiðregla hjá landinum fyri raðfesting og samskipan, sum er vend ímóti bæði almennum myndugleikum og privatum.

Endamálið er, at myndugleikarnar, tá ið teir brúka aðra lóggávu, t.d. planlóggávu, skulu leggja størri dent á tey útvaldu náttúrusløgini, enn teir annars høvdu gjørt, og at tað verður gjørt á meira samskipaðan hátt.

Skipanin hongur saman við hugtakinum *náttúruslag*, sum kann fevna um alt frá stórum vistskipanum til smá lívøkir umframt jarðfrøðilig fyribrigdir.

Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta í kunngerð, hvørji náttúrusløg ið skulu verða útvald. Í kunngerðini kann eisini verða tilskilað, um útveljingin skal fevna um allar ella bara nærri tilskilaðar fyrikomingar av náttúruslagnum.

Tá ið sløg verða útvald, hevur tað stóran týdning, um útbreiðslan av slagnum í Føroyum er hótt. Er hon tað, gevur uppskotið ikki bara heimild at velja náttúruslagið út, men áleggur eisini myndugleikunum eina skyldu at meta um, um slík útveljing er neyðug og ynskjandi.

Verða náttúrusløg útvald, kunnu kommunur tó velja at lata eina fyrikoming forfarast og lata økið, sum talan er um, til annað endamál í økisætlanini. Kommunan skal tó hava mett um og tikið serligt fyrilit fyri, at útbreiðslan og tann vistfrøðiligi standurin hjá tí útvalda náttúruslagnum ikki verður fyri afturstigi, m.a. við at leggja spurningin fyri viðkomandi landsmyndugleikar.

Fyri útvald náttúrusløg, har ið landbúnaðarvirksemi er í gongd, verða ásettar serligar reglur, sum skulu tryggja, at tað viðkomandi náttúruslagið verður vart. Ásett verður ein skylda at boða kommununi frá virksemi á landbúnaðarogn, sum ávirkar fyrikomingar av tí útvalda náttúruslagnum. Hetta hongur saman við, at nógv landbúnaðarvirksemi ikki krevur loyvi.

Har sum einum útvaldum náttúruslagi tørvar virkna røkt ella tiltøk, skal virkisætlan gerast. Mælt verður til at gera eina serliga studningssskipan til slíkar virkisætlanir. Slíkur studningur skal síggjast í samanhangi við egin fíggjarlig amboð hjá ávirkaðum geirum. Røktartiltøk í fyrikomingum av útvaldum náttúrusløgum kunnu bara fara fram eftir samráð við jarðareigaran.

*Ílegutilfar*
Reglurnar í lógarkapitli 7 um ílegutilfar eru nýggjar í føroyskari lóggávu. Dentur verður lagdur á, at landið skal sita fyri ílegutilfarinum sum einum felags tilfeingi, sum er ogn hjá Føroya fólki. Ílegutilfarið skal gagnnýtast, so at tað veður umhvørvi og fólki at so stórum gagni sum gjørligt, bæði í føroyskum høpi og í altjóða høpi, har dentur eisini verður lagdur á, at fyrimunirnir av at gagnnýta ílegutilfar verða rættvísiliga býttir. Við hesum verða atlit í sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi vard, eisini atlitið at burðardyggum brúki.

Landsstýrismaðurin kann við kunngerð seta í verk eina almenna loyvisskipan fyri tøku og gagnnýtslu av ílegutilfari. Tað er bara fyri ílegutilfar, sum tikið verður úr náttúruni, at reglur skulu gerast. Undantikin loyviskravinum er tøka til almenn søvn og tøka til brúk og framhaldandi góðsking í landbúnaði.

Harumframt verður mælt til, at landsstýrismaðurin við kunngerð skal kunna áseta, at fyrimunir av tøku og gagnnýtslu av ílegutilfari úr Føroyum skulu ognast landinum. Reglur kunnu bæði ásetast fyri fíggjarligum og ikki-fíggjarligum fyrimunum.

Landsstýrismaðurin fær eisini heimild at áseta nærri reglur fyri ílegutilfari í almennum søvnum.
Í og á sjónum skulu reglurnar í nattúrumargfeldislógini galda saman við reglunum í sjófeingislógini. Reglurnar í teimum báðum lógunum um loyvi til at taka lívfrøðiligt tilfar úr náttúruni samsvara í stóran mun. Ásetingarnar í náttúrumargfeldislógini um ílegutilfar galda bæði á landi og í sjónum.

*Eftirlit, handhevjan og tvingsilstiltøk*
Í lógarkapitlunum 8 og 9 verða ásettar reglur fyri eftirliti, handhevjan og tvingsilstiltøkum. Reglurnar snúgva seg serliga um:

- eftirlit
- kanningarvirksemi og upplýsingarskyldu
- rætting og bøtandi tiltøk í sambandi við ólógligt virksemi
- íverksetan av tiltøkum móti óvæntaðum umhvørvisavleiðingum av lógligum virksemi
- tvingsilsbøtur

Ein týdningarmikil áseting, sum er nýggj í føroyskari lóggávu, er ásetingin um náttúruendurgjald. Skyldan at rinda náttúruendurgjald verður áløgd við álegging frá landsstýrismanninum. Álegging kann áleggjast tí, sum hevur brotið eina áseting í ella við heimild í náttúrumargfeldislógini ella aðrari lóggávu, tá ið ásetingin skal fremja mið og meginreglur í náttúrumargfeldislógini.

Revsingarheimild verður fyrst og fremst ásett fyri ásetingarnar í lógini, sum áseta ítøkiligar skyldur ella forboð, við tilætlan ella ósketni sum ábyrgdartreyt. Tá ið talan er um meira almennar reglur sum varsemisskylduna, er eingin revsing knýtt at tilætlaðum brotum ella brotum av ósketni.

Landsstýrismaðurin fær heimild at áseta í kunngerð, at ein umhvørvisavgerðaskrá skal gerast. Í skránni skulu skrásetast avgerðir um t.d. raðfest sløg, økisvernd, fyribilsvernd og undantøk.

*Myndugleiki eftir lógini*

Myndugleikin at taka avgerðir og av eintingum at seta tiltøk í verk er lagdur til landsstýrismannin, sum er ovasti myndugleiki eftir lógini. Landsstýrismaðurin kann leggja sínar heimildir eftir lógini til ein stovn undir sær ella til annan landsstovn at umsita. Heimildirnar hjá landsstýrismanninum eftir lógini verða ætlandi latnar Umhvørvisstovuni at umsita.

Landsstýrismanninum verður eisini heimilað í samráð við kommunurnar at áseta, at kommunan skal vera myndugleiki eftir nærri ásettum ásetingum í ella við heimild í lógini. Kommunurnar fáa annars týðandi ábyrgd av at brúka tær umhvørvisrættarligu meginreglurnar og ásetingina um útvald náttúrusløg eftir náttúrumargfeldislógini, tá ið tær fyrisita eftir egnum reglum, serliga í sambandi við planlegging eftir planlóggávuni.

Landsstýrismaðurin kann gera av, at avgerðir, sum tiknar verða við heimild í náttúrumargfeldislógini ella reglum ásettum við heimild í lógini, bara skulu kunnu kærast til ávísa kærunevnd.

*Ásetingar at enda*
Skiftisásetingarnar í lógarkapitli 10 áseta, at avgerðir við heimild í ásetingum í náttúrufriðingarlógini, sum fara úr gildi, tá ið náttúrumargfeldislógin kemur í gildi, verða verandi í gildi, til landsstýrismaðurin tekur avgerð um annað. Somuleiðis verður ásett, at mál, sum eru til viðgerðar, tá ið náttúrumargfeldislógin kemur í gildi, verða viðgjørd og avgjørd eftir higartil galdandi reglum.

**1.5 Ummæli**

Hesir myndugleikar og feløg hava havt lógaruppskotið til hoyringar:

- Løgmansskrivstovan
- Mentamálaráðið
- Fiskimálaráðið,
- Uttanríkis- og vinnumálaráðið
- Samferðslumálaráðið
- Fíggjarmálaráðið
- Almannamálaráðið
- Landsverk
- Føroya Kærustovnur
- Føroya Landfúti
- Kommunufelagið
- SEV
- Bóndafelagið
- Óðalsfelagið
- Búnaðarstovan
- Búnaðargrunnnurin
- Fuglafrøðifelagið
- Sílaveiðifelagið
- Føroya náttúru- og umhvørvisverndarfelag
- Føroya skótaráð
- Føroya ríðingarfelag
- Froskmannafelagið

- Ferðaleiðarafelagið
- Tjóðsavnið
- Havstovan
- Jarðfeingi
- Visit Faroe Islands
- Ringrás
- Umhvørvisstovan
- Friðingarnevndirnar: Streymoyar sýsla, Norðoya sýsla, Eysturoyar sýsla, Sandoyar sýsla, Vága sýsla og Suðuroyar sýsla
- Yvirfriðingarnevndin
- Býarskipanarnevnd landsins
- Lívfrøðingafelagið
- Fróðskaparsetrið
- Vinnuhúsið/Ferðavinnufelagið/Handilsvinnufelagið
- Skógfriðingarnevndin

Uppskotið varð eisini lagt á tann almenna hoyringarportalin hjá landsstýrinum.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Inngangur

Uppskotið til náttúrumargfeldislóg er í høvuðsheitum eitt uppskot til eina heimildarlóg. Tí ber ikki til nágreiniliga at gera greiðu fyri, hvørjar fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar uppskotið fær. Tað er eisini torført at seta tøl á avleiðingarnar av uppskotinum.

Náttúrufriðingarlógin hevur tey bæði síðstu árini kostað landskassanum kr. 500.000 um árið. Upphæddin er farin til lønir, samsýningar, ferða- og dagpening o.a. til limirnar í Yvirfriðingarnevndini og teimum sjey staðbundnu friðingarnevndunum, sum eftir lógini m.a. kunnu áseta friðingar og skulu geva loyvi til at byggja uttangarðs og í ávísum økjum innangarðs og at taka mold burtur, vegagerð o.a.

Sett verður á stovn ein fakkøn náttúrufyrisiting at sita fyri náttúrumargfeldislógini. Av tí at tær staðbundnu friðingarnevndirnar og Yvirfriðingarnevndin verða avtiknar, hóast partar av náttúrufriðingarlógini verða verandi í gildi, fer tann nýggja náttúrufyrisitingin eisini at taka sær av uppgávunum, sum eftir galdandi lóg liggja hjá friðingarnevndunum í sýslunum og Yvirfriðingarnevndini.

Náttúrumargfeldislógin fer at hava størri útreiðslur við sær enn galdandi lóggáva, men júst hvussu stórar útreiðslurnar verða, veldst í stóran mun um politiska ætlan og raðfesting. Lógin er í stóran mun ein amboðskassi, har ið tað veldst um politiska raðfesting og fígging, hvussu og hvussu nógv ið amboðini verða brúkt.

Tað er ilt at meta, hvussu nógv starvsfólk ið setast skulu, fyri at sitið kann verða fyri náttúrumargfeldislógini á nøktandi hátt. Umframt sjálvt fyrisitingararbeiðið og arbeiði við at fylla karmarnar í lógini út við kunngerðum og vegleiðingum, má roknast við, at fitt av arbeiðsorku støðugt má brúkast til skrásetingar- og kortleggingararbeiði og at gera skrásetta vitan atkomandi. Slíkt arbeiði, sum leingi hevur ligið á láni, er ein fyritreyt fyri, at lógin veruliga fæst at virka eftir

sínum endamáli. Fullfíggjað skráseting av dýra-, plantu- og náttúrusløgum er tó eingin treyt. Byrjast má við tí týdningarmesta, hóast náttúrufyrisitingin eyðvitað fær eitt dyggari støði at virka á, so hvørt sum vitanin um náttúruna veksur og verður atkomandi.

Mælt verður í fyrstu syftu til at luta Umhvørvisstovuni í minsta lagi trý akademisk størv til at taka sær av fyrisitingini av náttúrumargfeldislógini umframt náttúruskráseting. So hvørt sum tey ymsu amboðini í lógini fara at verða brúkt, verður sum tørvurin á størvum sum frá líður størri. Á løgtingsfíggjarlógini fyri fíggjarárið 2018 er játtanin til Umhvørvisstovuna hækkað góðar 2,6 mió. kr., og av hesum skal ein partur brúkast til fyrisiting av nýggjari náttúrumargfeldislóg og ein partur til at fremja kunngerðina um at fyribyrgja og týna rottu.

Mett verður ikki, at uppskotið fær stórvegis fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar, hóast onkur einstøk fyrisitingarlig uppgáva eftir lógini verður løgd til kommunurnar. Landsstýrismaðurin fær heimild til at lata kommununum aðrar av sínum heimildum eftir lógini at sita fyri, men í fyrstu syftu eru ongar ætlanir um hetta.

Sí nærri niðanfyri um avleiðingar av teimum einstøku lógargreinunum.

## 2.2. Fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar og vinnuligar avleiðingar

Uppskotið til náttúrumargfeldislóg er í høvuðsheitum eitt uppskot til eina heimildarlóg. Tí ber ikki til nágreiniliga at gera greiðu fyri, hvørjar umhvørvisligar, fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar uppskotið fær. Tað er eisini torført at seta tøl á møguligar avleiðingar av uppskotinum. Hvørjar avleiðingar ið uppskotið fær, veldst í høvuðsheitum um, hvussu virkið ið amboðini í lógini fara at verða brúkt, sbr. m.a. reglurnar um raðfest sløg, økisvernd og útvald náttúrusløg. Gerast skulu virkisætlanir fyri røkt og onnur virkin tiltøk í búøkjunum hjá raðfestum sløgum og í útvaldum náttúrusløgum. Mælt verður til at veita slíkum virkisætlanum stuðul, annaðhvørt við eini serligari studningsskipan ella serstakari játtan. Stuðul eigur í høvuðsheitum at latast virknum tiltøkum.

Reglurnar í lógarkapitli 2 um vanligar meginreglur um burðardygt brúk og lógarkapitli 6 um útvald náttúrusløg geva ikki avgerðarheimildir. Hesar ásetingarnar fáa tí ongar beinleiðis fíggjarligar avleiðingar, og brúkið av hesum reglunum verður í høvuðsheitum partur av verandi málsviðgerð. Tað er ikki fyrr enn avgerðir verða tiknar eftir øðrum lógum, sum ávirka náttúrumargfeldi, at hesar ásetingarnar fáa týdning.

Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar mugu altíð greinast, tá ið mett verður, um tiltøk skulu setast í verk. Metast má um tær fíggjarligu avleiðingarnar, bæði við atliti at útreiðslu- og inntøkuviðurskiftum, fyri tey, sum ávirkast. Gjølligar og realistiskar samfelagsbúskaparligar greiningar skulu gerast í neyðugan mun.

**Avleiðingar fyri vinnuna – alment**

Uppskotið til náttúrumargfeldislóg kann í ávísan mun fáa avleiðingar fyri vinnuna. Mett verður, at lógin í fyrstu atløgu kann ávirka vinnu, sum í stóran mun brúkar land- og sjóøki. Fyri onkran vinnuveg og vinnurekandi kann uppskotið hava við sær, at neyðugt verður at laga virksemið til. Í onkrum føri kann eisini náttúrutilfeingi í einum nærri avmarkaðum øki verða avbyrgt frá at kunna verða gagnnýtt til vinnuendamál. Verður hann skoðaður einsæris, kann slíkur virknaður hava minkandi virðisskapan við sær. Samstundis ber uppskotið í sær breiðar tilgongdir, sum skulu tryggja, at ávirkað vinnuáhugamál og vinnuvegir skulu takast upp á ráð, tá ið greiða verður gjørd fyri ítøkiligum tiltøkum. Við hesum verður miðað eftir at gera greiðu fyri viðkomandi avleiðingum, so at hesar kunnu havast sum grundarlag, tá ið endaligar vigingar verða gjørdar og avgerðir tiknar.

Tær størstu møguligu avleiðingarnar fyri vinnuna eru knýttar at fulltrúarásetingunum í lógini, m.a. reglum um raðfest sløg og økisvernd. Tí kann greiða ikki gerast fyri avleiðingunum, fyrr enn í sambandi við útveljing av ítøkiligum sløgum og skipan av ítøkiligum verndarøkjum. Hvussu stórar tær fíggjarligu avleiðingarnar verða, veldst um verndarendamál og avmarkingarstig. Tá ið ræður um sambandið við fiskivinnugeiran, er veiða, heysting og onnur tøka fevnd av løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Tó skal fyrilit eisini havast við teimum vanligu ásetingunum um burðardygt brúk í lógarkapitli 2 í náttúrumargfeldislógini.

**Avleiðingar av einstøkum lógargreinum**

**Lógarkapittul 1 Endamál og gildisøki o.a. (§§ 1-3)**

*§ 1 um endamál*

Endamálsásetingin hevur størstan týdning sum tulkingartáttur eftir hinum ásetingunum í náttúrumargfeldislógini og ásetingum øðrum lógum. Hon er eisini leiðbeinandi fyri meting í sambandi við avgerðir eftir lógini, og fyri hvørjar tyngjandi treytir ið leggjast kunnu við avgerðum eftir lógini, sum annars eru til fyrimunar fyri umsøkjaran. Ásetingin fær sostatt ikki beinleiðis avleiðingar, uttan so at hon verður brúkt í sambandi við brúk av øðrum ásetingum í náttúrumargfeldislógini ella ásetingum í øðrum lógum. Endamálið hevur ikki í sær sjálvum fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar við sær.

*§ 2 um gildisøki*

Ásetingin um gildisøkið hjá lógini hevur í sjálvari sær ongar sjálvstøðugar avleiðingar av umsitingarligum ella fíggjarligum slag. Slíkar avleiðingar koma ikki í, fyrr enn ymsar ásetingar í lógini verða brúktar á landi, í áum, vøtnum, ósum og løkum, á landleiðini og møguliga á tí ytru føroysku landleiðini.

*§ 3 um allýsingar*

Ásetingin hevur ongar umsitingarligar ella fíggjarligar avleiðingar í sjálvari sær.

**Lógarkapittul 2 Almennar ásetingar um burðardygt brúk (§§ 4-14)**

*Alment*

Lógarkapittul 2 ber fyrst og fremst í sær mið og leiðreglur fyri lógartulking og meting og fær tí ikki beinleiðis avleiðingar, fyrr enn ásetingarnar verða brúktar í sambandi við brúk av øðrum ásetingum í náttúrumargfeldislógini ella ásetingum í øðrum lógum. Tey lógarfestu miðini og meginreglurnar eru nýggj í mun til galdandi rætt og fáa tí nakað av umsitingarligum avleiðingum. Niðanfyri verða tær einstøku ásetingarnar nærri umrøddar.

*§§ 4 og 5 um fyrisitingarmið fyri náttúrusløg, vistskipanir og dýra- og plantusløg*

Miðásetingarnar eru í sínum lógarfesta líki nýggjar í mun til galdandi rætt. Við lógarfestingini fáa miðini størri tyngd, soleiðis at atlitið at náttúrumargfeldinum verður styrkt í avgerðatilgongdunum. Ásetingarnar hava ikki beinleiðis virknað í sjálvum sær, men verða brúktar í sambandi við meting eftir øðrum ásetingum í náttúrumargfeldislógini ella ásetingum í øðrum lógum. Tær fíggjarligu avleiðingar valdast, hvat heimildargrundarlag talan er um, hvør dentur ið higartil er lagdur á umhvørvisvirðir, og um hugt verður at stuttskygdum avleiðingum ella avleiðingum í longdini. Í longdini fara ásetingarnar ætlandi at gera sítt til at tryggja, at tilfeingi eisini í framtíðini kann gagnnýtast fíggjarliga. Stuttskygt kunnu ásetingarnar í onkrum føri hava við sær, at loysnirnar, sum valdar verða, verða dýrari, og at rakstrarvinningurin verður minni. Ásetingarnar siga ikki, at umhvørvisvirðini altíð skulu viga meira enn onnur týðandi samfelagsáhugamál. Miðini fara ætlandi at gera sítt til, at greiða verður gjørd fyri umhvørvisvirðum tvørtur um geirar, og soleiðis eisini at styðja upp undir effektivisering. Samanumtikið verður ikki mett, at ásetingarnar fáa

stórvegis fíggjarligar ella umsitingar avleiðingar fyri myndugleikarnar, hvørki landsmyndugleikar ella kommunalar myndugleikar. Miðini kunnu tó gera tað viðkomandi at brúka amboð, sum kunnu hava slíkar avleiðingar, t.d. økisvernd ella vernd av dýra- og plantusløgum. Mett verður heldur ikki, at ásetingarnar fáa negativar fíggjarligar avleiðingar fyri vinnulívið. Tó kann tað, at størri dentur verður lagdur á náttúruvirðir í avgerðatilgongdunum, í onkrum førum hava øktar kostnaðir við sær fyri tey, sum varða av virksemi, sum ávirkar náttúrumargfeldið negativt.

*§ 6 um almenna varsemisskyldu*

Varsemisskyldan í § 6 geldur fyri øll. Tað er ein fyritreyt, at varsemið, sum krevst, liggur innan fyri karmarnar á tí, sum rímiliga kann væntast. Ásetingin sigur eisini, at varsemisskyldan er at rokna sum lokin, tá ið virksemi verður útint sambært loyvi frá almennum myndugleika. Í slíkum førum er tað sostatt loyvið frá tí almenna eftir øðrum ásetingum, fyrst og fremst við heimild í øðrum lógum enn náttúrumargfeldislógini, sum ásetur karmarnar fyri virkseminum, ikki varsemisskyldan. Fyri virksemi, sum ikki verður útint sambært loyvi, kunnu reglur, sum leggja upp fyri varsemisskylduni ásetast eftir øðrum lógum.

Varsemisskyldan ber ikki bara í sær eina skyldu at hava fyrilit, men eisini eina skyldu at kunna seg um náttúrumargfeldið. Myndugleikarnir eiga at vegleiða, í tann mun tað krevst til at tryggja, at endamálið við ásetingini verður rokkið. Talan kann t.d. vera um at vegleiða um náttúru, sum serligt fyrilit eigur at havast fyri, hvussu virksemi ella rakstur eigur at útinnast fyri at verja hesi atlitini o.a. Tað er serliga umráðandi at vegleiða um raðfest sløg og útvald náttúrusløg. Ásetingin hevur sostatt fíggjarligar avleiðingar fyri myndugleikarnar, tá ið ræður um tørvin á vegleiðing og kunning.

Tað er avgerandi, at kortlagdar upplýsingar um náttúrusløg og dýra- og plantusløg verða talgilt atkomandi hjá almenninginum.

Fyri vinnulívið kann ásetingin bera í sær, at dýrari loysnir onkuntíð mugu veljast. Av tí at kravið eftir § 6 bara fevnir um at gera tað, sum rímiligt er, og meira ítøkilig varsemiskrøv kunnu vera ásett í øðrum regluverki ella í loyvum, verða slíkir meirkostnaðirnir tó hóvligir.

*§ 7 um meginreglur fyri almennum avgerðum*

Grein 7 snýr seg um rættarvirknaðin av ásetingunum í §§ 8-12. Hetta eru ásetingarnar um vitanargrundarlagið og umhvørvisrættarligar meginreglur. Ásetingarnar eru leiðreglur fyri almennum avgerðum. Tær galda ikki beinleiðis fyri privat, men kunnu óbeinleiðis hava týdning fyri privat, tá ið myndugleikarnir brúka tær í sínum avgerðatilgondum. Avleiðingarnar verða umrøddar undir hvørjari grein sær.

*§ 8 um vitanargrundarlagið*

Vitanin um margfeldið í tí føroysku náttúruni er als ikki nøktandi. Henda sannroyndin ber í sær, at skyldan eftir § 8 at byggja á vísindaliga vitan um stovnsstøðuna hjá sløgum, útbreiðsluna og tann vistfrøðiliga standin hjá náttúrusløgum og virknaðin av árinum er avmarkað. Tað er tí ógvuliga umráðandi, at farið verður undir miðvíst arbeiði at skráseta og kortleggja ta føroysku náttúruna og gera vitanina atkomandi hjá myndugleikum og almenningi. Tástani fer skyldan eftir § 8 at virka eftir sínum endamáli, tí skyldan eftir § 8 fevnir fyrst og fremst og um tøka vitan.

Tørvur er eisini á vitan um virknaðir av ymsum hóttanartáttum á vistskipanir og dýra- og plantusløg, virknaðir av virksemi og røkt o.a. Almenn vitan av slíkum slag krevst fyri at kunna seta hóskandi umsitingartiltøk í verk fyri sløg og støð, sum skulu varðveitast.
At fáa til vega eitt dygt vitanargrundarlag fer at krevja raðfesting tey komandi árini, bæði fíggjarliga og umsitingarliga, men hetta er ikki treytað av uppskotinum til náttúrumargfeldislóg.

Henda skyldan er longu í stóran mun galdandi eftir sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi, umframt at løgtingið í 2006 samtykti uppskot til samtyktar (løgtingsmál nr. 8/2006) um at taka stig til at lýsa tað margfelda lívið í tí føroysku náttúruni, s o at sáttmálin um lívfrøðiligt margfeldið kundi verða hildin.

Arbeiðið at skráseta og kortleggja margfeldið í tí føroysku náttúruni er rúgvismikið og hevur leingi ligið á láni. Skal náttúrumargeldislógini fáast at virka eftir sínum endamáli, er tað tí avgerandi neyðugt at miðvíst skrásetingar- og kortleggingararbeiði verður raðfest og samskipað millum náttúrufyrisitingina og viðkomandi fakstovnar undir landinum umframt granskingarstovnar, so at tann neyðuga vitanin fæst til vega.

§ 8, stk. 1, ásetur, at myndugleikaútinning, sum ber við náttúrumargfeldið, skal byggja á vísindaliga vitan, so langt sum hetta er rímiligt at krevja. Tá ið metast skal, hvat ið er rímiligt, má kostnaðurin av at fáa vitanargrundarlagið til vega vigast upp ímóti váðanum fyri náttúrumargfeldið. Hvør ið hevur ábyrgdina av at fáa vitanargrundarlagið til vega í sambandi við eina ítøkiliga avgerð, skilst á vanligum fyrisitingarrættarligum reglum. Vanliga hava myndugleikarnir ábyrgdina, tá ið talan er um tiltøk, sum teir sjálvir taka stig til, t.d. reglur, áleggingar ella verndartiltøk. Tey, sum varða av tiltøkum ella virksemi, hava vanliga ábyrgdina í málum, har ið søkt verður um loyvi ella undantaksloyvi.

Ásetingin tekur fyrst og fremst støði í vitanini, sum longu finst, men kann í ávísan mun bera í sær eina skyldu at fáa til vega nýggja vitan. Í sambandi við skylduna at fáa til vega nýggja vitan má tó havast í huga, at meginreglan um fyrivarni í § 9 nettupp tekur støði í støðum, har ið vitanin ikki er nøktandi. Ásetingin kann kortini fáa fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri fleiri fyrisitingarstig og fyri bæði geiramyndugleikar og umhvørvismyndugleikar. Eftir ásetingini eigur fyrisitingin, so langt tað er rímiligt, at kunna seg um dátutilfar o.a., sum hon annaðhvørt sjálv hevur um hendur, ella sum finst hjá øðrum stovnum. Eitt nú kann tað hugsast, at vitanarstovnar sum Tjóðsavnið og aðrir hava nakað av viðkomandi vitan. Tað er umráðandi, at eisini slík vitan, sum longu finst, verður gjørd lætt atkomandi hjá myndugleikum og almenningi. So hvørt sum dátutilfarið um lívfrøðiligt margfeldið veksur í vavi, veksur eisini tørvurin á førleikum at tulka tilfarið og brúka tað í teimum samanhangum, har ið tað er viðkomandi. Fyrisitingarmyndugleikum, sum ikki sjálvir hava neyðugar umhvørvisfakligar førleikar, fer í størri mun enn í dag at tørva ráðgeving frá landsmyndugleikum, sum varða av umhvørvisvernd. Tí kann roknast við, at skyldurnar, sum ásettar eru í § 7, stk. 1, fara at hava við sær, at fleiri fara at venda sær til Umhvørvisstovuna, sum ætlandi í høvuðsheitum fer at sita fyri náttúrumargfeldislógini.

§ 8 fær eisini týdning fyri tey førir, har ið tann, sum varðar av virkseminum, hevur ábyrgd av at fáa til vega vitanargrundarlagið fyri eini avgerð. Tá ið myndugleikarnir eftir § 8, so langt tað er rímiligt, skulu byggja á vísindaliga vitan, eigur eisini grundarlagið, sum roynt verður at fáa til vega, at vera merkt av hesum. Men stk. 2 hevur eisini týdning, sbr. niðanfyri.

Skyldan í § 8, stk. 2, at leggja dent á vitan, sum er grundað á royndir hjá ættarliðum, sum hava livað av og í samspæli við náttúruna, geldur fyri vitan, sum ger sítt til at varðveita náttúrumargfeldið. Henda ásetingini hevur útgangsstøði í vitanini, sum finst.

Av vitanarfremjandi tiltøkum, sum hava týdning fyri, at § 8 í verki fer at virka eftir sínum endamáli, kunnu nevnast kortlegging av lívfrøðiligum margfeldi, kortlegging av náttúrusløgum á landi og fram við sjóvarmálanum og kortlegging av og umsjón við hóttum sløgum og fremmandum sløgum. Tað er umráðandi at alt dátutilfar, sum fingið verður til vega, verður gjørt talgilt atkomandi hjá almenningi og myndugleikum.

Á mangan hátt hava vit ikki nøktandi vitan, til at reglurnar um raðfest sløg og útvald náttúrusløg til fulnar fara at tæna sínum endamáli. Tí má sum skjótast ferð fáast á miðvísa og skipaða skráseting, so at hesi amboðini í lógaruppskotinum sum frá líður fáa størri virknað, so hvørt sum vitanargrundarlagið verður dyggari. Tað ræður um at verja tað týdningarmesta fyrst og síðan sum frá líður at taka størri tøk.

*§§ 9 til 12 um tær umhvørvisrættarligu meginreglurnar*
Lógarfestingin av meginreglunum um fyrivarni (§ 9), heildartrýstið á vistskipanina (§ 10), at tann, sum varðar av virksemi, sum er umhvørvinum at skaða, ber kostnaðin (§ 11), og umhvørvisgóða tøkni og rakstrarhættir (§ 12) er helst í ávísan mun ein lógarfesting av óskrivaðum meginreglum, sum longu í dag verða brúkar í sambandi við meting, men ikki skipað. Lógarfestingin kann gera sítt til, at tað verður lættari at ætla um avgerðir frammanundan, og ber í sær, at strangari krøv verða sett viðvíkjandi grundgeving fyri avgerðum. Annars verða fáar fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar. Meginreglurnar eru vendar móti myndugleikunum. Eins og tá ið talan er um miðini í §§ 4 og 5 verða meginreglurnar brúktar í sambandi við myndugleikaútinning eftir øðrum ásetingum í náttúrumargfeldislógini ella ásetingum í øðrum lógum. Tí kann virknaðurin berast saman við virknaðin av §§ 4 og 5, sbr. ta umrøðuna.

*§ 13 um dygarkrøv til náttúrumargfeldið*
§ 13 er orðað sum ein almenn heimild til at áseta leiðbeinandi dygdarkrøv til náttúrumargfeldið. Tað er í útgangsstøðinum ilt at siga, hvussu nógv henda ásetingin fer at verða brúkt. Tað veldst m.a. um, hvussu onnur amboð í lógini, sum økisvernd, raðfest sløg og útvald náttúrusløg, fara at verða brúkt. Tað fer at standa til landsstýrimannin at gera av, hvørji dýra- og plantusløg og náttúrusløg dygdarkrøvini skulu brúkast til.

Dygdarkrøv skulu galda tvørtur um geirar. Tað fer at krevja umsitingarliga orku at orða dygdarkrøv og seta tey í verk, bæði hjá umhvørvismyndugleikanum og myndugleikum, sum sita fyri virksemi, sum verður ávirkað av krøvunum. Tó verður mett, at tørvurin á umsitingarorku til dygdarkrøv verður størstur hjá umhvørvismyndugleikanum, sum fer at hava ábyrgdina av at samskipa arbeiðið at orða og fremja dygdarkrøvini í verki. Hugsanin er, at gjørd verður ein ætlan fyri, hvussu ið farast skal fram, um tað ikki eydnast at røkka teimum samtyktu krøvunum. Eisini hetta fer at krevja umsitingarliga orku. Annars verða dygdarkrøvini brúkt í verki, tá ið avgerðir verða tiknar við heimild í regluverki, sum longu finst, og tí verða tær umsitingarligu avleiðingarnar fyri tann einstaka fyrisitingarmyndugleikan væntandi avmarkaðar. Hvørjar fíggjarligar avleiðingar tey ítøkiligu dygdarkrøvini fáa fyri ávirkað vinnurekandi, veldst um innihaldið í krøvunum.

*§ 14 um dent á onnur týðandi samfelagsáhugamál*
Stk. 1 í ásetingini ber í sær, at tiltøk eftir bæði náttúrumargfeldislógini og øðrum lógum skulu vigast upp ímóti øðrum týðandi samfelagsáhugamálum.

**Lógarkapittul 3 Fyrisiting av sløgum (§§ 15-24)**
*Umhvørvisligar avleiðingar*
Lógarkapittul 3 ger fyrisitingarmiðið fyri sløg í § 5 virkið. Saman við m.a. meginreglunum í §§ 8, 9 og 10 skulu ásetingarnar í lógarkapitli 3 gera sítt til, at størri trygd fæst fyri, at lívførið hjá sløgunum verður varðveitt, og at tað slepst undan, at teirra vistfrøðiligu lívskor verða gjørd verri. Reglurnar um veiðu og tøku (§§ 16, 18 og 19) verða gjørdar galdandi fyri øll sløg á landi. Við hesum verða møguleikarnir at skipa viðurskiftini kring stórar lívverubólkar betraðir. Tó verður veiða og tøka, sum er fevnd av løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, ikki fevnd av reglunum í §§ 16, 18 og 19. Mett verður, at m.a. denturin á burðardygd í sambandi við veiðu av ryggdýrum, sbr. § 16, stk. 2, og kravið um vistskipanarhugsanina, sbr. § 16, stk. 3, fara at fáa gagnligar avleiðingar fyri umhvørvið.

Tann serstaka skipanin, sum skotin verður upp í § 21 um raðfest sløg, kann fáa stóran umhvørvisligan týdning. Í hesum sambandi eru serliga heimildin at áseta reglur um vernd av týðandi vistfrøðiligum funktiónsøkjum hjá slíkum sløgum eftir § 22, stk. 1, nr. 2, og heimildin at krevja, at greiða verður gjørd fyri avleiðingum í sambandi við ætlað inntriv í teirra funktiónsøkir, sbr. stk. 1, nr. 3, týdningarmiklar. Hesar heimildirnar bera í sær, at greiðari samanhangur verður millum vernd av sløgum og bú- og vakstrarøkir hjá sløgunum. Møguleikarnir fyri gagnligum avleiðingum fyri umhvørvið av § 21 verða enn betri av uppskotinum í stk. 3, sum áleggur fyrisitingini eina skyldu at meta, um eitt slag eigur at fáa støðu sum raðfest, tá ið støðan ella gongdin hjá slagnum ikki samsvarar við fyrisitingarmiðið í § 5, stk. 1.

*Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar*
*§ 15 um fyrisitingarmeginreglu*
Greinin heimilar eina almenna fyrisitingarmeginreglu fyri sløg. Ásetingin hongur nær saman við treytunum fyri veiðu í § 16. Samstundis verður staðfest, at veiða, heysting og onnur gagnnýtsla, sum er fevnd av løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, ikki er fevnd av §§ 16, 18 og 19 í náttúrumargfeldislógini um veiðu og tøku.

§ 15, stk. 2, staðfestir, at heysting og onnur tøka av villum plantum er loyvd, tá ið hon ikki hóttir *stovnin á staðnum*. Tørvur verður á at lýsa gjøllari og við dømum, hvat ið liggur í orðingini *stovnurin á staðnum*. Náttúrufyrisitingin eigur at gera vegleiðandi tilfar um hetta.

*§ 16 um veiðu*
§ 16 er framhald av fyrisitingarmeginregluni fyri vill dýr, sbr. § 15, stk. 1. Ásetingin ber í sær, at tað krevur heimild í lóg ella avgerð við heimild í lóg at veiða vill súgdýr og fugl.

Kravið um, at slagið sambært tí bestu tøku skjalfestingini framleiðir eitt avlop, sum kann veiðast burðardygt, sbr. § 16, stk. 2, er í sínum lógarfesta líki nýtt í mun til galdandi rætt. Hvussu ið orðingin *tí bestu tøku skjalfestingini* skal skiljast, er nærri umrøtt í teimum serligu viðmerkingunum til § 16. Útgangsstøðið, tá ið myndugleikar taka avgerðir um veiðu, er, at bygt verður á tøka vitan, men at vísindalig vitan verður brúkt í mestan møguligan mun, um slík vitan finst. Skjalfesting krevst tó bara í tann mun, sum er nøktandi sum avgerðargrundarlag.

Skjalfestingarkravið kann eisini fáa umsitingarligar avleiðingar, við tað at tað fer at krevja nakað størri umsitingarliga orku at orða reglur og avgerðir um veiðu í framtíðini.

*§ 17 um aðra tøku eftir meting hjá landsstýrismanninum*
Ásetingin gevur landsstýrismanninum heimild at loyva ella tøku av villum súgdýrum og fugli umframt fiski í áum, vøtnum, ósum og løkum til onnur endamál enn gagnnýtslu. Landsstýrismaðurin kann eisini av sínum eintingum seta tøku í verk til somu endamál og áseta nærri reglur fyri slíkari tøku. Ásetingin verður ikki mett at fáa stórvegis fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar.

*§§ 18 og 19 um tøku av ávikavist ryggleysum dýrum og plantum*
Báðar ásetingarnar lata upp fyri, at landsstýrismaðurin kann seta í verk skaðabasandi tiltøk á ognini hjá øðrum, sbr. § 18, stk. 2, og § 19, stk. 2. Tað er ein fyritreyt, at tiltøkini ikki hava fíggjarligar avleiðingar fyri jarðareigaran. Veldur myndugleikin við síni skaðabasing eigaranum av ognini fíggjarligan miss, sum ikki er knýttur at sjálvum skaðadýrinum, verður eitt møguligt endurgjaldskrav avgjørt eftir vanligum endurgjaldsrættarligum meginreglum. Annars fáa ásetingarnar ongar serligar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar.

Ásetingarnar í § 18, stk. 3, og § 19, stk. 3, geva heimild til í kunngerð at áseta reglur fyri veiðu av ryggleysum landdýrum og heysting av plantum. Tað er ilt at siga, í hvønn mun ásetingin fer at verða brúkt. Ásetingin fær í fyrstu atløgu ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar.

*§ 20 um ferðslu uttangarðs*
Ásetingin letur upp fyri, at reglur kunnu ásetast fyri ferðslu uttangarðs fyri at forða fyri, at plantur ella dýr verða fyri skaða ella ampa. Ásetingin skal bara brúkast í serligum førum og skal ikki hava fíggjarligar avleiðingar fyri jarðareigaran.

*§§ 21 og 22 um raðfest sløg*
Eftir § 21, stk. 1, kann landsstýrismaðurin við kunngerð geva nærri tilskilaðum sløgum støðu sum raðfest, og myndugleikin hevur skyldu til at meta, um slík avgerð skal takast, tá ið eitt slag eftir vísindaligum metingarstøði verður mett at vera í eini støðu, sum er í ósamsvari við miðið í § 5, stk. 2. Metingarskyldan ber ikki í sær eina skyldu at raðfesta sløg, og tí stendur tað í stóran mun til myndugleikan at gera av, hvussu nógv raðfestingarskipanin skal brúkast.

Tær umsitingarligu og fíggjarligu avleiðingarnar fyri fyrisitingina verða í fyrra lagi knýttar at kanningararbeiði í sambandi við áseting av kunngerð um raðfesting. Í seinna lagi verða avleiðingarnar fyri fyrisitingina knýttar at, hvussu stórt tal av sløgum ið raðfest verður, og hvørji umsitingartiltøk ið neyðugt er at fremja. Tað verður ymiskt, alt eftir slagnum, hvørji tiltøk ið eiga at fremjast.

Avleiðingarnar fyri privat av tí ítøkiligu kunngerðini valdast innihaldið í kunngerðini. Fullkomið forboð kann setast fyri veiðu ella heysting, men hetta ikki er ein neyðug fyritreyt fyri raðfesting. Eisini aðrar avleiðingar valdast, hvat slag ið talan er um, og hvørji varðveitandi tiltøk slagnum tørvar. Møguligar umsitingarligar ella fíggjarligar avleiðingar valdast tí avmarkingarstigið.

Fyri funktiónsøkir, sum ásett verða sum almennar kunngerðir eftir § 22, stk. 1, nr. 2, verða møguligar avmarkingar fyri privat knýttar at útbygging, veitagrevstri, avveiting og uppafturfylling. Avmarkingin kann eisini vera knýtt at ávísum tíðarskeiðum, t.d. verpingartíð. Fyrilitini, sum áløgd verða við avgerðini um búøkir, kunnu tó ikki bera í sær avmarkingar, sum hava munandi ampa við sær fyri brúk, sum er í gongd. Vísir tað seg eftir avgerðina kortini, at fyrilitini í búøkjum hjá raðfestum sløgum í summum førum til samans bera í sær avmarkingar, sum hava við sær munandi ampa fyri brúk, sum er í gongd, og valda jarðareigarum munandi miss, kann jarðareigarin krevja, at økið verður vart eftir lógarkapitli 5, ella at undantak verður gjørt frá raðfestingini fyri økini, sum talan er um. Er tað, longu tá ið verndin verður sett í verk, greitt, at avmarkingarnar fara at bera munandi ampa í sær, er økisvernd tað rætta amboðið.

Gerast skulu virkisætlanir fyri búøkir hjá raðfestum sløgum, har ið røkt ella virkin tiltøk krevjast. Mælt verður til at stuðla fremjing av slíkum virkisætlanum, annaðhvørt við eini serligari studningsskipan ella við serstakari játtan. Stuðul eigur í høvuðsheitum at latast virknum tiltøkum. Tann einstaka kunngerðin kann eisini hava við sær størri krøv um at gera greiðu fyri avleiðingum í sambandi við vinnuvirksemi, sbr. § 22, stk. 1, nr. 3, um, at krøv kunnu setast um, at greiða verður gjørd fyri avleiðingum fyri eitt dýra- ella plantuslag av ætlaðum inntrivum í funktiónsøkini hjá slagnum, og um, at greiða verður gjørd fyri øðrum funktiónsøkjum, sum kunnu gera sítt til at tryggja, at slagið verður vart í samsvari við § 5, stk. 1.

*§ 23 um handil o.a.*
Ásetingin, sum gevur landsstýrismanninum heimild at áseta reglur fyri m.a. inn- og útflutningi av hóttum dýra- og plantusløgum, fær ikki í sær sjálvari fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar.

*§ 24 um varðveitslutiltøk uttan um búøkið og fyri tamd og vand sløg*
Ásetingin gevur landsstýrismanninum heimild at seta varðveitslutiltøk í verk uttan um búøkið hjá villum sløgum. Tað verður væntandi bara í heilt serligum førum, at slík sokallað *ex situ*-varðveitsla kann verða viðkomandi, og tí verður ikki roknað við, at ásetingin fær fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar í fyrstu atløgu. Ásetingin fær ongan fíggjarligar avleiðingar fyri privat.

**Lógarkapittul 4 Fremmandar lívverur (§§ 25-29)**
*Umhvørvisligar avleiðingar*
Innsløðing av fremmandum lívverum er ein ávirkanartáttur, sum kann hava stórt skaðaárin á tað lívfrøðiliga margfeldið. Trupulleikin er bara fyri ein part fevndur av galdandi rætti. Lógaruppskotið fjøltáttar amboðini til eisini at fevna um innsløðing og lívverusløg, sum ongar reglur eru fyri í dag. Reglurnar skulu serliga leggja upp fyri umhvørvisatlitum í sambandi við innflutning og útseting av fremmandum lívverum. Aðrir tættir sum atlitið at plantu-, dýra- og mannaheilsu eru ikki fevndir av uppskotinum. Krøv verða sett um varsemi (§ 25) og um loyvi til innflutning (§ 26) og útflutning (§ 27). Á henda hátt fer náttúrumargfeldislógin at kunna gera sítt til minka um talið á fremmandum lívverum, sum sløðast inn í ta føroysku náttúruna í framtíðini, og sostatt eisini at forða fyri óhepnari ávirkan á lívverur, sum finnast natúrliga í tí føroysku náttúruni, og á vistskipanir. Tann gagnligi virknaðurin gerst uppaftur størri, tá ið tey løgfrøðiligu amboðini verða brúkt saman við øðrum amboðum, serliga vitan.

*Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar*
*§ 25 um varsemiskrav*
§ 25, stk. 1, ásetur eitt krav um varsemi, tá ið livandi ella lívførar lívverur verða settar út í umhvørvið. Tað ber m.a. í sær, at krøv verða sett um, at girðingar o.tíl., har ið lívverur verða settar út, eru væl tryggjað fyri útslepping, um lívverurnar kunnu verða umhvørvinum at skaða, um tær spjaðast. Varsemisskyldan kann hava við sær, at nakað størri krøv verða sett til tekniskar standardar í sambandi við sumt vinnuvirksemi, men mett verður ikki, at tað fer at hava nevningarverdar meirkostnaðir við sær.

Varsemisskyldan hjá tí, sum hevur ábyrgdina av útseting, er knýtt at atgongdini at vitan um umhvørvisváða í sambandi við útseting av fremmandum lívverum yvirhøvur og váða, sum er knýttur at ávísum lívverum. Tað liggur ein týðandi uppgáva á myndugleikanum at fáa slíka vitan til vega og gera hana atkomandi. Tí verður tørvur á størri arbeiðsorku til gransking, greining og kunningarvirksemi um fremmandar lívverur.

Varsemisskyldan í stk. 2 kann hava øktar útreiðslur við sær fyri tann, sum varðar av virksemi, t.d. í sambandi við brúgvarbygging, tunnilsgerð ella tílíkt. Er vandi fyri, at slík nýggj verkløg kunnu fara at hava við sær, at lívverur spjaðast, er tað ein fyritreyt eftir ásetingini, at tiltøk verða sett í verk fyri at forða fyri, at hetta hendir. Mett verður, at útreiðslurnar av slíkum tiltøkum vanliga verða lítlar í mun til heildarkostnaðin av slíkum verkætlanum. Ásetingin kann hava førleikatørv við sær, tá ið tann, sum varðar av virkseminum, ikki longu hevur ta vitan, sum krevst til at kunna forða fyri, at lívverur spjaðast. Í slíkum førum fær myndugleikin eftir náttúrumargfeldislógini ella viðkomandi geiramyndugleiki eisini ein týdningamiklan leiðbeinandi og kunnandi leiklut. Varsemisskyldan ber eisini í sær, at fyritøkur, sum selja ella lata víðari lívverur, skulu hava kunnleika um regluverk viðvíkjandi útseting og kunna kundarnar um, hvussu ið farast skal at við lívverunum í samsvari við regluverkið. Hetta ber í sær ein førleikatørv í slíkum fyritøkum, og at nakað verður gjørt fyri at gera slíka kunning atkomandi hjá kundunum (vørumerking, kunningarskriv o.s.fr.). Mett verður ikki, at vitanarkravið fer at hava munandi øktar útreiðslur við sær.

Kunngerðir eftir stk. 4 eru serliga ætlaðar ótilætlað innsløddum dýrum og plantum og eru treytaðar av eini ávísari vitan um, hvørji sløg av virksemi ið kunnu vera atvold til, at fremmandar lívverur sleppa út. Tað fer at krevja nakað av umsitingarligari orku at gera kunngerðir. Hvørjar fíggjarligar avleiðingar ið kunngerðin kann fáa fyri privat, veldst um innihaldið í kunngerðini.

*§§ 26 til 28 um innflutning og útseting*
Ásetingarnar í §§ 26 til 28 eru í stóran mun nýggjar. Tað fer tí at krevja nakað av umsitingarligari orku at sita fyri teimum. Tað ger tó umsitingarbyrðuna munandi minni, enn hon annars hevði verið, at dýr, sum eru fevnd av ásetingum í ella við heimild í løgtingslóg um innflutning og hald av vandamiklum dýrum o.ø., t.e. øll fremmand dýr, eru undantikin kravinum um innflutningsloyvi eftir náttúrumargfeldislógini, sbr. § 26, stk. 1, 2. pkt. Verða kunngerðarheimildirnar í §§ 26 til 28 brúktar, fer – í eina tíð – tørvur at vera á arbeiðsorku til at gera kunngerðir og til málsviðgerð.

Fyri at tær umsitingarligu avleiðingarnar ikki skulu gerast óneyðuga stórar, verður mælt til at viðgera spurningin um útseting í sambandi við viðgerðina av umsóknini um innflutningsloyvi, um tað, longu tá ið innflutt verður, er greitt, at lívveran skal setast út í náttúruumhvørvið.

Ein týðandi grundgeving fyri at krevja innflutningsloyvi er møguleikin fyri at handhevja ásetingarnar gjøgnum marknaeftirlit. Munadygg handhevjan av hesum ásetingunum er treytað av vitan hjá marknaeftirlitinum umframt førleikum til nøktandi eftirlitsvirksemi. Til førleikamenning verður serliga tørvur á kunning og upplæring í materiellum regluverki, váðametingum og fráboðanarmannagongdum.

**Lógarkapittul 5 Økisvernd (§§ 30-48)**
*Umhvørvisligar avleiðingar*
Lógarkapittul 5 útvegar nøkur meira fjøltáttað amboð til økisvernd enn friðingarheimildirnar eftir galdandi rætti. Kapittulin ger greitt, hvørjum ið miðað verður eftir at røkka við økisvernd, og at treytirnar fyri vernd eiga hava støði í tí vistfrøðiliga standinum, sum náttúrusløg ella dýra- og plantusløg eru í.

Lógaruppskotið ber eisini í sær, at verndarøkir kunnu skipast í sjónum burturav innan fyri 12 fjórðingar.

Lógaruppskotið ber í sær størri trygd fyri, at røkt og brúk, sum krevjast til at røkja verndarvirðir, t.d. í tjóðgørðum, landslagsverndarøkjum ella ávísum náttúrufriðøkjum, verða sett í verk og halda fram, sbr. kravið um røktarætlan. § 44 gevur fyrisitingarmyndugleikanum atgongd til at útinna røkt í øllum flokkum av verndarøkjum.

Tað er somuleiðis eitt krav, at umsitingarætlanir verða gjørdar fyri stór verndarøkir, sbr. §§ 32, stk. 3, og 33, stk. 4.

Latið verður upp fyri, at atlitið at mentanarminnum kann verjast í tí einstaka verndarøkinum. Tætt samstarv millum náttúrufyrisitingarmyndugleikan og mentanarminnamyndugleikan er ein fyritreyt, tá ið ræður um fyrisiting og viðgerð í einstøkum málum, sum eru knýtt at mentanarminnum í verndarøkinum. Hugsanin er, at umvæling og røkt av mentarnarminnum skal fara fram, soleiðis at bæði náttúru- og mentanarvirðir verða røkt á bestan hátt. Tiltøk við atliti at umsiting av mentanarminnum mugu greiðast við myndugleikan, sum situr fyri verndarøkjunum, so at tiltakið ikki ber ímóti verndarendamálinum eftir náttúrumargfeldislógini.

*Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar*
*§ 30 um økisverndarmið*

Ásetingin fær ikki í sær sjálvari umsitingarligar ella fíggjarligar avleiðingar.

*§§ 31-36 um økisvernd o.a.*
Tá ið verndarøkir verða skipað á landi og í ella á sjónum út á 12 fjórðingar, kann tað fáa avleiðingar fyri ymisk sløg av vinnuvirksemi. Hvussu stórar avleiðingarnar verða, veldst um verndarásetingarnar, sum ásettar verða, í mun til verndarendamálið, verndarvirðini og virksemi í tí ítøkiliga økinum.

Eftir § 31, stk. 2, kann munur gerast á verndini í mun til havbotnin, vatnsúluna og vatnskorpuna. Fiskiskapur við óskaðiligum reiðskapi kann ofta halda fram í verndarøkjum.

Sí annars eisini metingina av teimum fíggjarligu og umsitingarligu avleiðingunum av §§ 47 og 48, tá ið ræður um endurgjaldsreglur fyri teir ymsu verndarflokkarnar.

*§§ 32, 33, 34, 35 og 44 um røkt o.a.*
Lógaruppskotið ber í sær reglur um røkt av skipaðum verndarøkjum. Umframt § 44, sum ásetur yvirskipaðar reglur fyri røkt av verndarøkjum, verða ymiskar ásetingar um umsitingar- og røktarætlanir skotnar upp fyri teir ymsu verndarflokkarnar.

Avleiðingarnar av røkt fyri jarðareigarar verða ymiskar í ymsum økjum. Í økjum, har ið brúk krevst til at varðveita verndarvirðini, verður tað ofta viðkomandi at geva jarðareigarum ella rættindahavarum virknan lut í røktararbeiðinum. Eftir § 44, stk. 1, 2. pkt., skal myndugleikin, um tað er gjørligt, gera avtalu við jarðareigaran um at útinna røktartiltøk. Fyrisitingarmyndugleikin kann eisini gera avtalu um røkt við felagsskapir ella onnur, sbr. stk. 1, 3. pkt. Eftir umstøðunum kunnu slíkar avtalur vera treytaðar av ávísari samsýning frá tí almenna. Í endurreisingarfriðøkjum, sbr. § 34, stk. 2, kunnu røktartiltøk, sum ikki kunnu fremjast eftir § 44, koma upp á tal, sbr. stk. 2, 2. pkt. Er tørvur á slíkum tiltøkum, má myndugleikin fáa til vega eitt heimildargrundarlag, annaðhvørt við privatrættarligari avtalu ella við ognartøku til røktarendamál. Privatrættarligar avtalur kunnu ikki vera partur av eini ætlan fyri røkt.

Lógaruppskotið hevur, sum nevnt, ásetingar um krøv um røktarætlan. Kravið í § 44 um, at uppkast til ætlan fyri røkt, um tað er gjørligt, skal leggjast fram, samstundis við at verndarkunngerðin verður ásett, geldur fyri verndarøkir yvirhøvur og er ikki so óvikiligt sum kravið eftir ásetingunum í § 33, stk. 3, 1. pkt., § 34, stk. 4, 1. pkt., og § 35, 3. pkt., har ið slíkt uppkast skal leggjast fram samstundis við slagið av verndarkunngerð, sum nevnt er í hvørji áseting.

Sammett við friðingar eftir galdandi náttúrufriðingarlóg bera reglurnar, sum skotnar verða upp, í sær eitt krav um, at ætlan fyri røkt skal gerast fyri verndarøkir, har ið røkt ella brúkt krevst til at varða um verndarvirðini. Hetta ber í sær, at í landslagsverndarøkjum, tjóðgørðum og lívøkisverndarøkjum skal røktarætlan leggjast fram samstundis við verndarkunngerðina. Aftur at tí skulu umsitingarætlanir gerast fyri stór verndarøkir, sbr. §§ 32, stk. 3, og 33, stk. 4.

Uppskotið fer hava við sær tørv á umsitingarligari orku til at fyrireika verndarkunngerðir. Til verndarøkir, har ið ein umsitingarætlan og/ella ætlan fyri røkt verður gjørd, krevst umsitingarlig orka.

*§ 37 um altjóða støðu fyri verndarøkir*
Mett verður ikki, at ásetingin fær stórvegis umsitingarligar ella fíggjarligar avleiðingar.

*§§ 38, 39 og 40 um málsviðgerð*

Tær serligu málsviðgerðarreglurnar skulu serliga geva greiðar reglur fyri samstarvi við ávirkað vinnuáhugamál og umboð fyri fólkið á staðnum. Eisini er ásett, at verndarætlanir skulu samskipast við planarbeiði eftir planlóggávuni. Ásetingar bera nakað av umsitingarligum skyldum í sær.

*§ 41 um virksemi, tá ið málsgerðin er byrjað*
§ 41, stk. 2, gevur landsstýrismanninum heimild at áseta fráboðanarskyldu, tá ið stig eru tikin til vernd. Tørvurin á fráboðanarskyldu, og hvussu víðfevnd hon skal vera, veldst m.a. um, hvørja planstøðu økið hevur eftir planlóggávuni, og um inntrivið, sum talan er um, krevur loyvi eftir øðrum regluverki, sbr. stk. 1. Verður fráboðanarskylda ásett, kann tað hava við sær, at myndugleikin verður varur við fleiri ætlað inntriv enn annars. Fæst semja ikki í lag, kann myndugleikin meta, um bráðfeingisvernd skal setast í verk. Mett verður ikki, at ásett fráboðanarskylda og málsviðgerð tí viðvíkjandi fer at krevja munandi umsitingarliga orku.

*§ 42 um bráðfeingisvernd*
§ 42, stk. 1, gevur landsstýrismanninum heimild at seta í verk bráðfeingisvernd av ávísum økjum. Bráðfeingisvernd er avmarkað til fýra ár, men kann leingjast í mesta lagi tvey ár. Eftir stk. 2 kann landsstýrismaðurin eisini seta í verk bráðfeingisvernd av ávísum náttúrusløgum. Heimildin er ætlað at verða brúkt í heilt serligum førum, og møguligt brúk verður bráðfeingis. Tí verður mett, at avleiðingarnar av heimildini fyri jarðareigarar og rættindahavarar yvirhøvur verða avmarkaðar.

*§ 43 um grundgeving og kunngering av verndarkunngerðum*
Ásetingin verður í lítlan mun mett hava umsitingarligar og fíggjarligar avleiðingar.

*§ 45 um undantak frá verndarkunngerð*
Verður avgerð tikin um at geva undantak við tí treyt, at eitt samsvarandi øki verður skipað ella ment aðrastaðni, skal tann, sum varðar av virkseminum, bera rímiligar kostnaðir í tí sambandi.

*§ 46 um virksemi uttanfyri, sum kann valda skaða inni í einum verndarøki*
Ásetingin gevur heimild til at leggja dent á verndarvirðir í einum verndarøki í sambandi við virksemi o.a. uttan fyri verndarøkið. Ásetingin verður í lítlan mun mett at fáa umsitingarligar og fíggjarligar avleiðingar.

*§ 47 um endurgjald til eigarar og rættindahavarar í verndarøkjum*
Skotnar verða upp eins endurgjaldsreglur fyri tjóðgarðar, landslagsverndarøkir, náttúrufriðøkir og lívøkisverndarøkir. Uppskotið leggur sum heild betur upp fyri áhugamálunum hjá eigarum og rættindahavarum enn galdandi lóggáva.

Uppskotið ber í sær, at endurgjald skal veitast fyri allar avmarkingar á verandi virksemi, t.e. brúkið av eini ogn, sum í veruleikanum fer fram, tá ið verndarøkið verður skipað, har ið avmarkingarnar hava fíggjarligan týdning fyri raksturin. Tað er ein treyt, at raksturin av ognini, annaðhvørt talan er um eitt einstakt rakstrarslag, at raksturin av einum parti av ognini verður fyri ampa ella eina heildarmeting av fleiri rakstrarsløgum, verður darvaður orsakað av verndarkunngerðini. Eftir § 47 verður endurgjald ikki veitt fyri avmarkingar á væntandi broytt brúk í framtíðini.

Tað er ilt at taka dagar ímillum, hvørjar fíggjarligar avleiðingar ásetingin fær. Í fyrra lagi veldst tað um, hvussu nógv verndarøkir verða skipað. Tað er, tá ið samanum kemur, ein spurningur um politiska raðfesting. Í øðrum lagi er tað smátt við vinnuvirksemi í tí føroysku náttúruni, sum kann hugsast at verða darvað stórvegis av, at verndarøkir verða skipað. Samanumtikið verður ikki mett, at endurgjald ofta fer at koma upp á tal.

*§ 48 um mannagongdina fyri áseting av endurgjaldi*

Uppskotið miðar eftir at minka um útreiðslurnar hjá tí almenna í málum um endurgjald við at miða eftir at sleppa undan drúgvum rættarmálum. Tí skal landið í fyrstu atløgu geva eigara ella rættindahavara, sum setur fram krav um hetta, tilboð um endurgjald. Eigari ella rættindahavari, sum ikki tekur av tilboðnum, kann seta fram krav fyri landsstýrismannin um at fáa landið at biðja um rættarliga meting.

Uppskotið ber í sær, at jarðareigarar og rættindahavarar, sum ikki góðtaka fyrstu meting fyri rættinum og tí biðja um yvirmeting, mugu bera ein ávísan váða. Tí ein jarðareigari, sum biður um yvirmeting og fær verri úrslit, kann fáa álagt at taka útreiðslurnar hjá landinum upp á seg.

**Lógarkapittul 6 Útvald náttúrusløg (§§ 49-52)**
*Umhvørvisligar avleiðingar*
Skipanin við útvaldum náttúrusløgum í lógarkapitli 6 er nýggj. Mett verður, at útveljing av náttúrusløgum til at verða fevnd av tí serligu fyrisitingarskipanini fyri slík kann gerast eitt týðandi íkast til burðardygt brúk av margfeldinum í náttúruni. Eftir skipanini skal serligt fyrilit havast við fyrikomingum av einum útvaldum náttúruslagi, so at tað slepst undan, at útbreiðslan og tann vistfrøðiligi standurin hjá náttúruslagnum verða gjørd verri. Skal skipanin fáa tann ætlaða positiva umhvørvisvirknaðin, er tað treytað av, at landsstýrismaðurin gevur nóg nógvum náttúrusløgum, sum lúka eina ella fleiri av treytunum í § 49, støðu sum útvald. Aftur at tí er tað ein fyritreyt, at myndugleikarnir eftir geiralógum, sum bera við margfeldið í náttúruni, í verki taka reglurnar um útvald náttúrusløg til eftirtektar.

*Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar*
*§ 49 um útvald náttúrusløg*
§ 49 gevur heimild til í kunngerð at áseta, at ávís náttúrusløg skulu vera útvald. Eins og tá ið talan er um raðfest sløg, stendur tað í stóran til landsstýrismannin, hvussu stór skipanin verður í vavi.

Í stk. 3 verður staðfest, at landsstýrismaðurin hevur skyldu at meta, um kunngerð skal ásetast. Skyldan er avmarkað til náttúrusløg, sum eftir vísindaligum metingarstøði verða mett at vera í einum standi ella fyri eini gongd, sum í stóran mun ikki samsvarar við miðið í § 4, 1. pkt.

Tær umsitingarligu og fíggjarligu avleiðingarnar verða fyrst og fremst knýttar at fyrireikandi arbeiði framman undan eini kunngerð um útvald náttúrusløg.

*§ 50 um tann almenna týdningin av útveljingini*
Við skipanini við útvaldum náttúrusløgum verður miðað eftir eini fyrisitingarskipan, har ið bæði fíggjarlig og løgfrøðilig amboð verða brúkt til at varðveita náttúru, sum hevur serligt virði fyri margfeldið í náttúruni. Við at áseta í kunngerð, hvørjum náttúrusløgum ið serligt fyrivarni skal havast við tvørtur um samfelagsgeirar, verður miðað eftir at fáa eina eindarfyrisiting, sum ikki kemur óvæntað á viðkomandi áhugapartar. Hetta geldur fyri vigingina av náttúruvirðum í avgerðum, sum viðvíkja inntrivum í náttúruna, men eisini, tá ið studningur verður veittur (sbr. § 50, stk. 2). Skipanin kann soleiðis styðja upp undir effektivisering, bæði hjá teimum ymsu fyrisitingarmyndugleikunum og hjá tí einstaka vinnurekandi. Fyrimunurin er serliga, at tað verður kunnigt frammanundan, hvørji nátturuvirðir ið skulu viga serliga nógv, tá ið metast skal um ymiskt virksemi og tiltøk. Samstundis er skipanin liðilig, við tað at mett verður ítøkiliga um inntriv í mun til náttúruslagið yvirhøvur, og í mun til, hvørjum standi tann einstaka fyrikomingin er í.

Tað fer at liggja á landsmyndugleikanum at gera yvirlit yvir kortløgd økir og at góðskutryggja dátur. Til hetta krevst umsitingarlig orka.
Í § 50, stk. 1, verður víst til varsemisskylduna í § 6, og tað verður nágreinað, at serligt fyrilit skal havast fyri fyrikomingum av útvaldum náttúrusløgum, so at tað slepst undan, at útbreiðslan og

tann vistfrøðiligi standurin hjá náttúruslagnum verða gjørd verri. Varsemisskyldan geldur fyri ein og hvønn, og hon geldur, uttan mun til um ein fyrikoming av einum útvaldum náttúruslagi er kortløgd ella ikki. Varsemisskyldan má síggjast í samanhangi við, hvat ið kann væntast av kunnleika um tað einstaka staðið, og hvat virksemi og hvørji tiltøk ið kunnu hava við sær, at útbreiðslan og tann vistfrøðiligi standurin verða gjørd verri. Vegleiðing frá myndugleikanum verður eitt týðandi amboð til at menna førleikarnar, sbr. niðanfyri. Tað er ein fyritreyt, at varsemisskyldan ikki í sjálvari sær veldur vinnurekandi útreiðslur av týdningi. Skipanin við útvaldum náttúrusløgum fer tó at kunna fáa avleiðingar fyri tey, sum varða av virksemi ella tiltøkum, um umsóknir um loyvi ella stuðul verða havnaðar orsakað av fyrilitinum fyri einum náttúruslagi, sbr. stk. 2, ella um tað verður álagt teimum, sum varða av virksemi ella tiltøkum, at bera rímiligan kostnað av at varðveita, gera ella menna eina sambæriliga fyrikoming.

Mælt verður til, at myndugleikin ger vegleiðandi tilfar um, hvussu ið reglurnar í § 50 verða brúktar í verki. Best er, um slíkt tilfar er tøkt, samstundis við at kunngerð um útvald náttúrusløg kemur í gildi. Gerast skulu virkisætlanir fyri útvald náttúrusløg, sum tørvar røkt og onnur virkin tiltøk. Mælt verður til at stuðla fremjing av slíkum virkisætlanum, annaðhvørt við eini serligari studningsskipan ella serstakari játtan. Stuðul eigur í høvuðsheitum at latast virknum tiltøkum. Nakað av orku má brúkast til at fáa kunning út, um hvar ið støðini eru, og til samskifti við jarðareigarar, tey, sum varða av virksemi, og partar í nærumhvørvinum, um hvussu ið støðini eiga at verjast, og hvat virksemi ið møguliga kann fara fram á støðunum.

Metingarnar, sum gerast mugu í sambandi við viðgerð av loyvum og møguligum studningi til inntriv og broytt brúk, sum ávirka útvald náttúrusløg, sbr. § 50, stk. 2 og 3, fáa ávísar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur og geiramyndugleikar. Eftir stk. 3, 2. pkt., kann tann, sum varðar av virksemi, fáa álagt at bera rímiligan kostnað, tá ið aðrar fyrikomingar skulu gerast. Hugsanin er, at myndugleikin, í hvussu er í eitt tíðarskeið, veitir vegleiðing í sambandi við viðgerðina av stakmálum. Hvussu stórar ið tær umsitingarligu avleiðingarnar av stk. 2 og 3 tilsamans verða, veldst um, hvussu dúgliga skipanin við útvaldum náttúrusløgum verður brúkt.

*§ 51 um fráboðanarskyldu í sambandi við landbúnaðarvirksemi*
Eftir § 51 skal kommunan hava fráboðan, tá ið landbúnaðarvirksemi, sum loyvi ikki krevst til eftir aðrari lóggávu, ávirkar fyrikomingar av útvaldum náttúrusløgum. Boðast skal frá, áðrenn farið verður undir virksemið, og kommunan skal hava svarað, áðrenn virksemið kann fara í gongd. Kommunan skal meta um virksemið eftir reglunum í stk. 2 og 3. Kemur kommunan eftir, at virksemið kann hava við sær, at útbreiðslan av náttúruslagnum og tann vistfrøðiligi standurin hjá fyrikomingunum verða gjørd verri, kann hon nokta fyri virkseminum ella geva nærri boð um, hvussu ið virksemið skal fara fram. Mett verður ikki, at ásetingin um fráboðanarskyldu fyri landbúnaðarvirksemi fær stórvegis fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar.

*§ 52 um kunngering*
Eftir § 52 skulu loyvir til virksemi í fyrikomingum av útvaldum náttúrusløgum kunngerast. Ásetingin verður ikki mett av fáa stórvegis fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar.

**Lógarkapittul 7 Ílegutilfar (§§ 53-54)**
*Umhvørvisligar avleiðingar*
Tørvurin á heimildum at áseta reglur um atgongdina at ílegutilfeingi er grundaður á ymisk atlit, sum fyri ein stóran part røkka longri enn siðbundin umhvørvisatlit. Tøka av ílegutilfeingi nýtist ikki at vera nakar umhvørvistrupulleiki, tí tøkan av lívfrøðiligum tilfari er vanliga so lítil, at hon ikki hevur týdning fyri tað lívfrøðiliga margfeldið. Tó kunnu hugsast førir, har ið endurtikin tøka kann gerast ein negativur ávirkanartáttur, og lógaruppkotið – serliga lógarkapittul 3 – ger sítt til at forða fyri, at slíkar støður taka seg upp.

*Fíggjarligar og umhvørvisligar avleiðingar*
*§ 53 um fyrisiting av ílegutilfari*
Ásetingin staðfestir, at ílegutilfar er eitt felags tilfeingi, sum er ogn hjá Føroya fólki og verður fyrisitið av landinum. Ásetingin fær ongar beinleiðis fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri fyrisitingarmyndugleikan ella fyri privat.

*§ 54 um tøku og gagnnýtslu av ílegutilfari úr náttúruni*
Um sæð verður burtur frá løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi (§§ 4, 51 og 52) eru ongar reglur fyri atgongd at ílegutilfari í føroyskari náttúru. Tað er ilt at meta, í hvønn mun heimildin eftir § 54, stk.1, at áseta eina loyvisskipan fyri tøku fer at verða brúkt. Tí ber illa til at geva eitt ítøkiligt boð upp á fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar. Greiða má gerast fyri slíkum avleiðingum í kunngerðararbeiðinum. Reglur um loyvisskipan framman undan tøku hava við sær, at fáast má í lag ein málsviðgerarskipan. Kostnaðir til eina slíka skipan verða avmarkaðir til myndugleikan sum fer at sita fyri heimildunum, sum eftir lógini liggja hjá landsstýrismanninum. Tað eigur at miðast eftir, at ein slík skipan er kostnaðareffektiv og einføld at brúka. Eftir løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi kann arvatilfeingi úr havinum bara gagnnýtast við loyvi frá landsstýrismanninum. Tað eigur at miðast eftir samstarvi við fiskivinnumyndugleikan um at menna eina góða og kostnaðareffektiva skipan til loyvisskipanina.

Fyri granskarar ella vinnurekandi, sum fáa atgongd at føroyskum ílegutilfari, fer ein møgulig loyvisskipan eftir § 54 at hava nakað av meirarbeiði við sær. Tað eigur at miðast eftir, at meirarbeiðið ikki seinkar granskingar- ella menningararbeiðinum nevningarvert.

Ein loyvisskipan letur upp fyri inntøkum og øðrum fyrimunum fyri landið, við tað at lógin gevur heimild at áseta treytir um fyrimunir fyri atgongd at ílegutilfari. Tað er tó ilt at meta, hvussu stórar ið slíkar inntøkur kunnu væntast at gerast. Eisini aðrir fyrimunir sum granskingarsamstarv og innlit í granskingarúrslit kunnu fáast burtur úr skipanini.

Landsstýrismaðurin fær eisini heimild at áseta nærri reglur um ílegutilfar í almennum søvnum, sbr. § 54, stk. 5. Talan kann t.d. vera um reglur, sum áleggja teimum, sum sita fyri søvnum við ílegutilfari, at skráseta og gera alment atkomandi, hvat ílegutilfar ið tikið verður út søvnunum. Talan kann vera um savns- og vísindastovnar, sum hava slíkt tilfar um hendi. Tað er ilt at meta, hvørjar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar ið tað fær, um slíkar reglur verða ásettar.

**Lógarkapittul 8 Myndugleiki eftir lógini, kæra, eftirlit o.a. (§§ 55-62)**
*§ 55 um myndugleika eftir lógini*
*Inngangur*
Tær fíggjarligu avleiðingarnar av lógaruppskotinum fyri kommunurnar standast av trimum sløgum av støðum. Í fyrsta lagi kann lógaruppskotið hava avleiðingar fyri myndugleikan, sum kommunan útinnir eftir øðrum lógum. Í øðrum lagi kann lógaruppskotið hava avleiðingar, har ið kommunan situr fyri fastogn. Í triðja lagi kann tað hava avleiðingar, í tann mun tær fáa myndugleika eftir náttúrumargfeldislógini, annaðhvørt beinleiðis í lógini ella við avhending. Tørvurin á umsitingarligari orku er ymiskur, alt eftir hvørja støðu ið talan er um.

*Útinning av myndugleika eftir aðrari lóg og fyrisiting av fastogn*
Avbjóðingarnar, sum standast kunnu av at brúka náttúrumargfeldislógina saman við øðrum lógum, og í sambandi við fyrisiting av fastogn, krevja økta vitan í kommununum um margfeldið í náttúruni og virknaðir av ávirkan umframt førleika at tulka og brúka hesa vitan. Hesin tørvurin er serliga knýttur at brúki av lógarkapitli 2 og lógarkapitli 6, tá ið kunngerð um útvald náttúrusløg verður ásett.

At fáa til vega vitan verður fyrst og fremst ein landsuppgáva. Í ítøkiligum málum hava kommunurnar skyldu at hava lógarkapittul 2 sum grundarlag, eitt nú § 8 um vitanargrundarlagið. Kommunurnar mugu sostatt leita fram viðkomandi vitan og í ávísan mun fáa til vega nýggja vitan. Í nógvum førum verður tað tann, sum varðar av virksemi ella tiltaki, sum hevur ábyrgdina av at fáa vitanargrundarlagið til vega. Í teimum førum, har ið tað er kommunan sjálv, sum varðar av virkseminum ella tiltakinum, geldur eitt ávíst vitanarkrav eftir varsemisskylduni í § 6.

Kommununum fer at tørva førleikar at skilja vitan, sum finst, og at brúka hesa í ítøkiligum førum. Hetta kann hava útreiðslur við sær fyri kommunurnar.

Fyri útinning av kommunalari fyrisiting av egnum fastognum galda eftir náttúrumargfeldislógini somu reglur sum fyri myndugleikaútinning. Tað ber m.a. í sær, at kommunan skal seta líka stór krøv til røkt av náttúrumargfeldinum í sambandi við egið virksemi, sum hon hevði gjørt, um søkt varð um loyvi eftir viðkomandi regluverki til okkurt privat virksemi ella tiltak. Virknaðurin av hesum kann bæði vera negativur og positivur fyri kommununa. Tá ið kommunan sjálv tekur ábyrgd av at røkja margfeldið í náttúruni, kann tað eggja privatum til at gera so við. Velur kommunan sjálv at leggja avmarkingar á brúk av egnari ogn, kann tað eisini gera rúm fyri, at privat kunnu menna vinnuvirksemi aðrastaðni. Tað kann avmarka vinnuvirksemið hjá kommununi sjálvari, men heildarvirknaðurin verður mettur at vera positivur ella neutralur fyri búskapin hjá kommununi.

*Uppskotið um útvald náttúrusløg – útinning av myndugleika eftir aðrari lóg og myndugleika áløgdum eftir náttúrumargfeldislógini*

Uppskotið um útvald náttúrusløg byggir fyrst og fremst á, at kommunan tekur atlitið at útvaldum náttúrusløgum við í planleggingina eftir planlóggávuni. Hvussu stórur ið tørvurin verður, veldst um, hvussu nógv náttúrusløg ið verða fevnd av skipanini. Mett verður ikki, at skipanin fer at tyngja málsviðgerðina eftir planlóggávuni stórvegis.

Tað verður álagt kommununi sum jarðarmyndugleika at taka ímóti fráboðan um landbúnaðarvirksemi í fyrikomingum av útvaldum náttúrusløgum. Alt eftir hvørji og hvussu nógv náttúrusløg ið útvald verða, kann uppgávan fara at krevja nakað av málsviðgerðarorku í kommununum.

Um skipanina við útvaldum náttúrusløgum í síni heild er at siga, at skipanin fær ávísar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur og geiramyndugleikar. Miðað eigur at verða eftir at gera kommunurnar betur førar fyri at røkja umhvørvisuppgávur eftir náttúrumargfeldislógini. Í tí sambandi verður víst til, at gerast skulu virkisætlanir fyri útvald náttúrusløg, har ið røkt og onnur virkin tiltøk krevjast í útvaldum náttúrusløgum. Mælt verður til at stuðla kommunum og øðrum í at fremja slíkar virkisætlanir, annaðhvørt við eini serligari studningsskipan ella serstakari játtan. Stuðul eigur í høvuðsheitum at latast virknum tiltøkum.

*Kostnaðir í sambandi við avhending av myndugleika*

§ 55 í lógaruppskotinum gevur landsstýrismanninum heimild at avhenda kommununum myndugleika. Yvirhøvur verður ikki mett, at lógaruppskotið fær stórvegis avleiðingar fyri kommunurnar.

Avhendingarásetingin hevur ikki í sjálvari sær nakrar beinleiðis kostnaðir við sær. Tað er tann ítøkiliga avhendingin, sum kann hava skyldur við sær fyri kommunurnar. Tað er ein fyritreyt, at slík avhending fer fram við undirtøku frá tí einstøku kommununi.

Í fyrstu syftu eru ongar ætlanir um at avhenda kommununum myndugleika eftir lógini, men hetta kann koma upp á tal í framtíðini. Fyri kommunur, sum slíkur myndugleiki ikki verður avhendur í framtíðini, fer uppskotið ikki at hava kostnaðir við sær.

*Avleiðingar av uppskotinum um at fyrisitingaruppgávur í sambandi við verndarøkir kunnu leggjast til serliga nevnd*
Eftir § 55, stk. 2, kann landsstýrismaðurin áseta, at ein serliga sett nevnd skal vera fyrisitingarmyndugleiki fyri eitt øki, sum verður vart eftir kapitli 5 í lógaruppskotinum. Hvørjir kostnaðir, ið fara at standast av eini møguligari avhending av myndugleika til eina slíka serliga setta nevnd, veldst um ta ítøkiligu nevndina og hvussu víðfevnd ið tann avhenda ábyrgdin verður. Hesum má greiða gerast fyri ítøkiliga í hvørjum einstøkum føri.

*§§ 57 til 60 um eftirlit o.a.*
*Umhvørvisligar avleiðingar*
Mett verður, at reglurnar í lógaruppskotinum um eftirlit o.a. fara at effektivisera eftirlitsarbeiðið og einfalda tvingsilstiltøk fyri minni álvarslig lógarbrot, sum væntandi fara at mynda meginpartin av øllum lógarbrotunum. Uppskotið ber í sær, at revsirættarskipanin sleppur undan minni álvarsligum málum, og at fáast kunnu í lag mannagongdir fyri skjótum tiltøkum, sum styðja upp undir lýdni mótvegis regluverkinum. Tær umhvørvisligu avleiðingarnar av einum betraðum heimildargrundarlagi fyri eftirliti og einfaldaðum tvingsilstiltøkum fáa tilsamans positivan virknað á umhvørvið, serliga saman við tí at váðin fyri uppdaging verður størri.

*§ 57 um eftirlit*
Eftir § 57, stk. 1, 1. pkt., skal landsstýrismaðurin hava eftirlit við, at lógin verður hildin. Eftirlitsuppgávur kunnu serliga taka seg upp í sambandi við skipanirnar við raðfestum sløgum, útvaldum náttúrusløgum og fremmandum lívverum. Myndugleikar, sum frammanundan ikki hava havt eftirlitsábyrgd, kunnu fáa slíka ábyrgd eftir náttúrumargfeldislógini. Eftirlitsábyrgdin fer í fyrstu atløgu at snúgva seg um virknað av vinnuvirkseminum, sum tann einstaki myndugleikin hevur ábyrgdina av. Hetta kann hava við sær, at einstøkum myndugleikum fer at tørva størri fíggjarliga orku og betri førleikar. Lógaruppskotið kann eisini hava við sær tørv á størri orku til kunning og vegleiðing, serliga í eitt tíðarskeið eftir at lógin er komin í gildi.

*§ 58 um kanningarvirksemi, § 59 um upplýsingar- og fráboðanarskyldu og § 60 um innaneftirlit*
Mett verður ikki, at ásetingarnar fáa umsitingarligar og fíggjarligar avleiðingar av týdningi.

*§ 61 um broyting og afturtøku av loyvum*
Hvørjar umsitingarligar og fíggjarligar avleiðingar ið ásetingin fær, veldst um, í hvørjum førum og í hvønn mun hon verður brúkt.

Heimildin í § 61 fær bara umsitingarligar og fíggjarligar avleiðingar, í tann mun hon verður brúkt til at broyta ella taka aftur loyvir, sum annars ikki høvdu kunnað verið broytt ella tikin aftur eftir vanligum fyrisitingarrætti. Mett verður ikki, at ásetingin fer at verða nógv brúkt.

Avleiðingar fyri privat skulu havast í huga í sambandi við avgerðir um broyting ella afturtøku, sbr. § 61, stk. 3.

*§ 62 um umhvørvisavgerðaskrá*
§ 62 letur upp fyri, at landsstýrismaðurin í kunngerð kann áseta, at ein umhvørvisavgerðaskrá skal gerast fyri ávikavist varandi og bráðfeingis avgerðir, undantøk í verndarøkjum, raðfest sløg og undantøk í sambandi við slík og loyvir til virksemi ella tiltøk í fyrikomingum av einum útvaldum

náttúruslagi. Greiða má gerast fyri umsitingarligum og fíggjarligum avleiðingum í sambandi við arbeiðið at fyrireika og gera slíka skrá.

**Lógarkapittul 9 Handhevjan og tvingsilstiltøk (§§ 63-69)**
*Umhvørvisligar avleiðingar*
Lógaruppskotið ber í sær eitt størri úrval av tvingsilstiltøkum og tvingsilsamboðum enn galdandi lóggáva. Við hesum verða møguleikarnir at tryggja, at lógin verður hildin, betraðir, og hetta gagnar umhvørvinum. Møguligar tvingsilsbøtur og umhvørvisendurgjald kunnu gagnnýtast sum fíggjarligt grundarlag fyri m.a. røkt.

*Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar*
*§ 63 um rætting og bøtandi tiltøk*
§ 63, stk. 2, staðfestir eina endurreisingarskyldu í sambandi við brot á lógina. Tiltøk sum upptøka, rudding o.a. fáa í flestum førum bæði fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri tann, sum skyldan er vend móti. Endurreisingarskyldan er í samsvari við meginregluna um, at tann, sum varðar av virksemi, sum er umhvørvinum at skaða, ber kostnaðin, sbr. § 11. Í stk. 3 verður latið upp fyri, at sleppast kann undan skylduni, um annað hevði verið órímiligt út frá m.a. skyldini og fíggjarstøðuni hjá tí, sum hevur framt brotið.

Eftir stk. 2, 3. pkt., krevst samtykki frá landsstýrismanninum til endurreisingartiltøk, sum í sjálvum sær kunnu vera umhvørvinum at skaða av týdningi. Slík mál verða væntandi ikki nógv í tali, og tí verður ikki mett, at ásetingin fær umsitingarligar avleiðingar av týdningi fyri myndugleikan.

Eftir stk. 1 fær landsstýrismaðurin heimild at áleggja tí, sum hevur ábyrgdina, at fáa aftur í rættlag ella steðga viðurskiftum, sum ikki eru í samsvari við lógina ella avgerð við heimild í lógini. Nøkur slík mál kunnu væntast at taka seg upp, men ilt er at meta ítøkiliga um tær umsitingarligu avleiðingarnar.

*§ 64 um óvæntaðar umhvørvisavleiðingar av lógligum virksemi*
Eftir § 64, stk. 1, hevur tann, sum hevur ábyrgdina av lógligum virksemi, sum vísir seg at hava munandi óvæntaðar avleiðingar við sær fyri náttúrumargfeldið, skyldu til at seta rímilig tiltøk í verk til at forða fyri ella avmarka skaða ella vansar. Metast má, hvat ið er rímiligt. Tó kann skyldan í ávísan mun fáa fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri tann vinnurekandi.

Eftir stk. 2 kann landsstýrismaðurin áleggja tí, sum hevur ábyrgdina, innan eina ásetta freist at fremja tiltøk sum tey í stk. 1 nevndu. Talið á slíkum málum verður væntandi avmarkað, og tí verða tær umsitingarligu avleiðingarnar fyri eftirlitsmyndugleikan væntandi lítlar.

*§ 65 um beinleiðis fremjing*
Eftir § 65 kann landsstýrismaðurin bera so í bandi, at neyðug tiltøk verða sett í verk, sama um tann, sum hevur ábyrgdina, samtykkir ella mótmælir. Slík beinleiðis fremjing hongur saman við einum endurgjaldskravi móti tí, sum hevur ábyrgdina av útreiðslunum, sum landsstýrismaðurin hevur havt av tí beinleiðis fremjingini, sbr. stk. 2.

Mett verður, at mál við beinleiðis fremjing kunnu krevja stóra orku, meðan tey fara fram. Hinvegin verður tað væntandi sjáldan, at slík mál taka seg upp, og tí verður mett, at tær umsitingarligu avleiðingarnar av ásetingini samanumtikið verða lítlar.

*§ 66 um brúk av ogn hjá øðrum*

Í § 66, stk. 1, verður staðfest, at tiltøk eftir §§ 63, 64 ella 65 kunnu fremjast á ognini hjá tí, sum hevur ábyrgdina, ella á ognini hjá øðrum. Eftir stk. 2 er tað ein fyritreyt, at slík fremjing ikki fær fíggjarligar avleiðingar fyri onnur tann, sum hevur ábyrgdina.

*§ 67 um tvingsilsbøtur*
Tvingsilsbøtur kunnu eftir § 67 áleggjast tí, sum hevur ábyrgdina av, at ein skylda eftir lógini ella kunngerð ella álegging frá landsstýrismanninum ikki verður lokin. Tær fíggjarligu avleiðingarnar fyri tann, sum bótin verður áløgd, valdast, hvussu stór ið bótin er, og hvussu long tíð ið gongur, til áleggingin verður lýdd. Stk. 4 letur upp fyri, at landsstýrismaðurin kann sleppa áløgdum tvingsilsbótum. Eins og tá ið talan er um hinar ásetingarnar í lógarkapitli 9, verður mett, at tær umsitingarligu avleiðingarnar fyri myndugleikan av § 67 verða lítlar.

*§ 68 um umhvørvisendurgjald*
Umhvørvisendurgjald eftir § 68 kann áleggjast tí, sum brýtur ásetingar í ella við heimild í náttúrumargfeldislógini ella ásetingar í øðrum lógum, sum skulu fremja mið og meginreglur í náttúrumargfeldislógini. Tær fíggjarligu avleiðingarnar fyri tann, sum endurgjald verður álagt, skulu vera í lutfalli til skaðan, sum voldur er, sbr. stk. 2. Endurgjaldið skal ásetast við støði í eini heildarmeting, har ið fyrilit eisini skal havast fyri áløgdum revsitiltøkum og umstøðunum annars. Hvussu ofta ið reglurnar um umhvørvisendurgjald fara at verða brúktar, veldst um, í hvussu stóran mun náttúrumargfeldislógin fer at verða brotin, og hvussu ið farið verður fram eftir brotini. Tað er tí ilt at taka dagar ímillum, hvørjar fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar § 68 fær.

*§ 69 um revsing*
Mett verður ikki, at ásetingin fær fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar av týdningi, við tað at revsiásetingar eisini í dag finnast í náttúrufriðingarlógini.

**Lógarkapittul 10 Ásetingar at enda (§§ 70-72)**
*§§ 70 og 71 um gildiskomu og skiftisreglur*
Ásetingarnar fáa ikki umsitingarligar ella fíggjarligar avleiðingar.

## 2.3. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Arbeiðið at dagføra føroyska náttúruverndarlóggávu hevur leingi ligið á láni og við tí eisini arbeiðið at fáa lóggávuna í samsvar við tær altjóða skyldur, sum Føroyar hava átikið sær. Tað er tí eitt týðandi endamál við uppskotinum til náttúrumargfeldislóg at taka munagóð tøk fram ímóti, at Føroyar fara at lúka sínar altjóða skyldur við atliti at burðardyggum brúki og vernd av náttúrumargfeldi.

Galdandi náttúrufriðingarlóg frá 1970 leggur sum vera man ikki upp fyri Føroya skyldum sambært sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi. Við uppskotinum til náttúrumargfeldislóg verður serliga miðað eftir at lúka Føroya altjóða skyldur við atliti at burðardyggum brúki og vernd av margfeldinum í náttúruni.

Sambært altjóða skyldum eiga Føroyar at hava reglur, sum fevna um vill dýra- og plantusløg. Hesum er ikki á nøktandi hátt lagt upp fyri í galdandi lóggávu. Galdandi lóggáva er heldur ikki nøktandi, tá ið ræður um at kunna verja hótta og viðkvæma náttúru. Okkum tørvar bæði at fáa tað neyðuga lógarverkið til vega og at ítøkiliggera mið og meginreglur fyri burðardyggum brúki av margfeldinum í náttúruni. Við uppskotinum til náttúrumargfeldislóg verður roynt at leggja upp fyri hesum viðurskiftum.

Altjóða skyldur við atliti at margfeldi í sjónum verða í høvuðsheitum framdar í fiskivinnulóggávuni. Tilfeingisfyrisiting og vernd fyri óhepnum avleiðingum av fiskiskapi eru fevndar av løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Fyri at lúka altjóða skyldur verður tað meira almenna atlitið at margfeldinum í náttúruni tó fevnt av náttúrumargfeldislógini, m.a. við atliti at vernd av sløgum, økisvernd og burðardyggum brúki av útvaldum náttúrusløgum. ´

Av øðrum millumtjóðasáttmálum, sum hava týdning fyri evnisøkið hjá lógaruppskotinum, og sum Føroyar hava tikið undir við, kunnu nevnast Ramsar-sáttmálin um vernd av vátøkjum av altjóða týdningi, Bonn-sáttmálin um ferðandi villdýrasløg og OSPAR-sáttmálin um vernd av sjóøkinum í landnyrðingshavi.

## 2.4. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Uppskotið verður ikki mett at vera í ósamsvari við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, heldur ikki tann evropeiska mannarættindasáttmálan og ST-sáttmálan um rættindir hjá einstaklingum, ið bera brek.

## 2.5. Marknaforðingar

Ongar kendar marknaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at uppskotið fer at elva til marknaforðingar av týdningi, sbr. tó niðanfyri.

Eftir § 23 í uppskotinum kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta reglur um inn- og útflutning, sølu, varðveitslu og ognarhald av deyðum ella livandi eintøkum av dýra- og plantusløgum, sum natúrliga liva vill, ella pørtum av slíkum, á landi, í áum, vøtnum, ósum og løkum og í sjónum. Slíkar kunngerðir kunnu ásetast fyri at varðveita dýra- og plantusløg, sum natúrliga liva vill, ella fyri at halda altjóða skyldur. Í viðmerkingunum til § 23 er fyrst tilskilað, at Føroyar eru fevndar av tí danska limaskapinum í Heimshandilsfelagsskapinum WTO, og at tað ber í sær, at altjóða avtalur, sum gjørdar eru í WTO, eisini fevna um Føroyar. Síðan verður gjørt vart við, at tað altjóða handilsregluverkið undir WTO kann seta avmarkingar fyri, hvørji tiltøk ið setast kunnu í verk við atliti at handli við hóttum dýra- og plantusløgum.

Eftir § 26 í uppskotinum kunnu livandi og lívførar lívverur bara flytast inn í landið við loyvi frá landsstýrismanninum, sbr. stk. 1, og landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta reglur um innflutning av livandi og lívførum lívverum og áseta forboð fyri innflutningi av ávísum lívverum, um tað verður mett at vera neyðugt fyri at sleppast kann undan munandi óhepnum avleiðingum fyri tað lívfrøðiliga margfeldið, sbr. stk. 4. Í viðmerkingunum til § 26 er tilskilað, at tað í sambandi við meting eftir stk. 1 og 4 eigur at verða lagdur dentur á at sleppa undan óneyðugum handilsforðingum. Fyrilit skal m.a. havast við krøvum sambært tí altjóða handilsregluverkinum undir WTO. Víst verður eisini á, at atlitið at handilsforðingum serliga hevur týdning, tá ið kunngerðarheimildirnar eftir stk. 4 verða brúktar. Tá ið mett verður, hvussu heimildirnar skulu brúkast, skal hóttanin, sum tann fremmanda lívveran ber í sær, vigast upp ímóti atlitunum, sum tala fyri altjóða handli við sløgunum, umframt hvørji tiltøk ið setast kunnu í verk fyri at sleppa undan óhepnum avleiðingum fyri tað lívfrøðiliga margfeldið. Í hesum sambandi skal útgangsstøðið vera teir altjóða standardarnir, sum gjørdir eru fyri sløgini, talan er um.

## 2.6. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv

Lógaruppskotið hevur ásetingar um revsing, útpanting og sekt.

## 2.7. Skattir og avgjøld

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.8. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**

Landsstýrismaðurin er ovasti myndugleiki eftir lógaruppskotinum. Landsstýrismaðurin kann heimila stovni undir sær ella øðrum landsstovni at útinna heimildirnar, sum sambært lógaruppskotinum liggja hjá landsstýrismanninum. Landsstýrismaðurin kann eisini í samráð við kommunurnar áseta, at kommunan skal vera myndugleiki eftir nærri ásettum ásetingum í ella við heimild í lógaruppskotinum.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | **Ja** | **Ja** | **Nei** | **Nei** | **Ja** |
| Umsitingarligar avleiðingar | **Ja** | **Ja** | **Nei** | **Nei** | **Ja** |
| Umhvørvisligar avleiðingar | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Nei** |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Nei** |
| Sosialar avleiðingar | ////////////////////////////////////////////////// | | **Nei** | **Nei** | ////////////////////// |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku lógargreinina**

**Til § 1.**
§ 1 ásetur endamálið við lógini og hevur týdning á ymsan hátt. Ásetingin greiðir frá ætlanini við lógini og ger greitt, hvørji virðir lógin er grundað á. Ásetingin hevur eisini týdning fyri, hvussu aðrar ásetingar í lógini verða tulkaðar, og er leiðbeinandi fyri meting, tá ið avgerðir verða tiknar eftir lógini, og tá ið treytir verða lagdar við annars fyrimunarligum avgerðum eftir lógini. Ásetingin kann eisini leiðbeina, tá ið fleiri amboð eru í at velja, og tá ið støða skal takast til, um avgerð yvirhøvur skal takast ella tiltak setast í verk.

Amboðini til at røkka endamálinum eru bæði burðardygt brúk og vernd. Tað mesta virksemið, sum kann ávirka náttúrumargfeldið, verður tó framvegis fevnt av øðrum lógum. Ein týðandi spurningur er tí, hvønn týdning endamálsásetingin hevur fyri lógartulking eftir aðrari lóggávu. Aðrar lógir hava ofta egnar endamálsorðingar ella egnar leiðreglur fyri meting. Í slíkum førum verður týdningurin av § 1 í náttúrumargfeldislógini, at røkt av náttúrumargfeldinum verður eitt eyka

metingaratlit, sum verður brúkt saman við endamálunum, sum tann viðkomandi lógin ásetur. Eru atlitini og virðini ósambærilig, hevur hetta týdning fyri, hvussu langt ið farið verður í tí einstaka málinum fyri at røkja virðini eftir § 1 í náttúrumargfeldislógini. Tað er eisini umráðandi at meta um úrslitið av tí samlaðu myndugleikaútinningini, ikki bara avgerðini í tí einstaka málinum.

Endamálsásetingin hevur ongan beinleiðis rættarvirknað mótvegis tí einstaka borgaranum.

Tað almenna endamálið í § 1 verður ítøkiliggjørt í §§ 4 og 5 umframt § 30. Neyvari leiðbeinandi dygdarkrøv til náttúrumargfeldi kunnu ásetast eftir § 13.

*Náttúran* fevnir bæði um lívfrøðiligt margfeldi, landslagsmargfeldi og jarðfrøðiligt margfeldi. Hugtøkini kunnu fyri ein part umskarast. Til dømis kunnu landsløg vera ein partur av teimum vistfrøðiligu fyritreytunum fyri tí lívfrøðiliga margfeldinum. Samstundis ger tað lívfrøðiliga margfeldið sítt til at geva landslagnum tess sereyðkennir. Jarðfrøðin er grundarlagið undir til dømis jørðildi, sum aftur kann vera grundarlag undir ávísum lívfrøðiligum margfeldi. Hugtøkini samsvara kortini ikki fult og heilt, og tey leggja dent á ymsar síður á náttúruumhvørvinum.

Hugtakið *lívfrøðiligt margfeldi* verður í § 3 allýst sum *margfeldið av vistskipanum, sløgum og ílegubrigdum innan fyri sløgini og tey lívfrøðiligu sambondini teirra millum*. Innan fyri karmin á § 1 er talan um tað lívfrøðiliga margfeldið í náttúruni. Tað er ikki eitt høvuðsendamál við lógini at røkja ílegumargfeldið innan fyri húsdýrasløg og kynbøtt plantusløg. Men týdningurin av, at hesi verða vard, kemur til sjóndar í §§ 5, stk. 3, og 24, stk. 2.

Hugtakið *náttúran* er tó ætlað eisini at fevna um røktarávirkað og røktartreytað lívfrøðiligt margfeldi. Hugtakið fevnir sostatt breiðari enn hugtakið *náttúruøkir* í § 32.

Við landslagi verður sipað til størri samanhangir í náttúruni. *Landslag* verður í tí evropeiska landslagssáttmálanum frá 20. oktobur 2000 allýst sum *eitt øki, soleiðis sum fólk fata tað, við eyðkennum, sum eru úrslit av ávirkanini av og samanspælinum millum natúrligar og/ella mennskjaligar tættir* (art. 1 (a)). Eisini eftir § 1 fevnir *landslag* bæði um náttúrulandslag og røktarlandslag. Landslag, sum bara er manngjørt, t.d. býir, er tó ikki fevnt av náttúrumargfeldislógini. Við *landslagsligum margfeldi* verður sipað til margfeldið í sløgum av landsløgum, t.e. landsløg við egnum sereyðkennum.
*Jarðfrøðiligt margfeldi* er fjølbroytnið í jarðfrøðiligum fyribrigdum, t.d. løg við serstøkum grótsløgum, jarðfrøðiligir skappartar úr kvarterøld, umskaringar ella økir við steinrenningum. Sermerkt jarðfrøðilig fyribrigdir kunnu eitt nú vera atvold til, at náttúrufriðøkir verða skipað (sí § 34).

Hugtakið *náttúran* fevnir eisini um tær vistfrøðiligu tilgongdirnar í náttúruni. Hesar verða beinleiðis nevndar fyri at gera greitt, at dynamikkurin í náttúruni má tryggjast. Lógin miðar ikki eftir at steðga natúrligari menning, men heldur at tryggja, at slík menning sleppur at fara fram. Hetta merkir tó ikki, at tað ikki í summum førum kann vera eftirynskjandi við økisvernd og virknari røkt at varðveita eitt sermerkt framvakstrarstig, t.d. sum tilvísingarøki. Hugtakið *vistfrøðiligar tilgongdir* verður umrøtt nærri í viðmerkingunum til § 4.

Tá ið tær vistfrøðiligu tilgongdirnar verða tryggjaðar, ber eisini til at varðveita framleidnið hjá náttúruni, og vistskipanartænastur kunnu verða veittar.

Við hugtøkunum *náttúran* og *vistfrøðiligar tilgongdir* verður dentur eisini lagdur á, at *in situ*-varðveitsla er høvuðsmálið við lógini. Tað merkir, at vistskipanir, náttúrusløg, búøkir og sløg verða vard, har tey natúrliga koma fyri og kunnu mennast natúrliga. Lógin áleggur tó eisini

myndugleikunum eina skyldu at seta í verk *ex situ*-varðveitslutiltøk fyri sløg – t.e. uttan fyri búøkini – um hetta kann gera sítt til, at slagnum verður lív lagað í náttúruni (§ 24, stk. 1).

Málið at tryggja náttúrumargfeldið snýr seg bæði um at tryggja náttúrumargfeldið í løtuni og í framtíðini. Hugtakið *í framtíðini* snýr seg um at tryggja komandi ættarliðum eitt heilsugott umhvørvi og eina náttúru, har framleiðsluevni og fjølbroytni verða varðveitt.

Endamálsorðingin hevur støði í, at náttúruni verða givin grundleggjandi virðir sum nyttu- ella brúksvirði, upplivingarvirði, virði knýtt at samleikakenslu og tilknýti, vistfrøðiligt virði og eginvirði. Náttúran sum grundleggjandi fyritreyt fyri fólkalívi, heilsu, vinnuligum virksemi, mentan og trivnaði kemur til sjóndar í seinna setningsparti av § 1.

Burðardygt brúk og vernd verða í endamálsásetingini drigin fram sum amboðini til at røkka tí lýsta málinum, sbr. *við*. Burðardygt brúk kemur m.a. til sjóndar í lógarkapitli 2, í veiðu-, heystingar- og tøkuásetingunum í lógarkapitli 3 og í lógarkapitlunum 6 og 7. Verndartiltøk eru fyrst og fremst fevnd av §§ 21 og 22 og lógarkapitli 5. Vernd kann í hesum samanhanginum bæði snúgva seg um vernd fyri inntrivum og meira virkin tiltøk sum røkt og endurreisingartiltøk.

Endamálið við lógini samsvarar við altjóða skyldur við atliti at varðveitslu av náttúruvirðum, eitt nú sáttmálan um lívfrøðiligt margfeldi. Náttúrumargfeldislógin skal hjálpa til at tryggja, at altjóða avtalur verða framdar innan fyri virkisøkið hjá lógini.

**Til § 2.**
Náttúrumargfeldislógin gevur samskipað mið, meginreglur og reglur fyri brúki og vernd av margfeldinum í tí føroysku náttúruni við atliti at ílegum, sløgum og vistskipanum tvørtur um geirar. Náttúrumargfeldislógin skal leggja støði undir eina heildarfevnandi, vistskipanargrundaða fyrisiting av føroyskum land- og sjóøki. Tó gongur eitt týðandi altjóðarættarligt mark á 12 fjórðingum, sum verður endurspeglað í lógini, so at lógin ikki verður í ósamsvari við altjóðarætt. Tað ber í sær, at náttúrumargfeldislógin eftir *stk.1* av sær sjálvum geldur á føroyskum landøki, eisini í áum, vøtnum, ósum og løkum, og á sjóumveldinum út á 12 fjórðingar.

Eftir *stk. 2* galda summar av ásetingunum í lógini á landgrunninum og á tí ytru landleiðini. Henda ásetingin skilur ikki ímillum atgongdina at áseta reglur fyri føroysk og útlendsk feløg og borgarar. Við orðingini *so langt tær passa* verður lagt upp fyri, at onkrar ásetingar eftir sínum innihaldi ikki eru viðkomandi á landgrunninum, men kunnu galda á tí ytru landleiðini, ella øvut, og at partar av ásetingunum møguliga ikki eru viðkomandi á havinum. At ásetingarnar fáa gildi í hesum økinum, merkir ikki, at myndugleiki verður fluttur millum geiralóggávu og náttúrumargfeldislógina.

Eftir *stk. 2* geldur § 7 á landgrunninum og á tí ytru landleiðini. Hóast § 7 vísir til til §§ 8 til 12, verða meginreglurnar í §§ 11 og 12 ikki brúktar á landgrunninum og á tí ytru landleiðini, sbr. orðaljóðið í stk. 2.

Ásetingin geldur við teimum avmarkingum, sum altjóða rættur og serliga atlitið at jurisdiktión hjá øðrum londum seta.

**Til § 3.**
Í greinini verða týðandi hugtøk í lógini allýst.

*Nr. 1* allýsir dýr sum dýr í breiðari merking, m.a. súgdýr, fugl, fisk og ryggleys dýr.

*Nr. 2* allýsir hugtakið fremmand lívvera. Orðið lívvera er valt heldur enn slag, av tí at hugtakið er knýtt at útseting ella útslepping og ikki bara fevnir um sløgini, men eisini undirskipað flokkingarstig (undirsløg, stovnar, búfjøldir o.s.fr.). Lívvera er annars allýst í § 3, nr. 7. Vilt tú varðveita ílegumargfeldið innan fyri eitt slag, mást tú ofta verja undirsløg og íleguliga ólíkar stovnar fyri innsløðing av fremmandum lívverum av sama slagi. Eitt slag ella ein stovnur er at rokna sum fremmandur, tá ið hann ikki finst *natúrliga* á staðnum. Ein lívvera er fremmand, tá ið hon er komin um landamark ella er komin úr øðrum stað innan fyri sama land (innanhýsis sløðing). Ein fyritreyt fyri, at lívveran er at rokna sum fremmand, er, at hon tilvitað ella ótilvitað er innsløðd við mannavirksemi, t.d. tann nýsælendski flatmaðkurin. Ein stigvís og náttúrutreytað víðkan av útbreiðsluøkinum hjá einum slagi er ikki at rokna sum innsløðing, heldur ikki tá ið slík víðkan stendst av mannelvdari veðurlagsbroyting.

Tað er ilt at seta almennar treytir fyri, nær ið eitt slag, sum einaferð er innsløtt, kann sigast at finnast *natúrliga*, t.e. ikki longur er at rokna sum *fremmant*. Um sløg, sum í síni tíð eru innflutt til Føroya, kunnu roknast fyri *natúrlig*, veldst m.a. um, hvussu long tíð ið er fráliðin, síðan tey vórðu innflutt, og í hvønn mun slagið ella stovnurin hevur lagað seg eftir føroyskari náttúru.

Tað er greitt, at sløg, sum eru komin til Føroya tey seinnu árini, mugu roknast fyri fremmand. Somuleiðis eru góðar grundir at siga, at sløg, sum vórðu innflutt til Føroya fyri heilt nógvum árum síðan, t.d. jóansøkugras, í dag finnast natúrliga í føroyskari náttúru.

Ein trupulleiki, tá ið eitt tíðarmark skal setast fyri, nær ið eitt innsløtt slag ikki longur skal vera at rokna sum fremmant, men sum natúrligt í føroyskari náttúru, er, at summar lívverur kunnu hava drúgva tilgerðartíð, áðrenn tær vísa seg at hava skaðiligt árin á tað lívfrøðiliga margfeldið, sum finst natúrliga á einum stað. Í tilgerðartíðini finst slagið í lutfalsliga lítlum stovnum.

Tá ið talan er um plantur, kann tað ofta vera verri at skilja ímillum, hvørjar ið eru fremmandar, og hvørjar ið eftir at hava funnist leingi í Føroyum ella á einum stað eiga at verða góðtiknar sum búfastar í Føroyum ella á staðnum, har ið tær finnast.

Endamálið er at fyribyrgja, at lívfrøðiligt margfeldi, sum finst natúrliga í Føroyum, viknar ella fer fyri skeytið, orsakað av at fremmandar lívverur verða innfluttar og útsettar. Tá ið ivamál eru, um eitt slag skal roknast fyri fremmant ella natúrligt, skal tí ein loysn finnast við støði í eini heildarmeting, har dentur m.a. verður lagdur á, um slagið hevur skaðaárin við sær á tað lívfrøðiliga margfeldið. Landsstýrismaðurin kann gera leiðreglur fyri slíkum metingum.

*Nr. 3* allýsir heysting. Náttúrumargfeldislógin skilur ímillum heysting og veiðu av lívfrøðiligum tilfeingi øðrumegin og tøku av lívfrøðiligum tilfeingi hinumegin. *Tøka* er tað yvirskipaða hugtakið, sum fevnir um alla avlíving ella burturtøku av lívverum, sama hvat endamálið er, sbr. nr. 14. Heysting er eitt serligt slag av tøku, nevniliga tøka ella henting av plantum ella plantupørtum, har endamálið er útilív ella vinna. Heysting til prýðisendamál er fevnd av hesi allýsingini.

*Nr. 4* allýsir innflutning sum tað at føra í land úr økjum uttan fyri gildisøkið hjá lógini. Allýsingin má síggjast í samanhangi við gildisøkið hjá lógini eftir § 2. Talan er sostatt um innflutning, tá ið farið verður um markið fyri gildisøkið hjá lógini. Tað er eisini at rokna sum innflutningur, tá ið fólk við vilja bera so í bandi, at lívverur sleppa um markið.

*Nr. 5* allýsir ílegutilfar. Hugtakið ílegutilfar er valt heldur enn ílegutilfeingi, sum er hugtakið, sum brúkt verður í sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi. Talan er sostatt um eina allýsing, sum ikki er treytað av, hvat virði ella hvat tilfeingi tilfarið møguliga er fyri fólk. Orðið *sum* í allýsingini

vísir aftur til *ílegur og annað arvatilfar*. Náttúrumargfeldislógin fevnir ikki um atgongd at og brúk av ílegutilfari frá menniskjum. Hetta verður tilskilað í allýsingini í nr. 5.

*Nr. 6* fevnir um allýsingina av lívfrøðiligum margfeldi. Hon byggir á allýsingina í grein 2 í sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi.

*Nr. 7* allýsir lívveru sum eina og hvørja eind, sum er før fyri at nørast ella at flyta ílegutilfar. Tað er ein fyritreyt, at lívveran sjálv er før fyri hesum. Tað merkir, at virus eftir lógini ikki eru at rokna sum lívverur, av tí at teimum tørvar eina vertslívveru fyri at nørast. Allýsingin fevnir um lívverur í øllum bólkum av sløgum, eisini einkyknaðar lívverur.

*Nr. 8* allýsir náttúrumargfeldi. Hugtakið er eitt savnandi hugtak, sum fevnir um lívfrøðiligt margfeldi, landslagsmargfeldi og jarðfrøðiligt margfeldi, sbr. eisini endamálið við lógini í § 1. Allýsingin er avmarkað mótivegis margfeldi, sum í høvuðsheitum er úrslit av ávirkan frá menniskjum. Heilt tamt og vant lívfrøðiligt margfeldi, t.d. húsdýrasløg ella røktarplantusløg, fellur uttan fyri allýsingina.

*Nr. 9* gevur eina breiða allýsing av náttúruslagi. Í hesi lógini verður náttúruslag allýst sum einsháttað slag av náttúru, sum fevnir um allar livandi lívverur og náttúrutættirnar, sum har virka. Við hugtakinum verður roynt at lofta teimum týdningarmestu brigdunum í náttúruni á vistskipanarstigi (sí nr. 20). Tað er eftir lógini ikki neyðugt at allýsa náttúrusløgini eftir bara einum setti av treytum sum t.d. plantulívinum. Eisini dýralívið, jarðfrøðin ella landslagið kann eyðkenna eitt náttúruslag. Hugtakið kann fevna um størri vistskipanir sum t.d. ósar ella lyngheiðar, men eisini smá lívøkir sum hyljar og tjarnir. Sipað verður tó ikki til høvuðsnáttúrusløg sum t.d. fjøll ella røktarlandssløg. Hugtakið náttúruslag fevnir eisini um ymisk sløg av røktarlandslagi sum t.d. teigalendi.

*Nr. 10* gevur eina allýsing av plantum. Hóast soppar eru at rokna sum egið ríki, eru teir í hesi lógini fevndir av allýsingini av plantum. Skónir eru somuleiðis fevndar.

*Nr. 11* staðfestir, at ryggleys dýr eftir lógini eru dýr við ongum ryggi. Hugtakið fevnir m.a. um skordýr, krabbadýr og lindýr.

*Nr. 12* allýsir hugtakið slag (*species*). Hugtakið slag er ikki greitt allýst sum eind. Eitt slag er eyðkent við einum tvíliðaðum latínskum navni, har slektin skilst á fyrra liði og slagið á seinna liði. Ein treyt fyri, at okkurt kann vera at rokna sum eitt slag, er vanliga, um einstaklingarnir av mótsettum kyni kunnu fáa lívført og nøringarført avkom. Henda treytin hóskar tó ikki til øll sløg, m.a. ikki til sløg við ókynjaðari nøring. Alt oftari verða ílegutreytir brúktar til at skilja ímillum sløgini. Fyri ásetingar í lógini um sløg er tað ikki avgerandi at hava greiðan skilnað, so leingi myndugleikarnir hava greiðar lýsingar av sløgum í sínum avgerðum.

*Nr. 13* allýsir hugtakið stovnur. Í lógini verður hugtakið stovnur bara brúkt um ein bólk av einstaklingum av sama slagi, sum um somu tíð liva innan fyri eitt avmarkað øki.

*Nr. 14* allýsir tøku sum felagsnevnara fyri allar gerðir, sum snúgva seg um at taka lívverur úr náttúruni, annaðhvørt við avlíving ella burturtøku av heilum lívverum ella pørtum av lívverum, eisini flyting. Ásetingin geldur uttan mun til hátt ella endamál. At skaða lívverur er ikki at rokna sum tøka. Skaði á plantur og dýr má tí nevnast umframt tøku, um hann skal verða fevndur av viðkomandi áseting í lógini.

*Nr. 15* allýsir útseting av lívverum. Tað, sum serliga eyðkennir útseting, er, at talan er um eina tilvitaða gerð, sum er atvold til, at ein lívvera sleppur út í umhvørvið. Hugtakið fevnir eisini um afturlatið brúk, har eingin vissa er fyri, at lívverur ikki sleppa út. Við at sleppa út verður eisini hugsað um, at lívveran kann sleppa út, tá ið onnur dýr heinta hana sum fong.

*Nr. 16* allýsir veiðu sum tað at fanga ella drepa vill dýr til gagnnýtslu.

*Nr. 17* allýsir, hvat ið er at rokna sum eitt vistfrøðiligt funktiónsøki hjá einum ella fleiri sløgum. Ein vistfrøðilig funktión fyri eitt slag ella ein stovn kann lýsast sum samløgan av lívfrøðiligum og ikki-lívfrøðiligum tilgongdum, sum krevjast til at uppihalda ein lívføran stovn og natúrliga menning av slagnum. Ásetingin nevnir tey mest viðkomandi dømini um vistfrøðilig funktiónsøkir, men er ikki tømandi. Hugtakið er brúkt fyri at tryggja, at fyrisitingin av sløgum hevur nøktandi fyrilit fyri økjum, sum eitt slag brúkar bara í stutta tíð, men sum slagið ikki fær verið fyri uttan, um tí skal verða lív lagað, sum frá líður.

*Nr. 18* allýsir vistfrøðiligan stand. Hugtakið er knýtt at støðum, har eitt náttúruslag er. Hugtakið sigur nakað um dygdina í støðunum, ikki um talið á støðum og útbreiðsluna hjá náttúruslagnum. Tann vistfrøðiligi standurin er ein samanseting av støðuni eina ítøkiliga løtu og gongdini, sum hon hevur verið, og sum hon væntast at fara at vera í framtíðini, sbr. orðini *støða og gongd*. Tá ið metast skal um gongdina, mugu ávirkanartættirnir eisini takast við. Hugtakið *funktiónir* kann lýsast sum tey íkøst, sum verða veitt samspælinum í náttúruni, og fevnir m.a. um tænastur sum vatngoymslu og føðsluveitara og endurspeglar tær vistfrøðiligu tilgongdirnar í náttúruslagnum, eisini vatnhúsarhald, føðsluumgerð, røktarávirkan og sambond millum sløg. Óbeinleiðis fevnir hugtakið *funktiónir* sostatt eisini um tær vistfrøðiligu tilgongdirnar. Eru tær vistfrøðiligu tilgongdirnar skaddar, kann náttúran ikki hava tær somu funktiónirnar sum ein sunn náttúra í vistfrøðiligari javnvág. Hugtakið *bygnaður* sipar til samansetingina av sløgum og stovnum umframt tað fysiska skapið á staðnum. Við *framleidni* meinast framleidd lívmegn fyri hvørja økiseind, t.e. úrtøkan í nøgd av tilgongdunum.

*Nr. 19* allýsir vistskipan. Mótsett einum *náttúruslagi*, sum sipar til fleiri støð við einum ávísum slagi av náttúru, er ein vistskipan er eitt avmarkað landafrøðiligt stað. Avmarkingin kann vera meira ella minni greið, alt eftir hvørja vistskipan talan er um. Ein vistskipan kann vera eitt stað, har eitt ávíst náttúruslag er, men eisini eitt nógv størri øki, har fleiri náttúrusløg eru umboðað. Samstundis kann eitt stað, har eitt náttúruslag er, fevna um fleiri vistskipanir á mikrostigi. Hugtakið vistskipan fevnir um samspælið millum lívverurnar og teir ikki-lívfrøðiligu tættirnar sum veðurlag, ljós, vatnhúsarhald, føðslusølt o.a.

**Til § 4.**
Ásetingin áleggur ikki fyrisitingini ella privatum nakrar beinleiðis skyldur, men hevur týdning fyri lógartulking og meting eftir hesi og øðrum lógum, og tá ið nýggjar reglur verða gjørdar. Í náttúrumargfeldislógini verður § 4 serliga viðkomandi, tá ið metast skal, um verndarøkir skulu lýsast eftir lógarkapitli 5, hvussu stór verndarøkini eiga at vera fyri at varðveita funktiónina, bygnaðin og framleidnið hjá vistskipanunum, og hvørjar avmarkingar ið eru neyðugar fyri at røkka málinum. Greinin fær eisini týdning, tá ið metast skal, um eitt náttúruslag eigur at fáa støðu sum útvalt, sbr. § 49, sum beinleiðis vísir til miðið í § 4, og tá ið metast skal um inntriv í fyrikomingarnar av einum útvaldum náttúruslagi. Ásetingin kann eisini fáa týdning fyri, hvussu innihaldið í varsemisskylduni eftir § 6 verður tulkað. Eftir øðrum regluverki fær miðið serliga týdning í sambandi við ymisk økistiltøk umframt studningsveiting til røkt av røktarávirkaðum og røktartreytaðum náttúrusløgum.

Miðið í § 4, eisini miðið í § 5 niðanfyri, fær somu tyngd sum endamál eftir øðrum lógum. Atlitið at náttúrusløgum og vistskipanum fær tó størri tyngd enn í dag, við tað at tað ikki er lógarfest í galdandi rætti. Eisini verður atlitið at náttúruvirðum meira ítøkiliggjørt. Hetta fer at styðja upp undir fyrivarni, t.d. við tað at størri dentur verður lagdur á hótta og viðkvæma náttúru og minni á aðra náttúru.

Miðið í § 4 er knýtt at hugtøkunum *náttúruslag* og *vistskipan*. Hesi verða í uppskotinum allýst sum ávikavist *einsháttað slag av náttúru, sum fevnir um allar livandi lívverur og náttúrutættirnar, sum virka har, ella serstøk sløg av náttúrufyribrigdum umframt serstøk sløg av jarðfrøðifyribrigdum*, sbr. § 3, nr. 9, og *ein meira ella minni greidliga avmarkað og einsháttað náttúruskipan, har plantusamfeløg, dýrasamfeløg og smáverusamfeløg virka í samspæli sínámillum og við tað ikki-livandi umhvørvið*, sbr. § 3, nr. 19. Hugtakið náttúruslag sipar sostatt til eitt ávíst *slag* av náttúru, ikki til tað einstaka, landafrøðiliga avmarkaða staðið, har eitt slíkt slag av náttúru finst. Ein vistskipan, hinvegin, er eitt landafrøðiliga avmarkað øki. Ein vistkipan kann tó allýsast á fleiri stigum. Talan kann t.d. vera um eitt lundaland, eina á ella eitt vatn, men talan kann eisini vera um minni økir sum t.d. ein hyl.

Ein fyrikoming av einum náttúruslagi kann í sjálvari sær vera ein vistskipan, men vistskipanin kann eisini skiljast í yvirskipaðum týdningi og sostatt fevna um fleiri náttúrusløg. Eisini kann ein fyrikoming av einum náttúruslagi fevna um fleiri vistskipanir á mikrostigi.

Orðingin *at varðveita margfeldið av náttúrusløgum* í fyrra punktumi fevnir bæði um ein kvantitativan og ein kvalitativan part. Talan er um tal á náttúrusløgum ella útbreiðsluna av fyrikomingum av teimum ymisku náttúrusløgunum, men eisini um standin í hesum fyrikomingunum. Tað er ikki eitt endamál, at allar fyrikomingar av náttúrusløgum og teirra vídd skulu varðveitast, men talið av náttúrusløgum má haldast uppi og vera so stórt, og náttúrusløgini í slíkum standi, at náttúrusløgini samanlagt eru nóg sterk at standa ímóti eitt nú veðurlagsbroytingum. Bæði tann kvantitativi og tann kvalitativi parturin eru avgerandi fyri, at gongdin, bæði stuttskygt og í longdini, er góð.

Við *varðveita* verður bæði sipað til virkna fyrisiting og at náttúran sjálv heldur sær, mennist og endurnýggjar seg. Í hugtakinum liggur harafturat bæði eitt langskygt og eitt stuttskygt sjónarhorn. At stuttskygd varðveitsla ikki er nóg mikið, skilst eisini á § 1, har tað yvirskipaða endamálið er røkt *nú og í framtíðini*.

Tað natúrliga útbreiðsluøkið fevnir um alt tað landafrøðiliga økið – innan fyri gildisøkið hjá lógini – har náttúruslagið natúrliga kemur fyri. Mørkini á útbreiðsluøkinum eru ikki føst til eina og hvørja tíð. Náttúran er umskiftilig, og útbreiðslan av náttúrusløgum kann vera skiftandi, t.d. við veðurlagsbroytingum. Harafturat kunnu margfeldið av sløgum og tær vistfrøðiligu tilgongdirnar vera fyri eini natúrligari menning, sum aftur ávirkar innihaldið í náttúrusløgunum.

Hugtakið náttúruslag fevnir um ymisk sløg av røktarlandslagi sum t.d. teigalendi, sbr. viðmerkingarnar til § 3, nr. 9. Tað kann vera ilt at meta um, hvat tað *natúrliga útbreiðsluøkið* hjá einum slíkum náttúruslagi er. Útbreiðsluøkið veldst jú um, um mannaávirkanin er farin fram ella ikki. Útgangsstøðið má so vera, at hugt verður at teimum náttúrugivnu viðurskiftunum, sum hava lagt lunnar undir samanspælið millum fólk og náttúruna, sum náttúruslagið, sum talan er um, er úrslit av. Hyggjast má eisini at, hvar slíkt samanspæl millum náttúru og røkt í veruleikanum er farið fram ella fer fram. Tí er útbreiðsluøkið á degnum vanliga eitt gott útgangsstøði, tá ið metast skal um slík náttúrusløg.

Ásetingin brúkar tvey týðandi eyðkennir við einum náttúruslagi – margfeldið av sløgum og tær vistfrøðiligu tilgongdirnar, sum koma fyri í náttúruslagnum – fyri at skila til kjarnan í tí at varðveita margfeldið av náttúrusløgum.

*Margfeldið av sløgum* sipar til dýra- og plantusløgini, sum vanliga finnast í náttúruslagnum, sum talan er um, og samvirkanina, sum fer fram teirra millum. Finnast sløgini, sum eyðkenna náttúruslagið, ikki, er annaðhvørt ikki talan um eina fyrikoming av náttúruslagnum, ella er tann vistfrøðiliga dygdin vánalig.

Við *vistfrøðiligum tilgongdum* meinast alt tað innanhýsis samanspælið millum tær livandi lívverurnar í einum náttúruslagi og samanspælið millum ta livandi og ta ikki-livandi náttúruna. Hetta samanspælið er eitt úrslit av eini røð av stakfunktiónum, sum t.d. dýra- og plantusløg ella teir ikki-livandi partarnir hava. Sum dømir um vistfrøðiligar tilgongdir kunnu nevnast vatnhúsarhald (t.d. eitt turt ella vátt náttúruslag), binding av kolevni í mógvi og korallum, framvøkstur av einum korallrivi ella framleiðsla av jørð av serligum slagi (t.d. at náttúruslagið er súrt).

Hugtakið sipar fyrst og fremst til tann vistfrøðiliga standin, sum fyrikomingarnar eru í, men rúmar eisini einum kvantitativum parti. Gerast fyrikomingarnar av náttúruslagnum ov smáar, kann tað vera torført at tryggja tær vistfrøðiligu tilgongdirnar. T.d. kann tað vera trupult at varðveita tað neyðuga vatnhúsarhaldið í sera lítlum vátlendisøkjum.

*Seinna punktum* snýr seg um vistskipanir og lógarfestir útgangsstøðið fyri vistskipanarhugsanini. Ein vistskipan verður vanliga lýst gjøgnum sínar funktiónir, bygnað og framleidni, sí eisini allýsingina í § 3, nr. 19. Bæði tær einstøku lívverurnar, ikki-livandi partar av vistskipanini og heilar vistskipanir kunnu hava vistfrøðiligar funktiónir. Ein funktión kann lýsast sum íkastið, sum verður veitt samanspælinum í náttúruni. T.d. kann eitt øki hava eina funktión sum spjaðingargeil hjá sløgum, ein funktión hjá einum skógi er at framleiða súrevni, og eitt slag hevur funktión sum føði hjá einum ella fleiri øðrum sløgum.

Bygnaðurin hjá eini vistskipan er samansetingin av vistskipanini. Hvørji sløg ið finnast har, hvussu ið tey bera seg at sínámillum, og samansetingin av bæði livandi og ikki-livandi pørtum.

Við framleidni meinast framleidd lívmegn fyri hvørja økiseind, t.e. úrtøkan í nøgd av tilgongdunum.

Funktiónir, bygnaður og framleidni lýsa vistskipanina. Hetta eru dynamisk hugtøk, sum fevna um ta natúrligu gongdina í vistskipanini. Við at meta um tey nevndu parametrini ber til at siga um, hvussu góður ella ringur standurin er, sí eisini allýsingina av vistfrøðiligum standi í § 3, nr. 18. Ein vistskipan, sum virkar væl, kann veita fólki týðandi tænastur sum reint vatn, reina luft ella mat.

Seinna punktum vísir, at tað er lutfall millum mið og evnir, sbr. *í so stóran mun sum tað verður mett at vera rímiligt*. Við hvørt kunnu tey náttúrugivnu viðurskiftini í sjálvum sær vera av slíkum slagi, at tað ikki ber til at røkka miðinum. Aðrar tíðir kann íkastið til at røkka miðinum vera ógvuliga lítið í mun til kostnaðin av virkseminum. Tað er heldur ikki neyðugt at varðveita allar vistskipanir fyri at kunna røkka miðinum í fyrra punktumi.

Heildarmiðið í § 4 er eitt fyrisitingarmið, sum kann røkkast á ymsan hátt. Talan kann verða um at laga tiltakið eftir miðinum, at onkur tiltøk verða vald fram um onnur, at gagnlig tiltøk verða framd, ella at ógagnlig tiltøk ikki verða framd. Tað er úrslitið av tí samlaða brúkinum ella ikki-brúkinum, bæði privatum og hjá almennum myndugleikum, sum hevur týdning í mun til miðið í § 4.

Tiltøk eftir bæði náttúrumargfeldislógini og øðrum lógum skulu vigast upp ímóti øðrum týðandi samfelagsáhugamálum, sbr. § 14. Talan kann vera um fíggjarlig, sosial og mentanarlig áhugamál og tørvin á skynsamari tilfeingisfyrisiting. Ein slík viging skal ikki hava við sær, at vikið verður frá miðinum í § 4, men at tiltakið kann hava við sær, at miðið í § 4 verður rokkið á annan hátt ella seinni, enn um náttúrumargfeldið var tað einasta atlitið at taka.

**Til § 5.**
Ásetingin áleggur hvørki fyrisitingini ella privatum nakrar beinleiðis skyldur, men hevur týdning fyri lógartulking og meting eftir hesi og øðrum lógum, og tá ið nýggjar reglur verða gjørdar. Í náttúrumargfeldislógini verður miðið serliga viðkomandi fyri m.a. § 21 um raðfest sløg, sum beinleiðis vísir til gongdina hjá einum slagi sambært miðinum í § 5. Greinin fær eisini týdning sum ein táttur, tá ið metast skal um innihaldið í varsemisskylduni eftir § 6, sbr. eisini niðanfyri í viðmerkingunum til § 6. Aftur at tí fær ásetingin m.a. týdning, tá ið metast skal um tørvin á at lýsa verndarøkir eftir kapitli 5 í lógini, sbr. § 30, stk. 2 og 3.

Miðið í § 5 geldur fyri øll sløg á landi, í áum og vøtnum og í sjónum, eisini á havbotninum. Samsvarandi sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi fevnir miðið eisini um tað lívfrøðiliga margfeldið hjá sløgunum, sbr. *stk. 1, 1. pkt.* Talan er um ílegumargfeldi bæði millum ymiskar stovnar og innan fyri ein stovn. At ílegumargfeldið er nóg stórt krevst í fyrra lagi, fyri at slagnum skal verða lív lagað í longdini. Tað ger slagið meira harðbalið mótvegis umhvørvissveiggjum og forðar fyri óhepnum avleiðingum av innannøring. Í seinna lagi er tað at varðveita ílegumargfeldið eitt sjálvstøðugt endamál undir liðini á tí at varðveita vistskipanir og sløg. T.d. kann ein serstøk ílegutillaging í einum ávísum stovni vera áhugaverd við atliti at kynbótum, aling ella bioprospektering og seinni gagnnýtslu av ílegutilfari.

Nær knýtt at hesum er miðið, at sløgini skulu finnast í lívførum stovnum í sínum natúrligu útbreiðsluøkjum. Tað natúrliga útbreiðsluøkið hjá einum slagi er alt tað landafrøðiliga økið, har tað er natúrligt, at slagið finst. Eitt slag kann hava fleiri búøkir innan fyri sítt útbreiðsluøki. Einstaklingarnir, sum búsetast í einum ávísum búøki, eru ein stovnur. Tá ið talan er um røktartreytað sløg, má metast um tað natúrliga útbreiðsluøkið eftir teimum náttúrugivnu viðurskiftunum, sum eru fyritreytin fyri, at slagið finst, og tí veruligu røktarávirkanini, sum er farin ella fer fram, sbr. eisini viðmerkingarnar til hugtakið natúrligt útbreiðsluøki hjá einum náttúruslagi í § 4.

Hvat ið krevst, fyri at ein stovnur kann sigast at vera lívførur, kann vera ilt at siga við støði í vitanini á degnum og verður skiftandi frá einum slagi til annað. T.d. kann tað fyri nøkur plantusløg merkja, at tað eiga at finnast fleiri smáar fyrikomingar spjaddar um alt landið heldur enn nakrar fáar stórar fyrikomingar. Fyri onkur dýrasløg, hinvegin, kunnu nógvir einstaklingar í hvørjari fyrikoming hava størri týdning enn nógvar fyrikomingar við fáum einstaklingum. Sambært meginregluni um fyrivarni eigur óvissa at hava við sær, at fleiri stovnar, sum eru knýttir at ymsum búøkjum, verða røktir fyri at hava nóg stóran trygdarbredda. Hóast miðið, at sløg skulu finnast í lívførum stovnum í sínum natúrliga útbreiðsluøki, kunnu onnur týðandi samfelagsáhugamál tala fyri at røkka miðinum á annan hátt, enn atlitið at náttúrumargfeldinum einsamalt hevði talað fyri.
Her verður sipað til, at tiltøk eftir bæði náttúrumargfeldislógini og øðrum lógum skulu vigast upp ímóti øðrum týðandi samfelagsáhugamálum, sbr. § 14. Talan kann vera um fíggjarlig, sosial og mentanarlig áhugamál og tørvin á skynsamari tilfeingisfyrisiting. Ein slík viging skal ikki hava við sær, at vikið verður frá miðinum í § 5, men at tiltakið kann hava við sær, at miðið í § 5 verður rokkið á annan hátt ella seinni, enn um náttúrmargfeldið var tað einasta atlitið at taka.

Miðið fyri fyrisitingina av sløgum er langskygt. Tað ber m.a. í sær, at stuttskygd sveiggj í stovnastøddum ikki noyðast at hava týdning fyri, um miðið verður rokkið, sum frá líður.

Eftir stk. 1, *2. pkt.*, skulu tey vistfrøðiligu funktiónsøkini hjá sløgunum varðveitast, og hinar vistfrøðiligu fyritreytirnar skulu vera til staðar, *í tann mun tað krevst til at røkka* miðinum í fyrra punktumi. Við vistfrøðiligum funktiónsøkjum meinast bæði økið, har eitt slag heldur til tey flestu skeiðini í lívinum (búøki), og økir, har eitt slag heldur til eitt stutt tíðarskeið orsakað av tí serstøku funktiónini, sum økini hava fyri lívsringrásina hjá slagnum, sbr. § 3, nr. 17. Aðrar vistfrøðiligar fyritreytir kunnu vera reint vatn, at onnur sløg eru til staðar sum føði ella vertslívvera ella friður í verpingartíðini. Talan kann eisini vera um partar av landslagi, sum krevjast til samanhangir millum vistfrøðilig funktiónsøkir, t.d. spjaðingargeilar, sum, hóast tær petta búøkir sundur, gera tað møguligt hjá lívverum at skifta arvatilfar sínámillum.

Miðast skal eftir at *varðveita* sløgini og teirra ílegumargfeldi. Í tí liggur, at roynt verður at varðveita ella røkka einum góðum standi. Natúrlig gongd er eisini ein partur av hugtakinum, men tað kann vera ilt at staðfesta í royndum, hvat ið er natúrlig gongd. Við hvørt eru avleiðingarnar av eini natúrligari ávirkan vorðnar størri orsakað av mannaávirkan. Í øðrum førum er talan um í høvuðsheitum mannelvda gongd. Summum sløgum tørvar røkt, av tí at teirra fyrikoming er røktartreytað ella røktarávirkað. Miðið geldur eisini fyri slík sløg. Natúrlig gongd má í slíkum førum skiljast út frá tí samanspælinum millum fólk og náttúru, sum hevur skapt ella givið sítt íkast til lívsfyritreytirnar hjá slagnum. Sí annars um hugtakið *varðveita* eisini viðmerkingarnar til § 4.

Um tað ikki er møguligt at sita fyri einum slagi, so at tað finst í lívførum stovnum í tí natúrliga útbreiðsluøkinum (*in situ*), skulu varðveitslutiltøk setast í verk uttan fyri búøkið (*ex situ*), um tað kann gera sítt til, at slagnum verður lív lagað í náttúruni, sbr. § 24, stk. 1. Tað kann t.d. vera viðkomandi, tá ið talan er um sløg, sum hava tørv á serliga víðfevndari røkt, um teimum skal verða lív lagað í náttúruni. Endamálið við *ex situ*-varðveitslutiltøkum má fyrst og fremst vera, at slagið sum frá líður kann førast aftur og endurreisast í náttúruni.

Eisini (føroysk) sløg, sum valda skaða, eru í útgangsstøðinum fevnd av fyrisitingarmiðinum, bæði sum serstøk sløg og orsakað av teirra funktión í vistskipanini, men í tí sambandi hava ásetingarnar í lógarkapitli 3 týðandi fyrivarni við sær.

*Stk. 2* staðfestir, at fyrisitingarmiðið ikki geldur fyri fremmandar lívverur í tí føroysku náttúruni, men áleggur ikki myndugleikunum nakra skyldu at basa ávísum fremmandum lívverum. Orsøkin til undantakið er, at fremmandar lívverur kunnu hava óhepna ávirkan á føroyska náttúru. Tað er tó eingin treyt, at tann fremmanda lívveran í roynd og veru hevur slíka ávirkan.

*Stk. 3* ásetur eitt fyrisitingarmið fyri ílegumargfeldið innan fyri tamd og vand sløg.

**Til § 6.**
Ásetingin ásetur eina almenna varsemisskyldu fyri *øll* mótvegis náttúrumargfeldinum. Skyldan geldur bæði fyri privat, bæði einstaklingar, felagsskapir og fyritøkur, og fyri tað almenna.

Skyldan at fara fram við varsemi fevnir í fyrra lagi um eina skyldu at royna at kunna seg um, hvørji náttúruvirðir ið kunna fáa skaða. Hetta er ein fyritreyt fyri at gera varsemisskylduna munadygga. Tað ber ikki til tilvitað at hava fyrilit fyri náttúrumargfeldi, sum ein ikki veit um. Tað eru eyðsæð mørk fyri, hvat ið væntast kann, at einstaklingar av sínum eintingum kunnu útvega sær av vitan um lívfrøðiligt margfeldi. Í hesum sambandi liggur ein týðandi uppgáva á myndugleikunum at kunna almenningin. Tað má eisini kunna væntast meira av yrkisligum vinnufyritøkum enn av einstaklingum í teirra dagliga virki. Men ásetingin setur krøv um størri tilvitan mótvegis náttúruni.

Serliga tá ið myndugleikarnir syrgja fyri, at vitan um t.d. hótt sløg ella hótt náttúrusløg er lættliga atkomandi, eigur tað at kunna væntast, at roynt verður at kunna seg við slíka vitan.

Fyri tað almenna verður í § 8 skotin upp ein serlig regla um vitanargrundarlagið fyri myndugleikaútinning. Kravið til varsemi í § 6 skal eyðsæð ikki lesast soleiðis, at væntað verður, at øll skulu byggja á líka dygt vitanargrundarlag, sum kravt verður, at myndugleikarnir gera. Tí verður ikki víst til § 8 í hesi greinini.

Hin parturin av varsemisskylduni snýr seg um, at øll skulu gera tað, sum rímiligt er, til at tað slepst undan, at náttúrumargfeldið verður fyri skaða. Hvat ið er rímiligt, veldst serliga um, hvat slag av virksemi talan er um, hvussu væl grundað nyttuendamál virksemið hevur, hvussu stórt virksemið er í vavi, hvussu stóran skaða tað kann gera, um stórar útreiðslur eru knýttar at tí at hava fyrilit fyri náttúruvirðunum, og um skaðin er neyðugur, ella um viðkomandi lættliga hevði kunnað rokkið sínum endamáli á annan hátt. Tað hevur eisini týdning, um virksemið ávirkar hótta ella viðkvæma náttúru. Aftur at tí má dentur leggjast á, hvussu góða og atkomandi kunning myndugleikarnir hava veitt. Finst sera lítið av vegleiðing um, hvussu virksemið ávirkar náttúrumargfeldið, er tann einstaki í nógv minni mun at lasta, enn um slík vitan fanst, og almenningurin var gjørdur kunnigur við hana. Finst vegleiðing frá myndugleikunum, má tann, sum hevur virkað í samsvari við hesa vegleiðing, kunna líta á, at varsemisskyldan er lokin.

Sleppast skal ikki undan øllum skaða á náttúrumargfeldið. T.d. kann bara tað at ganga á einum lendi hava við sær, at traðkað verður á smáar plantur og skordýr. Varsemisskyldan er ikki ætlað at raka slíkt púra vanligt, lógligt virksemi. Tí hongur varsemisskyldan saman við miðunum í §§ 4 og 5. Tað týdningarmesta í varsemiskylduni er sostatt ábyrgdin hjá hvørjum einstøkum at geva sítt íkast – eftir førimuni – til heildarfyrisitingina av náttúrumargfeldinum, so at miðini í §§ 4 og 5 kunnu røkkast.

Ásetingin áleggur ongum at útinna eitt ávíst slag av virksemi, hóast tað kundi verið neyðugt fyri at varðveita náttúrumargfeldið. Er tørvur á t.d. virknari røkt ella gomlum rakstrarháttum, mugu myndugleikarnir á annan hátt royna at fáa slíkt virksemi lag, t.d. við avtalum ella studningsskipanum.

Tær umhvørvisrættarligu meginreglur í §§ 9 til 12 galda ikki beinleiðis fyri privat. Kortini kann samsvar vera ímillum meginreglurnar og tað, sum verður mett at vera varsom framferð. T.d. kann tað at velja alment góðtiknar varsamar rakstrarhættir vera fevnt av varsemisskylduni, um tað ikki tyngir byrðuna hjá tí, sum varðar av virkseminum, órímiliga nógv.

Varsemisskyldan hevur størstan týdning fyri atburð og virksemi, sum ikki er fevnt av reglum. Eru reglur ásettar fyri, hvussu fyrilit skal havast fyri náttúruvirðunum, er varsemisskyldan vanliga lokin, tá ið farið verður fram í samsvari við hesar reglurnar. Hetta geldur í enn størri mun, tá ið talan er um virksemi, sum almennur myndugleiki hevur givið loyvi til. Tann, sum hevur ábyrgdina av virkseminum, eigur í slíkum førum at kunna hava sum útgangsstøði, at varsemisskyldan er lokin, um fyritreytirnar fyri og innihaldið í loyvinum eru lokin.

Týdningurin, sum loyvið hevur fyri varsemisskylduna, skilst beinleiðis á *2. pkt.* Ein fyritreyt fyri, at varsemisskyldan kann metast at vera lokin, er, at virksemið verður útint í samsvari við loyvið. Tað ber í fyrra lagi í sær, at fyritreytirnar, sum loyvið varð givið eftir, t.d. um hvørji skaðaárin ið kundu standast av virkseminum, framvegis eru til staðar, og t.d. at nýggj vitan ikki er komin fram um skaðaárinini av virkseminum, sum mett verður, at tann, sum varðar av virkseminum, átti at vitað um. Í seinna lagi ber tað í sær, at virksemið verður útint í samsvari við innihaldið í loyvinum. Fyri virksemi, sum er knýtt at tí loyvda virkseminum, men sum ikki beinleiðis er nevnt í loyvinum,

geldur varsemisskyldan eftir § 6 á vanligan hátt. Er t.d. byggiloyvi givið í einum øki, har byggitilfar má flytast ígjøgnum eitt reiðringarøki, geldur varsemisskyldan fyri hesa ferðsluna.

Broytast fyritreytirnar fyri loyvinum, t.d. tí at virksemið vísir seg at elva til størri skaðaárin enn væntað, geldur varsemisskyldan sum annars. Eitt dømi um eina slíka støðu er, at tað í sambandi við útbyggingararbeiði verður rakt við eitt hótt slag, uttan at tað var greitt, tá ið loyvið varð givið, at slagið fanst í økinum.

**Til § 7.**
Greinin virkar sum innleiðandi áseting til greinina um vitanargrundarlagið í § 8 og tær umhvørvisrættarligu meginreglurnar, sum skotið verður upp at lógarfesta í §§ 9 til 12. Hóast reglan um vitanargrundarlagið ikki er ein umhvørvisrættarlig meginregla, er hon, sum meginreglurnar, vend ímóti myndugleikunum. Tí stendur hon saman við hinum leiðreglunum fyri almennum avgerðum og beint framman undan meginregluni um fyrivarni, sum hon hongur tætt saman við.

§ 7 er vend móti almennum myndugleikum. Tað rættarliga útgangsstøðið fyri umhvørvisrættarligum meginreglum nýtist kortini ikki at vera, at tær bara hava týdning fyri myndugleikarnar. Tær kunnu eftir aðrari lóggávu eisini hava týdning fyri privat. Men slíkur týdningur fyri privat geldur ikki eftir § 7 í náttúrumargfeldislógini. Tí áleggja meginreglurnar í §§ 9-12 ikki borgarunum nakrar sjálvstøðugar rættarskyldur. Tær fáa ikki bindandi virknað fyri borgararnar, fyrr enn tær verða havdar sum grundarlag og ítøkiliggjørdar, í sambandi við at fyrisitingin útinnir myndugleika eftir náttúrumargfeldislógini ella øðrum lógum, og í sambandi við at tað almenna situr fyri egnum fastognum.

Ein avleiðing av § 6 kann tó vera, at t.d. tað at velja ógvuliga skaðiligar rakstrarhættir, har aðrar loysnir eru í at velja, sum ikki hava stórvegis tvørleikar við sær fyri tann, sum varðar av virkseminum, verður mett at vera í ósamsvari við varsemisskylduna. Men hetta veldst í tí førinum um eina beinleiðis tulking av, hvat ið varsemisskyldan eftir § 6 ber í sær, ikki ásetingarnar í §§ 8-12.

Eftir *§ 7, 1. pkt.*, skulu §§ 8-12 havast sum grundarlag og brúkast sum leiðreglur, tá ið almennur myndugleiki verður útintur. Meginreglurnar hava týdning, bæði tá ið almennar reglur verða ásettar og í sambandi við stakavgerðir, eisini avgerðir um at veita studning. Orðið leiðregla ber m.a. í sær, at meginreglurnar ikki noyðast at vera avgerandi fyri úrslitið í einum og hvørjum máli. Onnur atlit kunnu vera viðkomandi, t.d. eftir leiðreglum fyri meting eftir eini aðrari lóg, sum viga meira í tí einstaka málinum. Í síni heild skal fyrisitingin av náttúrumargfeldinum tó vera í samsvari við leiðreglurnar. Tað veldst annars um vanligar meginreglur fyri lógartulking, hvønn ítøkiligan týdning meginreglurnar hava í hvørjum einstøkum máli.

Sostatt galda meginreglurnar í náttúrumargfeldislógini ikki beinleiðis. Tað eru tær operativu ásetingarnar – annaðhvørt í hesi lógini ella í øðrum lógum – sum gera av, hvør ábyrgd ið heilt ítøkiliga verður løgd á tann einstaka.

§ 7 ber eisini í sær, at tað skal síggjast á grundgevingini fyri almennum myndugleikaavgerðum, hvussu meginreglurnar eru brúktar í tí ítøkiliga málinum, og hvør dentur ið lagdur er á tær, sbr. *2. pkt.* Hetta geldur, hóast grundgevingarskylda ikki geldur eftir vanligum fyrisitingarrættarligum reglum.

Almenn myndugleikaútinning fevnir fyrst og fremst um kunngerðir og fyrisitingaravgerðir. Men hon fevnir eisini um aðra myndugleikaútinning. Studningsveiting er fevnd av hugtakinum almenn myndugleikaútinning, men tað verður kortini nevnt beinleiðis, tí studningsveiting kann hava stóran

týdning fyri røkt av náttúrumargfeldinum. Orðaljóðið fevnir eisini um myndugleikaútinning, bæði eftir náttúrumargfeldislógini og eftir øðrum lógum, sum ber við náttúrumargfeldið. Tann nevnda grundgevingarskyldan er serstakliga týdningarmikil, tí hon ger sítt til, at fyrisitið verður í samsvari við meginreglurnar, og at meginreglurnar í mestan mun verða tulkaðar einsháttað.

Í teimum førum, har fyrisitingini ikki er givið rúm fyri fríari meting ella ólíkum tulkingum í myndugleikaútinningini, skal fyrilit fyri meginreglunum havast sum grundarlag, tá ið heimildin til myndugleikaútinningina verður grundað, t.d. í sambandi við samráðingar um studningsskipanir.

Meginreglurnar í ásetingini verða ikki brúktar, tá ið tað almenna útinnir eigararæði í privatum ella almennum vinnufeløgum. Hinvegin verða meginreglurnar brúktar, tá ið tað almenna situr fyri egnum fastognum.

**Til § 8.**
Ásetingin um vitanargrundarlagið er ein leiðregla fyri almennum avgerðum, sbr. § 7. Ásetingin ásetur krøv til vitanargrundarlagið hjá myndugleikunum. Hon geldur í sambandi við avgerðir, sum almennir stovnar taka sum myndugleikar. Kravið geldur eisini, tá ið privatir partar útinna myndugleika vegna tað almenna. Almenn myndugleikaútinning fevnir fyrst og fremst um kunngerðir og fyrisitingaravgerðir, men hon fevnir eisini um avgerðir, sum ikki eru at rokna sum avgerðir eftir fyrisitingarlógini. Ásetingin fevnir tó ikki um avgerðir um ikki at taka avgerðir. Ásetingin geldur haraftur, tá ið tað almenna situr fyri egnari fastogn, sbr. § 7.

Kravið geldur bæði fyri avgerðir, sum eru knýttar at náttúruinntrivum, og avgerðir um at røkja náttúru.

*Stk. 1, 1. pkt.*, áleggur myndugleikunum at byggja á vísindaliga vitan, tá ið avgerðir verða tiknar, sum kunnu ávirka náttúrumargfeldið. Tað geldur í útgangsstøðinum fyri vitan, sum longu er atkomandi. Tað kann eisini fevna um vitan, sum møguliga má fáast til vega. Við *fáast til vega* meinast bæði at heinta inn vitan, sum finst, men sum tað er trupult at fáa hendur á, ella sum er ókend fyri fyrisitingarmyndugleikanum, og nýggja vitan. Kravið til vitanargrundarlagið skal vera rímiligt, alt eftir málinum, og hvussu stórt tað er í vavi. Eitt ósvitaligt krav um vísindaligt vitanargrundarlag fyri øllum avgerðum, sum bera við náttúrumargfeldið, hevði verið alt ov víðtøkið. Í fyrra lagi eru náttúrumargfeldið og tilgongdirnar í náttúruni so torgreidd, at vit neyvan í næstu framtíð fara at hava nágreiniliga vísindaliga vitan um sløg, náttúrusløg, vistfrøðiligar tilgongdir o.a. Í seinna lagi er tað heldur ikki skilagott at seta víðfevnt og kostnaðarmikið granskingar- og frágreiðingararbeiði í gongd, tá ið talan er um avmarkað virksemi og lítlan væntaðan skaða. Tilfeingið eigur at verða brúkt við tí besta heildarvirknaðinum við atliti at røkt av náttúrumargfeldinum í hyggju. Samstundis er í stórum málum, sum kunnu vera atvold til stóran skaða, mark fyri, hvat ið væntast kann, at fingið verður til vega av vitan. Hevur tiltakið, sum skotið verður upp at seta í verk, handilsligar avleiðingar, skal metingin av, hvat ið er *rímiligt* at krevja, eisini skiljast út frá, hvat ið viðkomandi altjóða avtalur (t.d. WTO) krevja. Stk. 1*, 2. pkt.*, ger hesa vigingina millum útreiðslurnar av at fáa til vega eitt vísindaligt avgerðargrundarlag øðrumegin og málið og møguliga umhvørvisávirkan hinumegin sjónliga. Hetta punktumið neyvlýsir sostatt, hvat ið tað er rímiligt at krevja, sbr. 1. pkt. Við *málinum* verður m.a. sipað til, hvussu stórt virksemið er, hvussu professionelt tað er, um talan er um stór fíggjarlig áhugamál, og um ávirkanin varir stutt ella er meira varandi. T.d. fer ikki sama vitanargrundarlag at krevjast fyri eini ógvuliga avmarkaðari tøku av ílegutilfari sum fyri víðfevndari vinnuligari heysting. Somuleiðis verður vitanargrundarlagið fyri eini avgerð um eitt mikroorkuverk heilt øðrvísi enn fyri eini avgerð um eina størri orkuútbygging. *Vandin fyri, at náttúrumargfeldið verður fyri skaða*, hongur tætt saman við *málinum*. Talan er bæði um, hvussu stórur vandin er fyri umhvørvisávirkan, og hvussu stórur skaðin væntast at gerast.

Ásetingin áleggur ikki myndugleikunum at útinna almenna kortlegging av náttúrumargfeldinum. Stk. 1, 1. pkt., sigur bæði nakað um slagið av vitan og um innihaldið í vitanini. Stk. 1 snýr seg um vitan av vísindaligum slag. Vísindalig vitan skal vera partleys, og hon skal kunna roynast. Vitanin kann vera grundað á ítøkiligar fundir ella eygleiðingar, men talan kann eisini vera um meira vanliga vitan um m.a. lívfrøði, vistfrøði, evnafrøði ella alisfrøði.

Innihaldið í vitanini skal eftir stk. 1 snúgva seg um stovnsstøðuna hjá sløgum, útbreiðsluna og tann vistfrøðiliga standin hjá náttúrusløgum og virknaðin av árinum. Við tí vistfrøðiliga standinum hjá einum náttúruslagi meinast støða og gongd við atliti at funktiónum, bygnaði og framleidni í fyrikomingunum av náttúruslagnum, sæddar í mun til aktuellar ávirkanartættir, sbr. allýsingina í § 3, nr. 18. Við at sipa alment til stovnsstøðuna hjá sløgum og standin og útbreiðsluna hjá náttúrusløgum leggur ásetingin dent á, at metast skal ikki um eitt árin einsæris í mun til ta einstøku fyrikomingina, sum verður ávirkað. Metast má um árinið í mun til, hvørjum standi eitt slag, ein stovnur ella eitt náttúruslag sum heild er í. Harafturat má metast um samanhangirnar í vistskipanini. Í tí liggur ikki, at tann, sum skal fáa vitan til vega, skal hava fullkomið yvirlit yvir sløg og náttúrusløg, og hvørjum standi tey eru í. Tað liggur á myndugleikunum at fáa slík yvirlit til vega. Vitanin, sum væntast kann, at tað viðkomandi virksemið skal fáa til vega, má verða knýtt at árininum ella árinunum, sum virksemið stendur fyri, sæð í mun til, hvørjum samlaðum standi, tey ávirkaðu sløgini og náttúrusløgini eru í. Vitan um virknaðin av árinum kann vera av náttúruvísindaligum slag, men talan kann eisini vera um t.d. vitan um søgulig árin og mentanarsiðvenju av týdningi fyri burðardygt brúkt og vernd.

Vitanin kann t.d. stava frá árinsmetingum, sum gjørdar eru vegna umsøkjaran í einum ávísum máli, frá tí almenna, í sambandi við at ætlanir verða gjørdar, ella frá meira almennum, fakligum frágreiðingum, t.d. reyðlistum fyri sløg og náttúrusløg.

Hvør ið skal fáa vitanina til vega, skilst eisini á vanligum fyrisitingarrættarligum meginreglum og møguliga eisini serligum reglum í tí einstøku lógini.

*Stk. 2* snýr seg um vitan, sum er grundað á royndir, og áleggur myndugleikunum eina skyldu at leggja dent á slíka vitan.

Vitan, sum er grundað á royndir kann vera dynamisk. Tað krevst, at vitanin er *grundað á* royndir hjá ættarliðum. Í tí liggur eisini, at vitanin kann hava ment seg, sum frá er liðið, hóast hon hevur rót í royndum hjá ættarliðum.

Ásetingin áleggur ikki myndugleikunum eina sjálvstøðuga skyldu at fáa vitan til vega, áðrenn avgerðir verða tiknar, sum fevnir víðari enn tað, sum skilst beinleiðis á stk. 1 ella vanligari fyrisitingarrættarligari skyldu at upplýsa mál á nøktandi hátt. Men ásetingin ber í sær eina serliga skyldu at leggja dent á slíka vitan, um hon er til taks.

Tað kann vera ein avbjóðing at fáa greiðu á, um slík vitan, sum er grundað á royndir, er til taks, og hvat hon í tí førinum ber í sær. At hoyra felagsskapir, sum væntast at kunna hava slíka vitan, er tí eitt týðandi ískoyti til skylduna í § 8, stk. 2. Slík hoyring krevst eftir vanligum fyrisitingarrættarligum reglum, men § 8, stk. 2, verður við til at siga, hvønn eitt mál skal leggjast fyri. Ein hoyringarpartur, sum kann geva sítt íkast við slíkari vitan, sum er grundað á royndir, sbr. § 8, stk. 2, hevur sjálvur ábyrgdina av at miðla hesa vitanina. Í summum førum aftra tey, sum hava siðbundna vitan, seg við at geva upplýsingar um vitan, sum kann hava verið vard í t.d. ættini ella nærsamfelagnum. Opinleiki og greiða um, hvat vitanin skal brúkast til, eru tí umráðandi. Tað

stendur tó tí, sum hevur vitanina, frítt at nokta at geva upplýsingar um vitanina, og í tí førinum kunnu myndugleikarnir ikki leggja dent á hana.

Vitanin, sum sóknast verður eftir í § 8, verður vanliga bara ein partur av avgerðargrundarlagnum. Alt eftir hvat slag av avgerð talan er um, verður avgerðin eisini grundað á aðra vitan, t.d. um fíggjarligar avleiðingar ella um ávirkan á onnur áhugamál sum t.d. heilsu ella útilív. Hvørji áhugamál ið gerast viðkomandi, og hvat vitan ið krevst, veldst í slíkum førum um ein blanding av § 8 í náttúrumargfeldislógini, tí ítøkiliga heimildargrundarlagnum fyri avgerðini og vanligum fyrisitingarrættarligum reglum.

**Til § 9.**
Ásetingin lógarfestir ta í altjóða umhvørvisrætti týðandi meginregluna um fyrivarni. Meginreglan, sum hevur stóran týdning fyri avgerðir um náttúrumargfeldið, er nýggj í føroyskari náttúruverndarlóggávu. Tó verður í onkrari føroyskari lóg víst til meginregluna, t.d. í § 2, stk. 2, nr. 2, í lóg um fyrisiting av sjófeingi, sum ásetur, at tað í fyrisitingini av lógini skal leggjast dentur á *fyrivarnisregluna sambært millumtjóða avtalum og leiðreglum*.

Tann rættarligi týdningurin av meginregluni skilst á § 7, sbr. viðmerkingarnar til ta greinina.

Meginreglan um fyrivarni verður viðkomandi bæði í sambandi við avgerðir, sum hava týdning fyri náttúrumargfeldið, og har miðað verður eftir at sleppa undan møguligum munandi skaða á náttúrumargfeldið (*1. pkt.*), og í sambandi við avgerðir sum aftursvar til vanda fyri álvarsligum ella óbótaligum skaða á náttúrumargfeldið (*2. pkt.*). Útgangsstøðið fyri avgerðir, sum kunnu ávirka náttúrumargfeldið, er, at avgerðargrundarlagið skal vera so dygt sum gjørligt, sbr. § 8. Tó kann ivi í nøkrum førum vera um avleiðingarnar fyri umhvørvið. Meginreglan um fyrivarni er ein leiðregla fyri, hvussu myndugleikarnir skulu handfara slíkan iva. Meginreglan um fyrivarni verður sostatt brúkt í førum, har ið slík nøktandi vitan ikki er til taks. Hetta geldur bæði í sambandi við fyrisitingaravgerðir, og tá ið mett verður um tiltøk, sum fyrisitingarmyndugleikin setur í gongd. Vitanartrotið kann snúgva seg um óvissu um, hvørji náttúruvirðir ið verða ávirkað, t.d. hvørji sløg ið finnast í einum øki, ella óvissu um, hvønn virknað eitt árin fer at hava.

Fyritreytin fyri at brúka 2. pkt. er, at veruligur vandi er fyri álvarsligum ella óbótaligum skaða á náttúrumargfeldið. Tað ber í sær, at tað eftir vísindaligum metingarstøði ella vitan av royndum eru verulig sannlíkindir fyri, at slíkur skaði kann koma í, men tað krevst ikki sannlíkindayvirvág fyri, at tað fer at henda. Tað skal kunna grundgevast eftir vanligum fyrisitingarrættarligum reglum fyri, at talan er um so mikið stóran vanda, at meginreglan um fyrivarni skal brúkast.

Sambært meginregluni um fyrivarni skulu myndugleikarnir ikki brúka vitanartrot sum grundgeving fyri at lata vera við at avmarka ella forða einum vanda fyri álvarsligum ella óbótaligum skaða. Skyldan sambært meginregluni kann bæði vera virkin, t.d. at seta eitt verndartiltak í verk, ella meira óvirkin, t.d. at nokta fyri virksemi, sum søkt er um loyvi til, ella leggja treytir við loyvi til slíkt virksemi. *Fyrisitingartiltøk* kunnu sostatt vera avgerðir um vernd ella avgerðir um burðardygt brúkt.

Hvat ið liggur í álvarsligum ella óbótaligum skaða, veldst um fleiri viðurskiftir. M.a. er tað týdningarmikið, um vandin fyri skaða snýr seg um náttúru, sum frammanundan er hótt ella viðkvom, um talan verður um varandi skaða ella ikki, og um skaðin fer at gera tað munandi verri at røkka miðunum í §§ 4 og 5. Tann møguligi umhvørvisskaðin má eisini skiljast út frá, hvørji onnur áhugamál ið verða ávirkað av avgerðini.

Tað er ein fyritreyt, at tiltøk hjá fyrisitingarmyndugleikanum fara fram innan fyri karmin á altjóða avtalum, sum Føroyar eru bundnar av.

**Til § 10.**
Ásetingin lógarfestir ta í altjóða umhvørvisrætti týðandi meginregluna um heildartrýstið á vistskipanina. Meginreglan er í sínum almenna líki nýggj í føroyskari náttúruverndarlóggávu. Tó verður í onkrari føroyskari lóg víst til meginregluna, t.d. í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi og í løgtingslóg um verju av havumhvørvinum.

Ásetingin er sum hinar meginreglurnar í hesum lógarkapitlinum ein leiðregla, tá ið almennur myndugleiki verður útintur. Tað ber m.a. í sær, at tá ið ásetingin verður brúkt í verki, skal fyrilit havast fyri, hvat ið rímiligt er at krevja av heildarmetingum í sambandi við virksemi og brúk.

Tann rættarligi týdningurin av ásetingini er nærri lýstur í viðmerkingunum til § 7.

Árin á eina vistskipan kunnu vera av lívfrøðiligum, lívvirkisligum, evnafrøðiligum, men eisini fagurfrøðiligum slag. Tey kunnu vera knýtt at einum beinleiðis inntrivi í ta ávísu vistskipanina ella vera meira almenn sum t.d. veðurlagsbroytingar. Eitt árin kann eisini hava gagnligan virknað á náttúrumargfeldið og viga upp ímóti øðrum skaðiligum árinum. Tað er virknaðin á náttúrumargfeldið, sum mett verður um eftir meginregluni um heildartrýstið á vistskipanina, ikki tað einstaka virksemið í sjálvum sær.

Ásetingin skal tryggja, at nýggj árin koma undir eina heildarmeting av, hvat trýst ið verður á eina vistskipan. Tað ber í fyrra lagi í sær, at metast skal um árinið einsæris, men við støði í umhvørvistrýstinum, sum longu er farið fram gjøgnum onnur árin. Hetta hevur serliga týdning, um umhvørvistrýstið er komið at einum avgerandi marki, har sjálvt lítil vøkstur í trýstinum fær stóran virknað á vistskipanina. Tað fer eisini at gera sítt til at forða fyri, at náttúruvirðini so líðandi minka orsakað av eini gongd, har hvørt einstakt inntriv einsamalt verður mett at vera ov lítið til verða steðgað.

Sæð í samanhangi við meginregluna um fyrivarni ber meginreglan um heildartrýstið á vistskipanina eisini í sær, at tá ið metast skal um eina avgerð, skulu eisini møguleikin fyri fleiri árinum av sama slag seinni og møguleikin fyri øðrum árinum í framtíðini, sum saman við verandi ávirkan kunnu fáa óynsktan virknað á náttúrumargfeldið, havast í huga. Í tí sambandi kann tað vera avgerandi, um myndugleikarnir rættarliga ella politiskt hava nakra serliga orsøk at vilja tryggja, at aktuellir partar verða viðfarnir eins. Til dømis kann ein hugsa sær, at meginreglan verður brúkt í sambandi við viðgerðina av ein umsókn um loyvi at fáa sær smáorkuverk í einum øki við nógvum fastognareigarum. Sannlíkindini fyri, at fleiri eigarar fara at søkja um loyvi at fáa sær smáorkuverk, um tann fyrsti umsøkjarin fær loyvi, kunnu vera ein grundgeving fyri at nokta tí fyrsta umsøkjaranum loyvi. Metingarnar við atliti at, hvat ið kann henda í framtíðini, eiga í tí førinum at vera so ítøkiligar sum gjørligt. Atlitið at skynsamari tilfeingisfyrisiting kann eisini vera viðkomandi sum ein metingartáttur, sbr. §§ 4 og 5 og viðmerkingarnar til hesar. *Ein* stór útbygging kann í onkrum førum vera betri enn nógv smá inntriv.

**Til § 11.**
Ásetingin lógarfestir sum eina almenna meginreglu ta í altjóða umhvørvisrætti týðandi meginregluna um, at tann, sum varðar av virksemi, sum er umhvørvinum at skaða, ber kostnaðin. Ásetingin er í sínum almenna líki nýggj í føroyskari náttúruverndarlóggávu, men ásetingar, sum endurspegla meginregluna, finnast t.d. í náttúrufriðingarlógini, umhvørvisverndarlógini og havumhvørvisverndarlógini.

Tann rættarligi týdningurin av ásetingini skilst á § 7, sbr. viðmerkingarnar til ta greinina. Ásetingin er ein leiðregla hjá myndugleikunum, tá ið teir taka avgerðir við støði í øðrum regluverki, og kann ikki brúkast beinleiðis sum áleggingarheimild mótvegis privatum. Tann ítøkiliga ábyrgdin hjá teimum, sum varða av virksemi, veldst tí um aðrar almennar reglur ella fyrisitingaravgerðir.

Kostnaðurin av at forða fyri ella avmarka skaða fevnir um allar útreiðslur í sambandi við fyribyrgjandi ella endurreisandi tiltøk. Talan kann eisini vera um útreiðslur av at fáa vitan til vega og av at hava eyguni við umhvørvisstandinum, har sum loyvt virksemi fer fram, sum kann ávirka umhvørvisstandin.

Við orðingini *tann, sum varðar av virksemi* meinast bæði tann, sum í veruleikanum fremur ta skaðaelvandi gerðina, og tann, sum hevur ábyrgdina av virkseminum, t.d. ein virkiseigari. Hvør av hesum ið í einum ítøkiligum føri skal bera kostnaðin, veldst um umstøðurnar í málinum.

Meginreglan hevur sum fyritreyt, at vandi er fyri *skaða,* ella at hendur er *skaði,* á náttúrumargfeldið, og at tørvur tí er á at seta fyribyrgjandi ella endurreisandi tiltøk í verk. Tað ber í sær, at ikki ein og hvør ávirkan er fevnd av ásetingini.

Meginreglan er í útgangsstøðinum til hindurs fyri, at tað almenna ber umhvørviskostnað, sum stendst av privatum virksemi, annaðhvørt beinleiðis ella gjøgnum studning. Møguleiki eigur tó at vera fyri tí í einstøkum førum, tá ið vandi er fyri, at neyðug ella ógvuliga ynskilig umhvørvistiltøk ikki verða sett í verk uttan okkurt slag av fíggjarligum stuðli. Harafturat kann tað vera órímiligt, at privat, sum fremja tiltøk, sum gagna samfelagnum, bera allan kostnaðin av at leggja upp fyri umhvørvisampa. Harafturat kann tað vera torført at síggja summar skaðar á náttúrumargfeldið fyri sær frammanundan. Meginreglan er avmarkað mótvegis tí, sum er órímiligt alt eftir virkseminum og skaðanum.

Ásetingin er kortini ikki til hindurs fyri, at tað almenna fyri egna rokning setur tiltøk í verk, tá ið tað verður mett at vera neyðugt fyri at byrgja fyri ella bøta um umhvørvisskaðar, og seinni biður um fulnað fyri útreiðslurnar hjá tí, sum varðar av virkseminum, sbr. § 65.

**Til § 12.**
Ásetingin lógarfestir undir einum tvær meginreglur úr altjóða umhvørvisrætti, nevniliga meginregluna um bestu tøku tøkni og arbeiðshættir og meginregluna um bestu staðseting.
Tann rættarligi týdningurin av ásetingini skilst á § 7, sbr. viðmerkingarnar til ta lógargreinina. Reglur í aðrari lóggávu um val av rakstrarháttum, tøkni ella staðseting eiga at vera orðaðar í samsvari við § 12. Í teimum førum, har slíkar reglur eru gjørdar, hevur ein einstaklingur ella eitt virki, sum fylgir hesum reglunum, vanliga lokið varsemisskylduna í § 6, sbr. eisini viðmerkingarnar til § 6.

Ásetingin snýr seg um at velja rakstrarhátt, tøkni og staðseting, so at tað slepst undan skaða á náttúrumargfeldið, ella so at slíkur skaði verður avmarkaður. Rakstrarhættir, sum gagna náttúrumargfeldinum, eru eisini fevndir av hesum, og slíkir hættir viga nógv, tá ið metast skal um, hvat ið gevur tey bestu samfelagsligu úrslitini.

Sum dømi um ta bestu møguligu *tøknina* kunnu t.d. nevnast reinsihættir, sum tryggja, at ongar livandi fremmandar verur sleppa út í náttúruna, sbr. § 25, stk. 2 og 3.

*Rakstrarhættir* kunnu t.d. snúgva seg um ymsar arbeiðshættir í landbúnaði, t.d. brúk av maskinum, brúk av reiðskapi í fiskiskapi, trygdartiltøk í sambandi alivirksemi o.s.fr.

Eitt dømi um ta bestu møguligu staðsetingina kann vera, at valt verður at staðseta eitt ídnaðarvirki á einum stað, har tað hevur minstan møguligan skaða við sær fyri eitt verndarøki, og har tað eftir samfelagsligum viðurskiftum annars ber til at fáa eina líka góða ella næstan líka góða loysn.

Tá ið mett verður um, hvør tøkni, hvørjir rakstarhættir og hvør staðseting ið skal góðtakast í hvørjum føri, skulu myndugleikarnir geva fyrrverandi, verandi og komandi brúki av náttúrumargfeldinum gætur umframt fíggjarligum viðurskiftum. Loysnin, sum eftir eini heildarmeting gevur tey bestu samfelagsligu úrslitini, skal veljast. Tað kann merkja, at fíggjarlig viðurskiftir í einstøkum málum viga meira enn atlit at náttúrumargfeldinum, men vanliga eigur loysnin, sum er best fyri náttúruna, at verða vald. Tað nýtist heldur ikki vera nakar mótsetningur millum fíggjarlig viðurskiftir og eina góða loysn fyri margfeldið í náttúruni.

*Fyrrverandi, verandi og komandi brúk* sipar til alt slag av brúki, um tað hevur fíggjarligt virði ella ikki. Talan kann vera um brúk sum eitt tilfeingi, brúk sum uppliving ella brúk sum røkt av náttúrumargfeldinum, t.d. vernd av einum búøki hjá einum hóttum slagi.

Fíggjarlig viðurskiftir kunnu bæði vera av privatbúskaparligum og samfelagsbúskaparligum slagi. Hvat ið gevur tey bestu samfelagsligu úrslitini má m.a. skiljast út frá endamálinum í § 1 í náttúrumargfeldislógini og teimum ítøkiligu miðunum í §§ 4 og 5 saman við endamálinum við øðrum reglum, sum brúktar verða. Hetta ber m.a. í sær, at framtíðin má havast í huga, tá ið vigað verður.

**Til § 13.**
Ásetingin snýr seg um dygdarkrøv til náttúrumargfeldi. Á hesum skilst, at almenn umhvørvisdygdarkrøv, sum eisini fevna um dálking, ikki kunnu ásetast við heimild í náttúrumargfeldislógini.

Tá ið skilað verður til dygdina á náttúrumargfeldi, kann bæði verða sipað til nøgd, t.d. talið á sløgum ella ta landafrøðiligu víddina á einum náttúruslagi, og innihald við atliti at góðum vistfrøðiligum standi. Dygdarkravið eigur vanliga at áseta ein tíðarkarm fyri, nær ið kravið eigur at vera lokið.

*Stk. 1* gevur landsstýrismanninum heimild at áseta leiðbeinandi dygdarkrøv til náttúrumargfeldi. Slík dygdarkrøv kann landsstýrismaðurin áseta m.a. fyri at gera greið felags mið tvørtur um tey ólíku fyrisitingarøkini og fyri at geva leiðbeining í sambandi við meting.

Dygdarkrøv eiga at verða ásett, tá ið talan er um negativa støðu ella gongd fyri náttúrumargfeldið ímóti fyrisitingarmiðunum í §§ 4 og 5, og eitt slíkt dygdarkrav kann gera sítt til, at miðini verða rokkin.

Dygdarkrøv til náttúrumargfeldi kunnu eisini brúkast í sambandi við økisplanlegging.

Dygdarkrøv kunnu hava týdning fyri, hvat ið liggur í varsemisskylduni eftir § 6. Í tí sambandi er tað ein fyritreyt, at almenningurin er gjørdur kunnigur við tey.

*Stk. 2* ítøkiligger virknaðin av, at eitt dygdarkrav ikki verður lokið, ella at vandi er fyri, at tað ikki verður lokið. Í slíkum førum verður mælt til, at myndugleikarnir samstarva um eina ætlan fyri tiltøkum, sum kunna hava við sær, at dygdarkrøvini verða lokin, sbr. stk 2, *1. pkt.* Talan kann vera um ymisk tiltøk, t.d. at seta endurreisingartiltøk í verk, avmarka negativ árin ella veita gagnligum tiltøkum studning. Slík tiltøk kunnu í nøkrum førum vera treytað av heimild í náttúrumargfeldislógini ella øðrum lógum, og hetta skilst á *2. pkt.* Seinna punktum gevur onga

sjálvstøðuga, nýggja kunngerðarheimild, men vísir, at brúk av verandi heimildum kann vera eitt viðkomandi amboð til at røkka dygdarkrøvum fyri náttúrumargfeldi.

**Til § 14.**
Eftir ásetingini skulu tiltøk eftir náttúrumargfeldislógini vigast upp ímóti øðrum týðandi samfelagsáhugamálum. Við *øðrum týðandi samfelagsáhugamálum* meinast fíggjarligir, sosialir og mentanarligir tørvir og tørvurin á skynsamari tilfeingisfyrisiting. Í skylduni at viga tiltakið eftir náttúrumargfeldislógini upp ímóti øðrum samfelagsáhugamálum liggur eisini skyldan hjá avgerðarmyndugleikanum at gera greiðu fyri, hvørji onnur samfelagsáhugamál ið gera seg galdandi. Tað kann bera í sær, at myndugleikin sjálvur má gera greiðu fyri avleiðingunum, ella at hann frá øðrum myndugleika má fáa til vega eina frágreiðing, sum ger greiðu fyri avleiðingunum, sbr. eisini skylduna hjá myndugleikum eftir fyrisitingarrættinum at tryggja, at tær neyðugu upplýsingarnar eru til staðar í einum máli, áðrenn avgerð verður tikin.

**Til § 15.**
Ásetingin er nýggj og heimilar eina almenna fyrisitingarmeginreglu fyri dýr og plantur. Samstundis verður staðfest, at veiða, heysting og onnur gagnnýtsla, sum er fevnd av løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, ikki er fevnd av ásetingunum í kapitli 3 um veiðu og aðra tøku.

Eftir *stk. 1, 1. pkt.*, kann veiða og onnur tøka av natúrliga villum dýrum bara fara fram sambært lóg ella avgerð við heimild í lóg. *Lóg* kann í hesum sambandi bæði vera náttúrumargfeldislógin, sbr. §§ 17 og 18, og onnur lóg, sbr. t.d. § 16, stk. 1.

Orðingin *sambært lóg* merkir ikki, at avgerð má takast ella reglur ásetast í kunngerð um veiðu ella tøku. Atgongdin at veiða ella taka kann eisini vera heimilað beinleiðis í lógini.

Hugtakið *vill* fevnir um øll vill dýr, sama um tey liva vill ella eru verða havd í fangilsi.

Hugtøkini *veiða* og *tøka* eru allýst í § 3, nr. 16 og 14. Við *veiðu* meinast at fanga ella drepa vill dýr til gagnnýtslu. *Tøka* fevnir um alla avlíving og burturtøku av einstaklingum av sløgum, sama hvat endamálið er. Ásetingin ber m.a. í sær, at tað at fanga, veiða og drepa vill dýr skal hava heimild í lóg. Eisini er avlíving og innsavning til vísindaligt endamál og flyting av livandi lívverum í eitt nýtt búøki fevnd av ásetingini. Viðvíkjandi tí síðstnevnda kann eisini ásetingin um fremmandar lívverur vera viðkomandi, sbr. § 27. Fyrsta punktum ber eisini í sær, at tøka av eggum og og rognum má hava heimild í lóg.

Eftir § 15, stk. 1, *2. pkt.*, skal sleppast undan óneyðugum skaða á vill dýr og teirra reiður ella búgv. Hugtøkini reiður og búgv fevna eisini um yngliøkir. Um hugtøkini eisini fevna um hvíldarstøð, má avgerast ítøkiliga. Eitt lítið, avmarkað øki verður lættari fevnt enn eitt stórt øki við ógreiðari avmarking.

Endamálið við orðinum *óneyðugum* er at vísa, at ásetingin ikki fevnir um allan skaða. Virksemi, sum er lógligt sambært lóg ella avgerð við heimild í lóg, er vanliga ikki at rokna sum óneyðugur skaði. Tá ið fleiri lógligir framferðarhættir eru í at velja, eigur tó tann varligasti at verða valdur, um hann ikki er meira tyngjandi enn ein framferðarháttur, sum er skaðiligur fyri dýralívið.

Hugtakið *líðing* skal tryggja, at vill dýr ikki líða óneyðuga í sambandi við veiðu. Ásetingin er mest viðkomandi, tá ið talan er um ryggdýr. Yvirskipað er tað djóravælferðarlógin, sum ásetur yvirskipaðar meginreglur fyri viðferð av dýrum, bæði dýrum, sum verða havd í fangilsi, og villum dýrum, men støður, sum hava samband við veiðu og fiskiskap, eru fevndar av reglum í viðkomandi veiðulóggávu og sjófeingislógini við kunngerðum.

Eftir § 15, stk. 1, *3. pkt.*, skal eisini sleppast undan, at vill dýr verða jagstrað óneyðuga. Við *jagstrað* meinast, at eitt vilt dýr verður ávirkað, so at tað má broyta kós ella ferð, í mun til tá ið tað kann flyta seg frítt. Hugtakið hevur sum fyritreyt, at ávirkanin er størri enn eitt vist og varir longur enn eitt vist. Tað krevst ikki, at endamálið er at drepa dýrið.

Tað er *óneyðug* jagstran, sum er fevnd av ásetingini. Metingin, um virksemið ber í sær óneyðuga jagstran, má gerast við støði í m.a. dýraverndaratlitum, hvussu neyðugt tað er at útinna virksemið, og um ein varligari framferðarháttur kann verða brúktur.

Forboðið fyri óneyðugari jagstran verður avmarkað av náttúrumargfeldislógini § 15, stk. 3, sum staðfestir, at ásetingarnar í m.a. § 15, stk. 1, ikki eru til hindurs fyri lógligari ferðslu, landbúnaðarvirksemi ella øðrum virksemi, sum er í samsvari við varsemisskylduna í § 6.

At jagstra vill dýr óneyðuga kann eftir umstøðunum eisini vera brot á varsemisskylduna í § 6 ella reglurnar um raðfest sløg í § 21.

*Stk. 2* snýr seg um heysting og aðra tøku av villum plantum. Hugtakið *planta* fevnir eftir lógini eisini um soppar, sbr. § 3, nr. 10. Ásetingin í stk. 2 fevnir eisini um sløg av einkyknaðum plantum. Eftir stk. 2 er heysting og onnur tøka av plantum loyvd. Tað er tó ein fyritreyt, at heystingin ella tøkan ikki ikki er so stór í vavi ella fer fram á slíkan hátt, at hon hóttir stovnin á staðnum. Avmarkingin er í útgangsstøðinum vend móti øllum sløgum av virksemi ella tiltøkum, men tað er ein treyt, at virksemið ella tiltakið hóttir lívførið hjá stovninum á staðnum. Hvørt virksemið ber slíka hóttan í sær, má m.a. metast eftir tí almennu stovnsstøðuni hjá slagnum, t.d. við støði í møguligum galdandi reyðlistum, og hvussu stórt virksemið er. Hvat ið er *stovnurin á staðnum*, má metast ítøkiliga. Orsøkin til, at allir einstaklingar innan fyri stovnin á staðnum ikki eiga at verða oyddir, hóast stovnsstøðan hjá slagnum er góð um landið, er endamálið um at tryggja nøktandi ílegumargfeldi innan fyri slagið, sbr. § 5, stk. 1. Stovnurin av slagnum á staðnum kann hava ávís ílegusereyðkennir, sum høvdu horvið, um hann oyddist.

Heysting og onnur tøka av plantum kann eisini avmarkast við avgerð við heimild í lóg. Við lóg meinast bæði náttúrumargfeldislógin, m.a. §§ 19, 21 og 22 og lógarkapittul 5 um økisvernd, og aðrar lógir.

Ásetingarnar í stk. 1 og 2 eru ikki til hindurs fyri lógligari ferðslu, landbúnaðarvirksemi ella øðrum virksemi, sum er í samsvari við varsemisskylduna í § 6, sbr. *stk. 3*. Um onkur kann sigast at fara fram í samsvari við varsemisskylduna, veldst m.a. um, hvørja vitan ið viðkomandi kann væntast at hava ella fáa til vega, og um viðkomandi í nøktandi mun hevur mett um avleiðingarnar av ferðsluni ella virkseminum. T.d. mugu størri krøv setast professionellum, sum skipa fyri túrum í náttúruni, enn einstaklingum. Tað er eisini ein fyritreyt, at ferðslan ella virksemið er lógligt eftir annars galdandi reglum.

Krevst alment loyvi til ferðsluna ella virksemið, og fer ferðslan ella virksemið fram í samsvari við slíkt loyvi, verður farið fram í samsvari við varsemisskylduna, sbr. § 6, 2. pkt., t.d. í sambandi við byggiloyvi eftir byggilóggávuni.

Eftir *stk. 4* verða reglurnar í §§ 16, 18 og 19 ikki brúktar, tá ið talan er um veiðu og tøku, sum er fevnd av løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Hinvegin verða reglurnar í § 1 (endamálið við lógini) og kapitli 2 (almennar ásetingar um burðardygt brúk) brúktar saman við løgtingslóg um fyrisiting av sjónfeingi, tá ið myndugleikin eftir løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi ger metingar og tekur avgerðir viðvíkjandi atgongdini at veiðu og aðrari gagnnýtslu av sjófeingi.

**Til § 16.**
Ásetingin ásetur almennar treytir fyri veiðu av ryggdýrum.

Í *stk. 1* verður staðfest, at allar avgerðir um at loyva veiðu av villum súgdýrum og fugli skulu takast við heimild í viðkomandi veiðilóggávu. Slíkar avgerðir skulu byggja á miðini og treytirnar, sum ásett eru í náttúrumargfeldislógini, sbr. serliga §§ 5, stk. 1 og 2, og 16, stk. 2 og 3.

*Stk. 2* ásetur tvær treytir, sum báðar skulu vera loknar, fyri at veiða kann loyvast. Tann fyrra treytin um *ta bestu tøku skjalfestingina* snýr seg bæði um líkið á og innihaldið í skjalfestingini, sum skal havast sum grundarlag, tá ið avgerð verður tikin um veiðu. Treytin ber í sær, at myndugleikarnir mugu fáa til vega yvirlit yvir tær dátur, sum finnast, og bera saman og brúka hesar dáturnar á fakliga skynsaman hátt. Skjalfestingin eigur at fevna um dátur um støddina á og gongdina hjá stovninum, og um hvussu stór veiðan er. Skjalfestingin, sum brúkt verður, eigur í mestan mun at vera fingin til vega við vísindaligum háttaløgum. Eisini upplýsingar, sum koma fram gjøgnum fráboðanir og vitan av royndum hjá øllum virkandi skulu kunnu brúkast sum skjalfesting, annaðhvørt einsamallar ella saman við vitan, sum er grundað á gransking (sbr. § 8).

Í teimum førum, har tað tøka dátutilfarið er so avmarkað, at tað er ógvuliga óvist, um veiðan er fakliga ráðilig, eiga myndugleikarnir annaðhvørt at nokta fyri ella avmarka veiðu. Í teimum førum, har eisini avmarkað veiða verður mett at vera ivasom, kann myndugleikin kortini loyva slíkari veiðu, um hann samstundis setur í verk innheinting av nýggjum dátum, og mett verður um hesar støðugt.

Treytin um *ta bestu tøku skjalfestingina* í § 16, stk. 2, er eitt skjalfestingarkrav við atliti at, um tað viðkomandi slagið framleiðir eitt *avlop, sum kann veiðast*. Talan er um eina serreglu í mun til § 8. § 8 kann tó verða viðkomandi, t.d. í sambandi við metingar eftir stk. 3.

Treytin í stk. 2 um *ta bestu tøku skrásetingina* má eisini síggjast í samanhangi við ta vanligu fyrisitingarrættarligu skylduna at upplýsa mál á nøktandi hátt. Treytin vísir í fyrra lagi, *hvat slag* av sannroyndargrundarlagi avgerðir, sum viðvíkja veiðu og aðrari tøku av ryggdýrum, eiga at vera grundaðar á, meðan sannroyndargrundarlagið eftir fyrisitingarrættinum skal vera nóg væl lýst, til at avgerð kann takast. Í seinna lagi sigur treytin í náttúrumargfeldislógini § 16, stk. 2, nær ið mál um veiðu av veiðudýrum eru nóg væl lýst.

Tann seinna treytin í stk. 2, um at slagið *framleiðir eitt avlop, sum kann veiðast burðardygt*, fevnir um lívfrøðilig viðurskiftir og sipar til, at veiðan skal vera burðardygg. Tað merkir m.a., at slagið kann mennast innan fyri tryggar lívfrøðiligar karmar. Í tí sambandi verða m.a. viðkvæmið hjá tí einstaka slagnum fyri umhvørvisbroytingum og veiðutrýst partur av metingargrundarlagnum saman við lívfrøðiligum táttum sum nøringarevnum, kapping, predatión, føðslu o.s.fr.

Treytin um, at slagið *framleiðir eitt avlop, sum kann veiðast*, ber eisini í sær, at tað eru vistfrøðiligar treytir, sum mynda karmin fyri, hvør veiða og tøka ið kann tolast. Innan fyri ein slíkan karm kann dentur tó eisini leggjast á sosial, mentanarlig og fíggjarlig viðurskiftir, sbr. stk. 3.

Tað at *framleiða eitt avlop, sum kann veiðast,* ber í sær, at alt avlopið kann takast. Hóast einki avlop er at veiða, kann tað vera lívfrøðiliga ráðiligt at loyva veiðu. Í teimum førum, har ein vil veiða meira enn avlopið, ella veiða, hóast einki avlop er, mugu prógv veitast fyri væntaðum vøkstri, so at slagið í longdini framleiðir eitt avlop, sum kann veiðast. Í hesum førunum eigur tøka at avmarkast so nógv sum gjørligt, so at framleiðsluevnini hjá slagnum ikki minka varandi. Tað

merkir m.a., at myndugleikin, tá ið hann tekur avgerð um tøku, má brúka ein trygdarbredda, so at tað slepst undan ótilætlaðum árinum orsakað av avmarkaðari vitan um árinini, sum avgerðin hevur á slagið.

*Stk. 3* ásetur, hvørji eykaatlit ið dentur skal leggjast á í sambandi við avgerðir um at loyva veiðu. Stk. 3, *1. pkt.*, ásetur, at tá ið avgerðir verða tiknar um at loyva veiðu og um framferðarháttin í sambandi við veiðu, skal dentur leggjast á funktiónina hjá slagnum vistskipanini og ávirkanina, sum veiðan kann hava á tað lívfrøðiliga margfeldið annars. Ásetingin endurspeglar vistskipanarhugsanina og kann t.d. hava við sær, at fyrilit verður havt fyri, at eitt slag hevur týdning sum føði hjá einum hóttum slagi. Hvat slag av vitan ið havast skal sum grundarlag, má síggjast í samanhangi við vitanarkravið í § 8, sum í hesum sambandinum verður brúkt saman við § 16, stk. 3.

Tá ið dentur verður lagdur á atlit eftir stk. 3, *2. pkt.*, skal tað gerast innan fyri karmin, sum høvuðstreytirnar í stk. 2 áseta. Eftir 2. pkt. skal veiðan hava týdning fyri vinnu og frítíðarlív. Eftir 2. pkt. skal dentur eisini leggjast á veiðusiðvenjuna í økinum. Eftir 2. pkt. skal dentur harafturat leggjast á skaðan, sum slagið ger.

Treytirnar í § 16, stk. 2 og 3, galda ikki fyri avgerðir um veiðu av fremmandum lívverum, sbr. *stk. 4*. Tað ber í sær, at myndugleikarnir kunnu brúka veiðu sum amboð til at basa fremmandum lívverum. Um tað er hóskandi, mugu myndugleikarnir meta um, m.a. eftir eginleikum hjá slagnum, væntaðum virknaði av veiðu, og um onnur amboð eru betur hóskandi til at basa slagnum.

Fyri raðfest sløg kunnu ásetast strangari reglur fyri veiðu enn tað, sum geldur eftir § 16, sbr. § 22, stk. 1, nr. 1.

**Til § 17.**
Ásetingin er eitt undantak frá veiðutreytunum í § 16, stk. 2 og 3., og gevur møguleika fyri at loyva aðrari tøku av villum súgdýrum og fugli umframt fiski í áum, vøtnum, ósum og løkum við kunngerð ella fyrisitingaravgerð.

Kunngerð eftir § 17, *stk. 1*, kann bara loyva tøku til tey nevndu endamálini. Fyri endamálini í nr. 1 til 6 skulu harafturat tvær høvuðstreytir verða loknar, sbr. stk. 2. Tann fyrra treytin er, at tøkan ikki hóttir lívførið hjá stovninum. Í teimum førum, har útbreiðslan hjá stovninum røkkur út um føroyskt øki, skal ikki metast um lívførið einsæris, men í mun til ta samlaðu útbreiðsluna hjá stovninum. Hin treytin er, at tað ikki ber til at røkka endamálinum við tøkuni á annan nøktandi hátt, t.d. við fyribyrgjandi tiltøkum.

Treytin í *stk. 2, 1. pkt.*, um lívførið hjá stovninum er ein minstatreyt. Treytin er ikki til hindurs fyri, at fyrisitingarmyndugleikarnir taka støði í lívførinum hjá einum stovni á einum stað, um slagið hevur fleiri atskildar stovnar í Føroyum. Ásetingin má eisini skiljast út frá fyrisitingarmiðinum í § 5, stk. 1, sum leggur dent á at varðveita nøktandi ílegumargfeldi.

Ásetingin er ikki avmarkað til kunngerðir og avgerðir um avlíving, men fevnir eisini um aðra tøku. Ein kunngerð eftir § 17 kann skilja ímillum førir, har tøka verður loyvd beinleiðis í kunngerðini, og førir, har søkjast má um tøkuloyvi. Í kunngerðini kunnu eisini ásetast nærri reglur fyri málsviðgerðini.

Kunngerðin kann snúgva seg um tøku alt árið ella ávís tíðarskeið og um alt landið ella í ávísum økjum. Eitt tøkuloyvi kann eisini avmarkast til eitt ávíst tal av einstaklingum.

Eftir *stk. 1, nr. 1,* kann tøka loyvast við kunngerð ella fyrisitingaravgerð fyri at verja plantur, dýr og vistskipanir, sum finnast natúrliga í náttúruni, t.d. tøka av fremmandum lívverum. Tað er ikki eitt krav eftir ásetingini, at vandi er fyri skaða á dýr, plantur ella vistskipanir. Kunngerðin ella avgerðin kann eisini snúgva seg um vernd fyri órógv og øðrum viðurskiftum, sum ikki kunnu kallast skaði.

Stk. 1, *nr. 2,* gevur heimild til at áseta reglur í kunngerð ella taka fyrisitingaravgerð fyri at verja fyri skaða á grøði, húsdýr, fisk, vatn ella aðra ogn.

Hugtakið *skaði* verður brúkt uttan nærri nágreiningar. Tó kann vera orsøk at gera mun á skaða í kunngerðini, alt eftir hvussu stórur hann er í vavi, sæð í mun til hvørji sløg talan er um.

Orðingin *at verja fyri* ber í sær, at tøkan kann fara fram sum fyribyrgjandi tiltak. Tøka eigur tó bara í serligum førum at loyvast, áðrenn nakar skaði er hendur. Og er skaði hendur, má talan vera um veruligan vanda fyri, at hann varir við ella fer at endurtaka seg.

Flytisløg kunnu gera skaða, annaðhvørt tá ið slagið er á ferð og brúkar eitt stað sum hvíldarpláss, ella tá ið staðið verður brúkt sum vetrartilhaldslívøki. Í báðum førum hevur skjóting til at verja fyri skaða vanliga ikki tann ætlaða virknaðin, uttan so at víðfevnd og áhaldandi skjóting verður loyvd. Ein slík loysn liggur greitt uttan fyri heimildargrundarlagið í § 17. Fyri tey flestu av slíkum sløgum eiga fyrst og fremst fyribyrgjandi tiltøk at verða brúkt, t.d. flyting av dýrum.

Hóast møguleikin í stk. 1, nr. 2, helst er mest viðkomandi fyri ryggdýr á landi, kann hann eisini hugsast at verða brúktur til ryggdýr í áum og vøtnum, t.d. tá ið fiskur veldur øðrum fiski ella lívverum skaða.

Stk. 1, *nr. 3,* gevur heimild at áseta reglur í kunngerð ella taka fyrisitingaravgerð fyri at verja almenn heilsu- og trygdaratlit ella onnur týðandi almenn áhugamál. Talan kann t.d. vera um smittuvanda, í samband við at fuglur setur seg við vatnveitingar, flogvøllir o.a.

Eftir stk. 1, *nr. 4,* kann avgerð takast við tí endamáli at endurreisa stovnar. Tað ber í sær, at loyvi t.d. kann gevast til at taka fisk at brúka til lívfisk ella til at seta út, t.d. við tí endamáli at endurreisa útdeyðar stovnar í áum og vøtnum.

Stk. 1, *nr. 5,* gevur heimild til at loyva tøku til granskingar- og undirvísingarendamál og til flokkanarvirksemi. Eitt granskingarendamál kann t.d. vera tøka og avlíving av einstaklingum av einum slagi fyri at kanna árin av dálking. Eitt undirvísingarendmál kann t.d. vera skera eintøk av sløgum upp í sambandi við náttúrufak. Hugtakið *granskingar- og undirvísingarendamál* kann umframt beinleiðis náttúruvísindalig endamál fevna um hagfrøðilig ella dýralæknafrøðilig endamál. Ásetingin kann eisini fevna um royndir við dýrum við tí endamáli at fáa til vega vitan av lívfrøðiligum, sálarfrøðiligum, tjóðlívsfrøðiligum, alisligum ella evnafrøðiligum slag.

Stk. 1, *nr. 6,* gevur heimild til at loyva tøku av fremmandum lívverum. Ásetingin gevur landsstýrismanninum heimild til at loyva avlíving, tá ið talan er um fremmandar lívverur, men tað, at talan er um fremmanda lívveru, eigur ikki av sær sjálvum at hava við sær, at loyvi verður givið at avlíva. Í kunngerð ella í meting hjá myndugleikanum kann dentur leggjast á eginleikar við slagnum, vandan fyri, at lívveran fótar sær og setur búgv í Føroyum, um útbreiðslan av lívveruni er úrslit av eini natúrligari gongd, og hvønn skaða lívveran kann valda tí lívfrøðiliga margfeldinum ella øðrum áhugamálum, t.d. grøði. Tað er tó ikki eitt krav eftir ásetingini, at talan er um ítøkiligan vanda fyri skaða. Í summum førum verður ikki nóg góð vitan tøk um, hvørjar avleiðingar lívveran kann verða atvold til, og ásetingin gevur í slíkum førum møguleika til at loyva tøku eftir

fyribyrgjandi atlitum. Treytirnar í stk. 2 galda ikki fyri tøku eftir nr. 7. Orsøkin er, at endamálið nettupp kann vera at oyða stovnin í Føroyum og ikki at varðveita ein lívføran stovn.

*Stk. 3, 1. pkt.*, gevur landsstýrismanninum møguleika at seta tøku í verk av sínum eintingum. Heimildin fevnir ikki um tøku eftir stk. 1, nr. 5 og 6. Tøka, sum nevnd er í nr. 5 og 6, verður framd av privatum ella almennum stovnum ella virkjum, ikki av fyrisitingarmyndugleikanum.

Tøka eftir stk. 1 verður framd av jarðareigaranum ella øðrum rættindahavara ella onkrum, sum hevur hevur fingið fulltrú frá øðrum teirra. Slík tiltøk kunnu bara fara fram á egnari ogn. Tøka, sum myndugleikin setur í verk eftir stk. 3, kann eftir *2. pkt.* fara fram uttan mun til einkarætt hjá jarðareigaranum ella øðrum til veiðu.

Tøka hjá myndugleikunum av ryggdýrum á ognini hjá øðrum fer í útgangsstøðinum fram uttan nakað slag av endurgjaldi frá myndugleikunum. Valda myndugleikarnir við síni skaðabasing jarðareigaranum fíggjarligan miss, sum ikki er knýttur at sjálvum skaðadýrinum, verður eitt møguligt endurgjaldskrav avgjørt eftir vanligum endurgjaldsrættarligum meginreglum.

**Til § 18.**
Ásetingin fyllir § 15, stk. 1 út, tá ið talan er um ryggleys dýr. Einkyknaðar lívverur eru eisini fevndar av ásetingini, sbr. allýsingina í § 3.

*Stk. 1* ásetur, í hvørjum førum tøka av ryggleysum dýrum er loyvd. Avmarkingar liggja í orðingini *um ikki annað er ásett*, sum vísir aftur til § 15, stk. 1. Um ikki annað er ásett í lóg ella avgerð við heimild í lóg, er tað eftir *nr. 1* loyvt at avlíva ryggleys dýr, sum eru til ónáðir ella skaða. T.d. kunnu skordýr, sum eru til ónáðir í bústaðarøkjum, basast. Eisini skaðadýr (sníkar), sum eru til skaða ella ónáðir hjá øðrum dýrum (villum dýrum og húsdýrum), kunnu avlívast við heimild í hesi ásetingini. Ásetingin kann eisini fevna um førir, har skaði ella ónáðir eru fyri hond. Ásetingin fevnir eisini um fremmandar lívverur, sum eru náttúrumargfeldinum at skaða.

Harafturat er eftir *nr. 2* loyvt at avlíva fremmand ryggleys dýr. Ásetingin hevur sjálvstøðugan týdning undir liðini á nr. 1 í teimum førum, har fremmandar lívverur ikki hava gjørt skaða. Fremmandar lívverur kunnu takast, sama um skaði er hendur ella ikki.

Eftir *nr. 3* er loyvt at taka ryggleys dýr, um tað ikki hóttir stovnin í økinum. Sum dømir um tøku, sum vanliga ikki hóttir stovnin í økinum, kunnu nevnast tøka til søvn ella flokkanarendamál ella tøka av klukkum til børn at kanna. Hvat í orðingin *í økinum* fevnir um, veldst um eina ítøkiliga meting úr einum staðbundnum sjónarhorni. Talan kann vera um eina kommunu, eina viðarlund ella eina mýri.

Í summum førum kann tað vera neyðugt, at myndugleikin sjálvur setur tiltøk í verk fyri at berja niður skaðadýr ella fremmandar lívverur, sbr. stk. 1, nr. 1 ella 2. Eftir *stk. 2* kann myndugleikin um neyðugt fremja slík tiltøk á fastogn hjá øðrum.

Tá ið myndugleikarnir berja niður skaðadýr á ognini hjá øðrum, er útgangsstøðið, at tað fer fram uttan nakað slag av endurgjaldi frá myndugleikunum. Valda myndugleikarnir við síni skaðabasing eigaranum av ognini fíggjarligan miss, sum ikki er knýttur at sjálvum skaðadýrinum, verður eitt møguligt endurgjaldskrav avgjørt eftir vanligum endurgjaldsrættarligum meginreglum.

Er tørvur á at skipa tøku av ryggleysum dýrum á landi nærri, t.d. tí at so nógv verður tikið, at tað hóttir stovnin, kann tað gerast við reglum í kunngerð ella við fyrisitingaravgerð, sbr. *stk. 3*.

Eftir *stk. 4* er veiða og onnur gagnnýtsla av villum ryggleysum dýrum í sjónum og í áum, vøtnum, ósum og løkum ikki fevnd av § 18. Slík veiða og gagnnýtsla er fevnd av løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, sbr. eisini § 15, stk. 4.

**Til § 19.**
Ásetingin lógarfestir undantøk frá § 15, stk. 2.

Undantakið í *stk. 1* geldur fyri tiltøk til at verja fyri skaða á heilsuna hjá fólki og dýrum, grøði ella aðra ogn. Undantakið fevnir eisini um at taka burtur fremmandar lívverur og tiltøk til at tryggja týðandi samfelagsáhugamál.

Í summum førum kann tað vera neyðugt, at myndugleikin sjálvur setur tiltøk í verk til at basa skaðaelvandi plantum. *Stk. 2* gevur heimild til at fremja slík tiltøk, um neyðugt á fastogn hjá øðrum. Spurningurin um møguligt endurgjald verður svaraður á sama hátt, sum tá ið talan er um tøku av ryggleysum dýrum, sbr. viðmerkingina til § 18, stk. 2.

*Stk. 3* gevur heimild til at skipa heysting ella aðra tøku av plantum nærri við reglum í kunngerð ella við fyrisitingaravgerð. Ásetingin geldur fyri heysting bæði í og uttan fyri vinnu. Ásetingin er serliga hugsað at verða brúkt, tá ið myndugleikin verður varur við eina gongd í heystingini av plantum, sum hóttir ávísar stovnar, ella sum kann hava við sær, at sløg ella stovnar verða fyri eini óhepnari gongd.

Eftir *stk. 4* er heysting og onnur gagnnýtsla av villum plantum í sjónum og í áum, vøtnum, ósum og løkum ikki fevnd av § 18. Slík heysting og gagnnýtsla er fevnd av løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, sbr. eisini § 15, stk. 4.

**Til § 20.**
Ásetingin er ein kunngerðarheimild til at gera reglur fyri ferðslu uttangarðs fyri at forða fyri, at plantur ella dýr verða fyri skaða ella ampa. Reglurnar kunnu fevna um tað at skipa fyri størri tiltøkum uttangarðs, náttúrukanningar og myndatøku o.a. og ferðslu, sum í serligan mun kann valda plantum ella dýrum skaða. Við náttúrukanningum meinast m.a. gransking og undirvísing.

Tørvurin á nærri skipaðari ferðslu kann hugsast at vera størstur í økjum, har viðkvom ella hótt sløg halda til. Talan kann eisini verða um at skipa ferðslu í verpingartíðini. Ásetingin kemur aftur at heimildini at gera reglur fyri ferðsluni í § 22, stk. 1, nr. 1 og 2 (raðfest sløg), og §§ 32 til 35 (tjóðgarðar, landslagsverndarøkir, náttúrufriðøkir, og lívøkisverndarøkir).

Við *uttangarðs* meinast lendi, ið er at skilja sum hagi.

**Til § 21.**
*Stk. 1* gevur landsstýrismanninum heimild til í kunngerð at útnevna nærri tilskilað sløg (*species*) á landi, í áum, vøtnum, ósum og løkum og í sjónum sum raðfest.

Eitt uppskot til kunngerð um raðfest sløg skal sendast til hoyringar hjá áhugafelagsskapum, m.a. umhvørvisfelagsskapum, vinnugreinafeløgum, yrkisfeløgum og vísindastovnum, landsmyndugleikum, sum hava áhugamál, sum verða ávirkað, ella sum í síni fyrisiting kunnu hava ávirkan á slagið, talan er um, umframt hjá kommunum innan fyri tað landafrøðiliga útbreiðsluøkið hjá slagnum. Samsvarandi leistur verður brúktur, tá ið vistfrøðilig funktiónsøkir hjá raðfestum sløgum verða vard eftir § 22, stk. 1, nr. 2.

Verða virkisætlanir gjørdar fyri vistfrøðilig funktiónsøkir hjá sløgum, sbr. § 22, stk. 3, skal hetta í høvuðsheitum gerast samstundis við kunngerðararbeiðið, so at uppkast til virkisætlan er gjørt, í seinasta lagi samstundis við kunngerðina um raðfesting. Soleiðis fæst framman undan raðfestingini greiða á tiltøkum, sum krevjast til framhaldandi at sita fyri búøkjunum hjá tí raðfesta slagnum.

Aftan á avgerðir um vistfrøðilig funktiónsøkir hjá raðfestum sløgum og áseting av virkisætlan skal tætt samstarv fáast í lag millum myndugleikan, sum situr fyri virkisætlanini, og myndugleikar, felagsskapir (eisini jarðareigarafeløg) ella jarðareigarar o.o., sum skulu hava ein leiklut, tá ið endamálini og tiltøkini í ætlanini skulu fremjast. Tá ið talan er um vistfrøðilig funktiónsøkir, har røkt krevst, eigur peningur at verða avsettur í virkisætlanini.

Sum liður í hoyringartilgongdini eigur eisini at verða mett, um skipanin við vistfrøðiligum funktiónsøkjum fyri raðfest sløg er tann skipanin, sum hóskar best, ella um onnur amboð heldur eiga at verða brúkt, t.d. tiltøk eftir aðrari lóggávu, økisvernd, sjálvbodnar loysnir ella ein samanseting av hesum, sbr. § 22, stk. 4.

Settar verða fram tríggjar ymiskar treytir, sum stórur dentur skal leggjast á, tá ið avgerð verður tikin um at geva einum slagi støðu sum raðfest.

Tann fyrsta treytin í *nr. 1* hongur saman við fyrisitingarmiðinum í § 5, stk. 1. Samsvarar tann vistfrøðiliga stovnsstøðan ella stovnsgongdin hjá einum slagi ikki við hetta miðið, eiga vanliga tiltøk at verða sett í verk umframt tað, sum §§ 15 til 20 áseta. Eftir orðaljóðinum í ásetingini merkir tað, at tað er nóg mikið til at raðfesta, at talan er um frávik frá miðinum. Frávikið eigur at síggjast í samanhangi við bæði stovnsstøðuna og stovnsgongdina. *Tiltøkini*, sum setast kunnu í verk, fevna bæði um tiltøk, sum avmarka virksemi, sum kann skaða ella gera støðuna verri hjá slagnum og fyrisitingar- og røktartiltøk.

Hóast eitt slag ikki er í einum vistfrøðiligum standi, sum ikki samsvarar við fyrisitingarmiðið, skal metast, um tað eigur at fáa støðu sum raðfest, um slagið hevur munandi part av síni natúrligu útbreiðslu ella íleguseryeðkennir í Føroyum, sbr. *nr. 2*. Undir hesa treytina koma bæði sløg, sum bara finnast í Føroyum (*endemisk* sløg), og sløg, sum fyri tað mesta finnast í Føroyum. Hugtakið *natúrligt útbreiðsluøki* fevnir um økir, har slagið heldur til alla ella partar av síni árligu ringrás. Við *íleguserey ðkennum* verður t.d. hugsað um sløg, sum hava stovnar við íleguserey ðkennum, sum eru serstøk fyri Føroyar, og sum hava týdning fyri ílegumargfeldið.

Tann triðja treytin snýr seg um, um altjóða skyldur eru knýttar at slagnum, sbr. *nr. 3*. Ásetingin geldur bara fyri sløg, sum eru fevnd av altjóðarættarliga bindandi reglum (altjóða listum). Tað er tó ikki altíð soleiðis, at sløg á altjóða listum verða mett at vera hótt (IUCN-flokkan) í Føroyum. Tað er tí ikki í øllum førum av sær sjálvum soleiðis, at slík sløg skulu raðfestast.

Tær tríggjar treytirnar eru ikki tømandi, sbr. at *stórur dentur* skal leggjast á tær, tá ið støða verður tikin til møguliga raðfesting. Tað kann hugsast, at tørvur er á at raðfesta eitt slag, hóast tað ikki kemur undir tær nevndu treytirnar, t.d. at eitt slag er sjáldsamt í Føroyum uttan at vera mett at vera hótt og uttan at lúka hinar báðar treytirnar. Raðfesting kann eisini vera viðkomandi, tá ið eitt slag er fevnt av einum heimsfevndum ella evropeiskum reyðlista, ella tá ið ikki rættarliga bindandi avgerð er tikin um, at tað er neyðugt at verja eitt ella fleiri sløg undir sáttmálum, sum Føroyar hava tikið undir við.

Hóast ein ella fleiri av treytunum í nr. 1 til 3 eru loknar, ber tað ikki neyðturviliga í sær, at slagið eigur at fáa støðu sum raðfest. Avgerðin má hava støði í eini ítøkiligari meting, m.a. við atliti at tí ítøkiligu útbreiðsluni hjá slagnum, støðuni hjá slagnum, hóttanini, og hvar ið slagið vanliga heldur

til. Í hesum sambandi hava vitanargrundarlagið og yvirlit hjá viðkomandi vitanarstovnum stóran leiklut. Avgerð um ikki at raðfesta kann harafturat takast, tá ið mett verður, at ein raðfesting ikki fær tann ætlaða virknaðin, t.d. tí at eitt slag orsakað av veðurlagsbroytingum er á veg burtur úr føroyskari náttúru, ella tí at onnur amboð verða mett at vera munadyggari til at verja slagið. Tá ið støðan ella gongdin hjá einum slagi ikki longur lýkur treytirnar í § 21, stk. 1, nr. 1, eigur at verða mett, um raðfestingin eigur at falla burtur, sbr. § 21, stk. 4.

Viðvíkjandi *stk. 2* verður víst til ta serligu umrøðuna niðanfyri av sløgum í sjónum.

Har ið stk. 1 ásetur, í hvørjum førum myndugleikarnir kunnu meta, um eitt slag eigur at fáa støðu sum raðfest, áleggur *stk. 3* myndugleikunum eina skyldu at meta, um eitt slag eigur at verða raðfest. Skyldan kemur í, tá ið tað *er skjalfest, at støðan ella gongdin hjá einum slagi eftir vísindaligum metingarstøði ikki samsvarar við fyrisitingarmiðið í § 5, stk. 1*. Tað er ikki eitt krav, at slagið á vísindaligum grundarlagi hevur fingið støðu sum hótt (IUCN-flokkan), men treytirnar, sum metingin, at støðan ella gongdin hjá slagnum er óheppin í mun til § 5, er grundað á, mugu vera av vísindaligum slag.

Landsstýrismaðurin hevur ikki eftir ásetingini eina skyldu at raðfesta, men til at meta, um slík avgerð eigur at verða tikin. Myndugleikarnir kunnu gera eina slíka meting av sínum eintingum, ella tá ið ein felagsskapur ella onnur við rættarligum áhuga krevja tað. Kravið um *rættarligan áhuga* er knýtt at endamálinum við at varðveita slagið. Talan má sostatt vera um felagsskapir ella onnur, sum hava serligan áhuga í, at slagið verður varðveitt, t.d. ein felagsskapur, sum hevur umhvørvisvernd sum eitt av sínum endamálum, ella ein, sum umboðar eina vinnugrein, sum metir, at tann skeiva gongdin hóttir vinnugrundarlagið. Talan kann eisini vera um ein felagsskap, sum umboðar fólk á staðnum, og sum metir ta skeivu gongdina hótta møguleikan hjá siðvenju at halda fram.

Í teimum førum, har felagsskapir ella onnur við rættarligum áhuga krevja, at mett verður, um avgerð eigur at verða tikin eftir hesi ásetingini, skal landsstýrismaðurin leggja kravið fyri viðkomandi geiramyndugleika, áðrenn avgerð verður tikin.

Í sambandi við metingina eftir hesi ásetingini galda eisini ásetingarnar í lógarkapitli 2.

Brot á metingarskylduna eftir stk. 2 er ikki knýtt at revsing og kann neyvan havast sum grundarlag fyri einum møguligum endurgjaldskravi.

Tá ið støðan ella gongdin hjá einum slagi, sum er raðfest eftir stk.1, nr. 1, ikki longur lýkur treytirnar í § 21, stk. 1, nr. 1, eigur at farast undir eina tilgongd við tí í hyggju, at slagið ikki longur skal vera raðfest, sbr. *stk. 4*. Tí er tað umráðandi, at tey, sum sita fyri hesum sløgunum, fylgja gongdini neyvt, soleiðis at hetta verður eitt dynamiskt amboð.

Í teimum førum, har eitt slag kemur undir treytirnar fyri raðfesting, men har slagið bara finst á nøkrum heilt fáum støðum, og møgulig raðfesting tí bara ávirkar ein ella heilt fáar jarðareigarar, kann metast, um tað í staðin fyri raðfesting við kunngerð er betur hóskandi, at slagið verður røkt við serstakari avtalum millum landið og jarðareigaran. Eins og tá ið virkisætlanir verður gjørdar fyri raðfest sløg (umrøtt niðanfyri), skal í slíkum førum ein ætlan gerast fyri, hvussu slagið og tess vistfrøðiligu funktiónsøkir skulu tryggjast, hvørji tiltøk, møguliga røkt, ið krevjast, og hvør peningur ið fylgir við at fremja tiltøk fyri, møguliga peningur til røkt, tá ið tað krevst til at tryggja, at slagnum verður lív lagað í longdini. Í teimum síðstnevndu førunum skal metast um peningin í samanhangi við aðrar viðkomandi studningsskipanir.

Tá ið sitast skal fyri teimum raðfestu sløgum og teirra funktiónsøkjum framhaldandi, kann tørvur vera á at gera virkisætlanir, sum greiða nærri frá slagnum og tess funktiónsøkjum, hóttanum, tiltøkum, ið krevjast til at verja slagið (og møguliga tess funktiónsøkir), uppskotum til raðfesting av tiltøkum, kostnaðarmetingum, pørtum, ið eiga at verða tiknir við í arbeiðið við og fremjingina av virkisætlanini, umframt hvør ið hevur ta yvirskipaðu fyrisitingarábyrgdina. Umhugsast kann, um fáast skal í lag ein egin studningsskipan fyri slíkar virkisætlanir. Aftur at tí kann tað vera viðkomandi at tillaga brúkið av amboðum og studningsskipanum hjá geiranum sjálvum, eisini landbúnaðarfyrisitingina, við tí í hyggju at tryggja, at sløg verða røkt sum best.

Í teimum førum, har tað raðfesta slagið ella tess funktiónsøki ikki fær verið framhaldandi røkt ella serlig røktartiltøk fyriuttan, um tað skal varðveitast í longdini, eigur ein avtala millum landið og jarðareigarafelagsskapir/jarðareigarar um framhaldandi røkt at vera ein týðandi partur av virkisætlanini, sbr. § 22, *stk. 3*. Verður ein egin studningsskipan sett í verk fyri slíkar virkisætlanir til røkt og onnur tiltøk, eigur peningurin í høvðusheitum fara til virkin tiltøk.

**Serligt um sløg í sjónum**
Tilfeingi, sum livir vilt í sjónum, verður eftir náttúrumargfeldislógini §§ 15, stk. 4, 18, stk. 4, og 19, stk. 4, skipað í samsvari við sjófeingislógina. Sjófeingislógin hevur eftir § 2 í lógini til endamáls at tryggja røkt og lívfrøðiliga og búskaparliga burðardygga gagnnýtslu av livandi sjófeingi. Hetta verður nærri útgreinað í sjófeingislógini § 2, stk. 2, sum ásetur atlit, sum dentur skal leggjast á, tá ið sitið verður fyri sjófeinginum, eitt nú fyrivarnisregluna og vistskipanarregluna, sum leggja upp fyri náttúrumargfeldinum og búøkjum.

Tær vanligu ásetingarnar um burðardygt brúk í kapitli 2 í náttúrumargfeldislógini verða brúktar útfyllandi, tá ið avgerðir verða tiknar eftir ásetingunum í sjófeingislógini. Í serligum førum kann tað gerast viðkomandi at brúka ásetingarnar í náttúrumargfeldislógini § 21 um raðfest sløg í sjónum mótvegis tilfeingi, sum livir vilt í sjónum. Við serligum førum meinast støður, har eitt slag er sjáldsamt ella er í vanda fyri at hvørva. Eisini í teimum førum, har tað er tørvur á at verja eitt slag tvørtur um geirar, verður § 21 viðkomandi. Tá ið mett verður, um eitt slag skal raðfestast, er tað umráðandi, at metingarnar byggja á tað tøka vitanargrundarlagið, sbr. náttúrumargfeldislógina § 8. Harumframt skal metast, um tað ber til at røkka nøktandi vernd av slagnum við teimum amboðum, sum geiramyndugleikin sjálvur hevur at ráða yvir. Í slíkum førum er tætt samstarv millum fiskivinnufyrisitingina og náttúrufyrisitingina umráðandi. Í teimum førum, har einum hóttum ella viðkvomum slagi tørvar vernd, og/ella tørvur er á at seta í verk vernd tvørtur um geiramørk eftir § 21, skulu náttúrumyndugleikin og fiskivinnumyndugleikin samstarva tætt.

Fiskiskapur og veiða í samsvari við vanligar broytingar í fiskastovnum verða skipað við tí vanligu tilfeingisfyrisitingini eftir sjófeingislógini. Tað ber í sær, at í teimum førum, har stovnsstøðan krevur strong reglutiltøk ella forboð fyri fiskiskapi, verða hesar metingarnar gjørdar innan fyri karmin á sjófeingislógini og í samsvari við atlitini eftir sjófeingislógini § 2, stk. 2.

Okkurt einstakt slag í sjónum, sum kann veiðast, hevur munandi part av síni natúrligu høvuðsútbreiðslu í Føroyum og kann finnast í stórum nøgdum. Slík sløg falla vanliga uttan fyri endamálið við ásetingini í § 21, sbr. orðingina *í serligum førum* í § 21, stk. 2.

Tá ið standurin ella gongdin hjá einum slagi er so góð, at tørvur ikki er á raðfestingini longur, eigur eftir § 21 at farast undir eina tilgongd við tí í hyggju at avraðfesta slagið. Tá ið talan er um sløg í sjónum, ber tað í sær, at náttúrufyrisitingin og fiskiveiðufyrisitingin eiga at fylgja gongdini hjá einum raðfestum slagi neyvt, so at talan verður um eitt dynamiskt amboð.

**Til § 22.**

*Stk. 1* í ásetingini gevur heimild til og leiðreglur fyri innihaldinum í eini kunngerð um raðfesting av einum slagi (*species*), t.e. hvønn rættarvirknað ein raðfesting kann hava. Ein raðfesting kann í fyrra lagi bera í sær forboð fyri allari tøku, skaða á ella oyðilegging av slagnum, talan er um, ella ávísum stovnum av slagnum, sbr. *nr. 1*. Tøka er í § 3, nr. 14, allýst sum *øll avlíving ella burturtøka úr náttúruni av heilum lívverum ella pørtum av lívverum, sama hvat endamálið er*. Hugtakið fevnir eisini um flyting og geldur uttan mun til háttin ella endamálið. *Oyðilegging* fevnir um gerðir, sum kunnu skaða, broyta, hylja, órógva ella á annan hátt gera støðuna verri hjá einum raðfestum slagi. Hetta fevnir t.d. um felling av trøum, har eitt raðfest fuglaslag reiðrast, at turrlegging av eini tjørn, sum er tilhaldsstað hjá einum raðfestum slagi, ella dálking ella veitagrevstur/avveiting/uppafturfylling í tí partinum av einum landslagi, har eitt raðfest slag heldur til. Vil ein fevna um tiltøk, sum meira óbeinleiðis eru sløgum at skaða, eiga reglurnar í nr. 2 at verða brúktar.

Við tøku av ílegutilfari fer at bera til at taka lívfrøðiligt tilfar úr náttúruni til ílegugreining og aðra lívevnafrøðiliga greining uttan at avlíva lívveruna ella taka hana burtur. Um slík bioprospektering er í ósamsvari við reglurnar fyri einum raðfestum slagi, veldst um eina ítøkiliga meting. M.a. má metast, um eitt slíkt inntriv kann verða slagnum at skaða.

Møguleikin *ávísir stovnar* ber í sær, at tað í kunngerðini kunnu ásetast ymiskar reglur fyri tøku í mun til ymisk landafrøðilig økir, sbr. allýsingina av stovni í § 3, nr. 13. Talan kann vera um eitt landafrøðiligt øki, sum er knýtt at *einum* ávísum stovni, ella eitt landafrøðiligt øki, sum hýsir fleiri stovnum.

Tað kann ásetast í kunngerðini, at reglurnar í §§ 15 til 20 ikki galda, ella at tær bara galda í avmarkaðan mun. Strangar reglur um ella forboð fyri tøku kunnu vera neyðug fyri at tryggja slagnum nøktandi verju, serliga tá ið slagið verður mett at vera hótt. Linkandi undantøk frá teimum almennu reglunum fyri teir ymisku flokkarnar av sløgum í §§ 15 til 20 eru ikki innan fyri karmarnar á § 22, stk. 1, nr. 1.

Røkka reglur, sum ásettar verða eftir nr. 1, ikki til at varðveita slagið og tess ílegumargfeldi, kunnu eftir *nr. 2* reglur ásetast um vernd av ávísum sløgum av *vistfrøðiligum funktiónsøkjum*, sum eru minni í vavi. Í kunngerðini kunnu ásetast reglur um øll vistfrøðilig funktiónsøkir av einum ávísum slagi, ella at nøkur ítøkilig vistfrøðilig funktiónsøkir verða mett at vera meira týðandi enn onnur. Í tí seinna førinum kann tað tó vera viðkomandi heldur at brúka lívøkisvernd. Sum *vistfrøðilig funktiónsøkir* eftir § 22, stk. 1, nr. 2, verða serliga roknað hamskiftisøkir, náttarhvíldarøkir, spæli-, gýtingar- ella makingarøkir og yngli- ella vakstrarøkir. Er tørvur á at fáa í lag størri vistfrøðilig funktiónsøkir, t.d. flytingarleiðir, er ikki heimild til hetta eftir stk. 1, nr. 2, sbr. hugtakið *minni í vavi*. Til slík endamál kann økisvernd vera eitt viðkomandi amboð.

Reglur um vernd av vistfrøðiligum funktiónsøkjum eru bindandi fyri privat og kunnu hava við sær, at teirra ræði yvir slíkum økjum verður avmarkað. Hetta kann eftir umstøðunum hava við sær, at virksemi ella ferðsla má hava fyrilit fyri endamálinum við tí vistfrøðiliga funktiónsøkinum. T.d. kunnu almennar reglur ásetast fyri burðardyggum brúki, sum varðveitir tey vistfrøðiligu funktiónsøkini hjá slagnum, ella ítøkiligar reglur fyri virksemi, sum er í gongd, um hetta krevst til frama fyri tað raðfesta slagið. Tað er tó ein fyritreyt, at reglurnar ikki hava munandi ampa við sær fyri virksemi, sum er í gongd í økinum. Eitt dømi um, hvat reglurnar um vistfrøðilig funktiónsøkir kunnu bera í sær, er, at tað verður ásett, at sleppast skal undan ferðslu ávís tíðarskeið, t.d. í verpingar- ella ynglitíðini.

Hóast tað ikki er nevnt beinleiðis í ásetingini, er hugsanin, at landsstýrismaðurin kunnar jarðareigarar og rættindahavarar um, at kend búøkir hjá raðfestum sløgum eru á ognini hjá teimum. Hetta fyri at tryggja, at jarðareigarar og rættindahavarar fáa nøktandi kunnleika til skipanina.

Hvat ið er at rokna sum *munandi ampi* eftir nr. 2, 2. pkt., veldst um eina ítøkiliga meting. Verður miðað eftir einum avmarkingarstigi, sum hevði kunnað verið ásett eftir viðkomandi geiralógum, sbr. stk. 4, er hetta vanliga ikki at rokna sum munandi ampi.

Verður tað á metingarstiginum undan avgerðini ikki mett, at avgerðin fer at hava munandi ampa við sær, men tað, tá ið nakað er fráliðið, vísir seg, at fyrilitini tilsamans eru atvold til so stórar avmarkingar, at tey kortini hava munandi ampa og munandi miss við sær, kann jarðareigarin krevja, at økið verður vart eftir lógarkapitli 5, ella at undantak verður gjørt frá raðfestingini fyri økið eftir stk. 5, sbr. *stk. 1, nr. 2, 3. pkt.* Tað kann t.d. vera støðan, um tey vistfrøðiligu funktiónsøkini hjá fleiri sløgum, sum bera við stórar partar av somu ogn, og fyrilitini, sum havast skulu, tilsamans hava munandi ampa við sær fyri virksemi, sum var byrjað, tá ið avgerðin um raðfesting varð tikin.

Nýggj tiltøk kunnu forbjóðast ella avmarkast, t.d. útbygging, veitagrevstur, avveiting, ífylling og ávís sløg av ferðslu. Harafturat kunnu í kunngerðini ásetast leiðreglur fyri meting eftir øðrum lógarverki í sambandi við inntriv, sum bera við økini, sum talan er um.

Tað er ein fyritreyt, at tað javnan verður mett um tað raðfesta slagið og støðuna í tess búøkjum, sbr. § 21, stk. 4, sum sigur, at landsstýrismaðurin við kunngerð kann gera av, at ein raðfesting eftir stk. 1, nr. 1, fellur burtur, tá ið stovnsmiðið í § 5, stk. 1, er rokkið.

Ásetingin í nr. 2 er orðað við funktiónsøkjum á landi í huga og er ikki gjørd galdandi í sjónum.

Tað er greitt ásett í *nr. 3*, at ein kunngerð kann bera í sær krøv um at gera greiðu fyri, hvørjar avleiðingar ætlað inntriv í funktiónsøkini hjá einum slagi hava fyri slagið. Hetta kann bera í sær, at greiða skal gerast fyri øðrum møguligum funktiónsøkjum, sum kunnu gera sítt til, at slagið verður varðveitt í samsvari við fyrisitingarmiðið í § 5. Við *funktiónsøkjum* meinast *vistfrøðilig funktiónsøkir*, sbr. allýsingina í § 3, nr. 17. Hvørjar greiningar o.a. um avleiðingarnar av ætlaðum inntrivum ið krevjast kunnu í slíkum økjum, veldst um ásetingarnar, sum heimila, at funktiónsøkið verður skipað.

Vanliga kann ikki við heimild í ella sambært aðrari lóggávu víkjast frá reglunum, sum ásettar eru í kunngerðini. Tó kann søkjast um undantak frá kunngerðini, um týðandi samfelagsatlit gera tað neyðugt, sbr. § 22, *stk. 5*. Í hesum liggja eisini trygdaratlit. Í teimum førum, har møguligt lógarósamsvar kann taka seg upp, eigur greiða at fáast á hesum í kunngerðararbeiðinum ella í sjálvari kunngerðini, t.d. í førum, har onkur í sambandi við lógliga fiskiveiðu eftir løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi eisini fær fisk, sum er eitt raðfest slag eftir náttúrumargfeldislógini. Tað má eisini ásetast í kunngerðini, hvør ið skal vera ábyrgur myndugleiki eftir kunngerðini.

Í *stk. 2, 1. pkt.*, er ásett, at kunngerðin kann áseta reglur um røktartiltøk í samsvari við § 44, tá ið tað krevst til at verja slagið. Ásetingin gevur myndugleikanum heimild til útinna røkt. Ásetingin gevur ikki heimild til at áleggja jarðareigaranum, rættindahavaranum ella øðrum at fremja ávísa røkt ella brúk av økinum. Hetta má vera eftir avtalu.

Í *2. pkt.* er beinleiðis ásett, at almennar studningsskipanir skulu styðja upp undir, at raðfest sløg verða vard. Almennar studningsskipanir fevna bæði um skipanir, sum positivt kunna gera sítt til at verja slagið, t.d. við røkt ella landslagsrøkt, og skipanir, sum í útgangsstøðinum tarna

møguleikan fyri, at slagnum verður lív lagað. Á orðingini *alt tað er gjørligt* skilst, at ásetingin er ein leiðregla og ikki ein skylduregla hjá myndugleikunum.

Í *stk. 3, 1. pkt.*, er ásett, at har sum virkin røkt ella onnur sløg av tiltøkum eru ein fyritreyt fyri at varðveita funktiónsøkið, skal landsstýrismaðurin leggja fram virkisætlan til at tryggja slík økir. Hugsanin er, at landsstýrismaðurin vanliga skal leggja fram uppkast til virkisætlan í seinasta lagi samstundis við raðfestingina. Undantikin hesum eru førir, har støðan krevur, at avgerð um raðfesting og skipan av vistfrøðiligum funktiónsøkjum verður tikin so skjótt sum gjørligt, uttan mun til um ein virkisætlanin er liðug.

*Onnur sløg av tiltøkum* sipar m.a. til fyrireiking, merking og endurreising. Peningurin skal í høvuðsheitum fara til virkin tiltøk.

Í teimum førum har virkisætlanir verða gjørdar, eiga tær at verða endurskoðaðar/eftirmettar fimm til tíggju ár eftir avgerðina um raðfesting.

Í samsvari við § 44 kunnu røktartiltøk fara fram á privatari jørð. Orðingin *alt tað er gjørligt* sipar til førir, har støðan krevur, at avgerð um raðfesting og skipan av vistfrøðiligum funktiónsøkjum verður tikin so skjótt sum gjørligt, uttan mun til um ein virkisætlan er liðug.

Er tað neyðugt at seta serstøk tiltøk ella røkt í verk í vistfrøðiligum funktiónsøkjum hjá einum slagi, skulu ávirkað eigara- ella vinnuáhugamál ella aðrir áhugaðir felagsskapir, tá ið tað er hóskandi, takast við, tá ið tiltøkini í virkisætlanini verða framd. Tá ið tilætlað røkt verður framd í verki, eigur myndugleikin fyrst og fremst at miða eftir at gera avtalu við jarðareigaran um at útinna røktartiltøk, sbr. *stk. 3, 2. pkt.* Avtala kann eisini gerast við áhugaðar felagsskapir ella onnur um at útinna røkt ella onnur neyðug tiltøk.

Samstundis við kunngerð eftir § 21 skal landsstýrismaðurin meta, um tað fyri at varðveita slagið og tess ílegumargfeldi er neyðugt at taka fleiri avgerðir um vistfrøðilig funktiónsøkir eftir náttúrumargfeldislógini ella øðrum lógum, sbr. § 22, *stk. 4*. Slík økir kunnu skipast sum verndarøkir eftir lógarkapitli 5, sum útvald náttúrusløg eftir lógarkapitli 6 ella við vernd eftir øðrum lógarverki. Skipanin av slíkum økjum skal fylgja málsviðgerðarreglunum fyri hesi verndarsløgini. Eisini rættarvirknaðurin skilst á tí viðkomandi regluverkinum.

Tað kann vera viðkomandi at skipa nýggj verndarøkir, serliga lívøkisverndarøkir, fyri at røkja atlitið at raðfestum sløgum, sbr. § 30, stk. 1, nr. 3. Vigingin millum almennar kunngerðir eftir § 22, stk. 1, nr. 2, og ítøkiliga avmarkað verndarøkir eftir lógarkapitli 5 eigur m.a. at hava støði í, um eitt vistfrøðiligt funktiónsøki er lætt at avmarka, hvussu stórt funktiónsøkið er, hvørji tiltøk ið kunnu hava negativa ávirkan á funktiónsøkini og avmarkingarstigið fyri hesi.

Eftir *stk. 5* kann undantak gerast frá § 21, um tað ikki ger standin ella gongdina hjá stovninum verri, ella um týðandi samfelagsatlit gera tað neyðugt.

**Til § 23.**
Ásetingin gevur fyrst og fremst kunngerðarheimild til at áseta reglur um innflutning og útflutning av deyðum ella livandi eintøkum av sløgum, sum natúrliga liva vill, ella pørtum av slíkum, á landi, í áum, vøtnum, ósum og løkum og í sjónum. Slíkar kunngerðir kunnu ásetast fyri at varðveita dýra- og plantusløg, sum natúrliga liva vill, ella fyri at halda altjóða skyldur.

Føroyar eru fevndar av tí danska limaskapinum í Heimshandilsfelagsskapinum WTO, og tað ber í sær, at altjóða avtalur, sum gjørdar eru í WTO, eisini fevna um Føroyar. Handilsregluverkið undir

WTO kann seta avmarkingar fyri, hvørji tiltøk ið setast kunnu í verk við atliti at handli við hóttum dýra- og plantusløgum.

Orðini *flutningur* og *varðveitsla ella ognarhald* bera í sær, at tað við heimild í hesi ásetingini eisini kunnu ásetast reglur um innlendskan handil og um landing av fiski og øðrum sløgum úr havinum. Ásetingin gevur ikki heimild til at gera reglur fyri eitt slag við tí grundgeving, at tað kann troka eitt slag í Føroyum av. Hetta er fevnt av lógarkapitli 5 um fremmandar lívverur.

**Til § 24.**
Ásetingin hevur støði í grein 9 í sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi.

*Stk. 1* áleggur myndugleikunum eina skyldu eftir náttúrumargfeldislógini at meta, um varðveitslutiltøk skulu setast í verk uttan um búøkið (sokallað *ex situ*-varðveitslutiltøk), um eitt slag á landi er í vanda fyri at verða avoytt. Treytin er, at tiltakið kann betra um møguleikarnar fyri, at slagnum verður lív lagað í náttúruni. Havandi endamálið við lógini í § 1 og fyrisitingarmiðið fyri vill sløg í § 5, stk. 1, í huga má miðast eftir, at slagnum verður lív lagað í náttúruni í longdini. Orðingin *skal landsstýrismaðurin meta* má skiljast soleiðis, at gerast má ein viging av sannlíkindunum fyri, at tiltakið ger sítt til, at slagnum verður lív lagað í Føroyum, hvørja ábyrgd Føroyar hava av at tryggja, at slagnum verður lív lagað í Føroyum og á heimsstigi, týdninginum, sum slagið hevur í vistskipanini, í hvønn mun slagið kann hugsast at hava vinnuligan ella annan nyttuligan týdning umframt kostnaðinum av at seta tiltakið í verk.

Tiltøkini eftir hesi ásetingini koma aftur at avgerðum um raðfesting eftir § 21. Ásetingin ber t.d. í sær eina skyldu at røkja slagið í sjálvum sær. Ásetingin ber ikki í sær eina skyldu til at røkja stovnar ella ættir av einum slag, t.d. ein ílegubanka fyri laks fyri at røkja tær ymisku stammurnar ella stovnarar av einum slag. Aftur at ásetingini kemur eisini lógarkapittul 5 um økisvernd, sum heimilar møguleikan fyri at verja økir til frama fyri ávísar stovnar. Eisini kunnu ymisk støð, har ávís sløg finnast, verjast fyri at varða um ílegubrigdir.

*Stk. 2* gevur heimild til at seta í verk serlig varðveitslutiltøk fyri tamd og vand sløg. Ásetingin er partur av lógargreinini um varðveitslutiltøk uttan um búøkið, av tí at tamd og vand sløg vanliga eru at finna uttan fyri sítt veruliga, t.e. upprunaliga, búøki. Tað merkir ikki, at varðveitslutiltøkini bara kunnu snúgva seg um varðveitslu í ílegubanka sum fræ ella í royndarglasi (*in vitro*). Eisini onnur søvn kunnu vera viðkomandi, t.d. viðarlundir ella á garðinum. Ein møgulig kunngerð kundi snúð seg um ítøkiligar skyldur ella forboð ella vegleitt um studningsveiting. Við tilvísingini til § 5, stk. 3, verður heimildin avmarkað til tiltøk, sum kunnu gera sítt til at tryggja tilfeingisgrundarlagið fyri framtíðina.

Tiltøk eftir stk. 2 skulu vera í samsvari við reglur í ella við heimild í løgtingslóg um djóravælferð. Eisini kunnu kunngerðir við heimild í løgtingslóg um djóravælferð áseta reglur fyri dýravælferð í sambandi við tiltøk eftir § 24, stk. 2.

**Til § 25**
Ásetingin ásetur, hvørji krøv til varsemisskyldu skulu galda, tá ið lívverur verða settar út í umhvørvið, og fyri virksemi, sum hevur við sær, at lívverur spjaðast ella sleppa út í økir, har tær ikki finnast natúrliga. Skyldan geldur fyri privat, bæði einstaklingar og virkir, og fyri tað almenna, eisini almennar fyritøkur. Verður varsemisskyldan ikki hildin, kann tað m.a. hava endurgjald við sær.

*Stk. 1* geldur fyri tilætlaða útseting av lívverum í umhvørvið. Ásetingin fevnir bæði um útseting av lívverum, sum ikki finnast í Føroyum frammanundan, og lívverum, sum fluttar verða úr øðrum øki í Føroyum.

Stk. 1, *1. pkt.*, ásetur, at tann, sum hevur ábyrgdina av útsetingini, skal fara fram við varsemi og, alt tað er gjørligt, royna at forða fyri, at útsetingin fær óhepnar avleiðingar fyri tað lívfrøðiliga margfeldið, t.d. at tann fremmanda lívveran trokar staðføst sløg av ella etur tey.

Orðingin *tann, sum hevur ábyrgdina* fevnir bæði um tann, sum í roynd og veru setur út, og t.d. tann, sum eigur virkið, sum fæst við útseting. Eftir umstøðunum kunnu eisini onnur, sum skipa soleiðis fyri, at útseting kann fara fram, ábyrgjast. Tað avgerandi er, hvør ið hevur tað næsta tilknýtið til at hava ábyrgdina av, at lívverurnar verða útsettar, og til at seta tiltøk í verk. Eitt, sum er týdningarmikið í hesum sambandi, er tí, hvør ið hevur bestan møguleika at stýra lívverunum og forða fyri skaða.

Við *at seta út* meinast eisini tilætlað at lata lívverur sleppa út, eisini at sleppa barlastarvatni úr skipum og at tveita lívverur sum burturkast í umhvørvið ella í eina girðing ella aðra afturlatna skipan, har eingin vissa er fyri, at tær ikki sleppa út, sbr. § 3, nr. 15. Tað kann vera ilt at taka dagar ímillum í hvørjum einstøkum føri, hvat ið er at rokna sum ein afturlatin skipan. Tey nærru mørkini mugu setast eftir eini ítøkiligari meting. Urtagarðshyljar eru eitt dømi um eina skipan, har eingin vissa er fyri, at lívverur ikki sleppa út.

Skyldan at fara fram við varsemi fevnir í fyrra lagi um eina skyldu at gera seg kunnigan við umhvørvisváðan, sum altíð er til staðar, tá ið fremmandar lívverur verða útsettar, og meira ítøkiliga váðan, sum stendst av, at júst tann lívveran, sum talan er um, verður útsett, í tann mun slíkur kunnleiki er alment atkomandi. Kunnleikin um umhvørvisváðan er ein fyritreyt fyri munadyggum varsemi, tí tað er ómøguligt at hava tilvitað fyrilit fyri umhvørvisváða, sum ein ongan kunnleika hevur um. Tað kunnu ikki setast tí einstaka ov strong krøv um, hvat ið hann skal kunna ogna sær av kunnleika um umhvørvisváða í sambandi við útseting av fremmandum lívverum. Í hesum sambandi hava myndugleikarnir eina týðandi uppgávu at kunna almenningin. Tá ið myndugleikarnir bera so í bandi, at kunning um skaðiligar fremmandar lívverur verður lættliga atkomandi, eigur tað at kunna væntast av teimum, sum fáast við útseting, at tey kunna seg um slíka kunning. Tað ber í sær, at tá ið lítil vegleiðing finst um, hvussu útsetingin kann ávirka náttúrumargfeldið, skal meira til, fyri at tann einstaki kann lastast, enn um slík kunning hevði verið tøk og atkomandi. Finst vegleiðing frá myndugleikunum, og verður farið fram í samsvari við hesa, má varsemisskyldan vanliga sigast at vera hildin. Gevur tann tøka og atkomandi kunningin orsøk at halda, at útsetingin fer at hava óhepnar avleiðingar fyri lívfrøðiligt margfeldi, og velur onkur at seta út kortini, liggur tað nær at meta, at viðkomandi ikki er farin fram við varsemi.

Hin liðurin í varsemiskravinum er, at tann, sum hevur ábyrgdina av útsetingini, alt tað er gjørligt, skal royna at forða fyri óhepnum avleiðingum fyri tað lívfrøðiliga margfeldið. Í hesum liggur sum fyritreyt, at tiltøk eru sett í verk, tá ið vandi er fyri óhepnum avleiðingum fyri lívfrøðiligt margfeldi. Hvussu umfatandi slík tiltøk skulu vera, má í høvuðsheitum metast í mun til, hvussu stórur møguleikin fyri skaða er í sambandi við útseting, og í nakað minni mun, hvønn møguleika tann, sum hevur ábyrgdina, í veruleikanum hevur at fremja slík tiltøk. Harumframt má dentur leggjast á, hvussu kunnandi og atkomandi kunning, myndugleikarnir hava givið um aktuell tiltøk.

*Stk. 1, 2. pkt.*, snýr seg um týdningin, sum loyvið hevur fyri varsemisskylduna. Varsemisskyldan hevur størstan týdning í sambandi við útseting, sum ikki krevur loyvi. Í slíkum førum geldur varsemisskyldan á vanligan hátt. Men í teimum førum, har myndugleikin hevur givið loyvi at seta út, má tann, sum hevur ábyrgdina, kunna vænta, at varsemisskyldan er lokin, um hann hevur hildið

fyritreytirnar fyri og innihaldið í loyvinum. Í hesum liggur bæði tað, at fyritreytirnar, sum loyvi byggir á, t.d. um, hvørji skaðaárin útsetingin varð mett at kunna verða atvold til, framvegis eru til staðar, og at útsetingin fer fram samsvarandi innihaldinum í loyvinum. Broytast fyritreytirnar fyri loyvinum, t.d. við at útsetingin vísir seg at elva til størri skaðaárin enn mett, geldur varsemisskyldan sum annars. Ein slík støða kann t.d. taka seg upp, tá ið lívverur, sum loyvi varð givið at seta út grundað á ta meting, at tær ikki fóru at fáa fótin fyri seg og spjaðast í umhvørvinum, kortini vísa seg at gera júst hetta. Í slíkum førum áleggur varsemisskyldan tí, sum hevur ábyrgdina, at royna at avmarka skaðaárini so væl sum gjørligt.

*Stk. 2* snýr seg virksemi, har tað, at lívverur spjaðast ella sleppa út, kann vera eitt møguligt hjáárin av virkseminum, sokallað ótilætlað spjaðing ella útslepping. Ásetingin áleggur tí, sum setur í verk virksemi ella tiltak, sum kann hava við sær, at lívverur spjaðast ella sleppa út, hagar tær ikki finnast natúrliga, í rímiligan mun at taka stig til at forða fyri hesum. Sum dømir um virksemi, sum er fevnt av ásetingini, kunnu nevnast flyting av moldrúgvum og urtagarðs- og gróðurstøðarvirksemi. Eisini brúgva- og brimgarðabygging o.a.., sum gevur ávísum sløgum atgongd til støð, har ið tey ikki finnast natúrliga, t.d. aðrar oyggjar, er fevnt av ásetingini.

Atlitið at tí, sum rímiligt er, ber í sær, at krøvini til trygdartiltøk skulu vera í røttum lutfalli við hóttanina. Hvat ið er rímiligt, veldst serliga um, hvat slag av virksemi talan er um, hvussu væl grundað nyttuendamál virksemið hevur, hvussu umfatandi virksemið er, hvussu stórur skaðaváði ið er knýttur at virkseminum, og hvussu kostnaðarmikið tað er at forða fyri ella minka um vandan fyri, at lívverur sløðast inn. Harafturat má dentur leggjast á, hvussu góða og atkomandi kunning myndugleikarnir hava givið. Finst kunngerð, leiðreglur ella vegleiðing frá myndugleikunum um, hvussu minkast kann um vandan fyri, at fremmandar lívverur frá virksemi ella einum tiltaki sleppa út ella spjaðast, og fer onkur fram samsvarandi hesum, má viðkomandi kunna líta á, at varsemisskyldan er hildin.

Í døminum við brúgva- ella brimgarðabygging kann eitt viðkomandi tiltak vera girðingar ella aðrar forðingar, sum avmarka atgongdina hjá fremmandum lívverum. Fyri vakstrarhús og gróðurstøðir kunnu viðkomandi tiltøk m.a. vera javnt eftirlit við gróðri í økinum kring støðina fyri so tíðliga sum gjørligt at varnast og taka burtur møguligar innsløddar lívverur, sum eru í ferð við at fóta sær. Geldur krav um loyvi til tiltakið, sum talan er um, eigur atlitið at forða fyri, at fremmandar lívverur spjaðast ella sleppa út, vanliga at vera ein partur av metingini hjá myndugleikanum, sum viðgerð loyvisumsóknina. Verður loyvi givið, kunnu treytir leggjast við fyri at forða fyri spjaðing ella minka um spjaðingarvandan. Ábyrgdin hjá tí einstaka eftir stk. 2 fær í slíkum føri minni sjálvstøðugt innihald, men fellur ikki heilt burtur.

Fyritøkur, sum selja ella fáa í lag sølu av fremmandum lívverum, t.d. dýrahandlar, vakstrarhús og gróðurstøðir, er fevndar av stk. 2. Umframt at galda viðvíkjandi spjaðing ella útslepping beinleiðis frá fyritøkuni ber kravið í sær eina skyldu fyri slíkar fyritøkur til at gera sítt til, at fyritøkan ikki óbeinleiðis fremur slíka spjaðing ella útslepping, við tað at kundar seta lívverurnar út í umhvørvið í ósamsvari við galdandi regluverk. T.d. eiga dýrahandlar at gera sínum kundum greitt, at tað er forboðið at seta fremmand kelidýr og akvariumfiskar og -plantur út í náttúruna.

Orðingin *skal í rímiligan mun taka stig til at forða fyri, at tað hendir* í náttúrumargfeldislógini § 25, stk. 2, ber, alt eftir spjaðingarvandanum og hvussu stóran skaða lívverurnar kunnu gera, í sær eina skyldu fyri fyritøkur til virkið at gera kunning um galdandi regluverk fyri útseting av lívverum atkomandi, t.d. við vørumerking, uppsløgum ella prentaðum tilfari í handlum. Tá ið talan er um plantur, fevnir orðingin eisini um eina skyldu til at kunna kundar um møguligan vanda fyri, at planturnar *kunnu væntast at breiða seg út um økið*, sbr. § 28, stk. 1, nr. 3.

*Stk. 3* ásetur eina skyldu fyri tann, sum hevur ábyrgdina, til beinanvegin at boða landsstýrismanninum frá, um *skaði á lívfrøðiligt margfeldi ella vandi fyri álvarsligum skaða á lívfrøðiligt margfeldi kemur fyri* orsakað av útseting, ella tí at fremmandar lívverur ótilætlað sleppa út. Sum dømir um støður, sum hava fráboðanarskyldu við sær, kunnu nevnast, at ein urtagarðseigari varnast, at ein planta hevur breitt seg út um urtagarðin og gjørt stovnar í økjum, sum liggja uppat, at lívverur sleppa út úr aliringum, búrum ella girðingum og útlát í sambandi við óhapp av vatni ella mold, sum kann væntast at hava í sær lívverur, sum kunnu valda skaða. Fráboðanarskyldan geldur, uttan mun til um talan er um ólógliga ella lógliga útseting. Tað, sum er avgerandi, er, um útsetingin hevur umhvørvisskaða ella vanda fyri álvarsligum umhvørvisskaða við sær. At enda vísir stk. 3 til viðkomandi ásetingar í lógarkapitli 9 (handhevjan og tvingsilstiltøk). Tilvísingin veksur ikki um skyldurnar hjá tí, sum varðar av virkseminum. Geldur fráboðanarskylda eftir øðrum lógarverki, geldur fráboðanarskyldan í stk. 3 ikki.

*Stk. 4* gevur landsstýrismanninum kunngerðarheimild at áseta reglur um krøv til nærri tilskilað sløg av virksemi ella tiltøkum, sum kunnu hava við sær vanda fyri, at lívverur spjaðast, ella at lívverur, sum ikki finnast natúrliga á staðnum, ótilætlað sleppa út, eisini um kunningarskyldu við atliti at spjaðingarvanda og skaða, sum ávís sløg av fremmandum lívverum kunnu gera. Reglur kunnu eisini ásetast um fráboðanarskylduna eftir stk. 3. Hóast ásetingin er at finna í lógargreinini um varsemiskrøv, er kunngerðarheimildin ikki avmarkað til tað, sum er at rokna sum varsom framferð. Saman við stk. 2 er henda heimildin eitt týðandi amboð til at fyribyrgja, at fremmandar lívverur ótilætlað sleppa út.

**Til § 26.**
*Stk. 1, 1. pkt.*, staðfestir útgangsstøðið, at loyvi krevst til at flyta lívverur inn í landið. Ásetingin skilur ikki ímillum sløg, sum finnast natúrliga í Føroyum, og sløg, sum ikki gera tað. Ásetingin fevnir ikki um deyð ella ikki-lívfør eintøk, sbr. allýsingina av lívveru í § 3, nr. 7, og orðaljóðið í § 26, stk. 1.

*Stk. 2, 2. pkt.*, staðfestir sum undantak til 1. pkt., at einki loyvi krevst eftir náttúrumargfeldislógini at flyta inn fremmand dýr, sum eru fevnd av ásetingum í ella reglum ásettum við heimild í løgtingslóg um innflutning og hald av vandamiklum dýrum o.ø. Innflutningur av sonevndum *eksotiskum dýrum* er sambært reglum ásettum við heimild í løgtingslóg um innflutning og hald av fremmandum dýrum í útgangsstøðinum forboðin. Eksotisk dýr fevna sambært hesum reglunum um súgdýr *(Mammalia)*, fugl *(Aves)*, skriðdýr *(Reptilia)*, paddur *(Amphibia)*, fisk *(Chondrichthyes og Osteichthyes) og* ryggleys dýr *(Invertebrata), sum ikki natúrliga hoyra heima í føroysku náttúruni*. Heilsufrøðiliga starvsstovan, sum umsitur lóggávuna, kann bara geva undantaksloyvi, tá ið talan er um eksotisk dýr, sum ikki kunnu verða m.a. føroyskum gróðri og føroyskum dýralívi at skaða, um tey verða slept leys í náttúruni. Av tí at tað eftir galdandi skipan er venja fyri strangari fyrisiting við atliti at innflutningi av fremmandum sløgum, verður mett, at atlitini at tí lívfrøðiliga margfeldinum eru so væl vard, at tað ikki er neyðugt at krevja loyvi eftir náttúrumargfeldislógini eisini.

*Stk. 2, 1. pkt.*, snýr seg um tey førini, har loyvi krevst til innflutning eftir stk. 1, og har endamálið við innflutninginum er at seta út í umhvørvið. Í slíkum førum er tað krav, at umsóknin um loyvi ger greiðu fyri, hvørji árin útsetingin kann hava á tað lívfrøðiliga margfeldið. Í tí sambandi verður ikki skilt ímillum útsetingar, sum loyvi krevst til eftir § 27, og útsetingar, sum kunnu fremjast uttan loyvi, sbr. § 28, men hetta kann fáa týdning fyri, hvussu stór skyldan at gera greiðu fyri árinum verður. Hvat ið krevst av slíkum metingum við atliti at árinum, veldst um tann væntaða vandan fyri spjaðing. Atlit at møguligum heilsuavleiðingum av útsetingini eru fevnd av aðrari lóggávu. Hugtakið *útseting* verður allýst í § 3, nr. 15, og umrøtt í viðmerkingunum til § 25 omanfyri.

Eftir *2. pkt.* kann landsstýrismaðurin leggja treytir við loyvinum. Treytirnar skulu fremja endamálið við loyvisskipanini ella kunna forða fyri skaðiligum avleiðingum, sum loyvi kann hugsast at fáa. Sakligur samanhangur skal vera millum loyvið og treytirnar, og treytirnar skulu ikki vera órímiliga tyngjandi.

*Stk. 3* í ásetingini setur mørk fyri metingini hjá fyrisitingini í sambandi við avgerðir um at geva loyvi eftir stk. 1 ella ikki. Loyvi kann ikki gevast, um orsøk er at halda, at innflutningurin fer at hava *munandi óhepnar avleiðingar* við sær fyri tað lívfrøðiliga margfeldið. Metingartemað verður ymiskt, alt eftir um endamálið við innflutninginum eisini er útseting, sbr. stk. 2, ella um talan er um innflutning til afturlatið brúk. Hevur tann, sum flytur inn, ongar ætlanir um at seta út í náttúruna, eru tað fyrst og fremst spurningar um sannlíkindini fyri broyttum brúki ella vandan fyri, at líverurnar sleppa út, og hvørjar avleiðingar hetta fær, sum eru viðkomandi. Er endamálið við innflutninginum at seta út í náttúruna, má spurningurin vera, um *orsøk er at halda*, at tann komandi útsetingin fer at hava *munandi óhepnar avleiðingar* við sær fyri tað lívfrøðiliga margfeldið, sbr. viðmerkingarnar til § 27, stk. 3. Eftir meginregluni um fyrivarni skulu ikki ov strong skjalfestingarkrøv setast, tá ið hugtakið *orsøk at halda* verður tulkað. Sí annars viðmerkingarnar til § 27, stk. 3.

*Stk. 4, 1. pkt.*, gevur landsstýrismanninum heimild at áseta reglur um innflutning eftir stk. 1, eisini um krøv til umsókn og treytir fyri loyvinum. Eftir *2. pkt.* kann landsstýrismaðurin eisini áseta, at ávísar lívverur ella bólkar av lívverum skulu kunnu flytast inn uttan loyvi eftir náttúrumargfeldislógini, og í tí sambandi kann fráboðan krevjast. Eftir *3. pkt.* kann landsstýrismaðurin harafturat áseta forboð fyri at flyta ávísar lívverur inn, um tað verður mett at vera neyðugt fyri at sleppa undan munandi negativum avleiðingum fyri tað lívfrøðiliga margfeldið. Heimildin í 2. pkt. at loyva innflutningi uttan loyvi kann t.d. vera viðkomandi, tá ið tað av royndum er greitt, at eitt slag onga negativa ávirkan hevur á tað lívfrøðiliga margfeldið. Talan kann t.d. vera um at áseta ein hvítalista við plantum, sum kunnu flytast inn uttan loyvi. Heimildin kann eisini vera viðkomandi í sambandi við innflutning av ávísum sløgum til gransking á starvsstovum ella í øðrum afturlatnum skipanum. Heimildin kann eisini brúkast til undantøk at føra sløg í land í sambandi við fiskiskap, sbr. § 3, nr. 4. Ásetingin má skiljast soleiðis, at reglurnar eisini kunnu vísa til endamálið við innflutninginum, so leingi talan er um ávís sløg.

Heimildin í 3. pkt. at áseta forboð fyri at flyta ávísar lívverur inn kann vera viðkomandi, tá ið talan er um lívverur, har nøktandi vitan er tøk til at kunna staðfesta, at innflutningur kann bera í sær váða fyri mun
andi óhepnum avleiðingum fyri tað lívfrøðiliga margfeldið, sum ikki kunnu góðtakast. Talan kann t.d. vera um at áseta ein svartalista við plantum, sum loyvi ikki kann gevast til at flyta inn.

Í sambandi við meting eftir stk. 1 og 4, eigur dentur at leggjast á at sleppa undan óneyðugum handilsforðingum. M.a. má fyrilit havast við krøvum sambært tí altjóða handilsregluverkinum undir WTO, sbr. eisini viðmerkingarnar til § 23. Atlitið at handilsforðingum hevur serliga týdning, tá ið kunngerðarheimildirnar eftir stk. 4 verða brúktar. Tá ið mett verður, hvussu heimildirnar skulu brúkast, má hóttanin, sum tann fremmanda lívveran ber í sær, vigast upp ímóti atlitunum, sum tala fyri altjóða handli við sløgunum, umframt hvørji tiltøk ið setast kunnu í verk fyri at sleppa undan óhepnum avleiðingum fyri tað lívfrøðiliga margfeldið. Í hesum sambandi má útgangsstøðið vera teir altjóða standardarnir, sum gjørdir eru fyri sløgini, talan er um.

**Til § 27.**
*Stk. 1* ásetur, í hvørjum førum loyvi krevst til at seta út í ta føroysku náttúruna. Víst verður til, at loyvi krevst ikki, um eitt av undantøkunum í § 28 geldur. Hugtakið *seta út* má skiljast á sama hátt sum *útseting*, sbr. § 3, nr. 15, og viðmerkingarnar til § 25, stk. 1. Eitt loyvi til útseting geldur fyri

lívveruna, sum søkt er um loyvi til at seta út, á staðnum, har ið søkt er um loyvi til at seta hana út. Aling av lívveruni á staðnum, har søkt er um at seta hana út, krevur tí ikki nýtt loyvi.

Kravið um loyvi til útseting fevnir ikki um útlát hjá skipum av barlastarvatni. Hetta tí at útseting, sum hendir sum ein ótilætlað avleiðing av virksemi, ikki er fevnd av § 27. Slíkt virksemi er fevnt av varsemisskylduni eftir § 25 og møguliga reglum ásettum við heimild í § 25, stk. 4, og/ella øðrum lógarverki.

Eftir *stk. 1, nr. 1,* krevst loyvi til at seta út í náttúruna lívverur av sløgum og undirsløgum, sum ikki finnast natúrliga í Føroyum. Útseting av lívverum av sløgum, sum finnast natúrliga í Føroyum, krevur ikki loyvi eftir hesum møguleikanum. Hvørt sløg, sum í síni tíð eru innflutt til Føroya, kunnu roknast sum *natúrlig*, veldst m.a. um, hvussu langt síðan tað er, at innflutningurin fór fram, og í hvønn mun slagið ella stovnurin kann væntast at hava óhepnar avleiðingar fyri annað lívfrøðiligt margfeldi.

*Stk. 1, nr. 2,* ásetur krav um loyvi til at seta út vill súgdýr og fugl av sløgum, undirsløgum ella stovnum, sum ikki frammanundan finnast natúrliga í einum øki. Við orðingini *sum ikki frammanundan finnast natúrliga í einum øki* meinast bæði sløg, undirsløg og stovnar, sum ikki frammanundan finnast í økinum, og sløg, undirsløg og stovnar, sum bara finnast í økinum, tí tey einaferð eru sett út har. Hugtakið *øki* fevnir eisini um minni økir, sum eru natúrliga avmarkað frá umhvørvinum uttanum, t.d. oyggjar.

Eftir *stk. 1, nr. 3,* krevst loyvi til at seta lívverur út á sjógv, í áir, á vøtn, í ósar, í løkir og í manngjørdar hyljar. Skilt verður ikki ímillum villar og tamdar ella vandar lívverur. Kravið um loyvi eftir náttúrumargfeldislógini geldur ikki fyri lívverur av staðfastari stammu. Í tí liggur, at lívveran, sum útsett verður, skal hava sín uppruna í tí staðbundna stovninum í útsetingarøkinum. Tað landafrøðiliga økið, sum sigast kann at hýsa somu stammu, kann vera ymiskt til støddar, alt eftir hvørja lívveru talan er um. Undantakið ber eisini í sær, at loyvi ikki krevst eftir náttúrumargfeldislógini til kynbótarvirksemi, tá ið talan er um lívverur av staðfastari stammu. Á síðsta parti av nr. 3 skilst, at loyvi ikki krevst eftir náttúrumargfeldislógini til at seta út, um loyvi er givið eftir løgtingslóg um aling av fiski v.m.

Eftir *stk. 2, 1. pkt.* fær landsstýrismaðurin heimild til at áseta reglur um krøv um loyvi til at seta út lívverur, sum ikki frammanundan finnast natúrliga á staðnum. Ásetingin viðvíkur lívverum, sum ikki eru fevndar av krøvunum um loyvi í nr. 1 til 3. Við orðingini *á staðnum* verður sipað til staðið, har útsetingin fer fram. Talan er um eitt munandi smalri hugtak enn *øki* í nr. 2. Hvussu stórt ummál, ið takast skal við, má metast ítøkiliga og veldst m.a. um, í hvørjum øki lívverurnar væntast at spjaðast.

Eftir *2. pkt.* fær landsstýrismaðurin í fyrra lagi heimild til at áseta forboð fyri at seta lívverur út. Í seinna lagi fær landsstýrismaðurin heimild til at áseta forboð fyri at selja lívverur, sum forboð er sett fyri at seta út. Landsstýrismaðurin ger í hvørjum føri av, um lívverurnar, sum forboð verður sett fyri at seta út, heldur ikki skulu kunna seljast.

Tað er ein treyt, at forboð fyri bæði útseting og sølu verður mett at vera neyðugt, fyri at sleppast kann undan munandi óhepnum avleiðingum fyri tað lívfrøðiliga margfeldið. Forboð skulu byggja á dygt vísindaligt vitanargrundarlag. Tað er ikki neyðugt, at vandi er fyri munandi óhepnum avleiðingum fyri tað lívfrøðiliga margfeldið um alt landið.

Eftir *stk. 3, 1. pkt.*, verður krav sett um, at umsókn um loyvi at seta út eftir stk. 1 og eftir kunngerð við heimild í stk. 2, 1. pkt., skal gera greiðu fyri árinunum, sum útsetingin kann hava á tað lívfrøðiliga margfeldið. Vitanin, sum krevjast kann, eigur í høvuðsheitum at byggja á vísindaliga vitan. Samstundis kann vitan, sum kemur fram við frágreiðingum, og vitan av royndum brúkast. Vitanin, sum brúkt verður, skal vera atkomandi og í mestan mun dagførd, men kann eisini fevna um nýggja vitan, sum møguliga má fáast til vega. Hetta verður tó avmarkað av, hvat ið tað er rímiligt at biðja um, í mun til hvussu stórt tiltakið er, hvønn skaða tað kann gera og kendar avleiðingar av tí. Tað ber í sær, at tá ið dygg vitan er tøk um árin, sum slagið, sum søkt verður um loyvi til at seta út, hevur á tað lívfrøðiliga margfeldið, verða serlig krøv ikki sett til skjalfesting. Øðrvísi er, tá ið søkt verður um at seta eitt nýtt slag út, og vitan tí ikki er tøk um avleiðingarnar fyri tað lívfrøðiliga margfeldið. Men eisini í slíkum førum skal skjalfestingin, sum kravd verður, síggjast í mun til útreiðslurnar, málið, og hvussu stóran skaða talan kann gerast um. Hvat ið krevst, veldst um, hvussu lívveran væntast at fara at spjaðast.

Eftir *2. pkt.* kann landsstýrismaðurin leggja treytir við einum loyvi til at seta út eftir stk. 1 og eftir kunngerð við heimild í stk. 2, 1. pkt., t.d. um brúk av geldum ella staðføstum lívverum ella um serlig trygdartiltøk til at forða fyri, at lívverur sleppa út úr eini girðing.

*3. pkt.* setur eitt absolutt mark fyri meting hjá fyrisitingini. Er talan um munandi óhepnar avleiðingar fyri tað lívfrøðiliga margfeldið, geldur markið, hóast talan ikki er um sannlíkindayvirvág fyri, at avleiðingarnar gerast veruleiki, sbr. *orsøk er at halda*. Í sambandi við meting má fyrisitingin við at brúka meginregluna um fyrivarni skynsamt hava fyrilit fyri møguligum vitanartroti viðvíkjandi avleiðingunum fyri tað lívfrøðiliga margfeldið.

Eftir *4. pkt.* kann loyvi ikki gevast til útseting í ósamsvari við forboð ásett við heimild í løgtingslóg um innflutning og hald av vandamiklum dýrum § 1, stk. 1. Sambært kunngerð nr. 14 frá 7 apríl 2014 um innflutning av eksotiskum dýrum § 3, stk. 2, er tað forboðið at sleppa *eksotiskum dýrum* leysum í tí føroysku náttúruni. Eksotisk dýr fevna sambært somu kunngerð um *súgdýr (Mammalia), fuglar (Aves), skriðdýr (Reptilia), paddur (Amphibia), fiskar (Chondrichthyes og Osteichthyes) og ryggleys dýr (Invertebrata), sum ikki natúrliga hoyra heima í føroysku náttúruni*. Kunngerðin heimilar ikki undantøk frá forboðnum í § 3, stk. 2.

Eftir *5. pkt.* kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta krøv til umsókn um loyvi til at seta út sambært stk. 1 og sambært kunngerð við heimild í stk. 2, 1. pkt.

**Til § 28.**
Ásetingin skal síggjast í samanhangi við hinar ásetingarnar um fremmandar lívverur.

*Stk. 1* ásetur undantøk frá kravinum um loyvi til ávísar útsetingar, um varsemisskyldan eftir § 25 verður hildin.

Eftir *nr. 1* eru lívverur, sum innfluttar eru við loyvi eftir § 26, stk. 1, sbr. stk. 2, við útseting í hyggju undantiknar kravinum um loyvi til útseting. Í sambandi við innflutningin er mett um avleiðingarnar av at seta slíkar lívverur út, og tí krevst ikki nýggj viðgerð.

Eftir *nr. 2* eru plantur, sum settar verða út í privatar urtagarðar, undantiknar kravinum um loyvi til útseting. Ásetingin ber í sær, at einstaklingum, sum seta plantur út í privatan urtagarð, ikki nýtist at meta um, um plantan fer at spjaðast. Hugtakið *privatur urtagarður* fevnir um urtagarðar í avmarkaðari støðd, sum gjørdir eru í sambandi við privatan bústað, frítíðarhús o.a.t. Hugtakið *privatur urtagarður* skal bara fevna um økir, har ið tað eru einstaklingar, sum seta út, og ikki professionell, t.d. landslagsarkitektar, garðyrkisfólk og onnur, sum orsakað av sínum yrki hava

serligan førleika á økinum. Standa professionell fyri útsetingini, skal urtagarðurin við atliti at tí ítøkiligu útsetingini roknast sum grasagarður og vera fevndur av undantakinum í § 28, nr. 3, og ikki nr. 2. Er ivi, um eitt øki er at rokna sum privatur urtagarður ella grasagarður, skal økið roknast sum grasagarður eftir ásetingini í § 28, stk. 1, nr. 3.

Ásetingin broytir einki í mun til varsemisskylduna í § 25, sum eisini geldur fyri privatar urtagarðseigarar. Hinvegin gongur eitt forboð í kunngerð eftir § 27, stk. 2, fyri at seta ávísar lívverur út fram um undantakið eftir stk. 1, nr. 2, sbr. § 28, stk. 3.

Undantakið í stk. 1, nr. 2, geldur bara fyri útseting av landplantum í privatar urtagarðar. Tað geldur ikki fyri útseting av vatnplantum á sjógv ella í áir, vøtn, ósar og løkir, heldur ikki manngjørdar hyljar, sbr. § 27, stk. 1, nr. 2.

Eftir *nr. 3* eru plantur, sum settar verða út í almennar grasagarðar (*parkanlegg*) og onnur velt økir, undantiknar kravinum um loyvi til útseting, um tær í lítlan mun kunnu væntast at breiða seg út um økið, og spjaðingin ikki kann væntast at hava óhepnar avleiðingar við sær fyri tað lívfrøðiliga margfeldið. Við treytini *um planturnar í lítlan mun kunnu væntast at breiða seg út um økið* meinast, at tað ikki er eitt ósvitaligt krav, at planturnar ikki kunnu væntast at breiða seg. Ein sera avmarkað spjaðing, bæði við atliti at tali á plantum og fjarstøðu frá útsetingarøkinum, lýkur treytina. Treytin *og spjaðingin ikki kann væntast at hava óhepnar avleiðingar við sær fyri tað lívfrøðiliga margfeldið* skal tulkast strangliga, og spjaðingin skal ikki kunna væntast at hava óhepnar avleiðingar við sær fyri tað lívfrøðiliga margfeldið. Fyri at loyvi ikki skal krevjast krevst, bæði at treytin um avmarkaða spjaðing er lokin, og at væntaður váði ikki er fyri óhepnum avleiðingum fyri tað lívfrøðiliga margfeldið.

Eftir *stk. 2, 1. pkt.*, kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta, at nærri tilskilaðar lívverur ella bólkar av lívverum kunnu setast út uttan serligt loyvi, um útsetingin ikki kann væntast at hava óhepnar avleiðingar við sær fyri tað lívfrøðiliga margfeldið. Við heimildini kunnu møguligir hvítulistar ásetast í kunngerð, t.e. listar við nærri tilskilaðum lívverum ella bólkum av lívverum, sum myndugleikarnir frammanundan hava góðkent til útseting. Hóast tað ikki skilst beinleiðis á kunngerðarheimildini, er tað ein fyritreyt fyri einum hvítalista, at myndugleikarnir hava dyggan kunnleika um, hvørjar møguligar avleiðingar ið standast kunnu av, at lívverurnar ella bólkarnir av lívverum, sum talan um, verða útsett. Útgangsstøðið er, at bara lívverur ella bólkar av lívverum, sum við stórari vissu kunnu sigast ikki hava óhepnar avleiðingar við sær fyri tað lívfrøðiliga margfeldið, kunnu setast á ein slíkan lista. Sí eisini viðmerkingarnar til § 26, stk. 4, 2. pkt.

*Stk. 3* staðfestir, at útseting ikki kann fara fram í ósamsvari við kunngerð eftir § 27, stk. 2.

**Til § 29.**
*Stk. 1, 1. pkt.*, staðfestir, at eitt krav um loyvi eftir náttúrumargfeldislógini ikki sleppir nøkrum undan møguligum loyvum til innflutning ella útseting, sum krevjast eftir aðrari lóggávu. Orsøkin til ásetingina er, at aðrar lógir kunnu leggja dent á onnur atlit, sum ikki eru vard eftir náttúrumargfeldislógini. Krevst loyvi eftir fleiri lógum, eiga myndugleikarnir eftir *stk. 2* fáa samskipaða málsviðgerð í lag. Slík samskipan kann fara fram við avtalu millum viðkomandi myndugleikar – annaðhvørt frá máli til mál ella við støði í meira algildum leiðreglum. Eftir *3. pkt.* fær landsstýrismaðurin heimild at skipa slíka samskipaða málsviðgerð við kunngerð.

*Stk. 2* staðfestir, at metingar eftir lógarkapitli 4 ikki skulu fevna um atlit at lívi og heilsu hjá plantum, dýrum og fólki, sum eru fevnd av aðrari lóggávu.

**Til § 30.**

*Stk. 1* ásetur bæði mið fyri økisvernd yvirhøvur og mið, sum eru viðkomandi fyri tað einstaka verndarøkið. Ásetingin er ikki tømandi, men nevnir tey mest týðandi miðini. Tað er ein fyritreyt fyri at skipa eitt verndarøki, at verndin í minsta lagi fremur eitt av teimum nevndu miðunum, sbr. orðingina *skulu gera sítt til*. Miðini galda, uttan mun til hvønn verndarflokk talan er um, men onkur mið kunnu vera serliga viðkomandi fyri ávísar verndarflokkar, sbr. niðanfyri. Vanliga eru fleiri mið viðkomandi. Høvuðsgrundgevingin fyri verndini skal liggja innan fyri miðini, sum nevnd eru í ásetingini, hóast onnur atlit kunnu koma afturat. Onnur atlit kunnu tó ikki vera eitt sjálvstøðugt endamál ella høvuðsgrundgevingin fyri verndini.

Orðingin *skulu gera sítt til* ber í sær, at verndarmyndugleikin, tá ið eitt verndarøki verður skipað, hevur skyldu til at meta um, hvørjum miðum roynt verður at røkka. Ásetingin ber tó ikki í sær eina skyldu at skipa verndarøkir, men sambært innganginum í stk. 1 kann tað sigast at vera ein fyritreyt, at økisvernd er eitt týðandi amboð til at røkka teimum nevndu miðunum.

Tað er beinleiðis nevnt í stk. 1, at verndarøkir kunnu skipast bæði á landi og í vatni, eisini sjónum. Verndarmiðini kunnu vera tey somu, uttan mun til hvar verndin verður sett í verk, men onkur mið kunnu vera meira viðkomandi á landi enn í sjónum. M.a. er atlitið at røktarlandslagi vanliga lítið viðkomandi í sambandi við undirsjóvarverndarøkir.

Orðið *varðveita* ber í sær, at náttúran skal varðveitast við sínum dynamikki og natúrligu tilgongdum. Við verndini kann miðast eftir at lata náttúruna ganga sína gongd, men miðast kann eisini eftir at tryggja eitt ávíst framfylgingarstig. Verndin kann eisini ber í sær, at at øki fyrst verður umvælt, og at ein natúrlig gongd síðan verður varðveitt. Er talan um at lata náttúruna ganga sína gongd, er røkt fyrst og fremst neyðug til at verja fyri mannaávirkan, t.d. við tiltøkum til at taka burtur fremmand sløg. Er endamálið at tryggja eitt ávíst framfylgingarstig, má røktin eisini fevna um tiltøk til at tálma summum av tí, sum annars kann kallast natúrlig gongd, t.d. tiltøk til at fáa at grógva aftur. Endamálið kann í slíkum føri vera at tryggja eitt serstakt samfelag av sløgum ella eitt sjáldsamt náttúruslag. Eisini upplivingarvirðið, sum er knýtt at ávísum náttúrusløgum, t.d. í røktarlandslagnum, kann hava stóran týdning.

Í tí einstøku verndarkunngerðini skal útgangsstøði havast í miðunum, sum tey eru lýst í § 30, men endamálið við verndini skal lýsast neyvari enn í teimum algildu orðingunum í § 30. T.d. kann eitt endamál um *at varðveita eitt stórt náttúruøki nøkulunda frítt fyri teknisk inntriv fyri at tryggja lívfrøðiligt margfeldi við vistskipanum, sløgum og stovnum*, sum eisini fevnir um *at varðveita eitt størri samanhangandi lyngøki, fjølbroytta áarnáttúru og fjøllini við sínum serstøku eyðkennum umframt jarðfrøðilig fyribrigdir og mentanarminnir*, vera ein neyvari lýsing av miðunum í nr. 1, 2, 4 og 5.

Miðið í *stk.1, nr. 1,* er eitt týðandi mið fyri økisvernd og endurspeglar m.a. meginregluna um fyrivarni. Tá ið fjølbroytnisbreiddin av náttúru og landsløgum verður varðveitt, verða náttúruvirðini í økjunum tryggjað, hóast øll sløg og samanhangir í vistskipanini ikki eru kend frammanundan. Miðið kann tí gera sítt til at gera meginregluna um fyrivarni virkna.

Við *landslagi* meinast eitt øki, soleiðis sum fólka skilja tað, við sereyðkennum, sum eru eitt úrslit av ávirkanini av og samanspælinum millum natúrligar og/ella menniskjaligar tættir, sbr. tann evropeiska landslagssáttmálan, kapittul 1, art. 1. Heilt manngjørt landslag er kortini ikki fevnt av hesi lógini.

Náttúrusløg og landslagssløg fevna ikki bara um livandi náttúru, men eisini t.d. jarðfrøðilig jarðløg og fyribrigdir, sum hava lívfrøðiligan uppruna, t.d. deytt tilfar, sum stavar frá livandi lívfrøðiligum tilfari, t.d. deyð (ella partar av) korallriv. Hugtakið *náttúruslag* er allýst í § 3, nr. 9.

Miðið í nr. 1 er serliga viðkomandi fyri verndarflokkarnar tjóðgarðar, landslagsverndarøkir og náttúrufriðøkir.

Miðið í stk. 1, *nr. 2*, endurspeglar, at økisvernd er eitt týðandi amboð til at varðveita sløg og ílegumargfeldi. Verndin kann vera serstakt vend ímóti einum slag og miða eftir at tryggja týðandi funktiónsøkir hjá slagnum. Verndin kann eisini vera vend ímóti náttúrusløgum, har ein av royndum veit, at ávís sløg finnast, uttan at teir einstøku einstaklingarnir ítøkiliga eru funnir á tí einstaka staðnum. Náttúrusløg kunnu eisini verjast fyri at tryggja higartil ókend sløg. Í slíkum førum renna miðini í nr. 1 og 2 fyri ein part saman.

Endamálið við verndini nýtist ikki at vera at verja einstøk sløg, men kann eisini vera at verja ávís samfeløg av sløgum, t.d. korallriv. Eisini hesum viðvíkjandi rennur tað fyri ein part saman millum miðini í nr. 1 og 2.

Fyri at tryggja ílegumargfeldi kann tað vera viðkomandi at verja økir við tí fyri eyga at verja ávísar stovnar. Aftur at tí kann tað vera týdningarmikið at verja ymisk støð, har ávís sløg finnast, fyri at varðveita ílegubrigdir.

Miðið í nr. 2 er serliga viðkomandi fyri verndarflokkarnar tjóðgarðar, náttúrufriðøkir og lívøkisverndarøkir.

Meðan stk. 1, nr. 1, byggir á eina fyrivarnishugsan, hevur miðið í stk. 1, *nr. 3*, til endamáls at varðveita tað, sum longu er hótt. Við hóttari náttúru meinast náttúrusløg ella gróðrarsløg, sum eru um at hvørva, ella sum eru fyri stórari afturgongd. Hótt náttúra fevnir eisini um hótt sløg. Slík sløg kunnu longu vera raðfest, og í tí føri kann økisvernd vera eitt týðandi ískoyti til raðfestingina. Á § 22 um raðfest sløg skilst, at tað – umframt beinleiðis vernd av sløgum – vanliga skulu ásetast reglur um varðveitslu av týðandi vistfrøðiligum funktiónsøkjum hjá sløgunum, sum raðfest verða. Umframt ella í staðin fyri slíkar reglur kann tørvur vera á meira serstakari vernd av einum ella fleiri ávísum økjum. Hetta skilst á miðinum í nr. 3. Miðið í nr. 3 er serliga viðkomandi fyri verndarflokkin náttúrufriðøkir.

Miðið í stk. 1, *nr. 4*, er serliga viðkomandi fyri tjóðgarðar. Verndarøkið má vera størri enn eitt vist í vavi fyri at vera fevnt av endamálinum nr. 4, sbr. orðið *stórar*.

Orðið *heilar*, t.e. *intaktar*, ber ikki neyðuga í sær, at økini skulu vera púra órørd av fólki. Í Føroyum, her fólk í nógvar øldir hava lagt slóð eftir seg við ferðslu, veiðu og biti, finnast eyðvitað fá slík støð. Men tað er ein fyritreyt, at tilgongdirnar og funktiónirnar í vistskipanini eru heilar ella kunnu gerast tað við virknum endurreisingartiltøkum ella natúrligari gongd, og við tí eisini, at økið er lutfalsliga lítið ávirkað av tekniskum inntrivum.

Upplivingarvirðið á slíkum stórum, lutfalsliga óskalaðum økjum er týdningarmikið. Eftir nr. 4 kann tað tí eisini vera ein partur av endamálinum at virka fyri, at náttúran kann upplivast, sbr. orðingina *eisini so at tær kunnu vera atkomandi til einfalt útilív*. Tað er ein fyritreyt, at hetta hendir á ein hátt, sum ikki oyðileggur náttúruvirðini, sum eru grundarlagið undir upplivingini, ella upplivingarvirðið fyri onnur, sbr. orðingina *einfalt útilív*. Einfalt útilív fevnir um náttúrupplivingar á landi, í vatni og í sjónum. Er eitt øki so viðkvæmt, at forboð eisini má setast fyri einføldum útilívi, er vanliga talan um at røkja onnur endamál enn eftir miðinum í nr. 4.

Eitt annað endamál við økisvernd eftir § 30 er at varðveita náttúrusøgulig virðir, sbr. *nr. 5*. Náttúrusøgulig virðir fevna m.a. um fyribrigdir og tilgongdir, sum vísa innflytingarsøguna hjá

sløgunum eftir ístíðirnar og menningarsøguna hjá náttúruni. Í tann mun tað, at fólk hevur verið á staðnum, er ein týðandi táttur í hesi søguni, kunnu eisini mentanarsøgulig virðir vera ein partur av endamálinum við verndini, hóast hetta ikki er nevnt beinleiðis. Náttúra, sum bara hevur mentanarsøguligan týdning, eigur at verða varðveitt eftir aðrari lóggávu. Miðið í nr. 5 er viðkomandi fyri verndarflokkarnar náttúrufriðøkir, landslagsverndarøkir og tjóðgarðar.

Miðið í stk. 1, *nr. 6*, snýr seg um náttúruvirðir, sum eru úrslit av røktarávirkan. Sum dømir um náttúru, sum er merkt av mannabrúki gjøgnum tíðirnar, kunnu nevnast teigalendir, slóttubøur, torvheiðar og byrgir. Orðini *gjøgnum tíðirnar* bera í sær, at talan er um brúk í fleiri ættarlið. Miðið um at varðveita slík náttúruvirðir byggir bæði á atlit at upplivingarvirði, brúksvirði og margfeldinum í náttúruni. Skulu náttúruvirðini kunna varðveitast, krevst vanliga, at brúkið, sum hevur skapt virðini, heldur fram. Endamálið er tí eisini at skipa slíkt brúk, t.d. við avtalum við jarðareigarar. Studningur kann eisini brúkast til at skipa varðveitingarvert brúk. Tað er ein fyritreyt, at brúkið ger sítt til at varðveita ella endurreisa náttúruvirðini.

Eftir stk. 1, nr. 5, kunnu mentanarsøgulig virðir vera ein partur av endamálinum við verndini. Slík virðir mugu tí vera eitt ískoyti til vernd av náttúruvirðum.

Stk. 1, *nr. 7*, ber í sær, at eitt endamál við verndini kann vera at knýta netverk. Netverkshugsanin ber í fyrra lagi í sær, at verndarleisturin eigur at vera skipaður og miðvísur. Aftur at tí ber tað í sær, at vistfrøðilig sambond verða skapt millum verndarøkir. Slík sambond kunnu eisini vera verndarøkir. Eitt verndarøki kann t.d. skipast fyri tryggja einum slagi ferðingarleið úr einum verndarøki í annað. Serliga lívøkisverndarøkir kunnu hava slíkt endamál. Vernd av einum størri landslagi kann hava til endamáls at knýta saman týðandi fyrikomingar av lívfrøðiligum margfeldi.

Orðið *samanhangir* í nr. 7 sipar ikki bara til teir fysisku samanhangirnar millum verndarøkini, men eisini til, at tað í sambandi við økisvernd má havast í huga, hvussu úrvalið av verndarøkjum styðjar upp undir heildarfevnda vistfrøðiliga og landslagsliga vernd. Netverksknýting ber sostatt í sær, at økini, sum vard verða, tilsamans skulu styðja upp undir heildarfevnda og nøktandi varðveitslu av lívfrøðiligum, landslagsligum og jarðfrøðiligum margfeldi, bæði úr innlendskum og altjóða sjónarhorni. Í hesum førunum fevna netverkini ofta um økir við endamálum sum teimum, sum skiljast á nr. 1, 2 og 3. Er eitt slíkt verndarøki partur av einum innlendskum ella altjóða netverki, er hetta eitt endamál, sum kemur aftur at endamálinum eftir nr. 1, 2 og 3, og sum t.d. kann hava týdning fyri, hvørja fyrikoming av einum náttúruslagi valt verður at verja. Er talan um altjóða skyldur, kann tað vera týdningarmikið, at tað er nevnt í verndarkunngerðini, at økið er ætlað at vera partur av einum netverki. Miðið í nr. 7 er viðkomandi fyri allar verndarflokkar.

Stk. 1, *nr. 8*, nevnir skipan av tilvísingarøkjum sum eitt økisverndarmið. Fyri at kunna meta um gongdina í náttúruni og virknaðin av ymsum ávirkanartáttum kunnu hyggjuráðini vera at samanbera við gongdina í einum øki, har mannaávirkan verður avmarkað til eitt minstamark. Miðið kann vera viðkomandi fyri fleiri verndarøkir, serliga náttúrufriðøkir, ofta sum eitt av fleiri endamálum.

Aðrar lógir kunnu hava ásetingar um vernd av økjum fyri óhepnari ávirkan frá virkseminum, sum lógirnar skipa. Eftir *stk. 2, 1. pkt.*, eiga myndugleikarnir at leggja dent á miðini í § 30, tá ið teir brúka slíkar ásetingar í geiralóggávu. Ásetingin kemur sostatt aftur at reglum um verndartiltøk í øðrum lógum og skal tryggja, at slík tiltøk draga í sama borð sum ásetingin í náttúrumargfeldislógini um økisverndarmið, og ítøkiligger samstundis, hvussu geirarnir kunnu gera sítt til, at umhvørvismiðini hjá landinum verða rokkin. Sum dømi um slíkar heimildir í aðrari lóg kann nevnast sjófeingislógin § 36, stk. 1, nr. 1 og 5, og stk. 5. Ásetingin geldur ikki í sambandi

við avgerðir um útbygging ella brúk eftir øðrum regluverki. Ásetingin kemur ikki fram um reglurnar í geiralógunum um verndartiltøk.

Hetta at stevna móti felags miðum tvørtur um geirar er serliga umráðandi, tá ið verndarøkir og økir við aðrari vernd saman skulu vera partar av einum netverki, sbr. viðmerkingina til stk. 1, nr. 7, omanfyri. Talan kann eisini verða um at leggja eina ætlan fyri eitt størri, samanhangandi øki, sum ber í sær, at tað kann vera viðkomandi at brúka amboð eftir ymsum lógarverki fyri ymsar partar av økinum. Við orðinum *ætlan* verður ikki hugsað um ætlanir eftir planlóggávuni, men meira óformligar ætlanir, sum myndugleikarnir gera, møguliga í samstarvi við privatar partar. Dømir um hetta kunnu taka seg upp í sambandi við arbeiði við ætlanum fyri vernd á sjónum og arbeiði við at varðveita virðismikið røktarlandslag. Í arbeiðinum við ætlanum fyri vernd á sjónum er tað t.d. viðkomandi at brúka m.a. økisverndarásetingarnar í náttúrumargfeldislógini og økisfriðing eftir sjófeingislógini fyri at geva ymsum økjum ymiskt og sundurgreinað verndarstig. Í slíkum førum kann tað vera viðkomandi at samskipa m.a. tey ítøkiligu verndarendamálini, umsitingarætlanir, eftirlit og málsviðgerð eftir teimum ymsu lógunum. Eftir *stk. 2, 2. pkt.*, kann landsstýrismaðurin áseta reglur fyri slíkari samskipan.

**Til § 31**
*Stk. 1* ásetur, at tað er landsstýrismaðurin, sum við kunngerð skipar tað einstaka verndarøkið.

*Stk. 2* ásetur, hvat ið kunngerðin skal áseta reglur um. Endamálið við at skipa verndarøkið skal nevnast í verndarkunngerðini, sbr. *stk. 2, 1. pkt.* Tað skal ásetast so ítøkiliga sum gjørligt, m.a. skal greiða gerast fyri, hvørji náttúru- og mentanarvirðir ið ætlanin er at verja. Tað er ikki neyðugt, at øll verndarvirðini í tí viðkomandi økinum eru kend, sbr. viðmerkingarnar til § 30, stk. 1, men verndaravgerðin eigur í tí føri at gera greiðu fyri, hvat ið avgerðin um at velja økið út er grundað á. Endamálið við verndini skal í minsta lagi rúmast innan fyri eitt ella fleiri av miðunum í § 30, men tað má ásetast meira ítøkiliga út frá eginleikum og eyðkennum við tí einstaka økinum.

Tað skal nevnast, hvørjum standi ætlanin er at røkka, t.d. at økið í mestan mun skal varðveitast órørt, ella at økið skal endurreisast, so at tað í mestan mun aftur sær natúrligt út.

Endamálið fær týdning fyri, hvussu sjálv kunngerðin verður orðað, og fyri, hvussu beinleiðis skyldur eftir lógini verður tulkaðar, t.d. skyldan eftir § 33, stk. 2, til ikki at broyta sereyðkennir ella útsjóndina á landslagnum munandi. Tað fær harafturat týdning fyri metingina hjá fyrisitingini í málum um loyvir ella undantøk til virksemi í verndarøkinum (sbr. § 45, stk. 1).

Mørkini um verndarøkið og ávirkaðar ognir skulu verða nevnd í verndaravgerðini. Við ávirkaðum ognum meinast ognir, sum heilt ella fyri ein part eru innan fyri mørkini um verndarøkið.

Tá ið verndarøkir verða skipað í sjónum, kunnu verndarvirðini vera knýtt at havbotninum, vatnsúluni, vatnskorpuni ella eini samanseting av hesum. Hvørt sjálv verndin eigur at avmarkast til eitt ella fleiri av hesum trimum, veldst um eina meting við støði í tí, sum neyðugt er fyri at varða um verndarvirðini. Eftir *stk. 2, 2. pkt.*, skal verndarkunngerðin tilskila, um endamálið við verndini fevnir um havbotnin, vatnsúluna, vatnskorpuna ella eina samseting av hesum.

Á *stk. 3, 1. pkt.*, skilst, at verndarøkið skal vera landafrøðiliga avmarkað, so at tað samsvarar við verndarendamálið. Hvat ið liggur í hesum, er nærri útgreinað í *2. pkt.* Verndarvirðini, sum verndin er grundað á, leggja útgangsstøðið fyri, hvussu verndarøkið eigur at verða avmarkað. Vistfrøðiligar fyritreytir fyri at varðveita verndarvirðini, t.d. væta og føði til sløg í økinum, mugu vera partur av metingini, tá ið økið verður avmarkað. Slík náttúrugivin viðurskiftir eru fevnd av orðingini *vistfrøðiligar funktiónir av týdningi fyri verndarendamálið*.

Eitt annað, sum drigið verður fram sum ein táttur, ið dentur eigur at verða lagdur á, er, hvussu væl vistskipanin tolir árin uttanífrá. Sum dømir um slík árin uttanífrá kunnu nevnast veðurlagsbroytingar og dálking. Í hesum sambandi kann støddin á verndarøkinum hava týdning fyri, hvønn virknað árinini hava á náttúruvirðini. Stór økir kunnu vera harðførari mótvegis avleiðingunum av veðurlagsbroytingum enn smá økir. Tað kann vera torført við vitanini á degnum at siga nakað við vissu um, hvussu økir eftir slíkum metingum eiga at verða avmarkað, men á altjóða stigi verður dentur serliga lagdur á hetta við atliti at avbjóðingunum, sum standast av veðurlagsbroytingum. § 31, stk. 3, gevur smidleika til at fáa til vega nýggja vitan í hesum sambandi.

Eisini onnur viðurskiftir enn tey, sum beinleiðis eru nevnd í stk. 3, hava týdning fyri avmarkingina, m.a. ognarmørk, ognarfyrivarni og vinnuáhugamál.

Ognarfyrivarni eru ikki viðkomandi, tá ið verndarøkir á sjónum uttan fyri grundlinjurnar verða avmarkað, men vinnuáhugamál kunnu hava týdning. Altjóðarættarligar skyldur hava fyrst og fremst týdning fyri spurningin, hvørjar avmarkingar ið setast kunnu fyri, hvussu økið verður brúkt, men kunnu eisini hugsast at fáa týdning fyri, hvussu økir verða avmarkað.

Hvørjar ásetingar ið ásetast kunnu fyri, hvussu økið verður brúkt, verður nágreinað í stk. 4 og 5.

*Stk. 4, 1. pkt.*, er tann almenna heimildin til at áseta reglur fyri ræðinum í verndarøkjum. Umframt at geva heimild til almennar forboðsásetingar letur 1. pkt. upp fyri møguleikanum eisini at áseta loyvis- og undantaksskipanir í kunngerðini, sbr. orðingina *áseta reglur*.

Ásetingin hongur saman við verndarendamálinum, við tað at landsstýrismaðurin kann forbjóða ella áseta reglur fyri øllum virksemi, sum *kann virka ímóti verndarendamálinum*. Tað er sostatt verndarendamálið við tí einstøku verndarkunngerðini, sum ítøkiligger karmin fyri, hvørjar reglur ið ásetast kunnu um ræði. Hvat ið heilt ítøkiliga kann metast at vera av slíkum slag, at tað kann virka ímóti verndarendamálinum, stendur tað til landsstýrismannin at meta um. Í sambandi við hesa metingina skal meginreglan um fyrivarni havast sum grundarlag, sbr. § 9, so at nøktandi trygd fæst fyri, at verndarvirðini verða vard og verndarendmálið rokkið. Tað merkir, at valdar óvissa um, hvørjar avleiðingar eitt slag av virksemi kann fáa fyri verndarvirðini, eigur virksemið at forbjóðast ella koma undir meting í hvørjum føri við kravi um loyvi, og at greiða verður gjørd fyri avleiðingunum av virkseminum. Tess størri møguleikin er fyri, at virksemið verður verndarvirðunum at skaða, tess størri er grundin í sambandi við slíka óvissu at seta avmarkingar, tá ið verndarkunngerðin verður orðað.

Meðan verndarendamálið ítøkiligger markið fyri, hvørjar reglur ið ásetast kunnu fyri ræði í sambandi við allar verndarflokkarnar, eru tað ásetingarnar fyri hvønn verndarflokkin, sum áseta tann ytra karmin um rættarvirknaðin av eini verndarkunngerð. Kunngerðarheimildin eftir stk. 4 er avmarkað til *karmin, sum geldur fyri hvønn verndarflokkin* (1. pkt.). Við *karmi* meinast í hesum sambandi mørkini, sum ásett eru í ásetingunum fyri teir ymisku verndarflokkarnar.

Ásetingarnar fyri teir einstøku verndarflokkarnar, serliga tjóðgarðar og landslagsverndarøkir, áseta bæði minstukrøv og hámarkskrøv fyri verndarásetingar. Sostatt er eitt minstastig knýtt at vernd í hvørjum máli, samstundis sum lógin tilskilar, hvat ið kann halda fram, uttan at verndin tarnar tað. Tað ber í sær, at verndarkunngerðir um tjóðgarðar í minsta lagi skulu tryggja vernd fyri *varandi ávirkan á náttúruumhvørvið ella mentanarminnir* (§ 32, stk. 2, 1. pkt.), og sum hámark er ásett, at ferðsla til gongu við fyriliti ikki kann forbjóðast (§ 32, stk. 2, 3. pkt.). Tá ið talan er um landslagsverndarøkir, skal verndin í minsta lagi forða fyri virksemi, sum kann *broyta sereyðkennir*

*ella útsjóndina á landslagnum munandi* (§ 33, stk. 2, 1. pkt.), samstundis sum virksemi, sum er í gongd, kann halda fram (§ 33, stk. 2, 2. pkt.). Í náttúrufriðøkjum má í minsta lagi eingin gera nakað, sum *minkar um tey í verndarendamálinum nevndu verndarvirðini* (§ 34, stk. 3, 1. pkt.), og friðøkið kann *alfriðast fyri øllum virksemi, tiltøkum og ferðslu* (§ 34, stk. 3, 2. pkt.). Lívøkisverndarøkir kunnu verjast fyri *virksemi og ferðslu, sum kann ávirka ella órógva slagið ella tess lívskor*. (§ 35).

Ásetingin verður m.a. ikki til hindurs fyri atgongd – heldur ikki motorferðslu - í sambandi við viðlíkahald av vegum, orkuverkum og vatnbyrgingum, sum skulu tryggja orkuveitingina. Ásetingin er heldur ikki til hindurs fyri neyðugari útbygging av slíkum verkløgum. Hetta geldur eisini fyri verandi orkuleiðingar. Mælt verður til at skila til hesi rættindini í verndarkunngerðini.
Verndarásetingarnar áseta bara reglur fyri virksemi innan fyri mørkini um hvørt verndarøki, ikki uttanfyri, hóast slíkt virksemi ávirkar verndarvirðini.

Reglan í § 31, stk. 4, er orðað sum ein fulltrúaráseting, sbr. orðingina *kann landsstýrismaðurin ... forbjóða*. Ásetingarnar í § 32, stk. 2, 1. pkt., § 33, stk. 2, 1. pkt., og § 34, stk. 3, 1. pkt., eru hinvegin orðaðar sum beinleiðis forboð og eru tí beinleiðis bindandi mótvegis borgarunum.

Tá ið talan er um vernd í sjónum, skilst á stk. 2, at verndarkunngerðin skal tilskila, um verndarvirðini eru knýtt at havbotninum, vatnsúluni, vatnskorpuni ella eini samanseting av hesum. Rættarvirknaðurin kann kortini vera knýttur at virksemi í einum av hinum verndarflokkunum, um virksemi har kann vera verndarvirðunum at skaða. T.d. kunnu avmarkingar setast alivirksemi í vatnsúluni, um dálking frá alistøðini kann ávirka verndarvirðini á havbotninum. Verndin fevnir í tí føri bæði um havbotnin, vatnsúluna og vatnskorpuna, meðan verndarvirðini bara eru knýtt at havbotninum. Viðvíkjandi verndarøkjum í sjónum verður serliga víst til § 36.

Hugtakið *virksemi* í 1. pkt. skal skiljast breitt. Tað kann t.d. bæði fevna um vinnuvirksemi og frítíðarvirksemi, privat og almenn tiltøk, varandi virksemi og staktiltøk. At avmarkingar kunnu leggjast á ferðslu, skilst beinleiðis á ásetingini. Við *ferðslu* meinast eisini uppihald, t.d. tjalding og ítróttatiltøk. Avmarkingarnar kunnu snúgva seg um fysiskt (faktiskt) ræði á økinum, ikki løgfrøðiligt ræði (t.d. atgongd at avhenda ogn í verndarøkinum).

Við heimild í § 31, stk. 4, kunnu ásetingar ásetast fyri lokkan og jagstran av villum dýrum í og út úr verndarøkjum. Slíkar ásetingar kunnu serliga vera viðkomandi í náttúrufriðøkjum og lívøkisverndarøkjum. Verður tað ítøkiliggjørt, at lokkan og jagstran av villum dýrum er forboðin, gerst tað lættari hjá eftirliti og jarðareigarum at steðga slíkum virksemi í økjum, har tað er ein trupulleiki.

Sum dømir um inntriv, sum vanliga eru forboðin í øllum sløgum av verndarøkjum, kunnu nevnast gerð av bygningum, støðum og øðrum varandi og fyribils innrættingum, vegagerð, úrtøka, ífylling ella at leggja mold- og grótrúgvur frá sær og at leggja luftkaðlar.

Eftir *stk. 4, 2. pkt.*, kann landsstýrismaðurin áseta, at sumt virksemi ikki kann fara fram, uttan at umsókn frammanundan er send fyrisitingarmyndugleikanum, og hesin síðan hevur givið loyvi.

Eftir *stk. 4, 3. pkt.*, kann landsstýrismaðurin áseta serligar reglur fyri ymsar partar av økinum, tá ið tað er í samsvari við funktiónina, sum økisparturin hevur í mun til verndarendamálið. Ásetingin vísir, at tørvur kann vera á ymsum avmarkingarstigi innan fyri eitt verndarøki, ella, at tað í einum parti av økinum kann vera tørvur á serligum reglum fyri at tryggja neyðuga vernd av verndarvirðunum. Slíkar ásetingar kunnu t.d. snúgva seg um ferðsluavmarking í pørtum av einum

verndarøki, sum eru serliga viðkvæmir, ella at beina ferðslu í økispartar, sum tola meira ferðslu, uttan at tað er lendinum at skaða.

*Stk. 5* nágreinar, at verndarkunngerðin ikki skal vera til hindurs fyri burðardyggum brúki, sum styðjar upp undir verndarendamálið í einum øki. Ásetingin leggur dent á tann gagnliga týdningin av brúki, sum ber í sær virkna varðveitslu av verndarvirðum. Hetta er eitt týðandi evni í sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi (sbr. m.a. art. 8 (j)) og eigur tí at síggjast aftur í lógini. Hvat brúk ið myndugleikarnir meta at hava henda virknaðin, eigur at síggjast í kunngerðini. Tað skilst longu á stk. 4, at brúk, sum hvørki gagnar ella virkar ímóti verndarendamálinum, kann loyvast. Tað er sjálvt brúkið, sum styðjar upp undir verndarvirðini, sum avmarkingar ikki skulu leggjast á. Í kunngerðini kunnu kortini reglur ásetast fyri øðrum viðurskiftum, sum eru knýtt at brúkinum, t.d. tekniskum inntrivum o.s.fr., so at sleppast kann undan, at verndarvirðini verða fyri skaða.

**Til § 32.**

Tann fyrra treytin fyri at skipa ein tjóðgarð er eftir *stk. 1*, at økið, sum vart verður, er eitt størri øki. Hugtakið *størri* er brúkt fyri at tilskila, at endamálið eigur at vera at verja størri, samanhangandi vistskipanir.

Tann seinna treytin er, at økið er at skilja sum náttúruøki. Talan kann bæði vera um økir á landi og eina samanseting av landi og sjógvi. Verndarøkir á sjónum burturav kunnu bara skipast eftir § 36. Tað er ikki eitt krav fyri at lúka treytina um at vera *náttúruøki*, at økið hevur verið fullkomiliga órørt av fólki. Slík økir finnast nóg illa í Føroyum, her fólk í størri ella minn mun hava hava lagt slóð eftir seg í stórum pørtum av náttúruni. Kravið útihýsir tí ikki allari mannaávirkan, men setur mark mótvegis virknari virking av náttúruni, t.d. landbúnaðarlandslagi. At økið hevur verið brúkt til víðtøkið uttangarðsbrúk sum beiti, veiðu og fiskiskap, er ikki til hindurs fyri, at økið í høvuðsheitum er at rokna sum náttúruøki. Kravið um, at talan skal vera um náttúruøki, útihýsir heldur ikki, at mentanarminnir kunnu vera í økinum, sbr. stk. 2, 1. pkt.

Ikki eitt og hvørt náttúruøki kann verjast sum tjóðgarður. Økið skal í fyrra lagi bera í sær serstakar ella umboðandi vistskipanir. Við *serstøkum* meinast, at økið hevur eyðkennir, sum skilja tað frá øðrum økjum. T.d. kann økið bera í sær fyrikomingar av sjáldsomum ella hóttum sløgum, sum ikki finnast aðrastaðni, ella serstakt ella serliga vakurt landslag. Tó kunnu økir eisini verjast, hóast tey ikki eru serstøk, men hinvegin umboðandi fyri eitt ávíst slag av náttúru. Kravið um, at økið ber í sær serstakar ella umboðandi vistskipanir ella landsløg, ber eisini í sær, at økið eigur at bera í sær verndarvirðir, sum hava tjóðartýdning ella altjóða týdning, sbr. heitið *tjóð*garður, hóast hetta ikki er ein neyðug treyt eftir lógini.

Ein tjóðgarður kann bera í sær eina ella fleiri vistskipanir ella landsløg. Tá ið mørkini verða sett, eigur tað, sum er ein natúrligur partur av vistskipanini ella gevur sítt íkast við týðandi vistfrøðiligum funktiónum (sbr. § 31, stk. 3, 1. pkt.), at havast í huga.

Aftur at tí skal økið ikki hava verið fyri tyngri náttúruinntrivum. Hvat ið er at rokna sum tyngri náttúruintriv, veldst um eina meting. T.d. er heimild til at skipa tjóðgarð, hóast ein traðarvegur liggur í økinum. Tað avgerandi er, um økið í síni heild er at skilja sum í høvuðsheitum órørt av tyngri tekniskum inntrivum.

Tjóðgarðar kunnu eftir § 32, stk. 1, skipast bæði á privatari og almennari jørð.

Ásetingin nevnir ikki serlig mið fyri tjóðgarðsvernd. Verndartreytirnar bera tó í sær, at verndarmið fyri tjóðgarðar vanliga eru fevnd av nr. 1, 2 og 4 í § 30, stk. 1. Verndarøkir, sum eru serstøk ella umboðandi, gera sítt til at varðveita *fjølbroytnisbreiddina av náttúrusløgum og landsløgum* (nr. 1).

Og treytin um *størri náttúruøkir, sum bera í sær ... vistskipanir ella landsløg, sum ikki hava verið fyri tyngri náttúruinntrivum*, ger, at økini kunnu gera sítt til at varðveita *sløg og ílegumargfeldi* (nr. 2) ella *størri heilar, t.e. intaktar, vistskipanir* (nr. 4). Atlitið at upplivingarvirðinum, sbr. *vera atkomandi til einfalt útilív* (nr. 4), skilst á rættarvirknaðinum í stk. 2.

Eisini hini endamálini í § 30, stk. 1, kunnu vera viðkomandi. Orsakað av støddini kunnu tjóðgarðar t.d. gera sítt til at varðveita vistfrøðiligar og landslagsligar samanhangir (nr. 7). Teir kunnu eisini gera sítt til at varðveita sjáldsom og hótt sløg og hótta náttúru (nr. 3) og náttúrusøgulig virðir (nr. 5) umframt at virka sum tilvísingarøkir (nr. 8).

*Stk. 2* setur tann ytra karmin um rættarvirknaðin av at skipa tjóðgarðar. Verndarásetingarnar, sum ásettar verða í verndarkunngerðini, sbr. § 31, skulu rúmast innan fyri karmin á stk. 2. Rættarvirknaðurin av lógarásetingini er eisini beinleiðis bindandi fyri borgararnar.

Útgangsstøðið eftir *1. pkt.* er, at eingin varandi ávirkan skal fara fram. Ávirkan, sum ikki er varandi, nýtist hinvegin ikki at vera forboðin. Ásetingin skal heldur ikki skiljast sum heilt óvikilig. Fólk hava ferðast í føroyskari náttúru í øldir og lagt slóð eftir seg, sbr. eisini, at mentanarminnir kunnu vera partur av verndarvirðunum í einum tjóðgarði. Í verki ber hetta í sær, at varandi virksemi er forboðið í tjóðgørðum, tá ið ávís sløg av heysting, varsom tilbúgving til ferðavinnu og í summum førum slóttur og seyðahald eru undantikin. Við varsamari tilbúgving til ferðavinnu meinast smærri tiltøk sum t.d. at gera farleiðir sjónligar og møguliga at broyta brúk av verandi bygningum. Tað skal framvegis vera forboðið at reisa nýggjar bygningar og brúka motorferðslu sum t.d. túrakoyring til hetta endamálið. Ferðavinnustøðir skulu ikki vera inni í tjóðgørðum.

Í stk. 2, *2. pkt.*, er ásett, at *kunngerðin skal verja ... fyri*. Tað ber í sær, at kunngerðin skal útgreina verndina nærri í mun til ymisk sløg av virksemi. Verndin fyri útbygging, verkløgum og dálking hevur við sær forboð fyri m.a. at gera bygningar, støðir og aðrar varandi ella fyribils innrættingar, vegagerð, at leggja luft- og jarðkaðlar, grevstri, ífylling, at sleppa sær av við mold- og grótrúgvur, at velta upp úr nýggjum, at slætta heyggjut lendi, námsvinnu, inntrivum í áir og vøtn og øðrum ídnaðarvirksemi, eisini tøku av steinevnatilfeingi og leitan eftir og útvinning av olju.

Við *øðrum virksemi* eftir stk. 2 meinast t.d. veiða og fiskiskapur. Hvørt tøka av lívfrøðiligum tilfari skal vera forboðin, ella loyvi skal gevast til veiðu og fiskiskap, má støða takast til í verndarásetingunum fyri tann einstaka tjóðgarðin við støði í verndarendamálinum.

Ein tjóðgarður, sum eisini fevnir um sjógv, kann fevna um havbotnin, vatnsúluna, vatnskorpuna ella eina samanseting av hesum. Verndarøkir, sum burturav fevna um sjógv, mugu skipast við heimild í § 36. Fevnir verndin um vatnsúluna, má støða takast til í verndarkunngerðini, um ávís sløg av fiskiskapi ella útgerðarbrúki eiga at forbjóðast, av tí at tey kunnu ávirka verndarvirðini og verndarendamálið. Eru verndarvirðini bara knýtt at havbotninum, kann fiskiskapur í vatnsúluni vanliga loyvast, um slíkur fiskiskapur ikki ávirkar lívstreytirnar á botni. Vernd, sum bara ásetur reglur fyri fiskiskapi á sjónum, er fevnd av sjófeingislógini.

Eftir stk. 2, 2. pkt., skal verndarkunngerðin *tryggja møguleikan at uppliva náttúruna í frið og náðum*. Hetta hongur saman við, at upplivingarvirðið ofta er eitt týðandi verndarvirði í tjóðgørðum. Upplivingarvirðið fevnir ikki bara um sjónárin, men eisini um at uppliva kvirru, anga og ljóð í náttúruni. Ásetingin ber m.a. í sær, at forboð kann setast fyri virksemi, sum hevur larm við sær, t.d. motorferðslu, í tann mun tað kann minka um upplivingarvirðið. Motorferðslan skal skipast strangliga í tjóðgørðum.

Eftir stk. 2, *3. pkt.*, er verndin eftir § 32 ikki til hindurs fyri ferðslu til gongu við fyriliti. Tað ber í sær, at slík ferðsla eftir hesi lógini kann fara fram í verndarøkjum uttangarðs, um hon fer fram við fyriliti og hóskandi varsemi. At ferðsla til gongu í útgangsstøðinum er loyvd í tjóðgørðum, hongur saman við, at upplivingarvirðið er ein týðandi grund til at skipa tjóðgarðar.

Eftir stk. 2, *4. pkt.*, er heimild til at avmarka ella seta forboð fyri ferðslu til gongu, men bara, um tað krevst fyri at varðveita verndarvirðini í økinum. Slíkar reglur kunnu t.d. vera viðkomandi, har ið stórir bólkar í ferðavinnu- ella øðrum samanhangi valda ella væntast at valda óhepnan slitskaða ella órógv. Ásetast kann tí í verndarkunngerðini, at skipað ferðsla krevur loyvi. Soleiðis fæst trygd fyri, at fyrisitingarmyndugleikin fær samrøðu í lag við tey, sum fáast við skipað virksemi. Hetta kann tryggja, at ferðslan ikki verður verndarvirðunum at skaða. Tað avgerandi, tá ið slík mál verða viðgjørd, er virknaðurin, sum ferðslan hevur á verndarvirðini, og ikki, um hon er vinnulig. Ein annar viðkomandi møguleiki, tá ið ferðsla til gongu skal avmarkast ella forbjóðast, kann vera við øðrum tiltøkum at beina ferðsluna í ávísar partar av vernarøkinum. Ásetingin heimilar hetta.

Orsakað av vandanum fyri lendissliti og órógvan av dýralívinum er tørvur á at kunna áseta reglur fyri øðrum sløgum av ferðslu enn ferðslu til gongu. Reglur kunnu ásetast fyri øllum virksemi, sum ikki er at rokna sum ferðsla til gongu, sbr. *øðrum virksemi*, um tað krevst til at røkka verndarendamálinum. Sum dømir kunnu nevnast ferðsla á súkklu ella rossabaki. Reglur kunnu eisini ásetast fyri ferðslu, sum fer fram við ikki-motorbúnari, tekniskari útgerð, t.d. flogskíggja, um slík ferðsla kann vera í ósamsvari við verndarendamálið. Tað eru avleiðingarnar, sum virksemið hevur fyri verndarvirðini, sum metast skal ítøkiliga um í hesum samanhangi, og ikki, um virksemið er í samsvari við siðbundið útilív.

Eftir *stk. 3, 1. pkt.*, skal uppkast til umsitingarætlan leggjast fram samstundis við verndaravgerðina. Hetta skal gera sítt til, at umsiting og neyðug tiltøk verða sett í verk í nóg góðari tíð og á skipaðan hátt, umframt at jarðareigarar og rættindahavarar í góðari tíð fáa eina fatan av, hvat ið er í væntu. Kravið um, at uppkast til umsitingarætlan *skal* leggjast fram samstundis við verndaravgerðina, skal ikki skiljast sum óvikiligt. Er tað hvørki neyðugt ella hóskandi at gera slíka ætlan, skal hon ikki gerast. Tað er heldur ikki eitt óvikiligt krav, at uppkast til umsitingarætlan verður lagt fram samstundis við verndaravgerðina, um støðan krevur, at verndaravgerðin verður tikin skundisliga. Eftir *2. pkt.* skal ein røktarætlan, um ein slík verður gjørd fyri økið, vera partur av umsitingarætlanini.

Mælt verður til at endurskoða umsitingarætlanina uml. 5. til 10. hvørt ár.

Jarðareigarar, rættindahavarar og kommunur, sum verða ávirkað, skulu fáa høvi at taka lut í arbeiðinum við umsitingarætlanum, sbr. § 38, stk. 1, 1. pkt.

**Til § 33.**
Treytin fyri at skipa eitt landslagsverndarøki er í fyrra lagi, at talan er um náttúru- ella røktarlandslag, sbr. *stk. 1, 1. pkt.* Við *landslagi* meinast í hesum sambandi heildin av landslagsskøpum, gróðrarsløgum í sínámillum samanspæli, vatnfyrikomingum, garðløgum, veitum, gøtum o.ø.

Landslagsverndarøkir kunnu eisini fevna um sjógv, men heimild er ikki í § 33 fyri at skipa landslagsverndarøkir á sjónum burturav.

Mótsett tjóðgarðsvernd er landslagsvernd ikki avmarkað til náttúrulandsløg. Sum nevnt í viðmerkingunum til § 32 finnast fá økir í Føroyum, sum eru heilt órørd av fólki, og tað eru glíðandi yvirgongdir millum náttúrulandsløg og røktarlandsløg. Við røktarlandslagi meinast í hesum

sambandi gjarna gamalt landbúnaðarlandslag, t.d. slóttubøur og byrgir, men ásetingin er ikki avmarkað til hetta. Bygningar og aðrar fysiskar støðir sum t.d. torvhús eru partur av røktarlandslagnum. Eitt mark má setast mótvegis økjum við tættari búseting og økjum, sum annars í stóran mun eru merkt av stórum tekniskum inntrivum sum t.d. vegum og øðrum undirstøðukervi ella størri verkløgum. Tað er tó ikki eitt krav eftir § 33, at økið í høvuðsheitum er frítt fyri teknisk inntriv, eins og tá ið talan er um tjóðgarðar.

Heimildin eftir náttúrumargfeldislógini at verja økir sum landslagsverndarøki er sostatt avmarkað til eitt smalri úrval av *landsløgum* enn eftir tí evropeiska landslagssáttmálanum, sum í art. 2 greitt ásetur, at eisini býarøkir eru fevnd av ásetingunum í sáttmálanum.

Í seinna lagi skal økið lúka hjátreytir um, at landslagið hevur vistfrøðiligt, mentanarligt ella upplivingarligt virði ella er samleikaskapandi. Við vistfrøðiligum virði meinast t.d., at landslagið lýkur týðandi vistfrøðiligar funktiónir fyri ávís sløg ella ber í sær umboðandi náttúrusløg.

Mentanarligt virði fevnir bæði um mentanarsøgulig virðir og nútíðarbrúk sum grundarlag fyri mentanarmenningini. Mentanarsøgulig virðir kunnu t.d. vera knýtt at siðbundnum brúksháttum í økinum, sum vísa seg í fysiskum fyrikomingum sum gamlari bygging, grótgørðum o.s.fr. Í slíkum førum kann økið samstundis sigast at hava mentanarligt virði. Í hugtakinum *mentanarligt* liggur eisini nútíðarbrúk, sum er virðisskapandi í mun til mentanarmenningina í nærsamfelagnum. Slíkt brúkt kann samstundis gera sítt til, at náttúruvirðir verða varðveitt. Eisini siðsøgulig virðir, sum eru knýtt at serstøkum støðum í landslagnum, eru fevnd av hugtakinum *mentanarligt virði*.

Yvirgongdin millum *mentanarligt virði*, tá ið ræður um nútíðarbrúk, og tað, sum er samleikaskapandi, er ikki eyðsýnd. M.a. tann evropeiski landslagssáttmálin leggur stóran dent á tað síðstnevnda landslagsvirðið. Sambært landslagssáttmálanum art. 5 (a) skulu sáttmálapartanir viðurkenna landsløg sum ein týðandi tátt í umhvørvinum hjá fólki, sum umboðar margfeldið í tess felags náttúru- og mentanararvi og eitt grundarlag undir tess samleika.

Landsløg kunnu geva sítt íkast til staðbundnan samleika ella tjóðarsamleika, og talan kann vera um landsløg, har fólk búgva og hava sítt lívsgrundarlag, ella landsløg við øðrum sløgum av samleika og tilknýti.

Tað upplivingarliga virðið hongur fyrst og fremst saman við útilívi. Eisini í hesum sambandi eru tó glíðandi yvirgongdir mótvegis tí, sum er samleikaskapandi ella vekur kensluna av at hoyra til.
Í stk. 1, *2. pkt.*, verður staðfest, at mentanarminnir, sum gera sítt til at geva landslagnum tess sermerkir, verða tald upp í landslagið.

Serstøk mið eru ikki lógarfest fyri landslagsverndarøkir, tíansheldur hinar verndarflokkarnar. Tí skulu miðini verða fevnd av § 30. Serliga viðkomandi fyri landslagsverndarøkir eru miðini í § 30, stk. 1, nr. 1, 6 og 7.

*Stk. 2* setur tann ytra karmin um rættarvirknaðin av at skipa landslagsverndarøkir. Verndarásetingarnar, sum ásettar verða í verndarkunngerðini, sbr. § 31, skulu rúmast innan fyri karmin á stk. 2. Rættarvirknaðurin av lógarásetingini er eisini beinleiðis bindandi mótvegis borgarunum.

Útgangsstøðið eftir *1. pkt.* er, at munandi ávirkan er forboðin, meðan verndin vanliga ikki er til hindurs fyri smávegis inntrivum. Hvat ið mett verður at vera *munandi*, kann vera skiftandi og má síggjast í samanhangi við tað ítøkiliga verndarendamálið. Kravið um munandi ávirkan má eisini síggjast í mun til, hvussu umfatandi virksemið er, hvat slag av virksemi talan er um, og hvar tað

fer fram, mett upp ímóti sermerkjum og dáminum í landslagnum. Talan kann vera um virksemi, sum annaðhvørt einsamalt ella saman við øðrum virksemi kann broyta verndarvirðini munandi.

Kravið um munandi ávirkan ber vanliga í sær forboð fyri at reisa bygningar, støðir og aðrar varandi ella fyribils innrættingar, at gera vegir, at leggja luft- og jarðkaðlar, grevstri, ífylling, at leggja mold- og grótrúgvur frá sær, nevningarverdari nývelting, nýgróðurseting, at slætta heyggjut lendi, námsvinnu og broytingum av týdningi í vatnrensli ella vatnstøðu.

Í teimum førum har tað innan fyri eitt landslagsverndarøki longu eru bygningar, vegir, brýr, garðar, orkuleiðingar, landbúnaðarøkir o.a., er verndin ikki til hindurs fyri rakstri og viðlíkahaldi, men verndarásetingarnar kunnu seta krøv til háttin og annað virksemi í tí sambandi (t.d. um flutning).

Orðið *sermerkja* sipar í hesum sambandi serliga til sjónárin, meðan orðið *dámur* í hesum sambandi serliga sipar til náttúru- og mentanarvirðir, og um landslagið ber dám av at vera t.d. strandarlandslag, havbotnur o.s.fr.

Eftir stk. 2, *2. pkt.*, kann virksemi, sum er í gongd, t.d. landbúnaður og fiskiskapur, halda fram og mennast innan fyri karmin á 1. pkt. Í tí liggur, at virksemið ikki skal virka ímóti verndarendamálinum.

Nýtt virksemi kann eftir *3. pkt.* loyvast, um tað verður lagað eftir landslagnum og á tann hátt ikki er í ósamsvari við verndarendamálið og ikki broytir verndarvirðini munandi.

*4. pkt.* lógarfestir eina skyldu fyri myndugleikan at leggja dent á heildarávirkanina frá virksemi í økinum. Hetta geldur eisini eftir § 10, men er serliga viðkomandi fyri landslagsverndarøkir, har ið vanliga nakað av mannavirksemi er, og har ið tað er eitt aðalmál varðveita sermerkir og dámin í landslagnum.

Kunngerðin kann nágreina, hvat ið mett verður at *broyta sermerkir ella dámin í landslagnum munandi*. Hóast ásetingin er ein *kann*-regla, skal hon síggjast sum eitt greitt signal um at gera greiðu fyri í tí einstøku kunngerðini, hvørji sløg av virksemi eru forboðin, hvat ið loyvi kann fáast til eftir umsókn, og hvat ið kann útinnast, uttan at verndin er til hindurs fyri tí. Talan kann vera um virksemi, sum annaðhvørt einsamalt ella saman við øðrum virksemi kann broyta verndarvirðini munandi. Ferðsla til gongu við fyriliti kann tó ikki eftir náttúrumargfeldislógini avmarkast í einum landslagsverndarøki.

Verða landslagsverndarøkir skipað, har ið mannabrúk er ein týðandi fyritreyt fyri at tryggja verndarendamálið, skal í seinasta lagi samstundis við verndaravgerðina leggjast fram uppkast til ætlan fyri røkt av økinum, sbr. *stk. 3, 1. pkt.* Leggjast skal fram ein ætlan fyri, hvussu fyrisitingarmyndugleikin hugsar at fremja røktina, sum krevst til at røkka verndarendamálinum í teimum nevndu førunum. Tann endaliga ætlanin verður fastsett av fyrisitingarmyndugleikanum, eftir at verndarkunngerðin er lýst. At ætlanin er endaliga fastsett, er tó eingin fyritreyt fyri at kunna fremja røkt í samsvari við § 44.

At tryggja, at ávís sløg av brúki halda fram, er ofta treytað av, at jarðareigarin ella rættindahavarin gevur loyvi, møguliga ognartøku, sbr. allýsingina av *røkt* í § 44 og avmarkingina í § 44, stk. 2, 2. pkt., fyri, hvat ið fremjast kann eftir lógargreinini. Í § 33, stk. 3, er tað tí nágreinað, at røktarætlanin kann fevna um privatrættarliga avtalu um brúk av økjum, stakfyribrigdir og rakstrarhættir fyri at tryggja verndarendamálið. Eisini í teimum førum, har loyvi ikki krevst frá jarðareigaranum til at fremja røkt, skal miðast eftir at fáa avtalu í lag við jarðareigaran, sbr. § 44, stk. 1, 2. pkt.

Eftir stk. 3, *3. pkt.*, kunnu í avtaluni ásetast ásetingar um fíggjarliga samsýning til privat, sum geva sítt íkast til røkt av økinum. Ásetingin er í roynd og veru óneyðug, men er tikin við fyri at draga fram, at hetta kann vera ein viðkomandi loysn. Slík samsýning eigur at síggjast í samanhangi við samsýning eftir § 47, stk. 2.

Í teimum økjum, har ið tað er viðkomandi, skal eisini heildarfevnd umsitingarætlan gerast, sbr. *stk. 4*. Í hesum førunum verður røktarætlanin ein partur av umsitingarætlanini. Tað verður fyrst og fremst viðkomandi at gera umsitingarætlanir fyri stór landslagsverndarøkir, har ið tað eru fleiri brúkaraáhugamál. Umsitingarætlanin eigur at gerast samstundis við røktarætlanina. Mælt verður til at endurskoða umsitingarætlanir uml. 5. til 10. hvørt ár.

Uppkast til umsitingarætlan skal leggjast fram samstundis við verndaravgerðina. Slík framløga ger sítt til, at umsiting og neyðug tiltøk verða sett í verk í nóg góðari tíð og á skipaðan hátt, umframt at jarðareigarar og rættindahavarar í góðari tíð fáa eina fatan av, hvat ið er í væntu.

Kravið um, at uppkast til umsitingarætlan *skal* leggjast fram samstundis við verndaravgerðina, skal ikki skiljast sum óvikiligt. Er tað hvørki neyðugt ella hóskandi at gera slíka ætlan, skal hon ikki gerast. Tað er heldur ikki eitt krav, at uppkast til umsitingarætlan verður lagt fram samstundis við verndaravgerðina, um støðan krevur, at verndaravgerðin verður tikin skundisliga.

Eftir *2. pkt.* skal røktarætlaninin vera partur av umsitingarætlanini.

Jarðareigarar, rættindahavarar og kommunur, sum verða ávirkað, skulu fáa høvi at taka lut í arbeiðinum við umsitingarætlanum, sbr. § 38, stk. 1, 1. pkt.

**Til § 34.**
Náttúrufriðøkir kunnu eins og tjóðgarðar skipast bæði á landi og í eini samanseting av landi og sjógvi. Eitt náttúrufriðøki, sum eisini fevnir um sjógv, kann fevna um havbotnin, vatnsúluna ella vatnskorpuna ella eina samanseting av hesum. Verndarøkir í ella á sjónum burturav verða skipað eftir § 36.

*Stk. 1* nevnir nakrar møguleikar sum treytir fyri at skipa eitt náttúrufriðøki. Tað er nóg mikið, at ein av møguleikunum er lokin, men økið kann bera í sær dygdir, sum lúka fleiri av treytunum samstundis.

Hótt, sjáldsom ella viðkvom náttúra kann vera sløg (*species*) ella stovnar, sum eru hótt, sjáldsom ella viðkvom, ella náttúrusløg, gróðrarsløg ella landslagssløg, sum eru í slíkum standi. Tá ið talan er um sløg (*species*), fevna *hótt, sjáldsom ella viðkvom* um IUCN-flokkarnar CR (Critically Endangered), EN (Endangered) og VU (Vulnerable). IUCN-flokkarnir NT (Near Threatended), DD (Data Deficient) og LC (Least Concern) eru vanliga ikki at rokna sum *hóttir, sjáldsamir ella viðkvæmir*, men kunnu koma undir onkrar av hinum treytunum í stk. 1, t.d. *nr. 3*. Tær náttúrufakligu treytirnar fyri, hvat ið er at rokna sum hótt, sjáldsamt ella viðkvæmt, mennast við tíðini, og tulkingin av hesum hugtøkunum í § 34 má tí lagast eftir tí fakligu gongdini á økinum. Hóast IUCN-flokkarnir eru hent metingarstøði, er formlig IUCN-flokking ikki ein fyritreyt fyri at kunna meta sløg at vera hótt, sjáldsom ella viðkvom.

Eitt náttúruslag ella eitt gróðrarslag kann sigast at vera sjáldsamt eftir nr. 1, tá ið fyrikomingin er avmarkað, annaðhvørt frá náttúrunnar hond, ella av tí at hon hevur verið fyri afturstigi av mannaávum, uttan at talan nýtist at vera um beinleiðis vanda fyri, at hon hvørvur.

Stk. 1, *nr. 2*, staðfestir, at eitt øki kann verjast, tá ið tað umboðar eitt ávíst slag av náttúru. Við *ávísum* meinast í hesum sambandi, at tað hevur ávís eyðkennir, t.d. at tað er ein fyrikoming av baraldi ella ein jarðfrøðilig fyrikoming úr kvarterøld. Treytin er í samsvari við miðið í § 30, nr. 1. Økir, sum á annan hátt hava serligan týdning fyri lívfrøðiligt margfeldi (stk. 1, *nr.3*), kunnu t.d. vera økir við sløgum, sum krevja fyrilit, týdningarmikil búøkir fyri vanliga fyrikomandi sløg, økir við yvirhøvur ríkum plantu- ella dýralívi, økir, sum í langa tíð hava havt støðug vistfrøðilig viðurskiftir, ella økir við týdningarmiklum landslagsvistfrøðiligum funktiónum.

Eisini jarðfrøðiligar fyrikomingar kunnu eftir *nr. 4* verjast sum náttúrufriðøkir. Nr. 2 fevnir um allar umboðandi náttúrufyrikomingar, eisini tær jarðfrøðiligu, meðan nr. 4 er ætlað at lofta fyrikomingum, sum eru serstakar, t.e. fyrikomingum, sum við sínum serdrøgum líkjast burturúr. Jarðfrøðiligar fyrikomingar eru eisini fevndar av nr. 1 og 5.

Tann síðsta treytin fyri friðøkisvernd, sum er í at velja, er, at økið hevur serstakt náttúruvísindaligt virði (*nr. 5*). Treytin kann fyri ein part falla saman við hinum treytunum í ásetingini. Munurin er, at tað vísindaliga virðið ella granskingarvirðið verður serliga drigið fram í nr. 5. Eitt viðkomandi dømi er vernd av tilvísingarøkjum, sbr. eisini verndarmiðið í § 30, stk. 1, nr. 8.

Treytirnar í stk. 1 eru av náttúrufakligum slag. Tað ber í sær, at eitt øki ikki kann verjast sum náttúrufriðøki, um verndarvirðini bara eru knýtt at týdningi, sum økið hevur við atliti at røkt, samleikaskapan ella uppliving.

Treytirnar í stk. 1, nr. 1 til 5, eru fyrst og fremst knýttar at funktiónini, sum økið hevur fyri tað lívfrøðiliga margfeldið. Hetta ber í sær, at eisini økir, sum fyrr hava verið fyri inntrivum, kunnu verjast sum friðøkir, um tann viðkomandi funktiónin framvegis er til staðar ella kann endurreisast, sbr. *stk. 2*. Endurreisingin kann fara fram, við at náttúran sleppur at mennast frítt eftir verndina og megnar at "bøta aftur" inntriv, sum gjørd eru, sbr. orðingina *við fríari menning*. Talan kann t.d. vera um økir, har ið gróður er slitin eftir nógva ferðslu, men tekur seg upp aftur, tá ið ferðslan hæsar av ella heldur uppat. Ofta kann tó vera tørvur á virknum endurreisingartiltøkum (sbr. *stk. 3, 1. pkt.*), t.d. upprudding í vatnfyrikomingum ella burturtøku av vegum og øðrum tekniskum inntrivum. Talan kann eisini verða um at skapa heilt nýggj lívøkir, t.d. eina nýggja tjørn.

Orðingarnar í stk. 1, nr. 1 til 5, bera í sær, at eisini røktartreytað lívfrøðiligt margfeldi kann geva grundarlag fyri friðøkisvernd.

*Stk. 3, 1. pkt.*, setur tann ytra karmin um rættarvirknaðin av at skipa náttúrufriðøkir. Verndarásetingarnar, sum ásettar verða í verndarkunngerðini, sbr. § 31, skulu kunna rúmast innan fyri karmin á stk. 3. Ásetingin er eisini beinleiðis bindandi í mun til borgaran.

Eftir *2. pkt.* kann eitt náttúrufriðøki alfriðast, soleiðis at verndin fevnir um allar partar av náttúruumhvørvinum í friðøkinum og geldur fyri alt virksemi. Av hesum skilst eisini, at náttúrufriðøkir eru eitt strangt verndarslag. Alfriðing fevnir eftir orðaljóðinum um alt virksemi, m.a. at byggja bygningar, verkløg og aðrar varandi ella fyribils innrættingar, vegagerð, ferðslu, veiðu og heysting, at leggja luft- og jarðkaðlar, grevstur, at fylla í og leggja frá sær mold- og grótrúgvur, at velta upp úr nýggjum, at gróðurseta av nýggjum, at slætta heyggjut lendi, námsvinnu, alivirksemi, inntriv í áir og vøtn og annað virksemi, eisini tøku av mineraltilfeingi og oljuleiting og -útvinning. Tað at økið, sum vart verður, hevur verið fyri inntrivum, sum í útgangsstøðinum eru óynskt í einum náttúrufriðøki, merkir ikki, at inntriv av sama slag kunnu gerast, eftir at økið er skipað sum náttúrufriðøki. Tørvur kann vera á strangari vernd í økjum, har ið inntriv fyrr eru gjørd.

Tað er ikki altíð tørvur á so víðfevndari friðing. Sumt virksemi kann vanliga halda fram í náttúrufriðøkjum, t.d. berjahenting, veiða og fisking í friðøkjum, har ið plantulívið er høvuðsverndarendamálið, og viðlíkahald av bygningum og verkløgum. Atgongdin at gera undantøk frá eini alfriðing er avmarkað. Sí nærri um hetta í viðmerkingunum til § 45.

Ásetingin sigur ikki, at talan aloftast skal vera alfriðing. Náttúrufriðøkir verða ofta skipað fyri at verja serstøk virðir og funktiónir, og avmarkingarstigið skal lagast eftir tí ítøkiliga verndarendamálinum, sbr. eisini § 31, stk. 4. T.d. er vanliga einki til hindurs fyri at loyva haruveiðu í einum friðøki, har ið endamálið er at verja plantulívið. Aftur at tí er latið upp fyri, at røktartreytað margfeldi kann verjast sum friðøki, og hetta er treytað av røktartiltøkum. Í endurreisingarfriðøkjum (sbr. § 34, stk. 4) kann tørvur eisini vera á virknum, stundum víðfevndum, tiltøkum.

Stk. 3, *3. pkt.*, ger greitt, at verndarásetingarnar fyri náttúrufriðøkir eisini kunnu fevna um ásetingar um vernd av mentanarminnum í friðøkinum. Ásetingin er neyðug fyri at gera greitt, at mentanarminnir kunnu verjast javnt við onnur virðir, sum verjast kunnu eftir friðøkisásetingini, av tí at atlit at mentanarminnum ikki eru nevnd millum treytirnar fyri friðøkisvernd í stk. 1.

Verður eitt náttúrufriðøki skipað, sum krevur virkin endurreisingartiltøk, ella har ið brúk er ein fyritreyt fyri at røkja verndarendamálið, skal samstundis við verndarkunngerðina uppkast til røktarætlan vera tøkt, sbr. *stk. 4, 1. pkt.* Sostatt krevst ikki, at uppkast til fullfíggjaða umsitingarætlan er tøkt, men til eina ætlan fyri, hvussu fyrisitingarmyndugleikin í verki ætlar at fremja røktina, sum krevst til at røkka verndarendamálinum. Endaliga ætlan fyri røkt kann fyrisitingarmyndugleikin gera, eftir at verndin við kunngerð er sett í verk. At ætlanin er endaliga ásett, er tó eingin treyt fyri at kunna útinna røkt í samsvari við § 44.

Á § 44 skilst, at summi røktartiltøk ikki kunnu fremjast eftir tí greinini, sbr. § 44, stk. 2, 2. pkt. Talan er um tiltøk, sum ofta kunnu vera viðkomandi í endurreisingarfriðøkjum. Er tørvur á slíkum tiltøkum, má myndugleikin fáa til vega eitt heimildargrundarlag annaðhvørt við privatrættarligari avtalu ella við ognartøku til røktarendamál.

Viðvíkjandi stk. 4, *2.* og *3. pkt.*, verður víst til viðmerkingarnar til samsvarandi áseting í § 33, stk. 3, 2. og 3. pkt.

Eins og tá ið talan er um hinar verndarflokkarnar, verða ikki skotin upp serlig lógarfest mið fyri náttúrufriðøkir. Treytirnar fyri vernd eru av náttúrufakligum slag, og millum miðini í § 30, stk. 1, eru tað serliga miðini í nr. 1, 2, 3, 5, 7 og 8, sum eru viðkomandi. Miðið í § 30, stk. 1, nr. 6, kann vera viðkomandi, tá ið ræður um at varðveita røktartreytað margfeldi. Fyritreytin er, at ein ella fleiri av treytunum í § 34, stk. 1, eru loknar.

Innan fyri eitt netverk, sbr. § 30, stk. 1, nr. 7, kunnu náttúrufriðøkini ofta vera ein ryggur av lutfalsliga smáum økjum, sum hava serligan týdning fyri tað lívfrøðiliga margfeldið. Friðøkini kunnu tó eisini skipast fyri at tryggja hent sambindingarlið millum verndarøkir, t.d. geilir ella vistfrøðiligar lopfjalir (økir, sum kunnu vera støðir til spjaðing av einum slag), og á tann hátt geva sítt íkast til netverkið.

**Til § 35.**
Treytin fyri lívøkisvernd er, at eitt øki hevur ella kann fáa serstakan týdning sum vistfrøðiligt funktiónsøki hjá nærri ásettum sløgum (*species*), sbr. *1. pkt.* Økir við eini vistfrøðiligari funktión eru t.d. økir, har ið fuglur søkir sær føði, híðøkir, hamskiftisøkir, náttarhvíldarøkir, spæli- ella makingarøkir, flytingarleiðir, yngliøkir og búøkir, sbr. eisini § 3, nr. 17. Eitt øki kann hava eina ella fleiri vistfrøðiligar funktiónir fyri tað sama slagið. At økið skal hava ella kunna fáa *serstakan*

*týdning* sum vistfrøðiligt funktiónsøki, ber ikki í sær, at eitt og hvørt vistfrøðiligt funktiónsøki skal kunna geva grundarlag fyri lívøkisvernd. Økið skal hava ella kunna fáa eginleikar, sum gera, at tað er týdningarmikið fyri gongdina hjá slagnum í mun til miðið í § 5.

Tann vistfrøðiliga funktiónin má snúgva seg um eitt ella fleiri nærri tilskilað sløg. Tað merkir, at tað skal vera kent, hvat slag ella hvørji sløg ið økið skal gera sítt til at varðveita. Snýr verndin seg um ókend sløg ella plantu- ella dýrasamfeløg, má heimildin til náttúrufriðøki í § 34 brúkast.

Eisini økir, sum í stóran mun eru merkt av inntrivum, kunnu verjast sum lívøkisverndarøkir. Er tann vistfrøðiliga funktiónin varðveitt hóast inntrivini, kann verndin verja fyri framhaldandi ávirkan. Økir kunnu eisini endurreisast ella mennast til at gerast týðandi funktiónsøkir hjá ávísum sløgum. At lívøkisverndarheimildin kann brúkast í slíkum førum, skilst á orðunum *kunnu fáa* í 1. pkt. Eftir *2. pkt.* geldur § 34, stk. 4, samsvarandi. Tað merkir, at uppkast til røktarætlan skal vera gjørt, tá ið eitt lívøkisverndarøki, sum krevur virkin endurreisingartiltøk, verður skipað. Víst verður til viðmerkingarnar til § 34, stk. 4.

Lívøkisverndarásetingin er ein heimild til økisvernd, t.e. hon kann ikki brúkast til at áseta almennar reglur um funktiónsøkir. Økið skal eftir 1. pkt. avmarkast við støði í, hvat ið krevst til at varðveita ella menna ta vistfrøðiligu funktiónina, sum talan er um, sí eisini § 31, stk. 3. Í endamálsásetingini í verndarkunngerðini eigur at verða ítøkiliggjørt, hvørja ella hvørjar funktiónir og sløg ið talan er um.

Tá ið ræður um endamálið við lívøkisvernd, eru tað § 30, stk. 1, nr. 2, 3 ella 7, sum eru viðkomandi. Forboð kann ásetast fyri virksemi ella ferðslu, *sum kann ávirka ella órógva slagið ella tess lívskor*. Ræðisreglurnar mugu ásetast innan fyri karmin á § 31, stk. 4, um, at forboð ella reglur, skulu snúgva seg um brúk, sum kann *virka ímóti verndarendamálinun*. Fyri lívøkisvernd ber tað í sær, at kunngerðin ikki kann áseta ásetingar, sum fara longur enn mett verður neyðugt til at tryggja ta vistfrøðiligu funktiónina fyri slagið ella sløgini, sum talan er um. Innan fyri hetta kunnu ásetast ásetingar bæði um tøku ella aðra ávirkan av eintøkum av slagnum, sbr. orðingina *sum kann ávirka ella órógva slagið*, og um brúk, sum kann ávirka ella órógva *lívskor* hjá slagnum, sum talan er um. Við slagnum meinast tað ella tey sløgini, sum nevnd eru sum endamál við verndini. Við *lívskorum* meinast t.d. vatnhúsarhald, dálking ella sløg, sum hava stóran týdning fyri ta vistfrøðiligu funktiónina fyri hetta slagið.

Ræðisreglurnar verða ymiskar, alt eftir funktiónini, sum verndin skal verja. Er t.d. talan um eitt reiðurstað, kunnu ferðsluavmarkingar eitt stutt tíðarskeið um árið vera nóg mikið.

**Til § 36.**
*Stk. 1* ásetur, at *verndarøkir kunnu skipast í ella á sjónum til at verja verndarvirðir í ella á sjónum*. Ásetingin gevur heimild til at skipa verndarøkir í ella á sjónum burturav. Umframt at verja verndarvirðir í ella á sjónum kann verndin skipast fyri at tryggja náttúruvirðir í ella sjónum, *sum eru vistfrøðiligar fyritreytir fyri sløgum, sum liva á landi*. Treytir og rættarvirknaður av vernd í ella á sjónum skiljast á hinum ásetingunum í § 36.

*Stk. 2* ásetur, at verndarøkir í ella á sjónum kunnu skipast við einum breiðum úrvali av miðum, sbr. § 30, stk. 1, nr. 1 til 8. Verndarøkir í ella á sjónum eru ein alfevndur verndarflokkur, og høvi er ikki til, sum á landi, at skipa økir sum tjóðgarð, landslagsverndarøki, náttúrufriðøki ella lívøkisverndarøki.

*Stk. 3* ásetur treytir fyri vernd av økjum í ella á sjónum. Treytirnar samsvara í stóran mun við treytirnar fyri skipan av tjóðgørðum, náttúrufriðøkjum og lívøkisverndarøkjum. Víst verður til umrøðuna av hesum treytunum omanfyri í §§ 32, 34 og 35.

Á *stk. 4* skilst, at verndin skal skila til, um verndarvirðini og avmarkingarnar fevna um botnin, vatnsúluna vatnskorpuna ella eina samanseting av hesum. Rættarvirknaðurin kann vera knýttur at virksemi, sum ikki beinleiðis ber við verndarvirðini, um virksemið óbeinleiðis kann vera verndarvirðunum at skaða og sostatt vera í ósamsvari við verndarendamálið. T.d. kunnu avmarkingar setast fyri alivirksemi í vatnsúluni, um dálking frá alistøðini kann ávirka verndarvirðini á botni. Avmarkingarnar fevna í tí førinum bæði um havbotnin, vatnsúluna og vatnskorpuna, hóast verndarvirðini bara er knýtt at havbotninum.

*Stk. 5* setur tann ytra karmin um rættarvirknaðin av at skipa verndarøkir í ella á sjónum. Verndarásetingarnar, sum ásettar verða í verndarkunngerðini, sbr. § 31, skulu rúmast innan fyri karmin á stk. 4. Á *2. pkt.* skilst, at verndarøkir í ella á sjónum kunnu seta forboð fyri øllum virksemi. So víðfevndar avmarkingar eru ofta óneyðugar. Tað er nágreinað, at slíkar avmarkingar ella forboð ikki kunnu fara longur, enn altjóðarættur loyvir. Tað ber í sær, at ásetingin m.a. ikki heimilar inntriv í rættin hjá fremmandum førum til meinaleysa ferðslu í føroyskum sjógvi, tá ið slíkur rættur er tryggjaður eftir havrættarsáttmálanum. Avmarkingarnar skulu ikki vera strangari, enn hvat ið verndarendamálið krevur. Sumt virksemi kann tí vanliga halda fram. T.d. verður vanliga einki til hindurs fyri at loyva fiskiskapi longri uppi í sjónum í einum verndarøki, sum hevur til endamáls at varðveita havbotnin. Á sama hátt hevur ferðsla sjóvegis vanliga ikki týdning djúpt niður í vatnsúluna.

Gagnnýtsla av villum sjófeingi kann fara fram í einum verndarøki í ella á sjónum, tá ið tað ikki er verndarvirðunum at skaða ella versnan og tí ikki er í ósamsvari við verndarendamálið.

*Sjóøkir, har verndin bara snýr seg um nærri ásettar reglur fyri útinnan av fiskiveiði, verða skipað sambært løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi*, sbr. *stk. 6*. Ásetingin staðfestir, at tá ið fiskiskapur er einasta virksemi, sum reglur mugu ásetast fyri fyri at røkka verndarendamálinum, skal hetta fara fram eftir løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Í tí føri er talan um økisfriðing heldur enn eitt verndarøki eftir kapitli 5 í náttúrumargfeldislógini.

**Til § 37.**
Ásetingin gevur heimild til at geva einum verndarøki serstaka støðu eftir einum altjóða sáttmála. Orðið *verndarøki* ber í sær, at talan má vera um eitt ítøkiligt øki, sum annaðhvørt longu er vart ella verður vart, samstundis við at tann serstaka støðan verður givin. Slík støða skal eftir *1. pkt.* gevast við kunngerð. Slík kunngerð kann ásetast annaðhvørt samstundis við verndarkunngerðina og vera ein partur av hesi ella seinni sum sjálvstøðug kunngerð.

Støðan, sum sipað verður til í 1. pkt., er ein støða sambært tí viðkomandi sáttmálanum, og sum er nærri lýst í honum, t.d. eitt øki eftir art. 2 í Ramsar-sáttmálanum.

Tann serstaka støðan fær í sjálvari sær týdning fyri metingarútinningina hjá fyrisitingini, t.d. í sambandi við spurningar um at geva loyvir ella undantaksloyvi til virksemi í einum verndarøki. Á *2. pkt.* skilst eisini, at virknaðurin, sum viðkomandi sáttmáli knýtir at slíkari støðu, geldur sum føroyskur rættur. Hetta merkir m.a. fyri Ramsar-økini, at verndin bara kann avtakast ella avmarkast *orsakað av átrokandi neyðugum tjóðaráhugamálum* hjá sáttmálapartinum, og at myndugleikarnir eiga at skapa nýggj friðøkir, um verndin av einum Ramsar-øki verður sett úr gildi (art. 4 (2)).

Ein serligur spurningur tekur seg upp við atliti at samtyktum hjá stovnum undir sáttmálanum, sum t.d. geva tilmælir ella leiðreglur fyri, hvussu ið sitast skal fyri verndarøkjunum. Slíkar samtyktir galda eftir § 37 ikki beinleiðis sum føroyskur rættur. Hesar samtyktirnar mugu tí setast í verk í verndarkunngerðini fyri at kunna fáa rættarvirknað mótvegis privatum pørtum. Gevur verndarkunngerðin fyrisitingarmyndugleikanum høvi til at sita fyri økinum í samsvari við samtyktina, og tørvur tí ikki er á at seta samtyktina í verk í kunngerðini, eigur hetta at vera leiðbeinandi hjá fyrisitingarmyndugleikanum, við atliti at hvussu ið sitið verður fyri verndarøkinum við serstakari støðu eftir § 37.

**Til § 38.**
Reglurnar í § 38 galda í sambandi við økisvernd eftir lógarkapitli 5. § 38 geldur tó ikki fyri bráðfeingisvernd eftir § 42, stk. 1 ella 2, sbr. § 42, stk. 3, 1. pkt.

Broytingar av kunngerðum um økisvernd kunnu vera ymiskar, og tí eigur málsviðgerðin at lagast eftir tí einstøku broytingini. Fyrisitingarlógin geldur í øllum førum. Snýr verndin seg um at víðka verndarøkið munandi, skal málið viðgerast eftir somu reglum, sum galda fyri skipan av einum heilt nýggjum øki, sbr. § 38. Tað sama eigur at galda, um broytingin snýr seg um at broyta verndarflokk, t.d. frá landslagsverndarøki til tjóðgarð ella náttúrufriðøki. Ein broyting, sum kann sigast at vera ein markrætting, ella sum snýr seg um tær einstøku verndarásetingarnar (antin tær verða herdar ella linkaðar), eigur at kunna fara fram við støði í eini málsviðgerð í samsvari við reglurnar í fyrisitingarlógini.

Verndarkunngerðir skulu tryggja vernd í longdini og koma í lag eftir víðfevnda málsviðgerð, har ið tey ymisku áhugamálini verða neyvt vigað upp ímóti hvørjum øðrum. Tekur spurningurin seg upp um heilt ella fyri ein part at avtaka eina kunngerð um økisvernd, er tað ein fyritreyt, at neyv greiða verður gjørd fyri avleiðingunum fyri endamálini, sum verndarkunngerðin skal varðveita, og at greiða verður gjørd fyri, at verndarkunngerðin upprunaliga bygdi á skeivar upplýsingar um verndarvirðini. Er orsøkin til eitt uppskot um avtøku, at verndarvirðið er burturdottið, kann grundarlagið tó vera eyðsæð.

Er talan um heilt ella fyri ein part at avtaka, skal málið viðgerast eftir somu reglum, sum galda fyri skipan av einum heilt nýggjum verndarøki, sbr. §§ 38 til 40. Er grundgevingin fyri avtøkuni, at verndarvirðini heilt ella fyri ein part eru burturdottin, eigur avtøkan at kunna fara fram við støði í eini málsviðgerð í samsvari við fyrisitingarlógina.

Í *stk.1, 1. pkt.*, verða eigarar, rættindahavarar, ávirkað vinnuáhugamál og fólk á staðnum, kommunan og aðrir viðkomandi myndugleikar drigin fram. So gott samstarv sum gjørligt ber í sær, at myndugleikarnir skulu miða eftir at fáa í lag eina málsviðgerð, har ið øll, sum ávirkað verða, fáa høvi at taka lut á bestan hátt fyri at gera greiðu fyri bæði ósamsvarandi og samsvarandi áhugamálum og hvussu ið málsviðgerðin skal fara fram.

Verndararbeiði byrjar vanliga við náttúrufakligum skrásetingum av verndarvirðum. Longu á hesum stiginum eigur at miðast eftir at fáa samstarv í lag við jarðareigarar, rættindahavarar og fólk á staðnum. Samstarvið kann vera av heilt praktiskum slag og kann t.d. snúgva seg um atgongd at ognunum ella staðbundnan kunnleika.

Jarðareigarar og rættindahavarar eru tey, sum hava ítøkilig rættindir í økinum, sum ætlanir eru um at verja. Fólkið á staðnum er ein størri bólkur av teimum, sum búgva í økinum. Stk. 1 ásetur minstuskyldur við atliti at, hvørjir áhugapartar ið tiknir eiga at verða við í tilgongdina. Vil myndugleikin taka onnur við í málsviðgerðina, t.d. serliga ávirkaðar brúkarar, sum ikki koma undir

hugtakið *umboð fyri fólkið á staðnum*, er eisini høvi til tað. Í hvønn mun brúkararnir eiga at verða tiknir við í hetta arbeiðið, veldst um tilknýtið, sum teir hava til økið, sum talan er um.

Stk. 1, *2. pkt.*, nágreinar, at ásetingin í stk. 1, 1. pkt., eisini geldur fyri málsviðgerðina í tilgongdum, sum settar eru í gongd við støði í sjálvbodnari vernd. Hóast sjálvboðin vernd byggir á, at jarðareigarin sjálvur tekur stig til vernd, skal málsviðgerðarmannagongdin fylgjast, so at trygd fæst fyri, at allir ávirkaðir partar eisini í slíkum førum verða tiknir við í málsviðgerðina.

Stk. 1, *3. pkt.*, nágreinar, at *málsviðgerðin skal skapa sum mest av greidleika um endamál og verndarvirðir, brúk á staðnum og kunnleika um verndarvirðir, økismørk og avleiðingar av verndini*. At málsviðgerðin skal *skapa sum mest av greidleika* um tey nevndu viðurskiftini, nýtist ikki at bera í sær, at tað er myndugleikin sjálvur, sum skal fáa allar upplýsingarnar til vega. Uppgávan hjá myndugleikanum er at bera so í bandi, at málsviðgerðin er soleiðis skipað, at tær neyðugu upplýsingarnar kunnu koma á borðið, eisini tá ið tær mugu fáast frá rættindahavarum og fólki á staðnum. Serlig vitan um, hvat ið er staðbundið brúk av økinum, og hvat ið fólk á staðnum veit frá verndarvirðum í økinum at siga, má fáast til vega við hoyringum á staðnum og fundum við fólkið á staðnum.

Hvat ið *sum mest* av greidleika er, kann vera ymiskt á ymsum stigum í verndartilgongdini. T.d. er greiða neyvan gjørd fyri øllum verndarvirðum og brúkaraáhugamálum, tá ið farið verður undir verndararbeiðið. Eisini kann avmarkingin av verndarøkinum tillagast so hvørt í tilgongdini og soleiðis eisini avleiðingarnar av verndini. Við *avleiðingum av verndini* meinast fyrst og fremst, hvørjar ræðisreglur ið kunnu vera viðkomandi, bæði fyri tann einstaka jarðareigaran ella rættindahavaran og fyri fólkið á staðnum ella almenningin yvirhøvur.

Á *4. pkt.* skilst, at sum liður í málsviðgerðini *skal eisini vitan um onnur møgulig virðir í økinum savnast inn*. Í tí liggur, at myndugleikin sum liður í málsviðgerðini skal savna inn vitan um onnur møgulig virðir enn verndarvirðir í økinum, sum longu er atkomandi. Tað kann eisini fevna um vitan, sum møguliga má fáast til vega. Við *fáa til vega* meinast bæði at savna inn vitan, sum finst, men sum er illa atkomandi, ella sum fyrisitingarmyndugleikin ikki veit um, og at fáa til vega nýggja vitan. Geirin, sum ávirkaður verður av tí ætlaðu verndini, skal geva sítt virkna íkast. Kravið til vitanargrundarlagið skal vera rímiligt, alt eftir hvat slag av máli talan er um og hvussu stórt málið er.

Á *stk. 2, 1. pkt.*, skilst, at høvuðsendamálið við at taka upp samband við kommunur tíðliga í tilgongdini er at greiða sambandið við økisplanlegging eftir planlóggávuni. Ásetingin ásetur, at *sambandið um kommunalt planarbeiði, sum farið verður undir samstundis eftir planlóggávuni, skal greiðast í samráð við kommununa*. Í tí liggur, at metast skal, um planleggingin eftir planlóggávuni og málsfyrireikingin eftir náttúrumargfeldislógini eiga at samskipast í tí ítøkiliga økinum.

Eftir stk. 2, *2. pkt.*, kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta reglur fyri samskipaðari viðgerð eftir planlóggávuni og náttúrumargfeldislógini.

**Til § 39.**
Eftir *stk. 1, 1. pkt.*, er tað verndarmyndugleikin, sum skal kunngera verndaruppskotið. Uppskotið skal kunngerast á ein hátt, sum er hóskandi til at kunna almenningin og ávirkað áhugamál um uppskotið. Tað kann vera ymiskt, alt eftir verndini og umstøðunum, hvat ið er hóskandi. Á 1. pkt. skilst eisini, at tær týdningarmestu avleiðingarnar av verndaruppskotinum skulu lýsast.

Á *3. pkt.* skilst, at jarðareigarar og rættindahavarar skulu fáa høvi at vera við, tá ið verndaruppskotið verður gjørt. Tí eiga hesir at kunnast skrivliga og fáa rímiliga freist at koma við viðmerkingum. Orðingin *alt tað er gjørligt* ber í sær, at talan ikki er um málsviðgerðarfeil, um kunningin ikki kemur fram til øll ella eitt bræv kemur ov seint fram.

So tíðliga sum gjørligt, og í góðari tíð fyri kunngeringina, skulu stig takast til samstarv við almennar myndugleikar, felagsskapir og onnur við serligum áhuga í verndarmálinum, sbr. *stk. 2, 1. pkt.*

Stk. 2, *2. pkt.*, nágreinar, at verndarkunngerðin skal orðast í samstarvi við viðkomandi týðandi myndugleikar.

**Til § 40.**
Í *stk. 1, 1. pkt.*, er ásett, hvørjir partar ið í minsta lagi skulu hoyrast um uppskotið til verndarkunngerð. Eftir *2. pkt.* skulu jarðareigarar og rættindahavarar hava serstaka fráboðan. Á hesum skilst, at tá ið talan er um teir í 1. pkt. nevndu partarnar, er felagshoyring at rokna sum nøktandi málsviðgerð á hesum stiginum. Eftir *3. pkt.* skal uppskotið harumframt leggjast fram til alment eftirlit á í minsta lagi einum lætt atkomandi stað, umframt at tað skal kunngerast á ein hátt, sum er hóskandi til at kunna almenningin og møgulig ávirkað áhugamál. Talan kann, alt eftir umstøðunum, vera um at kunngera í dagbløðum, netmiðlum, útvarpi o.ø.

Í *stk. 2, 1. pkt.*, er ásett, hvørjar upplýsingar ið í minsta lagi skulu vera í hoyringaruppskotinum. Økið, sum uppskotið fevnir um, skal lýsast, *m.a. verndarendamálið, verndarvirðini, hvussu økið er avmarkað, onnur virðir enn náttúruvirðir og avleiðingarnar, sum uppskotið væntast at fáa*.

Orðingin um, at *onnur virðir enn náttúruvirðir* skulu lýsast, ber í fyrra lagi í sær, at myndugleikin í sambandi við málsviðgerðina skal savna inn atkomandi vitan um onnur møgulig virðir enn náttúruvirðir í økinum. Í seinna lagi kann talan gerast um at fáa vitan til vega. Við *fáa til vega* meinast bæði at heinta inn vitan, sum finst, men er illa atkomandi ella ókend fyri myndugleikanum, og nýggj vitan. Geirin, sum ávirkaður verður av uppskotinum til verndarkunngerð, skal geva sítt virkna íkast í hesum sambandi. Kravið til vitanargrundarlagið skal vera rímiligt alt eftir málinum, m.a. hvussu stórt tað er.

Hoyringarfreistin er eftir stk. 2, 1. pkt., sett at vera í minsta lagi tveir mánaðir. Er talan um smáar broytingar í galdandi kunngerðum, kann tó víkjast frá hesi freistini, sbr. stk 2, *2. pkt*.

Eftir *stk. 3* skal tann serstaka fráboðanin til jarðareigararnar og rættindahavararnar, sbr. stk. 1, 2. pkt., umframt tær í stk. 2 nevndu upplýsingarnar fevna um allar upplýsingar, sum mett verður, at jarðareigarunum og rættindahavarunum tørvar fyri at kunna røkja síni áhugamál á fullgóðan hátt.

**Til § 41.**
*Stk. 1* geldur fyri virksemi, sum er treytað av loyvi eftir reglum í hesi lógini ella øðrum lógum, t.d. planlóggávuni ella byggilóggávuni. Tá ið viðkomandi myndugleikar *uttan nærri grundgeving* kunnu havna eini umsókn um loyvi, liggur í tí, at tað sum grundgeving fyri avgerðini kann vísast til verndararbeiðið, sum er í gongd. *1. pkt.* er ikki til hindurs fyri, at málið verður viðgjørt til fulnar, men *2. pkt.* er til hindurs fyri, at loyvi verður givið, sum hindrar verndararbeiðinum. Eftir stk. 1, 2. pkt., kann loyvi bara gevast, um virksemið ongan nevningarverdan týdning hevur fyri verndaruppskotið. Tað kann í einstøkum førum vera ilt hjá geiramyndugleikanum at taka dagar ímillum, um eitt virksemi kann ávirka verndarvirðini. Í slíkum førum eigur málið at verða lagt fyri landsstýrismannin. Hetta er í samsvari við ta almennu skylduna hjá fyrisitingini at greiða mál. Eftir

*3. pkt.* kann landsstýrismaðurin, tá ið týðandi samfelagsáhugamál gera tað neyðugt, kortini geva loyvi til virksemið.

Eftir *stk. 2, 1. pkt.*, hevur landsstýrismaðurin heimild at áseta fráboðanarskyldu fyri virksemi, sum loyvi ikki krevst til eftir aðrari lóg. Fráboðanarskyldan kann gerast alment galdandi ella bara í sambandi við ávíst virksemi ella ávís økir. Fráboðanarskyldan hevur ikki í sær sjálvari við sær, at loyvi krevst til virksemið. Skal tað galda, má avgerð takast um bráðfeingisvernd eftir § 42. Hetta kann hugsast at gerast viðkomandi eftir fráboðanina. Við kunngerðarheimildini eftir 1. pkt. kann eisini ásetast, at farast kann ikki undir virksemið, fyrr enn ávísa tíð eftir at fráboðanin er givin.

Eftir *stk. 3* kann ein almennur myndugleiki ikki veita virksemi í einum øki studning, um ætlanir eru um at skipa økið sum verndarøki. Landsstýrismaðurin kann gera undantak frá hesum, um virksemið ongan nevningarverdan týdning hevur fyri ella gagnar verndaruppskotinum. Er studningur veittur í ósamsvari við ásetingina, má hann kunna krevjast aftur.

*Stk. 4, 1. pkt.*, ásetur, at ásetingin bara geldur í fýra ár, frá tí at uppskotið er kunngjørt. Landsstýrismaðurin kann leingja gildistíðina í mesta lagi tvey ár, sbr. *2. pkt.* Longd gildistíð kann vera viðkomandi, tá ið talan er um stór og torgreidd mál.

**Til § 42**
Ásetingin snýr seg um tvey sløg av bráðfeingisvernd. Eftir *stk. 1* kunnu ítøkilig økir verjast bráðfeingis, og eftir *stk. 2* kann kunngerð ásetast um bráðfeingisvernd av einum ávísum náttúruslagi. Í tí seinna førinum geldur verndin fyri øll støð, har náttúruslagið finst, møguliga innan fyri eitt nærri tilskilað øki.

Stk 1, *1. pkt.*, heimilar kunngerðir um bráðfeingisvernd av ítøkiliga tilskilaðum økjum á landi og í ella á sjónum. Avgerðin kann takast fyri at forða fyri skaða á verndarvirðir. Tað ber í sær, at í minsta lagi ein ávís vitan má vera tøk um verndarvirðini, áðrenn avgerð um bráðfeingisvernd kann takast. Tað er tó ikki eitt krav, at fullkomin greiða skal vera gjørd fyri verndarvirðunum. Tað er heldur ikki eitt krav, at málsviðgerð er byrjað við varandi vernd eftir § 38 í hyggju.

Treytin um, at avgerð um bráðfeingisvernd bara kann takast fyri at forða fyri skaða á verndarvirðir, ber ikki í sær, at eitt ítøkiligt inntriv skal vera gjørt í økið. Myndugleikarnir skulu tó hava ábendingar um, at veruligur vandi er fyri slíkum inntrivum, t.d. orsakað av útsøgnum hjá jarðareigaranum, ella tí at útbúnaður til inntriv verður fluttur í eitt økið við verndarvirðum. Eisini loyvi eftir øðrum lógarverki at fara undir inntriv kann vera ein slík ábending.

Summi náttúrusløg kunnu verða so hótt ella vera so sjáldsom, at tað er neyðugt at taka bráðavgerðir um at verja allar fyrikomingar, til støða er tikin til, um onkur ella allar fyrikomingarnar eiga at verða vardar við økisvernd ella møguliga fáa støðu sum útvalt náttúruslag. *Stk. 2* letur upp fyri, at eitt ávíst náttúruslag kann verjast við bráðfeingisvernd. Tað er eitt krav eftir ásetingini, at vandi er fyri, at náttúruslagið, talan er um, hvørvur. Av tí at bráðfeingisverndin er grundað á, at náttúruslagið er sera hótt, talar hetta vanliga fyri at leggja stóran dent á verndaráhugamálini, tá ið mett verður, um tann einstaka fyrikomingin eigur at verða vard við varandi vernd. Ímóti at fáa varandi vernd í lag kann tala t.d. tað, at fyrikomingin longu er munandi ávirkað av mannavirksemi, og at hon er torfør at umvæla. Neyðugt kann eisini vera at lata eina fyrikoming forfarast, tá ið serliga týðandi samfelagsatlit tala fyri tí.

Í kunngerðini um bráðfeingisvernd av einum ávísum slag av náttúru kunnu vera avmarkingar og forboð fyri øllum sløgum av virksemi og ferðslu, sum kann *hótta náttúruslagið uppaftur meira*.

Hvat slag av virksemi talan kann verða um at avmarka, veldst um eginleikar og dám í tí ítøkiliga náttúruslagnum.

Málsviðgerðarreglurnar í §§ 38 til 40 galda ikki fyri kunngerðir um bráðfeingisvernd, sbr. *stk. 3, 1. pkt.* Hetta kemst av, at avgerðin ber dám av bráðavgerð, og at verndarvirðir skjótt kunnu fara fyri skeytið, um bíðast skal, til viðgerð eftir §§ 38 til 40 er avgreidd. Eigarar og rættindahavarar skulu tó, alt tað er gjørligt, hava fráboðan og sleppa til orðanna, áðrenn avgerð verður tikin, og kunngerðin skal, alt tað er gjørligt, sendast til hoyringar. Er vandi fyri, at tiltakið annars ikki kann fremjast, kann í serligum førum víkjast frá kravinum um fráboðan og hoyring frammanundan.

*Stk. 3, 2. pkt.*, áleggur landsstýrismanninum at halda fram við málsviðgerðini uttan ógrundaðan steðg. Málsviðgerðin kann annaðhvørt enda við varandi økisvernd, aðrari vernd ella umsiting eftir hesi ella øðrum lógum, avtøku av bráðfeingisverndini, ella at virknaðurin heldur uppat (sí stk. 3, 4. pkt.).

Reglan í stk. 3, *3. pkt.*, hevur sum fyritreyt, at bráðfeingisverndin má takast av, fyri at hon skal halda uppat. Verður bráðfeingisverndin avloyst av eisini kunngerð um varandi vernd, fer hon úr gildi av sær sjálvari. Í teimum førum, har bráðfeingisverndin hvørki verður avtikin ella avloyst av eini varandi verndarkunngerð, fer hon úr gildi av sær sjálvari fýra ár eftir kunngeringina. Landsstýrismaðurin kann leingja gildistíðina tvey ár, sbr. *4. pkt.* Slík leinging kann t.d. vera viðkomandi, tá ið bráðfeingisverndin er liður í einum stórum og torgreiddum máli.

**Til § 43.**
*Stk. 1* skal síggjast í samanhangi við § 31, stk. 2. *Føroysk mið* kunnu vera mið eftir, men eisini politisk mál, sum eru fest á blað í t.d. fíggjarlógaruppskotum ella øðrum almennum skjølum. Við *altjóða skyldum* meinast løgfrøðiliga bindandi skyldur við atliti at økisvernd. Verndarkunngerðir kunnu eisini hava støði í altjóða leiðreglum, og í tí føri eigur greiða at gerast fyri hesum. Tað serliga grundgevingarkravið í stk. 1 geldur ikki fyri bráðfeingisvernd eftir § 42.

Eftir *stk. 2, 1. pkt.*, skulu kunngerðir eftir §§ 31 og 42 lýsast í Kunngerðablaðnum og harumframt kunngerast á ein hátt, sum er hóskandi til at kunna almenningin og ávirkað áhugamál. Talan kann, alt eftir umstøðunum, vera um at kunngera í dagbløðum, netmiðlum, útvarpi o.ø.

Eftir *2. pkt.* skulu jarðareigarar, rættindahavarar og kommunur í verndarøkinum hava serstaka fráboðan. Slík fráboðan skal vanliga vera skrivlig.
Eftir *stk. 3* skal verndaravgerðin tinglýsast á ognir, sum heilt ella fyri ein part liggja innan fyri mørkini um verndarøkið. Snýr avgerðin seg um bráðfeingisvernd eftir § 42, skal hon tinglýsast á ognirnar, sum bráðfeingisverndin fevnir um.

*Stk. 4* skal síggjast í samanhangi við § 62 um eina møguliga umhvørvisavgerðaskrá. Uttan mun til § 62 er tað eitt krav eftir stk. 4, at verndaravgerðir eru alment atkomandi í talgildum líki við viðkomandi kortum. Ásetingin er hugsað at vera eitt amboð til við nútíðartøkni at gera verndaravgerðir lætt atkomandi og lættar at staðseta landafrøðiliga.

**Til § 44**
Eftir *stk. 1, 1. pkt.*, kann fyrisitingarmyndugleikin skipa fyri røkt, eisini seta endurreisingar- og umbøtingartiltøk í verk, og uppmerking av verndarøkinum. Aftur at tí skal fyrisitingarmyndugleikin, um tað er gjørligt, gera avtalu við jarðareigaran um nærri ásettar verndaruppgávur, sbr. *2. pkt.* Í orðingini *um tað er gjørligt* liggur bæði, at jarðareigarin skal vera fúsur at átaka sær slíka uppgávu, at almennur peningur er avsettur til slíka røkt, og at jarðareigarin hevur førleikarnar, sum krevjast til at útinna røktina á fakliga ráðiligan hátt. Ásetingin gevur ikki

fyrisitingarmyndugleikanum heimild til at áleggja jarðareigaranum, rættindahavaranum ella øðrum at útinna ávísa røkt ella brúk í økinum. Eftir *3. pkt.* í ásetingini kann avtala eisini gerast við áhugaðar felagsskapir ella onnur um nærri tilskilað røktartiltøk.

Stk. 1 hevur fyrst og fremst týdning fyri privata jørð og festijørð, sum verndarøkið fevnir um. Er talan um aðra jørð hjá landinum, kunnu røktartiltøk setast í verk uttan mun til boð ella samtykki frá landsmyndugleikanum, sum situr fyri eigararæðinum hjá landinum.

*Stk. 2, 1. pkt.*, setur, við teimum avmarkingum sum stk. 2, *2. pkt.*, setur, karmin fyri, hvørji sløg av røktartiltøkum fyrisitingarmyndugleikin kann seta í verk. Sum røktartiltøk verða roknað øll tiltøk, sum mett verða at vera neyðug fyri at varðveita ella røkka náttúru- ella røktarstandinum, sum er endamálið við verndini. Talan kann t.d. vera um at beina fyri fremmandum gróðri ella at taka upp eftir náttúruinntriv og taka burtur forfallin verkløg. Skulu nýggj lívøkir skapast ella verkløg gerast, krevst serligt rættargrundarlag við støði í avtalu ella ognartøku. Fevna verndarásetingarnar fyri eitt øki um ásetingar um vernd av mentanarminnum, heimilar stk. 2 røkt, sum krevst til at verja mentanarminnið.

Greinin heimilar eisini einfalda uppmerking ella gerð av gøtum, brúm o.ø. í verndarøkinum, har ið tað krevst fyri at beina ferðsluna fyri at verja verndarvirðini. At gera parkeringspláss í einum verndarøki krevur serligt rættargrundarlag.

Rætturin hjá fyrisitingarmyndugleikanum at útinna røkt fevnir um ferðslu, um neyðugt motorferðslu, í verndarøkinum í sambandi við røktina, so at loyvi ikki krevst frá jarðareigaranum.

Stk. 2, *2. pkt.*, nágreinar, at heimildin ikki fevnir um ávís røktartiltøk. Slík tiltøk kunnu tí bara fremjast við samtykki frá jarðareigaranum ella rættindahavaranum, møguliga við ognartøku av rættinum at útinna røkt. Hetta geldur, um røktartiltakið ber í sær veiðu ella heysting av natúrligum tilfeingi, ella at náttúrustandurin verður munandi broyttur, í mun til standin tá ið farið varð undir verndararbeiðið, sbr. § 39. Burturtøka av gróðri fer ikki fram *í útilívi og vinnu*, sbr. § 3, nr. 3, tá ið hon verður útint við røkt í hyggju, og kann tí fara fram sambært stk. 2, 1. pkt. Tað sama geldur fyri slóttur. Men úrtøkan skal samsvarandi § 44, stk. 4, latast jarðareigaranum ella rættindahavaranum at ráða yvir. Fyrisitingarmyndugleikin kann ikki seta dýr á beiti uttan samtykki frá jarðareigaranum.

Metast skal um spurningin, hvat ið er at rokna sum *munandi broyting* av standinum, sum náttúran er í, í mun til mundið, *tá ið farið verður undir verndararbeiðið*, t.e. mundið, tá ið verndaruppskotið varð kunngjørt eftir § 39, ella mundið fyri kunngerðina um bráðfeingisvernd. Í teimum førum, har ið avgerð um bráðfeingisvernd varð tikin fyrst, skal hetta mundið havast sum grundarlag. Kemur kunngeringin um vernd fyrst, skal kunngeringarmundið havast sum grundarlag.

Burturtøka av fremmandum træsløgum og plantaðum runnum er fevnd av røktarheimildini, hóast trøini eru plantað ella sádd, áðrenn farið verður undir verndararbeiðið. Økir, sum fyrr hava verið sligin, kunnu sláast sambært stk. 2, 1. pkt., hóast økið ikki verður sligið regluliga, tá ið farið verður undir verndararbeiðið.

Tá ið mett verður, um eitt tiltak er fevnt av røktarheimildini, hevur tað eisini týdning, hvussu víðtøkin røktin er. T.d. kann slóttur av stórum økjum eftir eini ítøkiligari meting krevja loyvi frá jarðareigaranum.

Tað er fyrisitingarmyndugleikin, sum má meta, hvørjir framferðarhættir ið krevjast ella eru ráðiligastir, tá ið røkt verður útint. Tað er ikki eitt krav, at brúktir verða somu hættir, sum fyrr hava

verið brúktir í sambandi við brúk. T.d. kann tað vera viðkomandi at brúka sláimaskinu, hóast sláimaskina ikki hevur verið brúkt fyrr. Tá ið mett verður, hvørjar framferðarhættir ið rættast er at brúka, skulu eisini verndarendamálið og týdningurin fyri jarðareigaran havast í huga. Tað kann eisini vera viðkomandi at leggja ávísan dent á tilfeingisatlit.

Røktartiltøk kunnu ikki hava nýggjar ræðisavmarkingar við sær fyri jarðareigaran. Røktartiltøkini skulu virða virksemi, sum er loyvt sambært verndarásetingunum og møguligum undantøkum. Krevur røktartørvurin, at virksemi sambært einum undantaksloyvi má víkja, má undantaksloyvið broytast.

Ávirka tiltøkini privata ogn ella rættindir, er tað eitt krav eftir *stk. 3*, at eigarin ella rættindahavarin, alt tað er gjørligt, fær fráboðan frammanundan. Fyrivarnið *alt tað er gjørligt* er ásett við førum í huga, har ið viðkomandi eigari ella rættindahavari ikki hevur tinglýst sín rætt og heldur ikki á annan hátt er myndugleikanum kendur, ella hevur ókendan bústað. Aftur at tí kunnu hugsast førir, har ið tiltøk hava sovorðnan bráðskund, at stundir ikki eru at boða jarðareigaranum ella rættindahavaranum frá frammanundan. Í slíkum førum verður fráboðan givin undir røktartiltakinum ella eftir at tað er framt. Ruskrudding er ikki fevnd av røktarhugtakinum og kann tí setast í verk, uttan at eigari ella rættindahavari fáa fráboðan frammanundan.

Tað er eitt krav eftir *stk. 4*, at fíggjarligir fyrimunir, ið standast av røktartiltøkum, ognast jarðareigaranum ella rættindahavaranum.

Eftir *stk. 5* er tað eitt krav, at uppkast til røktarætlan, alt tað er gjørligt, verður løgd fram samstundis við verndaravgerðina. Hetta ger sítt til at tryggja, at neyðug tiltøk verður sett í verk í nóg góðari tíð og á skipaðan hátt, og at jarðareigarar og rættindahavarar fáa eina fatan av, hvat ið er í væntu. Røktarætlanin kann vera partur av eini meira víðtøknari umsitingarætlan.

Kravið um, at uppkast til røktarætlan skal leggjast fram samstundis við verndaravgerðina, er ikki óvikiligt. Við fyrivarninum *um tað er gjørligt* verður hugsað um førir, har ið tað hvørki er neyðugt ella hóskandi at gera slíka ætlan, og har ið støðan krevur, at verndaravgerðin verður tikin skjótast gjørligt, sama um verndarætlan er liðug ella ikki. Snýr verndin seg um náttúruvirðir, har ið brúk er ein fyritreyt fyri varðveitslu, er tað tó eitt óvikiligt krav, at uppkast til røktarætlan við viðkomandi røktartiltøkum er gjørt, tá ið verndaravgerðin verður tikin, sbr. § 33, stk. 3, 1. pkt. (landslagsverndarøkir), § 34, stk. 4, 1. pkt. (náttúrufriðøkir), og § 35, 3. pkt. (lívøkisverndarøkir).

**Til § 45.**
*Stk. 1* ásetur treytirnar, sum vanliga skulu vera loknar, fyri at undantak skal kunna gerast frá varandi og bráðfeingis verndarkunngerðum. Í teimum førum, har ið trygdaratlit ella atlit at týðandi samfelagsáhugamálum krevja tað, kann undantak gerast frá eini kunngerð um varandi ella bráðfeingis vernd uttan mun til hinar báðar treytirnar í stk. 1.

Í fyrra lagi krevst, at tiltakið *ikki er ímóti endamálinum við verndarkunngerðini*. Alt eftir verndarflokkinum og hvussu verndarendamálið er ásett í verndarkunngerðini, kann tað vera ymiskt, hvat ið mett verður at vera ímóti verndarendamálinum. T.d. kann venjan vera strangari í náttúrufriðøkjum enn í tjóðgørðum og, serliga, landslagsverndarøkjum, og venjan kann eisini valdast umhvørvisstandin í tí einstaka verndarøkinum. Metast má eisini um, hvussu víðtøkið tiltakið er, hvat slag av tiltaki talan er um, og staðsetingina upp ímóti verndarendamálinum. Tiltøk og brúk, sum eru treytað av størri tekniskum inntrivum, fer tað vanliga ikki at bera til at gera undantøk fyri í nøkrum verndarøki.

Í seinna lagi krevst, at tiltakið ikki *kann ávirka verndarvirðini nevningarvert*. Á orðinum *nevningarvert* skilst, at rásarúmið fyri undantøkum er ætlað at vera heilt lítið, og at undantøk bara kunn gerast í førum, har ið tiltakið fær avmarkaða ávirkan á verndarvirðini. Endamálið við hesi nágreiningini er tryggja, at tað ikki verður máað burtur av verndini við nógvum og víðfevndum undantøkum. Ásetingin ger eisini greitt, at atlitið at verndarvirðunum skal vera yvirskipað t.d. vinnuáhugamálum.

Bæði krøvini skulu vera lokin, fyri at undantak skal kunna gerast. Men tað merkir ikki, at undantak *skal* gerast, bara tí at treytirnar eru loknar. Eingin hevur rætt til undantak, og eisini aðrir metingartættir kunnu vera viðkomandi. Tað stendur til fyrisitingarmyndugleikan at meta um málið innan fyri karmin á vanligum fyrisitingarrættarligum reglum og leiðreglum og boðum frá yvirskipaðum myndugleika. Eitt nú hevur tað týdning, hvussu stórt tiltakið er, sum søkt verður um undantak til, og hvussu neyðugt tað er, og hvørja ávirkan tað hevur á umhvørvið. Atlitini, sum tala fyri at loyva tiltakinum, hava eisini týdning, og metast má eisini, um tað verður í ósamsvari við verndarendamálið, um undantaksloyvir verða givin til tiltøk av sama slag í framtíðini.

Undantaksásetingin í § 45 kann ikki brúkast til at víðka karmin, sum ásettur er í verndaravgerðini. Ásetingin er ein trygdarventilur, sum skal lofta óvæntaðum førum ella serligum førum, sum tað ikki varð mett um, tá ið verndarkunngerðin varð orðað. Fyrisitingarmyndugleikin eigur serliga at meta um avleiðingarnar av einum undantaki, t.d. um væntast kann, at onnur fara at søkja um undantøk á sama grundarlagi. Fyrisitingarmyndugleikin má sostatt taka við í metingina, um eitt undantaksloyvi fer at hava við sær, at trýstið veksur at geva undantøk av sama slag í framtíðini. Ásetingin geldur fyrst og fremst fyri smávegis inntriv ella fyribils órógvan, sum hevur stóran týdning fyri umsøkjaran sammett við verndaráhugamálini. Hvar ið markið verður sett, veldst fyri part um, hvat slag av vernd talan er um. Valdar óvissa um, hvørja ávirkan eitt tiltak kann hava á náttúruumhvørvið, eigur stórur dentur at leggjast á meginregluna um fyrivarni. Rímiligur ivi um avleiðingarnar av einum ætlaðum tiltaki ella náttúruinntrivi eigur t.d. at kunna hava við sær, at ein umsókn verður havnað, ella at ein avgerð verður útsett, til betri greiða er fingin á spurninginum.

Á lógarkapitli 2 skilst, at eisini meginreglan um fyrivarni og meginreglan um heildartrýst, sbr. §§ 9 og 10, skulu havast sum grundarlag, tá ið umsóknir um undantøk verða viðgjørdar. Somuleiðis ásetingin í § 8, stk. 1, um vísindaliga vitan sum grundarlag fyri útinning av myndugleika.

Vísindaligar grundir kunnu brúkast sum grundgeving fyri einum undantaki. Hóast vísindalig atlit ofta eru ein grund til økisvernd, eigur verndarkunngerðin ikki at lata fullkomiliga upp fyri tiltøkum við vísindaligum endamáli, tí slík tiltøk kunnu ovbyrja umhvørvið, sum verjast skal, og sum er ein fyritreyt fyri tí vísindaligu granskingini. Tað vísindaliga endamálið við vernd kann tó brúkast sum grundgeving fyri eini meira linari og vanligari undantaksvenju til vísindalig endamál, so leingi talan ikki er um at byggja føst verkløg (nýtt undirstøðukervi) ella at gera lendisinntriv í verndarøkinum. Aftur at tí eigur dentur at leggjast á, um granskingarverkætlanin uttan stórvegis ampa kann fremjast uttan fyri verndarøkið, og um hon kann fremjast, soleiðis at náttúruumhvørvið í verndarøkinum ikki verður ovbyrjað óneyðuga.

Vanliga kann undantak gerast fyri tiltøk, sum gera sítt til at fremja verndarvirðini. Slíkt brúk kann síggjast sum ein liður í fyrisitingini, sum útint verður fyri at varða um verndarvirðini. Ofta kann loyvi eisini uttan trupulleikar gevast til brúk, sum hvørki fremur verndarvirðini ella er teimum til bága.

Ásetingarnar í §§ 32 til 36 seta tann ytra karmin fyri, hvat undantak kann gerast fyri.

Har ið trygdaratlit gera tað neyðugt, eru §§ 32 til 36 ikki til hindurs fyri undantøkum, sbr. stk. 1. Í slíkum førum kunnu undantøk gerast við støði í trygdaratlitum, hóast tað er ímóti verndarendamálinum og ávirkar verndarvirðini. Í slíkum førum verða undantøk vanliga gjørd við tí treyt, at tiltakið verður fyrireikað og framt í tøttum samstarvi millum tann, sum fremur trygdartiltakið, og fyrisitingarmyndugleikan, so at atlitið at endamálinum við verndaravgerðini og verndarásetingunum annars verður røkt á bestan hátt, sbr. § 45, stk. 1.

Við *trygdaratlitum* verður m.a. sipað til trygd við atliti at lívi og heilsu, smittandi sjúkum frá dýrum og trygd fyri stórum og beinleiðis skaða á ognir. Tað veldst í tí einstaka førinum um eina ítøkiliga meting, um tørvur er á serligum tiltøkum at varða um trygdina hjá teimum, sum brúka eitt øki. Hugsanin er ikki, at ásetingin skal hava við sær, at varsemisskyldan hjá tí einstaka minkar. Í einstøkum økjum, sum verða vitjað serliga ofta, kann tó vera grundarlag fyri minni trygdartiltøkum sum ketum, trygdarlínum ella ávaringarskeltum. Ásetingin er ikki ætlað til at loyva bygningum til trygdarendamál. Tað hevði verið ímóti endamálinum við økisvernd, sum er at tryggja náttúruøkir ímóti nýggjum tekniskum inntrivum. Verndin skal ikki vera til hindurs fyri útinning av løgreglu-, umsjónar-, sjúkraflutnings- og bjargingartænastum. Hetta eigur at vera tilskilað í tí einstøku kunngerðini, so at tað ikki verður neyðugt at kanna tað í eini akuttari støðu. Hinvegin er vanliga ikki grundarlag fyri royndarvenjingum í verndarøkjunum til slík endamál.

Eisini tá ið atlitið at týðandi samfelagsáhugamálum krevur tað, kann undantaksloyvi gevast, hóast tað er ímóti verndarendamálinum og ávirkar verndarvirðini, sbr. stk. 1. *Stk. 2* ásetur tó, hvørji atlit ið eru serliga viðkomandi, tá ið metast skal, um undantaksloyvi skal gevast við støði í atlitinum at *týðandi samfelagsáhugamálum*. Í fyrra lagi skal dentur leggjast á *týdningin, sum verndarøkið hevur fyri tað samlaða netverkið av verndarøkjum, og um eitt sambæriligt verndarøki kann skipast ella mennast aðrastaðni*. Í tí liggur, at náttúruvirðið innan fyri verndarøkið ikki skal skoðast einsæris, men út frá virðinum, sum tað hevur sammett við aðrar kendar fyrikomingar av hesum hesum slagnum av náttúruvirði. Í seinna lagi skal dentur leggjast á, *um eitt verndarøki av sama slag kann skipast ella mennast aðrastaðni*. Finst longu eitt slíkt øki av sama slag, ber tað í sær, at mett eigur at verða, um økið skal verjast. Finnast ikki økir av somu dygd sum økið, sum mett verður, um inntriv skal gerast í, men økir, sum kunnu mennast til somu dygd, skal miðast eftir at røkka hesum.

Orðingin *dentur serliga leggjast á* hevur við sær, at týdningurin, sum náttúruvirðini hava úr einum heildarsjónarhorni, og møguleikin fyri at fáa til vega eitt samsvarandi øki, eru ein týðandi grundgeving, tá ið støða skal takast til, um undantaksloyvi skal gevast ella ikki.

Verður undantaksloyvi givið við tí fyritreyt, at onnur fyrikoming av náttúruvirðinum verður fingin til vega, skulu tey týdningarmestu umvælingartiltøkini og onnur varðveitingartiltøk vera framd ella sett í gongd, áðrenn inntriv verður gjørt í verndarøkið. Við *sett í gongd* meinast, at aðrar fyrikomingar eru gjørdar klárar til umvæling, t.d. við keypi ella avtalu við jarðareigaran, so at ein ikki rennur seg í formligar forðingar í sambandi við tiltøk á fyrikomingini. Somuleiðis skal peningur vera avsettur til umvæling. Tað er tó ikki eitt krav, at sjálvt umvælingartiltakið er byrjað. Eftir stk. 2, *2. pkt.*, kann tann, sum varðar av virkseminum, fáa álagt at bera rímiligan kostnað av at røkja, skipa ella menna slíkt øki av sama slag, afturfyri at undantaksloyvi verður givið til inntriv í økið. Hetta er í samsvari við meginregluna í § 11. Tó skal metast, um slíkur kostnaður er rímiligur, sbr. orðingina *rímiligan kostnað*. Hvat ið er rímiligt, veldst um eina meting, alt eftir hvussu stórt virksemið er, hvussu stór byrða ið løgd verður á tann, sum varðar av virkseminum, slagnum av virksemi, t.d. tí ítøkiliga samfelagsgagninum av virkseminum, og avleiðingunum fyri náttúruvirðini. Ein slík meting skilst eisini á sjálvari meginregluni í § 11, sbr. viðmerkingarnar til ta ásetingina.

*Stk. 3* ásetur, hvussu mannagongdir fyri virksemi innan fyri eitt skipað verndarøki kunnu skipast, tá ið tað bæði krevst undantaksloyvi eftir náttúrumargfeldislógini og loyvi eftir geiralóg. *1. pkt.* ásetur, at tann, sum varðar av virkseminum, kann *velja at søkja um loyvini samstundis*. Tað ber í sær, at málsviðgerðin kann fara fram um somu leið. Á *2. pkt.* skilst, at avgerðir í slíkum førum fyrst skulu takast eftir verndarkunngerðini, t.e. kunngerð eftir náttúrumargfeldislógini. Við hesi raðfylgjuni slepst undan víðfevndari málsviðgerð eftir geiralóg, í teimum førum har undantaksloyvi ikki verður givið frá verndarkunngerðini. Í teimum førum har undantaksloyvi verður givið, sparir tað tíð, at umsóknin eftir geiralóg verður viðgjørd um somu leið. Tann, sum varðar av virkseminum, má sostatt sjálvur meta, hvat ið er hóskandi framferðarháttur í tí ítøkiliga málinum. Í teimum førum har málsviðgerðin fer fram um eina leið, skal fyrisitingarmyndugleikin fyri verndarøkið vera í tøttum sambandi við viðkomandi geiramyndugleikar um gongd, møguligar tekniskar loysnir o.s.fr. Undantak kann gerast frá avgerðaraðfylgjuni eftir ásetingini, um tað er ásett í verndarkunngerðini ella fyrisitingarmyndugleikin samtykkir.

*Stk. 4* skal tryggja, at umhvørvisatlit verða skjalfest, og at mett verður um tey í málum um undantaksloyvir, og forða fyri, at ein venja við standardiseraðum undantøkum tekur seg upp. Skjalfestingarskyldan liggur fyrst og fremst á tí, sum søkir um undantak. Fyrisitingarmyndugleikin hevur skyldu til á sjálvstøðugum grundarlagi at meta um tað framlagda tilfarið og leggja aftur at tí, tá ið vitan finst og er atkomandi. Ásetingin ber í sær eitt ískoyti til tey vanligu grundgevingarkrøvini eftir fyrisitingarlógini.

**Til § 46.**
*1. pkt.* geldur fyri virksemi, *sum loyvi krevst til eftir aðrari lóg*. Í tí liggur, at ásetingin geldur í sambandi við umsókn um loyvi eftir geiralóg ella plan- og byggilóggávuni. 1. pkt. í ásetingini geldur ikki fyri virksemi, sum loyvi ikki krevst til.

Eftir 1. pkt. skal í sambandi við meting eftir aðrari lóg *dentur leggjast á* virknaðin, sum avgerðin kann hava á verndarvirðini í einum øki, sum er vart eftir lógarkapitli 5 í náttúrumargfeldislógini. Í hesum liggur, at atlitið at náttúruvirðunum sambært verndarkunngerðini skal takast við í metingina, sum gjørd verður. Tað ber tó ikki í sær, at verndarvirðini skulu vera avgerandi, tá ið avgerðin skal takast. Geiramyndugleikin skal í síni myndugleikaútinning halda seg innan fyri metingarkarmin í tí einstøku geiralógini ella plan- og byggilóggávuni.

Ásetingin geldur bara fyri virksemi, sum fer fram uttan fyri verndarøkið, men sum kann hava negativa ávirkan á verndarvirðini innan fyri økið, t.d. orsakað av dálking, broyttari vatnstøðu, turrlegging, ella at áir verða beindar aðrar leiðir.

Ásetingin er ikki viðkomandi fyri møguligan negativan virknað, sum virksemið hevur á náttúruvirðir uttan fyri verndarøkið. Men ber virksemið í sær, at vísast kann á negativar avleiðingar fyri tey í verndarkunngerðini ásettu verndarvirðini inni í verndarøkinum, skal dentur leggjast á atlitið at verndarvirðunum innan fyri verndarøkið, tá ið avgerð verður tikin um at loyva virksemi, ella um treytir skulu leggjast við loyvi.

Eisini uttan eina slíka serreglu kann dentur leggjast á verndarvirðini innan fyri metingarkarmin eftir tí einstøku lógini. Við at lógarfesta hesa leiðregluna serstakt verður miðað eftir at sleppa undan ivamálum um, um tað er lógligt at leggja dent á virknaðin, sum tiltøk uttan fyri eitt verndarøki kunnu hava á verndarvirðini í verndarøkinum, so leingi metingin heldur seg innan fyri metingarkarmin eftir tí einstøku lógini. Aftur at tí gevur ásetingin heimild til at áseta serligar treytir, sum kunnu avmarka skaðavirknaðin á verndarøkið.

Tilvísingin í *2. pkt.* til § 6 (almenn varsemisskylda) er í roynd og veru óneyðug, við tað at virknaðurin, sum virksemi uttan fyri eitt verndarøki hevur á verndarvirðini innan fyri eitt verndarøki, kortini skal takast við, tá ið mett verður, um varsemisskyldan er lokin. Við ásetingini verður dentur lagdur á, at varsemisskyldan hevur stóran týdning í sambandi við virksemi uttan fyri verndarøkir, sum loyvi ikki krevst til, men sum kunnu hava ávirkan á verndarvirðini í økjunum.

**Til § 47.**
Ásetingin er ikki til hindurs fyri, at aðrar serreglur fyri endurgjaldi kunnu verða brúktar, tá ið serligt grundarlag er fyri tí.

Ásetingin er ein felags regla fyri allar verndarflokkarnar eftir lógarkapitli 5, eisini verndarøkir í sjónum. Ásetingin um endurgjald í sambandi við økisvernd eftir kapitli 5 í náttúrumargfeldislógini er ein seráseting um endurgjald í sambandi við ræðisinntriv. Tað ber í sær, at ásetingin ikki geldur fyri onnur ræðisinntriv, sum metast má um við støði í § 73 í grundlógini. Tað ber m.a. í sær, at endurgjaldsásetingarnar í náttúrumargfeldislógini ikki galda fyri avgerðir um bráðfeingisvernd ella aðrar ræðisavmarkingar, sum ásettar verða við heimild í lógini, ella økisvernd/lendisskipan eftir aðrari lóggávu.

Hjá summum jarðareigarum fer økisvernd, sama hvønn flokk talan er um, at darva vinnuvirksemi so mikið, at tað er rímiligt at veita endurgjald fyri fíggjarligan miss. Tí skjýtur stjórnarráðið upp felags endurgjaldsreglur, sum hava støði í brúki, sum er í gongd, og skilur ikki ímillum verndarflokkar. Ein serstøk endurgjaldsskipan á hesum rættarøkinum skal eisini styðja upp undir samstarvið við ávirkaðar jarðareigarar og rættindahavarar í tilgongdini fram ímóti verndaravgerðum, og tá ið sitið verður fyri lýstum verndarøkjum.

Sum rættindahavarar roknast m.a. festarar, servitutthavarar (beitisrættur o.t.) og rættindahavarar til útvinningarloyvir eftir løgtingslóg um kolvetnisvirksemi. Fiskimenn kunnu vanliga ikki roknast sum rættindahavarar til fisk ella fiskiøkir í sjónum í hesum sambandi. Fiskiveiða eftir eftir saltvatnsfiski er vanliga at rokna sum ein hvørsmansrættur. Ein serrættur kann vinnast, um t.d. ein minni bólkur av fiskimonnum hevur eitt fast, grundlagt brúk av ein ítøkiligum sjóøki. Høvuðsreglan verður sostatt, at tað krevst serliga tætt og eksklusivt tilknýti til eitt øki, fyri at fiskiveiða skal kunna metast á sama hátt sum ein *lutbundin* rættur. Verndaravgerðir, sum avmarka fiskiskap í sjónum, fara tí ikki at hava endurgjaldsskyldu við sær fyri landið. Feløg, sum hava fingið útvinningarloyvi til kolvetnisvirksemi eru at rokna sum *rættindahavarar* í mun til ásetingina. Í mun til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi skal hugtakið *ogn* í § 47, stk. 1, skiljast sum rættindir sambært útvinningarloyvi eftir løgtingslóg um kolvetnisvirksemi, sum eru knýtt at landafrøðiliga avmarkaðum økjum.

Ásetingin í § 47 geldur ikki fyri onnur ræðisinntriv, sum eru ásett eftir náttúrumargfeldislógini, ella fyri økisvernd ella lendisskipan eftir aðrari lóggávu, sbr. um hetta omanfyri. Í slíkum førum má endurgjaldsspurningurin greiðast eftir vanligum óskrivaðum reglum um endurgjald fyri ræðisinntriv, sbr. § 73 í grundlógini, ella møguliga øðrum serreglum um endurgjald.

Ásetingin ger einki undantak fyri jørð hjá landinum, og ein endurgjaldsskylda ber í slíkum føri í sær eina fíggjarætlanarliga flyting millum myndugleikar og stovnar hjá landinum. Er hinvegin talan um sjálvstøðug rættarsubjekt, geldur endurgjaldsskyldan á vanligan hátt.

Brúkið, sum darvað verður, skal vera í gongd, sbr. *stk. 1.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta, hvat ið er at rokna sum brúk, sum er í gongd, fyri ávíst virksemi, eitt nú virksemi sambært útvinningarloyvi eftir løgtingslóg um kolvetnisvirksemi, sbr. *stk. 3.* Sum brúk, sum er í gongd, er at rokna brúk, sum í roynd og veru fer fram, tá ið verndaravgerðin verður tikin, mótsett brúki, sum

er steðgað ella ikki er byrjað. Missur, sum stendst av, at broytt brúk ella umlegging verður forðað, gevur ikki rætt til endurgjald eftir ásetingini. Hinvegin er tað ikki til hindurs fyri endurgjaldi, at brúk fyribils er steðgað í eitt avmarkað tíðarskeið, t.d. orsakað av eigaraskifti ella sjúku. Tað sama geldur fyri støðutreytað ikki-brúk, tá ið roknast kann við, at brúkið verður tikið upp aftur. Tá ið metast skal, um ikki-brúkið er fyribils ella varir stutta tíð, hevur tað týdning, hvussu leingi tað hevur staðið við, hví tað er íkomið, og hvønn týdning tann vanliga samfelagsmenningin hevur fyri slíkt brúk.

Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at verndaravgerðin hevur avmarkingar við sær fyri brúk, sum er í gongd, og at hesar avmarkingarnar hava fíggjarligan týdning fyri raksturin. Tað er ilt at seta nakað neyvt mark fyri, hvat ið kann sigast at darva brúk, sum er gongd. Spurningurin má svarast ítøkiliga í hvørjum einstøkum føri. Tá ið treytirnar fyri endurgjaldi eru loknar, skal endurgjald veitast fyri allan missin.

Orsakasamband skal vera millum avgerðina og ampan fyri brúkið. Liggur orsøkin aðrastaðni, t.d. í eini avgerð eftir aðrari lóggávu, er hetta kravið ikki lokið. Má tað haldast, at brúk, sum er í gongd, uttan mun til verndaravgerðina hevði steðgað innan fyri heilt stutta tíð, verður heldur eingin missur at veita endurgjald fyri. Øðrvísi er, um brúk, sum er í gongd, hevði kunnað hildið fram við nøkrum tillagingum fyri at tryggja lønsemi.

Hvat ið er at rokna sum sjálvstøðugt brúk, sum er í gongd, mótsett brúki, sum bara er ein liður í øðrum brúki, má avgerast ítøkiliga. Í metingini má hyggjast eftir sjálvum brúksháttinum og ikki teimum einstøku liðunum í brúkinum. T.d. kann ferðsla, sum er knýtt at virksemi, ikki sigast at vera sjálvstøðugt brúk, og tí kunnu avmarkingar fyri slíka ferðslu bara geva rætt til endurgjald, um sjálvt virksemið verður darvað.

Í stk. 1, *2. pkt.*, verður útgreinað, at fyri broytingar í brúki, sum krevja almenn loyvir, geldur rætturin til endurgjald bara í teimum førum, har slíkt loyvi er givið, áðrenn tað ætlaða verndaruppskotið verður kunngjørt eftir § 39. Kravið um loyvi skal her skiljast í breiðari merking og fevnir um øll førir, har brúkið bara kann fara fram við støði í eini avgerð eftir eini lóg ella kunngerð, hvørt talan so er um byggiloyvi, undantaksloyvi frá økisætlan, serloyvi (*konsessión*), góðkenning, samtykki ella annað. Tað er ikki nóg mikið, at byggisamtykt er góðkend fyri t.d. eitt summarhúsøki, um endaligt byggiloyvi ikki er givið, áðrenn tað ætlaða verndaruppskotið verður kunngjørt eftir § 39. Er byggiloyvi givið fyri hetta mundið (og er byggiloyvið ikki fallið burtur, sbr. § 10, stk. 5, í byggilógini), geldur rætturin til endurgjald, hóast bygningurin ikki er gjørdur (men byggikostnaðurin verður í tí førinum drigin frá). Fyri orkuútbygging kann talan bara gerast um endurgjald, um loyvi (*konsessión*) er givið, møg. endaligt loyvi eftir byggilógini (til t.d. smærri orkuverk), áðrenn tað ætlaða verndaruppskotið er kunngjørt eftir § 39. Fyri kolvetnisvirksemi er tað avgerandi mundið í mun til stk. 1, 2. pkt., mundið, tá ið útvinningarloyvi var givið eftir løgtingslóg um kolvetnisvirksemi. Útvinningarloyvið gevur ein úrvalsrætt til at leita eftir og útvinna kolvetni. Hvussu rætturin skal útinnast, er í ávísan mun ávirkað av seinni loyvum og góðkenningum, men rætturin er ikki treytaður av hesum. Útvinningarloyvir til kolvetnisvirksemi, sum eru givin áðrenn tað ætlaða verndaruppskotið er kunngjørt eftir § 39, eru sostatt fevnd av rættinum til endurgjald sambært stk. 1, uttan mun til um útinningin av rættindunum sambært útvinningarloyvinum krevur serstakt loyvi sambært geiralóggávu, sum ikki er givið, tá ið tað ætlaða verndaruppskotið verður kunngjørt.

Broytingar í brúki, sum ikki krevja loyvi, men sum eru farnar fram, eftir at uppskotið varð sent til hoyringar eftir § 40, geva ikki grundarlag fyri endurgjaldi.

Tað er kortini ikki nóg mikið til at fáa endurgjald, at loyvi er givið til broyting í brúki, áðrenn tað ætlaða verndaruppskotið er kunngjørt eftir § 39. Umframt hetta mugu eisini hinar treytirnar fyri endurgjaldi vera loknar, eitt nú, at broytingin í brúki yvirhøvur hevði kunnað verið framd í verki, og at hon hevði givið fíggjarligan vinning.

Tá ið treytirnar fyri endurgjaldi eftir stk. 1 eru loknar, verður endurgjaldið ásett, sbr. *stk. 2*. Metast skal um verndina endurgjaldsrættarliga, sum vórðu negativir servituttar við sama innihaldi álagdir við ognartøku. Av tí at slíkir negativir servituttar ikki hava brúksvirði ella umsetningsvirði, má endurgjaldið ásetast við støði í minkingini í umsetningsvirðinum á allari ognini, sum verndarinntrivið hevur verið atvold til, ella minkingini í brúksvirðinum á ognini, sum ampin fyri brúk, sum er í gongd, hevur verið atvold til. At endurgjaldið verður ásett, sum tá ið talan er um ognartøku, ber eisini í sær, at tað bara eru áhugamál, sum eru vard ognartøkurættarliga, sum eru viðkomandi fyri endurgjaldið. Tá ið mett verður um endurgjaldið, skulu møguligar broytingar í brúkinum ikki vera partur av metingini. Støði skal takast í brúki, sum er í gongd, sbr. § 47, stk. 1. Metast má um missin við støði í verndaravgerðarmundinum, sbr. stk. 2, 2. pkt. Av tí at endurgjaldið verður útgoldið eftir verndaravgerðina, má endurgjald eisini latast fyri rakstrarmiss í tíðarskeiðinum, frá tí at verndaravgerðin fær gildi, og til endurgjald verður útgoldið.

Eftir *stk. 3* kann landsstýrismaðurin í kunngerð nágreina, hvat ið er at rokna sum brúk, sum er í gongd, eftir stk. 1, 1. pkt., og stk. 2 fyri ávíst slag av virksemi. Tá ið mett verður um, hvat ið er at rokna sum brúk, sum er í gongd, má hyggjast eftir hvørjum slagi av virksemi sær.

**Til § 48.**
Ásetingin í *stk. 1* tryggjar, at landið tekur støðu til endurgjaldskrøv hjá eigarum og rættindahavarum, sum biðja um tað. Ásetingin ber í sær, at landið ikki hevur skyldu til at geva tilboð um endurgjald, uttan so at tey, sum verða ávirkað, seta fram endurgjaldskrav. Kravið um, at eigari ella rættindahavari skal biðja um tilboð, skal skunda undir, at rættindaspurningar, ognarmørk o.t. verður avgreitt tíðliga. Kravið, sum settur verður fram, nýtist ikki at vera útgreinað, hóast tað er ein fyrimunur, at tað verður útgreinað, hvat tað er fyri brúk, sum verður darvað, og hvønn fíggjarligan týdning tað hevur.

Av tí at tað er umráðandi at fáa gongd á endurgjaldstilgongdina, so skjótt sum til ber, er ásett, at eigarar og rættindahavarar skulu seta fram síni endurgjaldskrøv innan fýra mánaðir, frá tí at verndaravgerðin er tikin. Alt eftir árstíðini og veðurlagnum kann tað í nógvum førum vera tíðarkrevjandi at taka støðu til, hvussu stórur tann fíggjarligi missurin er. Tí er tað nóg mikið, at eigarin ella rættindahavarin innan fýra mánaðir boðar frá, at hann krevur endurgjald, og seinni kemur aftur til sjálva endurgjaldsupphæddina.

Landsstýrismaðurin ger av, hvørjum stovni umbønin um tilboð skal sendast, og hvør stovnur ið skal geva tilboðið. Einki er til hindurs fyri, at landið innan fyri freistina eisini kann geva øðrum enn teimum, sum hava biðið um tað, t.d. um ein jarðareigari longu framman undan verndaravgerðini greitt hevur skrivað, at hann fer at krevja endurgjald fyri tað komandi verndaravgerðina.

Eitt tilboð gerst bindandi, tá ið tann, sum fær tilboðið, tekur av. Tilboðið er ikki at rokna sum ein fyrisitingaravgerð og kann tí ikki kærast. Tað ber hinvegin til at halda á at samráðast og biðja um nýtt og betri tilboð. Fyri at fremja skjóta endurgjaldsuppgerð til frama fyri allar partar hevur landið eftir ásetingini eina ávísa *samráðingarfulltrú* í greiðum málum við greiðum og lutfalsliga smáum endurgjaldsupphæddum.

Í *2. pkt.* er ásett, at áðrenn landið gevur tilboð um endurgjald eftir stk. 1, skal landið tilnevna tvey óheft, serkøn metingarfólk at meta um tann fíggjarliga missin, sum stendst av, at verndin darvar brúk, sum er í gongd. Metingin skal havast sum grundarlag, tá ið landsstýrismaðurin gevur tilboð um endurgjald.

Í *3. pkt.* er ásett, at landsstýrismaðurin í serligum førum kann leingja ella endurnýggja freistina at seta fram krav um endurgjald. Dentur skal leggjast á, um eigarin ella rættindahavarin hevði rímiliga grund til at fara út um freistina og ikki kann lastast fyri ikki at hava søkt um longda freist, ella tað eftir umstøðunum hevði verið órímiligt at noktað eigaranum ella rættindahavaranum at sett fram krav um endurgjald, orsakað av at hann fór út um freistina.

Í *stk. 2* er ásett, at eigari ella rættindahavari, sum ikki tekur av einum endurgjaldstilboði frá landinum, kann krevja, at landsstýrismaðurin fær landið at biðja rættin um rættarliga meting til at áseta endurgjald eftir § 47. Slíkt krav skal setast fram, í seinasta lagi seks mánaðir eftir at tilboðið varð givið. At tað er landið, sum skal biðja um rættarliga meting, og ikki tann einstaki eigarin ella rættindahavarin, er m.a. ein fyrimunur við atliti at at tryggja felags viðgerð fyri allar ognir, har krav er sett fram um endurgjald. Skipanin skal eisini tryggja, at gáttin at fáa tilboð roynd fyri rættinum ikki gerst ov høg.

Í *2. pkt.* er ásett, at landsstýrismaðurin í serligum førum kann leingja ella endurnýggja freistina fyri at krevja rættarliga meting. Dentur skal leggjast á, um eigarin ella rættindahavarin hevði rímiliga grund til at fara út um freistina og ikki kann lastast fyri ikki at hava søkt um longda freist, ella tað eftir umstøðunum hevði verið órímiligt at noktað eigaranum ella rættindahavaranum at sett fram krav eftir stk. 2, orsakað av at hann fór út um freistina.

Í *stk. 3* er ásett, hvør ið ber sakarmálskostnaðin, tá ið landið eftir umbøn frá eigara ella rættindahavara biður rættin um rættarliga meting til at áseta endurgjald eftir § 47, og tá ið annaðhvørt landið ella eigari ella rættindahavari biður um yvirmeting.

Tá ið mett verður um, hvat ið er at rokna sum *neyðugar útreiðslur* í sambandi við metingarsakina fyri rættinum, skal støði vanliga takast í, at partar við felags áhugamálum í mestan mun eiga at leita sær felags tekniska og løgfrøðiliga hjálp. Hinvegin skal dentur eisini leggjast á, at partar við ósamsvarandi áhugamálum í metingarsakini ikki eiga at leita sær felags hjálp, og at hjálpin er rímiliga býtt, í mun til hvussu nógvir áhugapartar eru, og hvørji áhugamál verndaravgerðin ávirkar. Jarðareigari, sum biður um yvirmeting og fær verri úrslit enn eftir tí fyrru metingini, kann fáa álagt at taka útreiðslurnar hjá landinum upp á seg, men kann heilt ella fyri ein part sleppa undan endurgjaldsskyldu, um týdningarmiklar grundir gera tað rímiligt. Tá ið støða verður tikin til, um eigari ella rættindahavari skal sleppa undan endurgjaldi, skal dentur leggjast á, um eigarin ella rættindahavarin hevði góðar grundir at royna ta fyrru metingina, av tí at málið var ivasamt ella prógvini í málinum ikki vóru greið, fyrr enn eftir at málið kom fyri rættin, um landið kundi lastast fyri, at málið varð lagt fyri rættin, ella hevði havnað einum rímiligum semingstilboði, ella málið hevur vælferðartýdning, og viðurskiftini hjá eigaranum ella rættindahavaranum tala fyri at sleppa honum undan endurgjaldsskyldu.

**Til § 49.**
Ásetingin gevur heimild til at geva ávísum náttúrusløgum støðu sum útvald og ásetur treytir fyri slíkari útveljing.

*Stk. 1* lógarfestir meginregluna um útvald náttúrusløg. Náttúrusløg kunnu veljast út til ta serligu fyrisitingarskipanina í lógarkapitli 6 *til at fremja endamálið í § 4.* At geva einum náttúruslagi støðu sum *útvalt* skal tí hava til endamáls *at varðveita margfeldið av náttúrusløgum í teimum natúrligu*

*útbreiðsluøkjunum og við tí margfeldið av sløgum og tær vistfrøðiligu tilgongdirnar, sum eyðkenna hvørt náttúruslagið.* Samstundis skulu tiltøk eftir lógini vigast upp ímóti øðrum týðandi samfelagsáhugamálum (sí § 14 og viðmerkingarnar til ta ásetingina).

Hugtakið *náttúruslag* er allýst í § 3, nr. 9. Hugtakið fevnir bæði um náttúrusløg í sjónum og á landi, eisini í áum, vøtnum, ósum og løkum. Náttúrusløgini kunnu vera ógvuliga ymisk, og tað kann vera ymiskt, hvussu nógvar fyrikomingar ið finnast av teimum.

Landsstýrismaðurin kann velja náttúrusløg út við kunngerð. Kunngerðin fær gildi tvørtur um fyrisitingargeirarnar. Ta almannarættarligu fyrisitingina útinnir tann einstaki geiramyndugleikin í mun til lógarverkið, sum er viðkomandi í tí einstaka førinum, sbr. § 50.

Kunngerðin skal galda fyri *ávís* náttúrusløg. Tað merkir, at skilast skal til navnið á náttúruslagnum. Kunngerðin ásetur ikki løgfrøðiliga bindandi, kortløgd økir fyri náttúruslagið ella náttúrusløgini, sum útvald verða. Er ætlanin at verja ávíst landafrøðiligt øki við øllum náttúrusløgum, ið har finnast, má tað gerast við økisvernd eftir lógarkapitli 5 ella øðrum amboðum, t.d. økisætlanum eftir planlóggávuni. Skipanin kann tó fáa týdning fyri eitt nærri tilskilað øki ella ogn, um kommunan ella annar geiramyndugleiki brúkar sín myndugleika eftir §§ 50 og 51.

Kunngerðin kann galda fyri alt landið ella partar av landinum. Tað síðstnevnda kann vera viðkomandi, tá ið fyrikomingarnar í einum serligum øki í landinum líkjast frá fyrikomingum í øðrum økjum í landinum. Í kunngerðini kunnu eftir stk. 1, *2. pkt.*, ásetast treytir fyri, hvørjar fyrikomingar av náttúruslagnum skulu vera fevndar av kunngerðini. T.d. kann ásetast, at kunngerðin bara fevnir um fyrikomingar, sum eru størri ella minni enn eitt vist, ella at ávís dygdarkrøv skulu vera lokin, t.d. krøv um fyrikoming av ávísum sløgum, um heilar (intaktar) vistfrøðiligar tilgongdir sum t.d. vatnhúsarhald, um at størri inntriv ikki eru gjørd o.a.tíl. Tað kann ofta vera viðkomandi at seta slík dygdarkrøv fyri at sleppa undan, at kunngerðin verður ov víðfevnd.

Kunngerðin skal ikki áseta reglur fyri, hvussu ið sitast skal fyri tí einstøku fyrikomingini. Slíkar reglur eru ásettar beinleiðis í lógini, sbr. §§ 50 til 52, og í tí viðkomandi geiralógini.

Í virkisætlanini eigur greiða m.a. at gerast fyri, hvussu nógvar fyrikomingar av slagnum talan er um, hvar ið tær eru at finna, hvussu stórar tær eru (tilsamans og hvør í sínum lagi), hvørji árin ið skaða ella gagna náttúruslagnum, og hvørji fyrisitingartiltøk ella avmarkingarstig ið verða viðmæld. Er tørvur á at seta serlig fyrisitingartiltøk í verk í einum útvaldum náttúruslagi, skulu ávirkað eigara- ella vinnuáhugamál takast við. Tiltøkini eiga í mestan mun at verða fyrireikað í samstarvi við ávirkaðar eigara- og vinnufelagsskapir og at vera partur av virkisætlanini.

Landsstýrismaðurin kann áseta kunngerð um útvald náttúrusløg. Uppskotið til kunngerð um útvald náttúrusløg skal sendast í breiða almenna hoyring hjá áhugafelagsskapum, eisini umhvørvis- og vinnufelagsskapum, fak- og vitanarstovnum, landsmyndugleikum, sum sita fyri náttúruslagnum, talan er um, og kommunum innan fyri tað landafrøðiliga útbreiðsluøkið hjá náttúruslagnum, talan er um.

Verða virkisætlanir gjørdar, eiga tær í høvuðsheitum at verða gjørdar samstundis við kunngerðararbeiðið. Á henda hátt fæst longu framman undan útveljingini ein fatan av, hvat ið er í væntu, og hvørji tiltøk ið eru neyðug.

Eftir at avgerð er tikin um útveljing, og virkisætlan gjørd, skal tætt samstarv vera millum myndugleikan, sum umsitur virkisætlanina, og myndugleikar, felagsskapir (eisini

jarðareigarafelagsskapir) ella jarðareigarar o.o., sum skulu hava ein leiklut í at fremja miðini og tiltøkini sambært virkisætlanini. Fyrisitingarmyndugleikin kann gera avtalu við jarðareigaran um at útinna nærri ásett røktartiltøk ella sløg av brúki, sbr. § 50, stk. 5. Fáast kann í lag eina studningsskipan til virkisætlanir fyri røkt og øðrum tiltøkum í útvaldum náttúrusløgum. Fæst slík skipan í lag, eigur studningur í høvuðsheitum at verða veittur virknum tiltøkum og at koma aftur at øðrum møguligum studningsskipanum, t.d. í landbúnaðinum.

Sum ein liður í hoyringartilgongdini eigur eisini at verða mett, um skipanin við útvaldum náttúrusløgum er tann skipanin, sum hóskar best, ella um onnur verndaramboð eiga at verða brúkt í staðin, t.d. økisvernd eftir lógarkapitli 5, tiltøk eftir aðrari lóggávu, sjálvbodnar loysnir ella ein samanseting av hesum.

Útveljing ber ikki í sær, at fyrikomingarnar, talan er um, verða friðaðar. Skipanin er meira at rokna sum ein leiðregla fyri burðardyggum brúki av útvaldum náttúrusløgum. Tað liggur í skipanini eftir lógarkapitli 6, at tað er loyvt at lata eina fyrikoming fara fyri skeytið, tá ið mett er um dygdina í fyrikomingini og týdningin, hon hevur fyri, at miðið í § 4 kann verða rokkið, og onnur týðandi samfelagsáhugamál (§ 14). Geldur útveljingin bara fyri fyrikomingar av ávísari dygd, kann hetta kortini vera ein ábending um, at meira krevst til at lata eina fyrikoming fara fyri skeytið, enn um útveljingin hevði fevnt um allar fyrikomingar av náttúruslagnum. Tað merkir, at tess smalari kunngerðin er, tess størri týdning hava tær fevndu fyrikomingarnar í mun til miðið í § 4.

Sum skilst á tí, sum er nevnt omanfyri, kunnu einstakar fyrikomingar av einum náttúruslagi vera so virðismiklar, at valt verður í staðin at brúka økisvernd sum amboð til at varða um náttúruslagið. Økisvernd kann eisini vera ein neyðug loysn, um avmarkingarstigið eigur at vera so strangt, at vinnuvirksemi má halda uppat. Verður ein fyrikoming av einum útvaldum náttúruslagi vard eftir lógarkapitli 5, ella liggur hon innan fyri eitt verandi verndarøki, galda reglurnar um økisvernd í lógarkapitli 5 og verndarkunngerðirnar framman fyri reglurnar um útvald náttúrusløg. Tað merkir, at reglurnar í §§ 49 til 52 ikki galda fyri slíkar fyrikomingar. Tað er tó ein fyritreyt, at eisini slíkar fyrikomingar verða kortlagdar, so at tær verða partur av tí samlaða yvirlitinum yvir náttúruslagið. Í summum førum kann tað renna saman millum fyrikomingar av einum útvaldum náttúruslagi og funktiónsøkir hjá einum raðfestum slagi eftir § 22, stk. 1, nr. 2. Er náttúruslagið útvalt, áðrenn slagið verður raðfest, eigur, tá ið kunngerð eftir § 22, stk. 1, nr. 2, verður orðað, at verða mett, um skipanin eftir lógarkapitli 6 verjir tað raðfesta slagið á nøktandi hátt. Ger hon ikki tað, eiga strangari reglur at verða ásettar eftir § 22, stk. 1, nr. 2. Tað kann t.d. vera viðkomandi at alfriða fyrikomingar av einum náttúruslagi, sum hýsa einum raðfestum slagi, hóast náttúruslagið er útvalt frammanundan. Er kunngerð eftir § 22, stk. 1, nr. 2, ásett, áðrenn náttúruslagið verður útvalt, geldur hon framman fyri lógarkapittul 6, um ósamsvar er millum reglurnar fyri fyrikomingum, sum eru fevndar av báðum regluverkunum. Annars galda regluverkini javnsíðis.

*Stk. 2* ásetur atlit, sum dentur skal leggjast á, tá ið eitt náttúruslag verður útvalt. Uppreksanin er ikki tømandi, men nevnir teir týdningarmestu tættirnar, sbr. orðið *serliga*. Atlitini í nr. 1 og 2 eru beinleiðis grundað á atlitið at náttúrumargfeldinum, meðan nr. 3 og 4 vísa til altjóða samanhangir, annaðhvørt lívfrøðiligar (nr. 3) ella rættarligar (nr. 4). Av tí at eisini altjóða skyldur mangan byggja á atlit at lívfrøðiligum margfeldi ella øðrum náttúruvirðum, rennur tað mangan saman millum fleiri atlit.

Tað fyrsta viðkomandi atlitið í *stk. 2, nr. 1,* snýr seg um náttúrusløg, sum eru í vanda fyri at fara fyri einki. Vit hava í dag ongan reyðlista fyri náttúrusløg, men mælt verður til at gera ein slíkan. Orðingin *fyri eini gongd ella í einum standi* sipar bæði til ta kvantitativu útbreiðsluna, t.e. talið á fyrikomingum, og hvussu stórar tær eru í vavi, og dygdina í fyrikomingunum. Eitt dømi um

negativa gongd við atliti at dygd kann vera, at ávís dýra- ella plantusløg hvørva úr náttúruslagnum, t.d. orsakað av minkandi føðslu, kapping frá fremmandum sløgum ella dálking.

Hvat ið mett verður at vera orsøkin til afturgongdina, t.d. um náttúruslagið hevur verið fyri stórum trýsti orsakað av inntrivum, um broytingin stendst av veðurlagsbroytingum ella t.d. ikki-brúki, kann hava týdning fyri, um útveljing verður mett at vera hóskandi amboð ella ikki.

Í nr. 1 er talan um gongd ella stand, *sum ikki samsvarar við miðið í § 4*.

Tað merkir, at natúrligar broytingar vanliga ikki eru fevndar. Hinvegin kann ein natúrlig gongd hava við sær, at eitt náttúruslag verður sjáldsamt í Føroyum, samstundis sum tann natúrliga gongdin ikki gevur grundarlag fyri at meta, at slagið fer at hvørva heilt. At talan skal vera um eina gongd, sum *ikki samsvarar* við miðið, ber eisini í sær, at ikki ein og hvør broyting er nóg stór til at vera grundarlag fyri útveljing. Broytingin skal vera størri enn eitt vist, áðrenn gongdin ella standurin kann sigast ikki at samsvara við miðið í § 4. Talan kann vera um, at útbreiðslan av náttúruslagnum minkar munandi í vavi ella við ferð, ella at trýstið frá inntrivum økist munandi. Er náttúruslagið sjáldsamt frammanundan, kunnu kortini eisini smærri broytingar sigast at vera í ósamsvari við miðið í § 4.

*Nr. 2* vísir til náttúrusløg, *sum hava stóran týdning fyri eitt ella fleiri raðfest sløg*. Summi náttúrusløg kunnu hava serligan týdning sum vistfrøðilig funktiónsøkir hjá raðfestum sløgum (*species*). At velja slík náttúrusløg út kann gera sítt til at tryggja, at nóg nógv slík funktiónsøkir verða varðveitt. Um skipanin eftir lógarkapitli 6 røkkur til, ella onnur amboð til at tryggja funktiónsøkir mugu takast í brúk, má metast, tá ið slagið verður raðfest eftir §§ 21 og 22.

Summi náttúrusløg kunnu hava munandi virði fyri tað lívfrøðiliga margfeldið, hóast tey ikki eru fevnd av nøkrum av atlitunum í nr. 1 til 4. Talan kann t.d. vera um eitt náttúruslag, sum er í útryðjuni á sínum sínum útbreiðsluøki og tí kann hýsa sløgum við serligum ílegueyðkennum ella eini samanseting av sløgum, sum bregður frá fyrikomingunum í meira miðstøddum økjum. Talan kann eisini vera um náttúrusløg, sum eru sjáldsom úr einum náttúrusjónarhorni. Av tí at uppreksanin í nr. 2 ikki er tømandi, kunnu eisini slík náttúrusløg veljast út. Men av tí at hesi førini ikki verða nevnd í ásetingini, krevst eitt sindur meira, fyri at tey einsamøll skulu kunna vera grundgeving fyri útveljing.

Atlitið í *nr. 3* hevur útgangsstøði í náttúrusløgum, sum hava *munandi part av síni útbreiðslu í Føroyum*, og hevur samdømi í einum samsvarandi atliti fyri sløg (*species*) í § 21. Atlitið fevnir í øllum førum um náttúrusløg, sum *bara* finnast í Føroyum (ílend, t.e. *endemisk*, náttúrusløg), men eisini náttúrusløg, sum í høvuðsheitum finnast í Føroyum. Orðaskiftið í altjóða arbeiðið ber tann vegin, at at lond hava serliga ábyrgd ikki bara av at varða um síni ílendu (endemisku) dýra- og plantusløg, men eisini síni ílendu náttúrusløg. Hvat ið er at rokna sum eitt ílent náttúruslag, veldst um, hvussu náttúrusløg verða allýst og avmarkað. Eftir náttúrumargfeldislógini § 49 er ikki talan um treytir við nógvum lívfrøðiligum brigdum. Náttúruslagið skal vera heilt ólíkt náttúrusløgum í øðrum londum fyri at kunna sigast at vera ílent ella vera fevnt av orðingini *hevur munandi part av síni útbreiðslu í Føroyum*.

Hóast atlitið í nr. 3 er lokið, eigur náttúruslagið ikki í øllum førum at fáa støðu sum útvalt. Eins og tá ið talan er um hini atlitini í stk. 2, skal útveljingin vera grundað á eina meting við støði í tí ítøkiligu útbreiðsluni av náttúruslagnum, tí vistfrøðiliga standinum, sum fyrikomingarnar eru í, og hóttanarmyndini.

Atlitið í *nr. 4* er ofta óneyðugt aftur at hinum atlitunum, sbr. *altjóða skyldu eru knýttar at náttúruslagnum*. Tá ið ávís náttúrusløg eru sett á altjóða listar við náttúrusløgum, sum krevja serligt eftiransni, er tað vanliga grundað atlit sum hóttan, viðkvæmi ella sjáldsemi. Tó kunnu dømir vera um, at eitt slag á einum altjóða lista ikki er í serliga stórum vanda í Føroyum. Í slíkum førum kann skyldan hava við sær, at skipanin í lógarkapitli 6 verður brúkt, samstundis sum tað í sambandi við meting í ítøkiligum førum kann havast fyrilit fyri standinum hjá náttúruslagnum í Føroyum.

Nr. 4 vísir til altjóða skyldur. Atlitið fevnir um altjóðarættarliga bindandi reglur, ikki vegleiðandi leiðreglur. Eru náttúrusløgini fevnd av nøkrum av hinum atlitunum í stk. 2, kunnu tó eisini leiðreglur vera ein týðandi ískoytisgrundgeving fyri útveljingini.

Avgerðargrundarlagið fyri útveljingini skal vera í samsvari við § 8. Tað merkir, at ein kunngerð um útvald náttúrusløg, *so langt sum tað er rímiligt*, skal byggja á *vísindaliga vitan um stovnsstøðuna hjá sløgum, útbreiðsluna og tann vistfrøðiliga standin hjá náttúrusløgum og virknaðin av árinum*, sbr. § 8, stk. 1. Dentur kann eisini leggjast á vitan av royndum, sbr. § 8, stk. 2. Hvat ið er eitt rímiligt vitanargrundarlag, veldst um eina meting. Metast má um, hvussu víðfevnt ella avgerandi eitt møguligt vitanartrot er, og um skjalfestar ábendingar eru um, at náttúruslagið er fyri afturgongd. Eftir § 9 skulu, tá ið veruligur vandi er fyri, at náttúrumargfeldi verður fyri álvarsligum ella óbótaligum skaða, tiltøk ikki útsetast, hóast vitanin trýtur.

§ 49 hevur sum fyritreyt, at skipanin kann mennast, sum frá líður, so hvørt sum vitanargrundarlagið veksur. Tey fyrstu náttúrusløgini, sum útvald verða, verða tí væntandi sløg, har ið nóg dygg vitan longu er tøk, til at ein grundgivin avgerð kann takast í mun til atlitini í stk. 2.

Eftir § 49, stk. 1, stendur tað til landsstýrismannin at meta, um útveljing er eitt hóskandi amboð. Hóast fleiri treytir eru loknar, merkir tað ikki av sær sjálvum, at náttúruslagið verður útvalt. Spurningurin má síggjast í samanhangi við, um onnur amboð enn útvald náttúrsløg eru meira viðkomandi, sbr. umrøðuna omanfyri.

*Stk. 3* ásetur tó eina skyldu fyri myndugleikarnar at meta um tørvin, tá ið tað er *skjalfest, at standurin ella gongdin hjá einum náttúruslagi eftir vísindaligum metingarstøði í stóran mun ikki samsvarar við miðið í § 4*. Henda treytin er knýtt at atlitinum í stk. 2, nr. 1. Í hesum liggur, at tað eiga at krevjast góðir grundir fyri ikki at velja út í hesum førunum.

Bæði myndugleikarnir sjálvir og áhugapartar við rættarligum áhuga kunnu gera skylduna virkna. Orðini *við rættarligum áhuga* vísa aftur til bæði *ein felagsskapur* og *onnur*. Kravið um *rættarligan áhuga* er knýtt at endamálinum, sum er at varðveita náttúruslagið. Tað merkir, at talan má vera um felagsskapir ella onnur, sum hava serligan áhuga í, at náttúruslagið verður varðveitt, t.d. tí at umhvørvisvernd er millum endamálini við felagsskapinum, ella tí at felagsskapurin umboðar eina vinnu, sum metir gongdina at vera eina hóttan móti tilfeingisgrundarlagnum.

Skjalfesting og vísindalig krøv skulu havast sum grundarlag, fyri at skyldan eftir stk. 3 at meta um útveljing skal gerast virkin. Tað ber ikki í sær, at náttúruslagið á vísindaligum grundarlagi hevur fingið støðu sum hótt ella viðkvæmt. Men atlitini, sum metingin, at gongdin verður mett at vera negativ í mun til § 4, byggir á, skulu vera av vísindaligum slag.

Avgerðir eftir § 49 kunnu byggja á almennan kunnleika, t.d. brúkarakunnleika ella kunnleika, sum fyrisitingin hevur av royndum.

Í sambandi við metingina eftir hesi ásetingini galda eisini ásetingarnar í lógarkapitli 2.

Brot á metingaskylduna eftir stk. 3 verða ikki revsað og kunnu neyvan verða grundarlag fyri eini møguligari endurgjaldsábyrgd.

Fyri náttúrusløg, har virkin røkt er ein fyritreyt fyri, at støðini kunnu verða varðveitt, skal landið leggja fram virkisætlan til at tryggja slík økir, sbr. *stk. 4*. Hugsanin er, at landið vanliga skal leggja fram uppkast til virkisætlan í seinasta lagi samstundis við útveljingina. Undantikin hesum eru førir, har støðan krevur, at avgerð um útveljing verður tikin skjótast gjørligt, uttan mun til um virkisætlan er liðug ella ikki.

Við *øðrum tiltøkum* meinast m.a. fyrireiking, uppmerking og endurreising. Møguligur studningur eigur í høvuðsheitum at fara til virkin tiltøk.

Verða virkisætlanir gjørdar, eiga tær at verða endurskoðaðar/eftirmettar fimm til tíggju ár eftir avgerðina um útveljing.

Tætt samstarv við ávirkaðar jarðareigarafelagsskapir og vinnuáhugamál hevur stóran týdning, tá ið virkisætlan verður gjørd. Ætlanin skal, sum omanfyri nevnt, vanliga gerast samstundis við útveljingarkunngerðina, soleiðis at uppkast til virkisætlan verður lagt fram samstundis við avgerðina. Á henda hátt fæst í góðari tíð og á skipaðan hátt gongd á fyrisiting og neyðug tiltøk, umframt at jarðareigarar og rættindahavarar í góðari tíð fáa eina fatan av, hvat ið er í væntu. Fæst ein studningsskipan til virkisætlanir fyri røkt og øðrum sløgum av tiltøkum í útvaldum náttúrusløgum í lag, eigur peningurin í høvuðsheitum at fara til virkin tiltøk. Slíkur møguligur studningur skal síggjast í samanhangi við fíggjarlig amboð hjá ávirkaðum geirum, m.a. landbúnaðarfyrisitingini.

**Til § 50.**
Ásetingin snýr seg um rættarvirknaðin av útveljing.

*Stk. 1* ber í sær eina ítøkiliggering av tí vanligu varsemisskylduni í § 6, tá ið talan er um útvald náttúrusløg. Skyldan hevur sum fyritreyt, at ein og hvør eftir besta førimuni kunnar seg um, hvørji náttúrusløg ið eru útvald, og um virksemið hjá viðkomandi ber við útvald náttúrusløg. Ein fyritreyt fyri hesum er, at myndugleikarnir veita nóg góða kunning um útvald náttúrusløg, og hvat ið kann hava óhepna ávirkan á tey. Metast má um varsemisskylduna út frá teimum krøvum, sum tað er rímilig at seta tí einstaka virksemisútinnaranum. Ásetingin geldur, sama um tað eru privat ella tað almenna, sum útinnir virksemið. Fyri útinning av almennum myndugleika, eisini fyrisiting av fastognum, galda eisini reglurnar í stk. 2.

Skyldan eftir stk. 1 er knýtt at avleiðingunum av virkseminum, ikki hvar ið tað fer fram. Tess longri burturi frá náttúruslagnum virksemið fer fram, tess minni krøv kunnu setast útinnaranum, við atliti at hvat ið hann kann væntast at síggja frammanundan av avleiðingum. Varsemisskyldan minkar, tess longri burtur frá náttúruslagnum tað ávirkandi virksemi fer fram.

Á § 6, stk. 2, skilst, at varsemisskyldan er at rokna sum lokin, um virksemið verður útint sambært loyvi frá almennum myndugleika, og fyritreytirnar fyri loyvinum framvegis eru til staðar.

Hvat ið liggur í orðingini *verða gjørd verri*, má metast út frá miðinum í § 4. Hugtakið er knýtt at náttúruslagnum í sjálvum sær, ikki tí einstøku fyrikomingini. Hugtakið fevnir ikki um eitt og hvørt minni afturstig í útbreiðslu ella dygd. Og orðingin *verða gjørd verri* ber í sær, at natúrligar broytingar eru ikki fevndar.

Hvørt talan er um *at gera verri*, kann vera ilt at meta um hjá tí einstaka. Av tí at loyvir frá almennum myndugleikum koma í staðin fyri varsemisskylduna, er virkisøkið hjá varsemisskylduni serliga knýtt at virksemi, sum verður útint, uttan at myndugleikarnir eru uppií. Er vegleiðingartilfar gjørt um burðardygt brúk av fyrikomingum av útvaldum náttúrusløgum, kann tann einstaki hava hetta sum grundarlag fyri, hvussu hann fer um eina fyrikoming av einum útvaldum náttúruslagi. Er talan um, at ein fyrikoming verður heilt oyðiløgd, kann tó skjótt vera talan um *at gera verri*, um ikki nógvar fyrikomingar eru eftir av náttúruslagnum. Hjá tí einstaka er tað tó ilt at meta um virðið á tí einstøku fyrikomingini í mun til náttúruslagið í síni heild. Varsemiskyldan ber í slíkum førum í sær, at tann einstaki setur seg í samband við myndugleikarnar og biður um nærri vegleiðing.

Orsakað av tí almenna innihaldinum í varsemisskylduni og tørvinum hjá privatum á vegleiðing um, hvussu hon verður brúkt í verki, verða brot á ásetingina ikki revsað.

Skipanin við útvaldum náttúrusløgum hevur sum fyritreyt, at hon verður útint gjøgnum kommunuplanlegging og myndugleikaútinning innan fyri teir viðkomandi geirarnar. Hetta skilst serliga á § 50, *stk. 2, 1. pkt.* Ásetingin er ein bindandi leiðregla fyri meting eftir øðrum lógarverki og fyri fyrisiting av fastognum hjá tí almenna. Ásetingin ber onga sjálvstøðuga avgerðarheimild í sær, men byggir á, at skipanarheimildir eru í øðrum lógum, møguliga sjálvari náttúrumargfeldislógini (t.d. §§ 20, 26 ella 27). Serliga viðkomandi eru plan- og byggilóggávan, men eisini loyvisskipanir í øðrum lógum.

Ásetingin byggir á, at tað í sambandi við tulking og meting eftir hesum regluverkunum er rásarúm fyri at leggja dent á náttúruvirðir. Er í onkrum føri ósamsvar millum rásarúmið fyri meting eftir aðrari lóg og náttúrumargfeldislógini, veldst tað um vanligar tulkingarmeginreglur, brúktar til ítøkilig førir, hvat ið loysnin er. Miðast má tó eftir at greiða slíkt ósamsvar, tá ið lóggáva verður orðað. Ósamsvar kann eisini vera millum kunngerðir við heimild í aðrari lóg og náttúrumargfeldislógina. Serliga tá ið talan er um reglur um studningsveiting, kunnu myndugleikarnir hava skyldu til at veita studning, um nærri ásettar treytir eru loknar. Tað liggur á myndugleikunum at finna loysnir við at endurskoða slíkar reglur, so at regluverkið fæst í samljóð. Ásetingin geldur, *tá ið almennur myndugleiki verður útintur*. Hetta fevnir um at gera kunngerðir og taka avgerðir, m.a. at veita ella at nokta studning. Ásetingin fevnir bæði um studning til tiltøk, sum gagna náttúrumargfeldinum, t.d. røkt, og studning til inntriv í útvald náttúruslag.

Ásetingin geldur eisini, tá ið tað almenna situr fyri egnum fastognum, sí eisini viðmerkingarnar til § 7.

At *serligt fyrilit* skal havast, ber í sær, at stórur dentur skal leggjast á atlitið at tí útvalda náttúruslagnum, t.d. í sambandi við meting, ella tá ið regluverk verður gjørt. Tað ber tó ikki í sær, at at atlitið at náttúruslagnum skal hava avgerandi týdning í øllum førum. Ósamsvar viðvíkjandi endamálum og áhugamálum kann hava við sær, at stakfyrikomingar av einum útvaldum náttúruslagi mugu dvína.

*Fyrilitið,* sum havast skal, er, at avgerðin, sum viðkomandi myndugleiki tekur, ikki skal hava við sær, at útbreiðslan og tann vistfrøðiligi standurin hjá fyrikomingunum verða gjørd verri. Við vistfrøðiligum standi hjá einum náttúruslagi meinast støða og gongd við atliti at funktiónum, bygnaði og framleidni, har ið náttúruslagið finst, í mun til ítøkiligar ávirkanartættir, sbr. allýsingina í § 3, nr. 18. Eftir stk. 3 skal í sambandi við meting m.a. dentur leggjast á týdningin, sum fyrikomingin hevur í mun til allar fyrikomingarnar av náttúruslagnum í Føroyum, sbr. niðanfyri.

Á § 49, stk. 1, skilst, at endamálið við skipanini við útvaldum náttúrusløgum er at fremja miðið í § 4. Ásetingin í § 50 skal tí eisini lesast við § 14 í huga, so at vigað verður upp ímóti øðrum týðandi samfelagsáhugamálum, tá ið avgerðir verða tiknar, sum bera við fyrikomingar av útvaldum náttúrusløgum.

Tað at fyrilit verður havt, ber ikki altíð í sær, at sýtast má fyri tiltøkum. Tað kann ofta vera nóg mikið, at myndugleikarnir leggja nærri treytir við, tá ið tiltøk verða framd.

Orðingin *gera verri* er nærri umrødd undir stk. 1.

Ásetingin í stk. 2 ber í sær, at tað skal síggjast í avgerðini, hvussu ið atlitið at náttúruslagnum er vigað og røkt, ella hvørji onnur atlit ið størri dentur er lagdur á.

Tað skilst á stk. 2, *2. pkt.*, at greiða skal gerast fyri avleiðingunum fyri tað útvalda náttúruslagið, um mett verður, um loyvi skal gevast til inntriv í eina fyrikoming av náttúruslagnum. Talan er ikki um eina vanliga árinsmeting, men eina einfaldari meting av avleiðingunum fyri útbreiðsluna og standin hjá náttúruslagnum, so at ein fakliga grundað meting kann gerast eftir 1. pkt. Í samsvari við meginregluna í § 11 er tað tann, sum varðar av virkseminum, sum hevur ábyrgd av, at greiningin verður gjørd, meðan tað liggur á viðkomandi myndugleika at bera so í bandi, at greiningin er tøk, tá ið avgerð verður tikin, og at hon ber í sær nøktandi upplýsingar, so at metingin, sum krevst, kann gerast. Ein slík avleiðingagreining kann eftir umstøðunum hava við sær, at treytir kunnu leggjast við loyvinum.

Tað er avleiðingunum fyri náttúruslagið, greiða skal gerast fyri. Kemur greiningin eftir, at virksemi ikki hevur nevningarverdar avleiðingar fyri fyrikomingina, talan er um, er ikki neyðugt at halda fram og kanna avleiðingarnar fyri náttúruslagið í síni heild. Kemur tann fyrsta greiningin hinvegin eftir, at fyrikomingin oyðilegst ella versnar, verður tað næsta stigið í greiningini at kanna, hvønn týdning tað hevur fyri náttúruslagið í síni heild, at fyrikomingin fer fyri skeytið, sbr. eisini stk. 3.

Eftir stk. 2, *3. pkt.*, kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta nærri reglur um avleiðingagreiningina. Kunngerðin kann bæði áseta reglur fyri *útinningini* og *viðgerðini*. At reglur verða ásettar fyri *útinningini*, kann bera í sær, at kunngerðin ítøkiligger, hvat virksemi og hvørji náttúrusløg ið krevja avleiðingagreining. Aftur at tí kunnu reglur ásetast um innihaldið í greiningini. Ein kunngerð um *viðgerðina* av umsóknini kann t.d. snúgva seg um hoyring, innlit og aðrar málsviðgerðarreglur. T.d. kann krevjast, at málið verður lagt fyri landsstýrismannin.
*Stk. 3, 1. pkt.*, vegleiðir nærri um meting í sambandi við virksemi, sum ber við ein fyrikoming av einum útvaldum náttúruslagi.

Í fyrra lagi verður gjørt greitt, at tann einstaka fyrikomingin ikki skal skoðast einsæris, men út frá virðinum á fyrikomingini í mun til aðrar fyrikomingar av náttúruslagnum. Verður ein slík meting gjørd á kommunalum stigi, kann t.d. verða valt politiskt at lata eina fyrikoming fara fyri skeytið, samstundis sum kommunan tekur undir við, at aðrar fyrikomingar verða varðveittar. Hevur kommunan bara eina fyrikoming av náttúruslagnum, má metast um virðið úr einum breiðari økis- ella landssjónarhorni.

Í seinna lagi kann tað vera avgerandi fyri metingina, um ein sambærilig fyrikoming kann gerast ella mennast aðrastaðni. Finst longu ein slík fyrikoming, verða fyrikomingarnar vigaðar upp ímóti hvørji aðrari eftir 1. setningsliði, sbr. omanfyri. Tað kunnu finnast fyrikomingar, sum ikki hava eins góða dygd og tann, sum fer fyri skeytið, men sum – annaðhvørt av natúrligum ávum ella við ávísum tiltøkum – kann mennast til eina javnverda fyrikoming. Oftari kann tað vera so, enn at ein

fyrikoming verður gjørd heilt av nýggjum. Tað kann vera torført og fakliga krevjandi at seta slíka nýgerð í verk.

Metingarnar eftir stk. 3 skulu síggjast í avgerðini.

Fyri at tað skal kunna metast um inntriv í eina fyrikoming í mun til náttúruslagið í síni heild í Føroyum, er tað avgerandi neyðugt, at upplýsingar um útvald náttúrusløg verða dagførdar og gjørdar atkomandi.

Eftir stk. 3, *2. pkt.*, kann tann, sum varðar av virkseminum, fáa álagt at bera rímiligan kostnað av at røkja, gera, ella menna eina fyrikoming av einum útvaldum náttúruslagi, afturfyri at loyvi verður givið til munandi inntriv í eina aðra fyrikoming. Hetta er í samsvari við meginregluna í § 11. Ein slík álegging skal tó vera rímilig, sbr. orðingina *rímiligan kostnað*. Hvat ið er rímiligt, veldst um eina meting, alt eftir hvussu stórt virksemið er, hvørja byrðu ein slík álegging ber í sær fyri tann, sum varðar av virkseminum, hvat slag av virksemi talan er um, t.d. ta ítøkiliga samfelagsgagnið av virkseminum, og avleiðingarnar fyri náttúruslagið. Ein slík meting við atliti at, hvussu rímilig ein álegging er, er eisini í samsvari við sjálva meginregluna í § 11, sbr. viðmerkingarnar til ta ásetingina.

*Stk. 4* ger greiðu fyri sambandinum millum reglurnar í stk. 1 til 3 og góðkendar býarskipanir og byggisamtyktir. Á § 50, stk. 2, 1. pkt., skilst, at eisini kommunur í síni myndugleikaútinning skulu hava *serligt fyrilit* fyri *fyrikomingum av útvaldum náttúrusløgum, so at tað slepst undan, at útbreiðslan av náttúrusløgunum og tann vistfrøðiligi standurin hjá fyrikomingunum verða gjørd verri*. Kommunan kann tó koma eftir, at onnur atlit í einum ítøkiligum máli viga meira enn atlitið at einum útvaldum náttúruslagi (sbr. § 14 um viging upp ímóti øðrum týðandi samfelagsatlitum), ella at atlitið at einum útvaldum náttúruslagi kann verða røkt innan fyri karmin á eini býarskipan ella byggisamtykt, sum kommunan hevur í hyggju at samtykkja. Støða verður í tí førinum tikin til atlitið at tí útvalda náttúruslagnum í plantilgongdini, har ið tað er ein fyritreyt, at landsmyndugleikar eru uppií. Eisini § 50, stk. 2, 2. pkt., og § 50, stk. 3, galda í plantilgongdini.

Verður á henda hátt endalig støða tikin til økisbrúkið í eini fyrikoming av einum útvaldum náttúruslagi, myndar býarskipanin ella byggisamtyktin karmin um fyrisitingina heldur enn § 50, stk. 1 til 3. Tað nýtist tó ikki at bera í sær, at býarskipanin ella byggisamtyktin ger greiðu fyri allari fyrisitingini. Er t.d. tørvur á røkt til at varðveita eina fyrikoming av einum útvaldum náttúruslagi, geldur eingin skylda til hetta eftir planlóggávuni. Í tí førinum mugu onnur amboð koma aftur at býarskipanini ella byggisamtyktini. Tað skilst á orðingini í stk. 4, at býarskipanir og byggisamtyktir *koma fram um reglurnar í stk. 1 til 3*. Tað ber í sær, at stk. 1 til 3 ikki galda fyri viðurskiftir, sum býarskipan ella byggisamtykt hevur tikið støðu til. Fyri viðurskiftir, sum býarskipanir ella byggisamtyktir ikki taka støðu til, t.d. virkna fyrisiting, galda reglurnar á vanligan hátt. Stk. 1 til 3 kunnu eisini verða brúkt framíhjá, tá ið tiltøk skulu fremjast sambært býarskipan ella byggisamtykt.

Tað er eitt krav, at býarskipanin ella byggisamtyktin *greiðir økisbrúkið fyri eina fyrikoming av einum útvaldum náttúruslagi*. Er fyrikomingin fevnd av eini størri ætlan, sum er so yvirskapað, at greið støða ikki er tikin til fyrikomingina av tí útvalda náttúruslagnum, geldur § 50, stk. 4, ikki.

§ 50, stk. 4, ber ikki í sær, at kommunan noyðist at gera eina so ítøkiliga ætlan, men ger hon tað ikki, galda stk. 1 til 3 fult og heilt.

Taka førir seg upp í sambandi við landbúnaðarvirksemi, sum ber við fyrikomingar av útvaldum náttúrusløgum, har eina økisætlan eftir planlóggávuni *greiðir økisbrúkið fyri eina fyrikoming av*

*einum útvaldum náttúruslagi*, sbr. § 50, stk. 4, geldur heldur eingin fráboðanarskylda eftir § 51, stk. 1. Er fyrikomingin fevnd av eini størri ætlan, sum er so yvirskipað, at greið støða ikki er tikin til fyrikomingina av tí útvalda náttúruslagnum, geldur § 50, stk. 4, tó ikki.

Tá ið talan er um planir, sum vóru samtyktir, áðrenn eitt náttúruslag fekk støðu sum útvalt, geldur stk. 4 ikki. Tað merkir, at reglurnar í § 50, stk. 1 til 3, skulu fylgjast.

Í summum førum kunna eldri planir galda, sum ikki leggja upp fyri atlitinum at tí útvalda náttúruslagnum. Kemur í slíkum føri ein umsókn um t.d. byggiloyvi, sum er í samsvari við planin, má kommunan eftir regluni í § 50, stk. 2, meta, um fyrikomingin kann fara fyri skeytið, uttan at tað hevur við sær, *at útbreiðslan av náttúrusløgunum og tann vistfrøðiligi standurin hjá fyrikomingunum verða gjørd verri*. Tað kann eisini vera viðkomandi at seta nærri krøv við atliti at tí ítøkiligu staðsetingini av bygninginum. Aftur at tí kann tað vera viðkomandi at leggja treytir við um eina sambærilig fyrikoming aðrastaðni, sbr. § 50, stk. 3.

Tað er undir øllum umstøðum ein stórur fyrimunur, um kommunan í býarskipan ella byggisamtykt ger greiðu fyri økisbrúkinum fyri fyrikomingar av útvaldum náttúrusløgum, tá ið kunngerð um útvald náttúrusløg er ásett.

*Stk. 5* ásetur eina reglu fyri røkt, m.a. við atliti at hóttum náttúrusløgum í landbúnaðarlandslagnum, sum krevja røkt fyri at verða varðveitt. Í slíkum málum er tað umráðandi at fáa samstarv í lag millum tað almenna og einstakar jarðareigarar. Har ið tað almenna sær tørvin á røktartiltøkum, og jarðareigarin er sinnaður at útinna røktina, eigur tað almenna at gera avtalu við jarðareigaran um røkt av tí viðkomandi fyrikomingini av náttúruslagnum. Røktin kann eisini útinnast av landsstovnum ella kommunalum stovnum, møguliga við samstarvi teirra millum, men bara eftir avtalu við jarðareigaran.. Ásetingin áleggur hvørki jarðareigaranum ella tí almenna nakra rættarliga skyldu at útinna røkt, men ger greitt, at røkt er ein uppgáva, sum hevur týdning, tá ið útvald náttúrusløg skulu varðveitast. Røkt, sum ber í sær inntriv í rættindir hjá jarðareigarum ella rættindhavarum, kann ikki útinnast við heimild í hesi ásetingini, uttan so at jarðareigarin gevur sítt samtykki. Peningur, sum møguliga er avsettur í virkisætlanini, kann brúkast til hetta slagið av røkt.

**Til § 51.**
Ásetingin snýr seg um rættarvirknaðin av útvaldum náttúrusløgum fyri landbúnaðarvirksemi, sum loyvi ikki krevst til.

*Stk. 1, 1. pkt.*, ásetur eina fráboðanarskyldu fyri landbúnaðarvirkssemi, sum ávirkar fyrikomingar av útvaldum náttúrusløgum. Reglurnar í § 51 galda ikki fyri virksemi, sum loyvi krevst til eftir øðrum regluverki. Slík førir eru fevnd av viðkomandi loyvisskipanum, sum verða brúktar saman við reglunum í náttúrumargeldislógini § 50 og teimum almennu ásetingunum í náttúrumargfeldislógini um burðardygt brúk.

Við landbúnaðarvirksemi, sum ávirkar fyrikomingar av útvaldum náttúrusløgum, meinast í hesum samanhanginum virksemi, sum verður útint sum liður í landbúnaðarvirksemi, og sum kann broyta eyðkennini við ella støddina á eini fyrikoming av einum útvaldum náttúruslagi. Talan kann t.d. vera um sáing, taðing o.a.

Ásetingin fevnir ikki um óvirkni. Tað merkir, at hóttir t.d. afturgróður eina fyrikoming av einum útvaldum náttúruslagi, mugu onnur amboð enn reglurnar í § 51 takast í brúk.

Hóast tað ikki beinleiðis skilst á ásetingini, er hugsanin, at kommunan ber so í bandi, at jarðareigarar og rættindahavarar verða kunnaðir um kendar fyrikomingar av útvaldum

náttúrusløgum á teirra ognum. Hetta fyri at tryggja, at jarðareigarar og rættindahavarar fáa nøktandi kunnleika um skipanina.

Fráboðanarskyldan geldur, uttan mun til um tað eru privatir ella almennir eigarar, sum standa fyri virkseminum.

Kommunan skal hava fráboðanina. Náttúrumargfeldislógin ásetur onga freist fyri, nær kommunan skal hava svarað, men slík freist kann ásetast, tá ið kunngerð verður ásett um eitt útvalt náttúruslag. Vinnuatlit kunnu tala fyri at áseta slíka freist, t.d. upp á tríggjar vikur. Virksemið kann ikki útinnast, uttan at kommunan hevur svarað, t.e. kommunan kann ikki tigandi lata virksemið ganga sína gongd, sbr. *2. pkt*.

Kommunan skal meta um virksemið eftir reglunum í § 50, stk. 2 og 3. Víst verður til umrøðuna av hesum ásetingunum omanfyri. Metingin hjá kommununi av fráboðanarskylduni er *útinning av myndugleika* eftir § 50, stk. 2, og tí galda metingaratlitini eftir § 50, stk. 2 og 3, sbr. *3. pkt*.

Eftir *4. pkt.* kann kommunan nokta fyri virkseminum ella geva nærri boð um, hvussu virksemið skal fara fram, tá ið virksemið kann hava við sær, at útbreiðslan av náttúruslagnum og tann vistfrøðiligi standurin hjá fyrikomingunum verða gjørd verri.

Hugtakið *gera verri* er knýtt náttúruslagnum í sjálvum sær. Tað merkir, at miðast skal eftir, at fyrikomingarnar av náttúruslagnum tilsamans verða varðveittar við framtíðini í huga. Í førum, har eitt náttúruslag fevnir um fleiri støð, sum eru í góðum vistfrøðiligum standi, kann tað í størri mun loyvast, at standurin í eini einstakari fyrikoming verður verri, enn um eitt náttúruslag hevur fáar fyrikomingar eftir, sum eru í góðum vistfrøðiligum standi, ella fáar fyrikomingar innan fyri eitt avmarkað øki. Í tí síðstnevnda førinum eigur í minni mun at latast upp fyri at loyva inntrivum ella brúki í eini stakfyrikoming. Hugtakið *gera verri* ber í sær, at natúrligar broytingar ikki eru fevndar. Er talan um, at útbreiðslan av náttúruslagnum og tann vistfrøðiligi standurin hjá fyrikomingunum verða gjørd verri, *kann* kommunan nokta fyri virkseminum. Tess størri inntriv í tað útvalda náttúruslagið virksemið er atvold til, tess størri orsøk hevur kommunan at nokta fyri tiltakinum ella at seta nærri treytir.

Tørvar einum útvaldum náttúruslagi vernd á einum verndarstigi, sum ber í sær, at vinnuvirksemi, sum er í gongd, má halda uppat ella verður munandi tvørligari at útinna, er økisvernd eftir lógarkapitli 5 amboðið, ið brúkast skal.

Fyri summi náttúrusløg í røktarlandslagnum í landbúnaðinum er virkin røkt ella framhaldandi hald av teimum ólíku støðunum ein týðandi fyritreyt fyri varðveitslu av náttúrusløgunum. Í slíkum førum eigur landið syrgja fyri samskipaðum brúki av tiltøkum, sum gera sítt til at verja náttúrusløgini.

**Til § 52.**
Ásetingin snýr seg um kunngering av avgerðum um inntriv í útvald náttúrusløg.

Tað er umráðandi, at avgerðir um inntriv í útvald náttúrusløg verða gjørdar kendar. Ásetingin lógarfestir tí eina skyldu at kunngera slíkar avgerðir. Skyldan liggur á myndugleikanum, sum hevur loyvt virksemi í fyrikomingum av útvaldum náttúrusløgum.

Verður ein umhvørvisavgerðaskrá gjørd eftir § 62, eiga avgerðir um at loyva inntrivum í fyrikomingar av útvaldum náttúrusløgum at verða skrásettar í skránni.

Skal munagott eftirlit førast við standinum, sum tey útvaldu náttúrusløgini í Føroyum sum heild eru í, er tað umráðandi at hava heildaryvirlit yvir avgerðir, sum loyva inntrivum. Eitt slíkt yvirlit hevur eisini týdning, tá ið dagar skulu takast ímillum, um eitt inntriv í eitt útvalt náttúruslag verður atvold til, at útbreiðslan hjá náttúruslagnum og tann vistfrøðiligi standurin hjá fyrikomingunum verða gjørd verri. Svarið veldst um heildargongdina hjá náttúruslagnum. Men tað er ikki bara umráðandi at skráseta avgerðir, sum loyva inntrivum. Slík skráseting loftar ikki gongd í náttúrusløgunum, sum ikki stendst av negativum inntrivum. Tað er umráðandi at hava eyguni við og skráseta gongdina í fyrikomingunum í sjálvum sær, heldur enn bara hvat ið er loyvt ella ikki loyvt í teimum.

**Til § 53.**
Ásetingin staðfestir, at tað er landið, sum hevur ábyrgdina av at sita fyri ílegutilfari. Aftur at tí ger ásetingin greitt, hvørji atlit, ið havast skulu í huga, tá ið sitið verður fyri ílegutilfari.

Ásetingin staðfestir, at ílegutilfar er ogn hjá Føroya fólki. Ásetingin sigur eisini, at tað er landið, sum hevur ábyrgd av at sita fyri ílegutilfarinum í Føroyum. Endamálið við at staðfesta hetta er at gera greitt, at landið hevur stjórnar- og handhevjanarrætt til ílegutilfar.

Sí nærri um hugtakið *ílegutilfar* í allýsingini í §3 , nr. 5, og viðmerkingunum til ta greinina.

Ásetingin sigur, at ílegutilfarið er eitt felags tilfeingi, sum er ogn hjá Føroya fólki, sbr. *1. pkt.* Hugtakið *Føroya fólk* skal skiljast í víðari merking og sipar til almenningin, ella felagsskapin í samfelagnum, úr staðbundnum, tjóðarligum og altjóða sjónarhorni og til felagsskap tvørtur um ættarlið. Eftir ásetingini skal munandi dentur tí leggjast á framtíðarbrúk av ílegutilfarinum. Hugtakið *felags* ber í sær, at eingin í útgangsstøðinum hevur nakran einkarætt til ílegutilfar orsakað av ognarrætti til tað lívfrøðiliga tilfarið. Fyrisitingin av ílegutilfarinum skal í mestan mun gera sítt til, at ílegutilfar eisini í framtíðini verður verandi eitt felags tilfeingi. Ásetingin er ikki til hindurs fyri, at søkjast kann um t.d. einkarætt ella annan immateriellan rætt til uppfinningar, sum hava ílegutilfar í sær.

Á *2. pkt.* skilst, at gagnnýtslan av ílegutilfari skal vera *umhvørvi og fólki at so stórum gagni sum gjørligt*. *Gagnnýtslan* skal her skiljast í víðari merking og fevnir eisini um sjálva tøkuna av ílegutilfarinum og møguliga stovnan av immateriellum rættindum. Tað er í samsvari við endamálið, at tøka av ílegutilfari kann gera sítt til at vaksa um kunnleikan um tað lívfrøðiliga margfeldið og á tann hátt styðja upp undir vernd og burðardygt brúk, sbr. tey bæði fyrstu høvuðsendamálini í sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi og § 1 í hesi lógini.

Orðingin *umhvørvi og fólki at so stórum gagni sum gjørligt* sipar m.a. til at lætta um sínámillum býti av ílegutilfari, sum hevur týdning fyri matvørutrygd og heilsuendamál, og tá ið slóðast skal fyri vinnumenning og virðisskapan. Tað er einki greitt mark millum at vera *umhvørvi at gagni* og *fólki at gagni*. Varðveitsla og burðardygt brúk av lívfrøðiligum margfeldi og ílegumargfeldi gagnar eisini fólki.

Dentur skal eisini leggjast á atlitið at hóskiligum býti av fyrimunum av brúki av ílegutilfari, tá ið sitið verður fyri ílegutilfarinum í Føroyum, sbr. *2. pkt.* Meginreglan er í samsvari við tað triðja høvuðsendamálið í sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi og FAO-sáttmálan um plantuílegutilfeingi.

Fyrisitingin av ílegutilfeingi skal vera umhvørvi og fólki at so stórum gagni sum gjørligt, *bæði úr føroyskum og altjóða sjónarhorni*. Úr føroyskum sjónarhorni er tað serliga eitt endamál, at lógin verður karmur um brúk av ílegutilfari og vinnumenning við støði í slíkum tilfari, og at hetta fer

fram á burðardyggan hátt. Úr altjóða sjónarhorni skal serliga miðast eftir at bera so í bandi, at lóggáva í øðrum londum um ílegutilfar verður hildin, at treytir um býti av fyrimunum millum føroyskar partar og onnur lond verða hildnar, umframt at lætt verður um býti av ílegutilfari millum lond.

**Til § 54.**
Høvuðsreglan skilst á *stk. 1, 1. pkt.*, sum sigur, at landsstýrismaðurin kann áseta, at tann, sum vil taka lívfrøðiligt tilfar úr náttúruni við tí hyggju at gagnnýta ílegutilfarið, skal hava loyvi frá landsstýrismanninum. Ein slík loyvisskipan verður almenn og geldur fyri øll. Loyvi krevst eisini eftir eini slíkari loyvisskipan, um onkur vil gagnnýta slíkt tilfar, sum longu er tikið úr náttúruni. Eitt slíkt føri kann vera, at tað lívfrøðiliga tilfarið er tikið úr náttúruni við øðrum endamáli enn at gagnnýta ílegutilfarið, t.d. til prýði. Skyldan at søkja um loyvi kann sostatt koma í, eftir at tað lívfrøðiliga tilfarið er tikið úr náttúruni, um tilfarið ikki varð tikið úr náttúruni við tí í hyggju at gagnnýta ílegutilfarið. Í slíkum førum kemur ein møgulig skylda at søkja um loyvi í, um onkur seinni vil gagnnýta tilfar, sum longu er tikið úr náttúruni. Loyvi til tøku ella framhaldandi gagnnýtslu av ílegutilfari gevur ikki umsøkjaranum serstakan einkarætt. Ein slíkur serstakur einkarættur er ikki í samsvari við endamálið í § 53. Tøka til flokkanarendamál er ikki fevnd av eini loyvisskipan, tí flokkanarvirksemi er ikki at rokna sum *gagnnýtsla* av ílegutilfarinum.

Stk 1, *2. pkt.*, ásetur, at treytirnar fyri einum møguligum loyvi framvegis galda fyri tann, sum fær tilfarið ella úrslitini frá tøkuni. Hetta geldur, hóast long tíð er gingin frá tøku til gagnnýtslu, og hóast tilfarið ella úrslitini verða flutt fleiri ferðir. At tað at fáa úrslitini frá tøkuni eisini er fevnt, ber í sær, at t.d. treytirnar fyri loyvinum framvegis galda, tá ið granskingarúrslit, sum eru grundað á ílegutilfarið, verða flutt. *At fáa* skal tulkast breitt, soleiðis at flyting uttan viðurgjald av tilfari ella úrslitum av gagnnýtsluni av hesum eisini er fevnd.

*Úr náttúruni* skal skiljast soleiðis, at ein møgulig loyvisskipan bara geldur fyri natúrliga vill sløg. Í hesum liggur ein avmarking móti lívverum, sum eru ávirkaðar av fólki gjøgnum røkt og aling. Loyvi krevst ikki til tøku av hesum, hóast tey kunnu sigast at halda til í náttúruni, t.d. tá ið tey er vilst av veltum bø. Hetta er nágreinað í *3. pkt.*, sum nevnir, at undantakið frá loyvisskipanini eisini fevnir um tøku til almenn søvn. Endamálið er at tryggja innsavningararbeiðið til ein møguligan ílegubanka, arbeiði við matvørutrygd og siðbundið ali- og kynbótaarbeiði í landbúnaði og fiskaaling ikki verður hindrað.

*Stk. 2* í ásetingini ger greitt, at ein møgulig loyvisskipan eftir stk. 1 ikki avmarkar rættin rættin hjá einum eigara ella øðrum rættindahavara at nokta atgongd at tí lívfrøðiliga tilfarinum ella at jørðini, har ið tað lívfrøðiliga tilfarið er. Í tí liggur, at ognanin av tí lívfrøðiliga tilfarinum skal vera lóglig. Tað hevur m.a. við sær, at ein jarðareigari kann nokta atgongd at tilfarinum á síni ogn ella leggja treytir við slíkari atgongd. Sum dømi um *annan rættindahavara* kann nevnast onkur við immateriellum rættindum.

Stk. 2 er í roynd og veru óneyðugt, við tað at møgulig onnur loyvir og privatrættarligar reglur galda lið um lið við loyvisásetingina í stk. 1. Kortini er valt at gera greiðu fyri spurninginum í mun til jarðareigarar og aðrar rættindahavarar.

*Stk. 3* gevur landsstýrismanninum heimild til at gera undantak frá ásetingunum í lógarkapitli 3 um fyrisiting av sløgum í sambandi við umsókn um tøku av lívfrøðiligum tilfari við tí í hyggju at gagnnýta ílegutilfarið. Tað ber í sær, at landsstýrismaðurin við tøku til hetta endamálið kann geva loyvi til at taka sløg, sum t.d. ikki kunnu veiðast, ella sum verða tikin uttan fyri veiðitíð. Hetta kemst av, at atlitini aftan fyri ásetingarnar í lógarkapitli 3 ikki altíð eru líka tungt til staðar, tá ið tøkan bara fevnir um eitt ella nøkur fá eintøk.

Eftir *stk. 4* fær landsstýrismaðurin heimild til at áseta í kunngerð, hvørjar upplýsingar ið skulu vera við í umsóknini. Tað kunnu vera upplýsingar um, í hvørji kommunu tøkan eftir ætlan skal fara fram, náttúruslagið á staðnum, og hvat slag av tilfari, ið takast skal (plantupartur ella jarðprøvi). Afturat tí kunnu krevjast upplýsingar um, um áhugamál á staðnum verða ávirkað, ella um tøka av ílegutilfari byggir á brúk av siðbundnari vitan hjá fólki á staðnum.

Í *2. pkt.* verður heimild givin til at leggja treytir við loyvinum eftir stk. 1. Ein treyt kann vera, at fyrimunir av gagnnýtsluni skulu ognast landinum. Aðrar treytir, sum hugsast kunnu, kunnu snúgva seg um tíðaravmarking, tal á einstaklingum, sum takast kunnu, tøkuhættir, endurreisingartiltøk, og um økið, sum tikið verður úr, fær skaða. Møguligir fyrimunir, bæði peningaligir (t.d. nýtsluviðurgjøld (*royalties)* ella sokallað *milestone*-gjøld) og ikki-peningaligir (t.d. granskingarsamstarv og atgongd at granskingarúrslitum), sum stava frá gagnnýtsluni av ílegutilfari, verða ikki nevndir í einum tømandi lista í ískoyti II til *Bonn Guidelines* undir sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi. Sum dømir kunnu nevnast granskingarsamstarv og lutan av granskingarúrslitum og nýggjari vitan, luttøka í vørumenning, atgongd at dátugrunnum, førleikamenning, fíggjarligar mótveitingar o.s.fr.

Eftir *3. pkt.* kann kunngerðin eisini áseta, hvussu áhugamálini hjá jarðareigarunum og fólkinum á staðnum verða vard á rímiligan hátt. Í tann mun áhugamálini hjá hesum verða ávirkað, skal tað endurspeglast í kunngerðini.

Í kunngerðini kunnu eisini treytir setast fyri framhaldandi gagnnýtslu av tilfari, sbr. *4. pkt*. Víst verður til § 53, 2. pkt., sum sigur, at gagnnýtslan skal vera *umhvørvi og fólki at so stórum gagni sum gjørligt, bæði úr føroyskum og altjóða sjónarhorni*. Heimildin hevur útgangsstøði í tí altjóða rættargongdini á økinum.

Partafundurin undir sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi (CBD) samtykti í 2002 altjóða leiðreglur, *Bonn Guidelines on Access to Genetic Resources and Fair and Equitable Sharing of Benefits Arising Out of their Utilization*, sum eru sjálvbodnar leiðreglur fyri fremjing av ásetingunum í sáttmálanum, sum snúgva seg um atgongd at og býti av fyrimunum av gagnnýtsluni av ílegutilfeingi. Treytir við atliti at framhaldandi brúki av ílegutilfari eru tiknar við fleiri staðni í leiðreglunum umframt í ískoyti I, *Suggested Elements for Material Transfer Agreements*. Við leiðreglunum verður m.a. miðað eftir at vegleiða londini viðvíkjandi gerð av tjóðarlóggávu og politikki á økinum.

Heimstoppfundurin í Johannesburg í 2002 um umhvørvi og gongd samtykti síðan, at gerast skuldi eitt altjóða skipan undir CBD, rættarliga bindandi ella ikki, um rættvíst býti av fyrimununum, sum stava frá brúkinum av ílegutilfeingi, m.a. við støði í *Bonn Guidelines*. Tann 7. partafundurin fyri CBD setti orsakað av hesum ein arbeiðsbólk at menna og samráðast um eina altjóða skipan fyri atgongd at ílegutilfeingi og rættvísum býti við støði í art. 15 og 8j í CBD. Heimildin fyri arbeiðsbólkinum varð fest á blað í avgerð VII/17 frá tí 7. partafundinum fyri CBD. Á partafundi fyri CBD í Nagoya í Japan tann 29. oktobur 2010 varð tað sonevnda *Nagoya*-ískoytið til sáttmálan um lívfrøðiligt margfeldi samtykt. Ískoytið snýr seg um atgongdina at lívfrøðiligum tilfari og býtið av fyrimunum, sum standast av gagnnýtsluni av slíkum tilfari.

Møguligar treytir fyri framhaldandi gagnnýtslu av ílegutilfari skulu ítøkiliggerast við kunngerð, tá ið greiða er gjørd fyri tørvinum í mun til tær altjóða tilgongdirnar. Heimildin skal bara brúkast í samsvari við hesa kunngerðina.

Eftir *stk. 5* fær landsstýrismaðurin heimild at áseta nærri reglur fyri ílegutilfari í almennum søvnum. Við einum almennum savni meinast eitt savn av ílegutilfari, sum verður fyrisitið av landinum ella fyri landið, og sum er atkomandi hjá einum og hvørjum eftir nærri ásettum treytum. M.a. kunnu reglur ásetast fyri tøku úr slíkum søvnum og um treytir viðvíkjandi stovnan av immateriellum rættindum.

**Til § 55.**
*Stk. 1* staðfestir, at landsstýrismaðurin er ovasti myndugleiki eftir lógini. Landsstýrismaðurin kann eftir vanligum fyrisitingarrætti uttan beinleiðis lógarheimild leggja sínar heimildir eftir lógini til stovnar, sum eru undirskipaðir landsstýrismanninum. Í *stk. 2* er ásett, at landsstýrismaðurin harumframt kann heimila øðrum landsstovni at útinna heimildir, sum eftir lógini liggja hjá landsstýrismanninum. Tað verður ætlandi Umhvørvisstovan, sum í høvuðsheitum fer at útinna heimildirnar hjá landsstýrismanninum, men ásetingin letur upp fyri, at landsstýrismaðurin kann heimila øðrum landsstovni at sita fyri ávísum ásetingum í lógini.

Eftir *stk. 3, 1. pkt.,* kann landsstýrismaðurin heimila kommunum at vera myndugleiki eftir nærri ásettum ásetingum í ella við heimild í lógini. Ein slík heimild skal knýtast at nærri ásettum ásetingum í ella við heimild í lógini. Verður tað heimilað kommunum at sita fyri ásetingum í lógarkapitli 5 um økisvernd, kann landsstýrismaðurin eftir stk. 3, *2. pkt.*, leiðbeina kommunurnar um málsviðgerð, og hvussu lógin skal tulkast. Landsstýrismaðurin kann eisini leiðbeina alment um atlit, sum havast skulu í huga í sambandi við meting, umframt leiðbeina kommunurnar í ítøkiligum førum.

Eftir stk. 3, *3. pkt.*, kann landsstýrismaðurin áseta, at ein serliga sett nevnd skal vera fyrisitingarmyndugleiki fyri eitt verndarøki, sum er vart við heimild í lógarkapitli 5. Í eini slíkari nevnd kunnu t.d. sita umboð frá kommunum, sum verða ávirkaðar av, at økið verður skipað sum verndarøki, og aðrir partar, sum kunnu hugsast at verða ávirkaðir av hesum.

Eftir *stk. 4* kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur fyri útinning av avhendum myndugleika ella uppgávum eftir lógini.

**Til § 56.**
Ásetingin gevur landsstýrismanninum heimild at áseta reglur um kæru og at áseta, at avgerðir eftir náttúrumargfeldislógini og reglum ásettum við heimild í náttúrumargfeldislógini bara skulu kunna kærast til ávísan kærustovn.

**Til § 57.**
*Stk. 1, 1. pkt.,* ásetur sum almenna reglu, at landsstýrismaðurin skal hava eftirlit við, hvørjum standi náttúran er í. Eftirlitið skal byrgja fyri og møguliga avdúka brot á náttúrumargfeldislógina við kunngerðum.
Eftirlitið eigur at síggjast í samanhangi við aðrar ásetingar í lógaruppskotinum, sum geva myndugleikanum heimild at seta tiltøk í verk fyri at halda við líka ella byrgja fyri, at umhvørvisvirðir verða gjørd verri, sbr. t.d. lógarkapittul 5 um økisvernd og serliga § 44 um røkt av verndarøkjum, § 21 um raðfest sløg og § 49 um útvald náttúrusløg. Ásetingin fevnir eisini um meira alment eftirlit við umhvørvinum, uttan mun til um serlig umhvørvisvirðir eru til staðar.

Landsstýrismaðurin hevur høvuðsábyrgdina av umhvørviseftirlitinum. Hjá øðrum myndugleikum kann tað vera viðkomandi at hava eyguni við virknaðinum av vinnuligum virksemi, sum myndugleikarnir hvør í sínum lagi hava fyrisitingarliga ábyrgd av. At eftirlitsuppgávan liggur hjá tí almenna, er ikki til hindurs fyri, at eftirlitsmyndugleikin heilt ella fyri ein part byggir á upplýsingar, sum eru innheintaðar frá privatum vinnuvirksemi.

Myndugleikin eigur í útgangsstøðinum at miða eftir at gera upplýsingar, sum hann hevur um umhvørvisstøðuna, atkomandi hjá øllum. Tó kunnu undantøk vera, t.d. tá ið tað kann seta hóttar stovnar í váða, at upplýsingarnar verða breiddar út.

Stk. 1, *2. pkt.*, ásetur meginregluna fyri, hvussu í eftirlitið verður útint. Tað stendur til eftirlitsmyndugleikan at velja út, á hvørjum økjum eftirlit skal førast. *3. pkt.* ásetur eftirlitsstigið. Eftirlitsstigið er orðað sum ein skylda, t.e. at eftirlit skal førast í so stóran mun, at myndugleikin kann avdúka brot á ásetingarnar í lógini. Skyldan skal útinnast á so mundadyggan hátt sum gjørligt, sbr. stk. 2, 3. pkt. Skyldan fevnir ikki um yvirvøku. Skyldan ásetur minstastigið, men hvussu stórt eftirlitið skal vera í vavi, veldst um eina meting av tí veruliga tørvinum og raðfesting. Eftirlitið, sum í roynd og veru verðurført, skal útinnast so munadygt sum gjørligt, og dentur skal leggjast á at ávirka umhvørvið sum minst.

Eftir *stk. 2, 1. pkt.*, skal tann, sum eftirlit verður havt við, ella tann, sum hevur ábyrgdina av virkseminum, veita teimum, sum útinna eftirlitið, neyðuga hjálp og kunning. Hvat ið er at meta sum neyðug hjálp og kunning, veldst um eina ítøkiliga meting við støði í umstøðunum í tí einstaka málinum. Yvirhøvur má krevjast, at hjálpin og kunningin skal vera neyðug til at gera eftirlitið ført fyri at føra eftirlit við, at lógin verður hildin. Henda ásetingin er almenn og skal síggjast saman við ásetingini um kanningarvirksemi í § 58 og ásetingini um upplýsingar- og fráboðanarskyldu í § 59. Stk. 2, *2. pkt.*, ásetur, at eftirlitsmyndugleikin kann steðga fólki og førum, tá ið tað krevst til at útinna eftirlitið. Hetta er eitt neyðugt amboð, fyri at eftirlitið skal kunna útinna sínar eftirlitsuppgávur eftir náttúrumargfeldislógini. Steðging eftir hesi ásetingini er ikki at skilja sum handtøka, varðhaldsfongsling ella húsarannsókn, sum løgreglan eftir rættargangslógini hevur heimild til at fremja. Steðgingarrætturin er avmarkaður til førir, har ið steðging *krevst til at útinna eftirlitið*. Tann, sum útinnir eftirlititið, má meta ítøkiliga, um steðging krevst. Í verki verður steðging tann einasti møguleikin hjá tí, sum útinnir eftirlitið, eitt nú at biðja um samleikaprógv ella neyðugar upplýsingar. Aftur at tí kann tað verða neyðugt at steðga fólki, førum ella motorakførum fyri at geva teimum ferðandi ráð og leiðbeining, sbr. § 57, stk. 3.

Ásetingin heimilar ikki tvingsil, men brot á skylduna at steðga, tá ið eftirlit verður ført, kunnu revsast, sbr. § 69.

*Stk. 3* staðfestir, at myndugleikin í sambandi við sínar eftirlitsuppgávur hevur ein týðandi leiklut at brúka kunning og ráðgeving sum amboð til at fremja endamálið við lógini. Sum dømi um leiðbeining eftir stk. 3 kann nevnast, at eftirlitið minnir á skylduna at lýða lógir, kunngerðir og avgerðir. Á henda hátt ger eftirlitið vart við, at tann, sum eftirlit verður havt við, ikki hevur hildið tað, sum eftirlitsmyndugleikin metir at vera greiðar skyldur í lóg, kunngerð ella avgerð.

**Til § 58.**
Sambært *1. pkt.* hava eftirlitsmyndugleikin og løgreglan ótarnaða atgongd at ogn, tá ið tað krevst til at útinna uppgávur eftir lógini. Sum ogn skulu skiljast jarðar- og vatnøkir og bygningar, konstruktiónir og støðir. Ásetingin hevur serliga týdning fyri innangarðsjørð og privatar vegir. Tað verða í høvuðsheitum eftirlitsmyndugleikin ella løgreglan, sum gera av, hvussu ið kanningarvirksemið skal fara fram. Kanningarvirksemið skal tó altíð fara fram í samsvari við meginregluna um eftirlit í § 57, stk. 1, og við hóskandi fyriliti fyri eigara, festara ella rættindahavara. Dentur skal eisini leggjast á at føra eitt so munadygt eftirlit, sum umstøðurnar krevja, við so lítlum ampa sum gjørligt fyri náttúruna, sbr. § 57, stk. 2. Ásetingin loyvir ikki eftirlitsmyndugleikanum at rannsaka privat hús við tí endamáli at avdúka t.d. revsiverd viðurskiftir. Slíka rannsakan kann bara løgreglan fremja, sbr. ásetingarnar í kapitli 73 í rættargangslógini um rannsakan.

Atgongdin hjá eftirlitsmyndugleikanum og løgregluni at ogn er avmarkað til førir, har ið atgongd krevst til at útinna uppgávur eftir lógini. Ásetingin ber í sær, at upplýsingar eiga at fáast til vega á annan hátt enn við atgongd, um tað ikki ovbyrjar eftirlitsmyndugleikan, meira enn rímiligt er. Í summum førum kann tann einstaki lata upplýsingar, uttan at myndugleikanum nýtist at fáa atgongd at ognini. Talan kann eisini vera um upplýsingar, sum eru lætt atkomandi á annan hátt. Í øðrum førum hevur myndugleikin tørv á sjálvur at staðfesta og gera eina sjálvstøðuga meting av upplýsingunum, t.d. tí at onkur serligur førleiki krevst ella, í serligum førum, fyri at sleppast kann undan, at upplýsingar verða afturhildnar.

Aftur at tí er tað ein treyt fyri at fáa atgongd at ogn, at virksemið, sum fer fram á ognini, *kann ávirka náttúrumargfeldið*, ella at mett verður, at náttúrumargfeldið er ávirkað. Eftir ásetingini kunnu eftirlitsmyndugleikin og løgreglan fáa atgongd at ogn, hóast skaði á náttúrumargfeldið ikki er íkomin enn. Umsjónin hjá eftirlitinum kann sostatt vera fyribyrgjandi og t.d. hava til endamáls at kanna eftir, um treytirnar í einum loyvi verða hildnar. Heimild er eisini fyri atgongd at øðrum ognir, tá ið tað krevst fyri at koma fram at ognini, sum kannast skal. Av tí at talan skal vera um virksemi, sum *kann* ávirka náttúrumargfeldið, er talan um eina meting hjá fyrisitingini. Í sambandi við hesa metingina skal havast í huga, at eftirlitsmyndugleikin kann krevja at fáa skjøl og annað tilfar útvegað, sbr. § 58, 2. pkt. Tað krevst saklig grund til at seta kanning í verk eftir ásetingini.

Eftir *2. pkt.* kann eftirlitsmyndugleikin krevja at fáa skjøl og annað tilfar, sum kann hava týdning fyri uppgávur eftir lógini, útvegað til kanningar. Skjølini kunnu vera í pappírslíki ella talgild. Við *øðrum tilfari* meinast eisini annað talgilt tilfar sum t.d. upptøkur, myndir og sýnir.

Í sambandi við kanningarvirksemið skal tann, sum útinnir eftirlitið, skjalprógva, hvør ið hann er. Heimildin í § 58 kann bara brúkast, tá ið tað er neyðugt.

**Til § 59.**
Eftir *stk. 1* hevur eftirlitsmyndugleikin rætt til at krevja upplýsingar frá øllum, sum hava gjørt ella gera nakað, sum kann ávirka náttúrumargfeldið. Upplýsingarskyldan geldur bara fyri upplýsingar, sum eftirlitsmyndugleikanum tørvar til at útinna sínar uppgávur eftir lógini. Mett verður í hvørjum einstøkum føri, hvørjar upplýsingar ið eru neyðugar. Upplýsingarskyldan fevnir vanliga um navn, starv og bústað. Hetta hevur t.d. týdning fyri eftirlit viðvíkjandi ferðsluásetingum í verndarøkjum. T.d. er ferðsla við motorakfari í verndar- ella funktiónsøkjum hjá útvaldum náttúrusløgum at rokna sum umhvørvisávirkan eftir ásetingini, og tí geldur upplýsingarskyldan fyri allar førarar og ferðandi við slíkum akførum.

Eftirlitsmyndugleikin ger av, hvørjar upplýsingar ið honum tørvar. Tað er ilt at siga, hvussu nógv ið eftirlitsmyndugleikin kann krevja, um upplýsingarnar ikki eru lætt atkomandi og møguliga mugu framleiðast. Einføld samanseting av upplýsingum eigur at kunna krevjast. Hinvegin fevnir upplýsingarskyldan í flestum førum ikki um at áleggja størri kortlegging/skráseting. Í samskiftinum við fyritøkur eigur eftirlitsmyndugleikin at venda sær til leiðsluna í fyritøkuni. Slík mannagongd er umráðandi fyri at tryggja munadygt eftirlit og skapar álit millum eftirlitsmyndugleikan og fyritøkuna. Í serligum førum kann tað vera neyðugt at fáa upplýsingar beinleiðis frá einum arbeiðstakara, serliga tá ið talan er um granskingarfyritøkur.

Upplýsingarnar kunnu vera grundarlag undir fyrisitingaravgerðum, t.d. tvingsilsbótum, sbr. § 67, ella umhvørvisendurgjaldi, sbr. § 68. Tað veldst um eina ítøkiliga meting, um fyritøkan eisini eigur at meldast til løgregluna fyri brot á revsiásetingina í § 69.

Orðingin *øll, sum hava gjørt ella gera nakað,* setur avmarkingar fyri, hvønn ið eftirlitsmyndugleikin kann biðja um upplýsingar. Eftirlitsmyndugleikin skal vanliga venda sær til tann, sum hevur ábyrgdina, tann, sum varðar av virkseminum, ella eitt viðkomandi umboð á staðnum. Í serligum førum kann eftirlitsmyndugleikin tó venda sær til ein arbeiðstakara ella onnur, sum hava fingið uppgávur. Avmarkingin skal ikki skiljast soleiðis, at hon er til hindurs fyri at krevja upplýsingar í planleggingartíðarskeiðum stutt undan íverkseting, ella í rímuligari tíð eftir at viðkomandi er hildin uppat at hava ella gera nakað, sum kann ávirka umhvørvið.

Orðingin *uttan at tagnarskyldan hindrar tí* nágreinar, at upplýsingarskyldan geldur fram um tagnarskylduna. Ásetingin kann fáa týdning, tá ið eftirlitsmyndugleikanum tørvar upplýsingar, sum verða mettar at vera loyndarmál hjá eini fyritøku. Tað er ein treyt, at upplýsingarnar ikki verða brúktar til annað enn endamálið eftir lógini.

Ásetingar, sum minna um hesa, finnast t.d. í kapitli 15 í havumhvørvisverndarlógini.

Eftir s*tk. 2* hevur tann, sum hevur ábyrgdina av skaða á náttúrumargfeldið ella vanda fyri álvarsligum skaða av slíkum slag orsakað av virksemi, sum er fevnt av ásetingunum í lógini, skyldu til at boða landsstýrismanninum frá. Tað er nóg mikið, at eitt slag (*species*), eitt nátturuslag ella eitt øki hevur fingið skaða. Sostatt krevst ikki, at náttúrumargfeldið sum heild hevur fingið skaða ella hevur verið í vanda fyri at fáa skaða. Metast má í hvørjum einstøkum føri, um skaðin er av slíkum slag og so stórur, at boðað eigur at verða frá. T.d. kann tað hava týdning, um raðfest sløg, útvald náttúrusløg ella verndarøkir verða ávirkað, um fráboðanin kann gera, at skaðin verður minni í vavi, ella um tann, sum hevur ábyrgdina, sjálvur hevur førleika til at bøta ella avmarka skaðan.

Fráboðanarskyldan er serliga viðkomandi í sambandi við veiðu ella heysting av sløgum ella virksemi í verndarøkjum, har ið lógligt virksemi fær óvæntaðar umhvørvisavleiðingar. Dømir um støður, sum gera fráboðanarskylduna virkna, kunnu vera knýtt at minni virksemi, sum loyvi er fingið til at hava í einum verndarøki. Elvir loyvd koyring í økinum til størri skaða, enn roknað varð við, tá ið loyvið varð givið, ella hendir eitt óhapp, har ið dálkandi evnir elva til skaða í lendinum, skal myndugleikin hava fráboðan. Fráboðanarskyldan geldur, sama um virksemið er lógligt og ólógligt eftir náttúrumargfeldislógini. Tað, sum er avgerandi, er, um virksemið er atvold til skaða ella vanda fyri álvarsligum skaða á náttúrumargfeldið. Eydnast tað at forða fyri vandanum ella at bøta skaðan, dettur fráboðanarskyldan burtur.

**Til § 60.**
Til at tryggja at krøv, sum ásett eru í ella við heimild í lógini, verða lokin, verður heimilað landsstýrismanninum at áseta reglur í kunngerð um innaneftirlit og innaneftirlitsskipanir.

**Til § 61.**
Heimildin eftir § 61 at broyta og taka aftur loyvir fevnir um avgerðir við heimild í náttúrumargfeldislógini ella kunngerðum við heimild í náttúrumargfeldislógini. Talan kann m.a. vera um loyvi eftir § 22, stk. 5, undantak frá eini kunngerð um raðfest sløg, §§ 26 og 27 um innflutning og útseting av fremmandum lívverum og § 45, stk. 1, um undantak frá eini verndarkunngerð. Í summum førum snúgva loyvini seg um stakvirksemi, sum ikki kann gerast um, tá ið tað er útint og loyvið brúkt. Vísir tað loyvda og útinta virksemið seg at vera óheppið og hava óvæntaðar avleiðingar, kann spurningurin taka seg upp, um tann, sum varðar av virkseminum, eigur at seta tálmandi tiltøk í verk, sbr. § 64.

*Stk. 1* gevur heimild til at strika ella broyta treytirnar í einum loyvi ella seta nýggjar treytir og, um neyðugt, taka loyvið aftur, tá ið ein av teimum serligu broytingargrundunum í nr. 1-6 er lokin. Talan kann vera um heilt ella fyri ein part at taka loyvi aftur, at skoyta nýggjar treytir uppí ella at

strika treytir. Hvussu stór broyting ið gjørd verður, veldst um broytingargrundina í tí einstaka førinum.

*Nr. 1* gevur heimild til at broyta ella taka aftur loyvir, tá ið tað krevst til at forða fyri óvæntaðari og munandi skaðiligari ávirkan á náttúrumargfeldið, sum roknað ikki varð við, tá ið loyvið varð givið. Ásetingin ber sostatt í sær, at eitt loyvi ikki sleppir tí, sum varðar av virkseminum, undan váðanum fyri óvæntaðum skaða á náttúrumargfeldið.

*Nr. 2* gevur heimild at broyta ella taka aftur loyvir, tá ið minkast kann um tað skaðiliga árinið á náttúrumargfeldið, uttan at tað hevur órímiligan kostnað við sær fyri tann, sum varðar av virkseminum. Tað merkir í veruleikanum, at broytingar mugu vera hendar við atliti at kostnaðinum, eftir at loyvið varð givið. Tá ið dagar verða tiknir ímillum, hvat ið kann metast at vera *órímiligt*, skal dentur bæði leggjast á, hvørji minking í ampanum fyri náttúrumargfeldið ið til ber at røkka, kostnaðin, bæði í sjálvum sær og í mun til fyrri kostnaðir, og heildaríløguna í virksemið. Atlitið at fíggjarstøðuni hjá tí, sum varðar av virkseminum, kann bara fáa týdning í sambandi við metingina, tá ið dagar skulu takast ímillum, um heimildin at broyta ella taka aftur loyvi eigur at verða brúkt.

*Nr. 3* skal síggjast í samanhangi við meginregluna í § 12 um umhvørvisgóða tøkni og rakstrarhættir og gevur heimild til at áleggja, at nýggj tøkni skal brúkast, ella seta krøv, sum hava sum fyritreyt, at nýggj tøkni verður tikin í brúk, um tað kann minka munandi um vansarnar fyri náttúrumargfeldið.

*Nr. 4* skal síggjast í samanhangi við dygdarkrøv eftir § 13 og gevur heimild til at broyta ella taka aftur loyvir, tá ið tað krevst til at røkka ásettum dygdarkrøvum.

*Nr. 5* gevur heimild til at broyta at taka aftur loyvir, um tann, sum varðar av virkseminum, brýtur ásetingar í ella við heimild í lógini. Ásetingin verður bara brúkt, tá ið talan er um álvarslig brot á lógina, sbr. *munandi*, ella brot, sum endurtaka seg ella eru áhaldandi.

*Nr. 6* vísir til heimildir at broyta ella taka aftur loyvir eftir annars galdandi reglum. Her verður serliga hugsað um tann vanliga fyrisitingarrættin.

*Stk. 2, 1.pkt.*, gevur almenna heimild at broyta ella taka aftur loyvir, tá ið liðin eru tíggju ár síðan avgerðina. Tá ið tíggju ára freistin verður roknað, hevur tað ongan týdning, hvussu long tíð ið liðin er, síðan virksemið fór í gongd. Men tá ið mett verður, um heimildin at broyta ella taka aftur loyvir skal brúkast, kann tað, alt eftir umstøðunum, vera viðkomandi at leggja dent á tíðina, sum tað tekur at vinna íløguna inn aftur.

Stk. 2, *2. pkt.*, gevur almenna heimild til at linka avmarkingar og treytir í loyvum innan fyri karmin á loyvunum. Í tí sambandi skal meginreglan um fyrivarni í § 9 havast í huga. Tað kann tó bera so á, at tað orsakað av hesi meginregluni eru settar avmarkingar ella lagdar treytir við loyvinum, sum komið verður eftir at tørvur ikki eru á fyri at sleppa undan skaða á náttúrumargfeldið. Í tí førinum gevur 2. pkt. grundarlag fyri broyting.

*Stk. 3* ásetur, at missurin, sum broytingin ella afturtøkan fer at valda tí, sum varðar av virkseminum, skal havast í huga. Ásetingin ásetur, at metast skal um útreiðslurnar, sum ein broyting ella afturtøka fer at hava við sær fyri tann, sum varðar av virkseminum, og fyrimunir og vansar, sum ein broyting ella afturtøka annars fer at hava við sær. Hetta hevur eisini týdning fyri málsviðgerðina í málum um at broyta og taka aftur loyvir. Men stórar útreiðslur eru ikki til hindurs fyri broyting ella afturtøku, um fyrimunirnir tilsamans í nøktandi mun viga uppímóti.

Eftir *stk. 3* skulu útreiðslurnar, sum ein broyting ella umgerð fer at hava við sær fyri tann, sum varðar av virkseminum, havast í huga. Tá ið avgerð verður tikin eftir stk. 1 og 2, skal sostatt metast um útreiðslurnar av virkseminum, og útreiðslurnar skulu vigast upp ímóti fyrimununum og vansunum, sum broytingin ella afturtøkan annars fer at hava við sær. Tó verða krøvini til grundgevingina fyri avgerðini um broyting ella afturtøku herd í slíkum førum.

**Til § 62.**
Verður ein umhvørvisavgerðaskrá gjørd, ber ásetingin í sær eina skyldu fyri landsstýrismannin at tryggja almenninginum atgongd at upplýsingum um avgerðir eftir § 22, stk. 5 (undantøk frá reglum um raðfest sløg), § 31, stk. 1 (avgerðir um økisvernd), § 42, stk. 1 og 2 (bráðfeingisvernd), og § 45, stk. 1 (undantøk frá økisvernd), og avgerðir, sum nevndar eru í § 52, stk. 1, 1. pkt (loyvir til virksemi í fyrikomingum av útvaldum náttúrusløgum).

**Til § 63.**
*Stk. 1* gevur landsstýrismanninum heimild at áleggja tí, sum hevur ábyrgdina, at fáa viðurskiftir, sum eru í ósamsvari við lógina, aftur í rættlag. Fyri at sleppast skal undan misskiljingum verður tað at steðga nevnt beinleiðis, hóast tað er fevnt av hugtakinum *fáa í rættlag*. Tað er ikki eitt krav, at brotið longu hevur verið atvold til skaða á náttúrumargfeldið, ella at vandi er fyri hesum. Í nógvum førum verður tó talan um slíka versnan ella í hvussu er vanda fyri slíkari versnan. Hetta tí at reglurnar í náttúrumargfeldislógini og treytir í tí einstaka loyvinum nettupp eru ásettar, fyri at sleppast kann undan slíkari versnan. Brot á hesar bera tí ofta í sær vanda fyri versnan. Í áleggingini kann verða ásett, hvussu viðurskiftini skulu fáast í rættlag, og hvørji bøtandi og endurreisandi tiltøk, ið fremjast skulu eftir stk. 1.

Áleggingin skal stílast tí, sum hevur ábyrgdina av brotinum. Er talan um arbeiðstakara, sum hevur framt brotið í tænastu fyri arbeiðsgevara, skal áleggingin vanliga stílast arbeiðsgevaranum, serliga tá ið talan er um bøtandi ella endurreisandi tiltøk. Kunnu fleiri sigast at hava ábyrgdina, bera skaðavaldararnir eftir vanligum endurgjaldsrætti samábyrgd. Myndugleikarnir kunnu eisini áleggja tí einstaka ymiska ábyrgd.

Í áleggingini kann setast ein freist fyri, nær áleggingin skal vera lýdd. Er eingin freist sett, veldst tað um eina tulking av áleggingini í mun til umstøðurnar, nær ið áleggingin skal vera lýdd, men útgangsstøðið er, at viðurskiftini skulu fáast í rættlag beinanvegin.

*Stk. 2, 1. pkt.,* ásetur eina almenna reglu um, at tann, sum við at gera ímóti lógini er atvold til vanda fyri, at náttúrumargfeldið versnar, skal seta tiltøk í verk til at forða fyri, at tað hendir. Tað kann vera ymiskt, alt eftir hvat slag av versnan talan er um, hvørji tiltøk ið tað kann vera viðkomandi at fremja. Ásetingin kann eftir umstøðunum hava við sær eina skyldu at gevast við virkseminum, sum kann vera atvold til versnan.

Stk. 2, *2. pkt.*, ásetur, at tá ið brot á lógina longu hevur havt við sær, at náttúrumargfeldið er versnað, fevnir skyldan eftir 1. pkt. um at forða fyri, at viðurskiftini versna uppaftur meira, og – um gjørligt – at fáa náttúrumargfeldið aftur í sama stand sum frammanundan. Ásetingin nevnir dømir um tiltøk, sum kunnu vera viðkomandi – upptøku, rudding, burturbeining og slætting – men uppreksanin er ikki tømandi, sbr. eisini stk. 4. Tað, sum er avgerandi, tá ið tiltak skal veljast, er, um tiltakið kann forða fyri, at viðurskiftini versna uppaftur meira, og møguliga endurreisa standin, sum náttúrumargfeldið var í frammanundan. Ikki øll umhvørvisversnan kann fáast í rættlag aftur, og í tí førinum fevnir skyldan bara um at bera so í bandi, at tað slepst undan, at viðurskiftini versna uppaftur meira.

Ásetingin lýsir ikki versnan nærri, t.d. *munandi* versnan. Hetta kemst av, at talan er um ólóglig viðurskiftir, sum eiga at fáast í rættlag, uttan at tann einstaki skal meta, um talan er um munandi náttúruversnan ella ikki. § 64, sum snýr seg um óvæntaðar avleiðingar av lógligum viðurskiftum, hevur hinvegin eina slíka avmarking. Hevði tiltakið at endurreisa ella forða fyri versnanini eftir § 63, stk. 2, verið serliga tyngjandi, og er talan um lítla versnan, skilst annars á stk. 3, at skyldan ikki geldur.

Stk. 2, *3. pkt.*, snýr seg um bøtandi og endurreisandi tiltøk, sum í sjálvum sær kunnu ávirka umhvørvið nevningarvert. Slík tiltøk kunnu bara setast í verk eftir samtykki ella álegging frá landsstýrismanninum. Kravið um samtykki geldur ikki, um talan er um neyðrættarstøðu. Gera tiltøk, sum sjálv eru atvold til ávísa umhvørvisversnan, sítt til at byrgja fyri uppaftur størri versnan, eiga ikki ov strong krøv at setast, fyri at tiltakið kann metast at vera heimilað eftir neyðrættarhugsan.

*Stk. 3* avmarkar í ávísan mun fyribyrgingar-, umvælingar- og endurreisingarskylduna eftir stk. 2, við tað at útreiðslurnar, sum álagdar verða, skulu vera í rímiligum lutfalli við samfelagsgagnið. Nær ið tiltaksskyldan kann sigast at vera serliga órímilig, veldst um eina heildarmeting, har ið skaðavirknaðurin av rættarbrotinum, virknaðurin sum tey ætlaðu tiltøkini kunnu væntast at fáa, útreiðslurnar av tiltøkunum og skyldin hjá tí, sum hevur framt rættarbrotið, eru teir týdningarmestu tættirnir. Fíggjarstøðan hjá tí, sum hevur framt rættarbrotið, kann eisini takast við í metingina umframt fyritreytirnar hjá viðkomandi at seta fyribyrgjandi, bøtandi og endurreisandi tiltøk í verk. Metast kann eisini, um tann, sum rekur regluligt virksemi, sum ber í sær ávísan umhvørvisvanda, kann væntast at hava betri fyritreytir enn onnur.

Fyri at eingin ivi skal vera, ger *stk. 4* greitt, at avlíving og afturflyting eru dømir um tiltøk, sum bæði eftir stk. 1 og stk. 2 kunnu vera viðkomandi, tá ið talan er um fremmandar lívverur.

Í teimum førum har náttúrumargfeldislógin og geiralógir hava somu tvingsilsamboð, er útgangsstøðið, at reglurnar í geiralógini skulu brúkast, um ikki reglurnar snúgva seg um ymsar tættir í viðurskiftunum, sum talan er um. Vantar geiralógum reglur um rætting og bøtandi tiltøk, kunnu rætting og bøtandi tiltøk eftir náttúrumargfeldislógini brúkast.

**Til § 64.**
*Stk. 1* staðfestir eina skyldu fyri tann, sum hevur ábyrgdina, at seta tiltøk í verk at forða fyri ella avmarka skaðar ella vansar, tá ið virksemi í samsvari við lógina ella avgerð við heimild í lógini er atvold til munandi óvæntaðar avleiðingar fyri náttúrumargfeldið. Talan kann t.d. vera um lógliga útseting av fremmandum lívverum, sum vísir seg at hava nógv skjótari spjaðing við sær enn væntað, ella at lívverur, sum ikki vórðu hildnar at fara at hóra undan, taka búgv í tí føroysku náttúruni. Ásetingin letur tó ikki upp fyri at áleggja skaðaavmarkandi tiltøk í sambandi við munandi óvæntaðar umhvørvisavleiðingar, um hesar vóru kendar frammanundan.

Skyldan at seta tiltøk í verk er avmarkað, við tað at ásetingin bara krevur, at *rímilig* tiltøk verða sett í verk, og at tað bara geldur, tá ið talan er um *munandi* avleiðingar. Avmarkingin hongur saman við, at virksemið, sum er atvold til skaðan, er lógligt, og at heldur ikki myndugleikin hevur roknað við møguleikanum fyri skaða. Tá ið mett verður, hvat ið er at rokna sum rímilig tiltøk, eigur m.a. at havast í huga, hvussu álvarsligar avleiðingar talan er um, hvussu víðfevnd tiltøk ið neyðug eru, og hvussu nógv ið tiltøkini fara at kosta. Eisini skal fíggjarstøðan hjá tí, sum hevur ábyrgdina, havast í huga.

*Stk. 2* gevur landsstýrismanninum heimild at áleggja tí, sum hevur ábyrgdina, at seta tiltøk í verk innan eina ásetta freist. Avmarkingin í stk. 1 geldur eisini í hesum sambandi. Myndugleikarnir

kunnu áleggja endurreisandi tiltøk, tá ið tað ikki er tí, sum hevur ábyrgdina, til serligan ampa. Hvat ið er til *serligan ampa*, veldst um eina ítøkiliga meting í hvørjum føri. Talan kann vera um fíggjarligan ampa, men eisini, hvørja arbeiðsbyrðu ella annan ampa ið tiltøkini fara at hava við sær. Meta myndugleikarnir, at tað fyri at varða um umhvørvið er tørvur er á fleiri endurreisandi tiltøkum, skulu myndugleikarnir meta, um teir sjálvir skulu fremja slík tiltøk, møguliga í samstarvi við tann, sum hevði havt ábyrgdina eftir § 64.

**Til § 65.**
*Stk. 1, 1. pkt.*, gevur landsstýrismanninum rætt til at bera so í bandi, at tiltøk verða sett í verk, um tann, sum hevur ábyrgdina, ikki lýður eina álegging eftir §§ 63 ella 64. Tiltøk, sum tann, sum hevur ábyrgdina, eftir § 63, stk. 2, hevur lógarbundna skyldu at fremja, kunnu í útgangsstøðinum ikki fremjast beinleiðis. Tó skilst á stk. 1, *2. pkt.*, at landsstýrismaðurin kortini kann seta tiltøk í verk, um tað hevur skund til at verja náttúrumargfeldið ella tað ikki ber til at siga, hvør ið hevur ábyrgdina. Tann síðstnevndi møguleikin kann t.d. vera viðkomandi, tá ið eitt ólógligt inntriv er gjørt í eitt verndarøki og tað ikki hevur eydnast myndugleikanum at fáa greiðu á, hvør ið hevur gjørt inntrivið. Er tað viðkomandi at seta tiltøk í verk ímóti fremmandum lívverum, sum við egnari hjálp eru slopnar út í ta føroysku náttúruna, og sum bera í sær eina hóttan móti tí lívfrøðiliga margfeldinum, skal tað fara fram eftir §§ 17, stk. 3, 18, stk. 1, ella 19, stk. 2. Setur tann, sum tiltakið skal setast í verk ímóti, seg fysiskt upp ímóti tiltakinum, ella heldur hann fram við virkseminum, sum honum er álagt at steðga, kunnu myndugleikarnir ikki sjálvir leggja fysiskt uppí. Í slíkum førum mugu myndugleikarnir heita á løgregluna um at vera sær til hjálpar.

Eftir *stk. 2, 1. pkt.*, kann fulnaður krevjast fyri útreiðslurnar til tiltøk eftir stk. 1 hjá tí, sum hevur ábyrgdina. Hetta fevnir eisini um útreiðslur til endurgjald fyri neyðugt brúk av aðrari ogn eftir § 66, stk. 2. Krøv um fulnað fyri útreiðslur eru tvingsilsgrundarlag fyri úttøku, sbr. stk. 2, *2. pkt*.

**Til § 66.**
*Stk. 1, 1. pkt.*, staðfestir, at tá ið tiltøk verða framd eftir §§ 63, 64 ella 65, kann ogn hjá tí, sum hevur ábyrgdina, ella øðrum verða brúkt. Brúkið skal vera *neyðugt* fyri at kunna fremja tiltøkini eftir teimum nevndu ásetingunum. Kravið um neyðugleika verður endurtikið framman fyri *fastogn hjá øðrum* fyri at vísa á, at tað í mestan mun er ognin hjá tí, sum hevur ábyrgdina, sum eigur at verða brúkt til at fremja tiltakið. Í summum førum er hetta tó ikki nóg mikið, t.d. um skaðin hevur breitt seg inn á aðra ogn, ella tørvur er á atgongd tvørtur um aðra ogn.

Rætturin at brúka ognina hjá tí, sum hevur ábyrgdina, geldur bæði fyri leysafæ og fastogn. At brúka fastogn hjá tí, sum hevur ábyrgdina, er viðkomandi á staðnum, har ið tað, sum er atvold til umhvørvisskaðan ella vandan fyri skaða, er. Leysafæ, sum tað kann vera viðkomandi at brúka, er t.d. reiðskapur ella uppruddingaramboð, sum tann, sum hevur ábyrgdina, hevur ræði á. Tá ið ræður um at brúka ogn hjá øðrum, er bara talan um fastogn. Við fastogn meinast jarðar- og vatnøkir og bygningar. Tað kann t.d. vera neyðugt at fara tvørtur um fastognina hjá øðrum fyri at koma fram at staðnum, har ið umhvørvisskaðin er hendur ella kann henda. Tað kann eisini vera neyðugt at heinta inn fremmandar lívverur á aðrari ogn. Myndugleikin hevur annars eisini atgongd at aðrari ogn eftir §§ 17, stk. 3, 18, stk. 1, ella 19, stk. 2.

Rætturin at brúka ogn hjá tí, sum hevur ábyrgdina, fevnir um førir, har ið myndugleikin syrgir fyri at seta tiltøk í verk eftir § 65. At brúka ogn hjá øðrum kann bæði vera viðkomandi, tá ið tann, sum hevur ábyrgdina, fremur tiltøk eftir §§ 63 ella 64, og tá ið myndugleikin setur tiltøk í verk eftir § 65.

*Stk. 2, 1. pkt.*, áleggur tí, sum hevur ábyrgdina, eina skyldu at rinda endurgjald fyri miss orsakað av skaða ella ampa, sum verður veldur øðrum orsakað av brúki sum nevndum í stk. 1 av fastogn

hjá viðkomandi. Endurgjaldsskyldan hjá tí, sum hevur ábyrgdina, fevnir bæði um førir, har ið tað er myndugleikin, sum hevur brúkt ogn hjá øðrum, og førir, har ið tann, sum hevur ábyrgdina, sjálvur ger tað. Eftir *2. pkt.* veitir landið trygd fyri upphæddini. Tað ber í sær, at triðipartur, sum má lata sær lynda, at ognin hjá sær verður brúkt, kann velja at venda endurgjaldskravinum beinleiðis móti landinum. Landið hevur í tí førinum aftursókn móti tí, sum hevur ábyrgdina.

Á *stk. 3* skilst, at heimild er fyri neyðugari motorferðslu á fastogn, sum er ikki er partur av verndarøkinum, fyri at kunna útinna røktartiltøk í verndarøkinum eftir § 44. Hetta geldur bæði fyri myndugleikan, sum situr fyri verndarøkinum, og tann, sum myndugleikin biður útinna slíka uppgávu. Ferðslan á fastogn uttan fyri verndarøkið skal vera *neyðug* fyri at kunna útinna røktartiltøk í verndarøkinum. Ber uttan stórvegis hóvasták til at fáa atgongd at verndarøkinum á annan hátt, er ikki heimild fyri motorferðslu við røkt í hyggju.

**Til § 67.**
*Stk. 1* gevur landsstýrismanninum heimild at áleggja tvingsilsbøtur. Slíkar fyrisitingarligar tvingsilsbøtur eiga bara at verða álagdar í førum, har serligur tørvur er á munadyggari stýring og handhevjan, sbr. orðið *kann*.

*Stk. 2* ásetur reglur fyri, nær ið tvingsilsbøtur kunnu ásetast, og nær ið tær byrja at telja. Útgangsstøðið í *1. pkt.* er, at tvingsilsbøtur kunnu ásetast, tá ið eitt brot er staðfest, t.e. brotið er longu framt. Tvingsilsbøtur eiga bara at verða álagdar, tá ið talan er um viðurskiftir, sum eru løtt at staðfesta. Í avgerðini um tvingsilsbøtur skal ásetast ein freist at fáa viðurskiftini, sum tvingsilsbøtur verða álagdar fyri, aftur í rættlag.

Er tað serliga umráðandi at tryggja, at ein skylda verður hildin, og heldur myndugleikin longu frammanundan, at ein skylda av serligum ávum eigur at tryggjast við tvingsilsbótum, kunnu bøturnar ásetast fyrr. Tað kann vera viðkomandi at áseta tær í sjálvum loyvinum til virksemið, men eisini seinni, t.d. um tað í sambandi við kanning av virkseminum verður komið eftir, at ítøkiligur vandi er fyri lógarbroti. Tvingsilsbøturnar byrja í slíkum førum at telja, tá ið eitt møguligt rættarbrot byrjar, sbr. *3. pkt.*
Tvingsilsbøturnar telja, so leingi tey ólógligu viðurskiftini standa við, t.d. við eini fastari upphædd um dagin, ella soleiðis, at tær falla til gjaldingar fyri hvørt rættarbrotið, sbr. *4. pkt.* Hvat slag av tvingsilsbótum ið myndugleikin velur, veldst um tey ítøkiligu viðurskiftini. Er t.d. talan um ein ólógliga bygdan bygning, sum tann, sum hevur ábyrgdina, hevur fingið álagt at ríva niður, telja tvingsilsbøturnar vanliga, so leingi bygningurin stendur. Tað sama geldur fyri onnur ólóglig viðurskiftir, sum bera dám av eini støðu. Snýr rættarbrotið seg um virksemi, sum verður endurtikið, t.d. at fremmandar lívverur aftur og aftur sleppa út ólógliga, kann ein stakbót fyri hvørt brotið vera mest viðkomandi.

Tvingsilsbøturnar telja eftir *5. pkt.* ikki, um tað ikki ber til at lúka treytirnar orsakað av viðurskiftum, sum tann, sum hevur ábyrgdina, ikki kann lastast fyri. Eitt dømi kann vera, at áløgd ruddingartiltøk ikki kunnu fremjast beinanvegin orsakað av ógvuliga ringum veðurlíkindum.

Tað verður nágreinað í *6. pkt.*, at tvingsilsbøtur verða álagdar annaðhvørt sum leypandi bøtur ella sum stakbøtur. Vanliga eiga leypandi bøtur at verða álagdar, men tað slagið skal veljast, sum í tí einstaka førinum verður mett at muna best. Endamálið við tvingsilsbótum skal vera at tryggja, at tað, sum ásett er í ella við heimild í lógini, verður lýtt. Tvingsilsbøtur skulu ásetast soleiðis, at tann, sum hevur ábyrgdina, hevur møguleika at sleppa undan bót, um hann lýkur skylduna, talan er um.

*Stk. 3, 1. pkt.*, staðfestir, at tvingsilsbøtur verða álagdar tí, sum hevur ábyrgdina av rættarbrotinum. Tá ið talan er um feløg o.a. tilíkt, skulu tvingsilsbøtur vanliga stílast tí løgfrøðiliga persóninum, ikki einstaklinginum, sum hevur framt rættarbrotið, sbr. *2. pkt.* Í *3. pkt.* verður staðfest, at tá ið talan er um feløg, sum eru partur av einum samtaki, kunnu tvingsilsbøtur ikki bara krevjast inn hjá felagnum, sum tvingsilsbøturnar eru stílaðar, men eisini hjá einum móðurfelag. Á henda hátt fæst størri trygd fyri, at tvingsilsbøturnar kunnu virka sum eitt munadygt amboð at leggja trýst við, við tað at vantandi peningur í dótturfelagnum ikki nýtist at vera nøkur forðing fyri innkrevjing. Í *4. pkt.* er ásett, at kravið er tvingsilsgrundarlag fyri úttøku. Tað ber í sær, at álagdar tvingsilsbøtur kunnu krevjast inn uttan lógsókn og dóm.

*Stk. 4* gevur landsstýrismanninum heimild at sleppa áløgdum tvingsilsbótum.

Í førum har ið náttúrumargfeldislógin og geiralógir hava somu tvingsilsamboð, er útgangsstøðið, at tvingsilsreglurnar í geiralógini skulu brúkast, um ikki reglurnar snúgva seg um ymsar tættir í viðurskiftunum, sum talan um. Í tann mun geiralógum vantar reglur um tvingsilsbøtur, kunnu reglurnar í náttúrumargfeldislógini um tvingsilsbøtur brúkast.

Álagdar tvingsilsbøtur eru ikki revsing og kunnu tí koma aftur at gjøldum, sum áløgd eru fyri lógarbrot, ella aftur at aðrari revsiatgerð.

Tað er vanlig fatan, at tvingsilsbøtur falla burtur og ikki longur kunnu krevjast inn, tá ið tvingsilin hevur virkað og endamálið tí er rokkið. Tvingsilsbøtur eru sostatt ikki revsing fyri eina longu útinta atferð, men eitt tvingsilsamboð til at tvinga fram eina ávísa atferð. Høvdu tvingsilsbøtur kunnað verið innkravdar, eftir at atferðin, sum var orsøk til, at tvingsilsbøtur vórðu álagdar, var hildin uppat, høvdu tær farið frá at vera eitt tvingsilsamboð til at vera revsing, og í tí føri hevði tað verið brot á Tann evropeiska mannarættindasáttmálan art. 6, stk. 1, at álagt (tvingsils)bøtur fyrisitingarliga uttan halda meginregluna um rættvísan rættargang.

**Til § 68.**
*Stk. 1* gevur heimildina fyri umhvørvisendurgjaldi. Ásetingin ber í sær eina reglu um objektiva endurgjaldsábyrgd eftir serstaka álegging frá landsstýrismanninum. Fyritreytirnar eru, at tann endurgjaldsskyldigi hevur brotið eina áseting í ella við heimild í náttúrumargfeldislógini ella eina áseting í aðrari lóggávu, um ásetingin miðar eftir at fremja mið og meginreglur í náttúrumargfeldislógini. Endurgjaldsskyldig kunnu vera einstaklingar, almenn ella privat feløg ella felagsskapir umframt umboð fyri hesi, sum bera ábyrgd, um slík umboð sjálv kunnu sigast at hava brotið lógina. Kravið skal stílast arbeiðsgevaranum, um ein arbeiðstakari hevur framt brotið sum liður í sínum arbeiði. Kunnu fleiri sigast at hava ábyrgdina, kunnu tey eftir vanligum endurgjaldsrætti hava samábyrgd.

Áleggingin verður áløgd við heimild í náttúrumargfeldislógini § 68, og endurgjaldsupphæddin fer til landið.

Umhvørvisendurgjald kann áleggjast, hóast í veruleikanum eingin vistfrøðiligur skaði hevur staðist av rættarbrotinum. Men spurningurin, um skaði er veldur ella ikki, kann hava stóran týdning fyri spurningin, um álegging eigur at áleggjast. Umhvørvisendurgjald eigur vanliga ikki at áleggjast fyri burturav formlig rættarbrot.

*Stk. 2, 1. pkt.*, gevur nærri leiðreglur fyri, nær ið umhvørvisendurgjald eigur at áleggjast, og hvussu stórt endurgjaldið eigur at vera. Ein breið heildarmeting er avgerandi, men tættirnir, sum nevndir verða í stk. 2, hava serligan týdning í sambandi við metingina. Dentur skal leggjast á týdningin av umhvørvisvirðunum, sum eru ella kunnu verða ávirkað av rættarbrotinum, t.d. um tað snýr seg um

sjáldsom ella viðkvom sløg (*species*). Stórur dentur eigur at leggjast á, um umhvørvisskaði veruliga er hendur, og hvussu víðfevndur og varandi hann er. Tað sama geldur, um rættarbrotið verður rakt av øðrum tvingsilstiltøkum, við tað at miðast skal eftir, at tiltøkini tilsamans verða rímilig.

Tí talar tað ímóti endurgjaldinum ella fyri at minka um tað, at viðkomandi verður revsaður fyri rættarbrotið. Tað ber tó til at knýta revsing og umhvørvisendurgjald saman. Av tí at umhvørvisendurgjald er at rokna sum ein borgararættarlig reaktión í mun til tann evropeiska mannarættindasáttmálan, kann tað áleggjast, uttan at forboðið fyri dupultari revsirættarsókn í ískoytissáttmála nr. 7 til tann evropeiska mannarættindasáttmálan art. 4 er til hindurs fyri tí, sama um umhvørvisendurgjaldið verður álagt, fyri ella eftir at revsimálið er avgreitt.

Serliga tá ið ræður um minni og meira standardmerkt rættarbrot, ásetur stk. 2, *2. pkt.*, at landsstýrismaðurin kann áseta kunngerð um sokallaða einfaldaða álegging í revsimálum.

Eftir *stk. 3, 1. pkt.*, er ein álegging um umhvørvisendurgjald tvingsilsgrundarlag fyri úttøku. Endurgjaldskravið kann eisini takast upp í sambandi við revsimál, sbr. *2. pkt.* Tann endurgjaldsskyldigi kann tó kæra um áleggingina á vanligan hátt ella leggja áleggingina fyri rættin við vanligari borgarligari lógsókn, kæra um úttøkuviðgerðina eftir rættargangslógini ella í revsimáli, um ákæra verður reist móti lógbrótaranum. Endurgjaldskravið kann eisini takast upp í sambandi við revsimál. Í øllum førum kann rætturin eftir *3. pkt.* – ólíkt vanligum fyrisitingarrættarligum reglum um roynslu av fyrisitingaravgerðum – royna endurgjaldsáleggingina til fulnar, bæði um treytirnar fyri at áleggja endurgjald eru til staðar, um endurgjald eigur at krevjast, og hvør upphædd ið eigur at krevjast. *4. pkt.* skal tryggja, at tann endurgjaldsskyldigi fær fráboðan um tær serligu reglurnar um roynslu av áleggingini. Lógin ásetur onga egna freist fyri, nær ið slík roynsla kann krevjast.

*Stk. 4* svarar til § 67, stk. 4, um tvingsilsbøtur og ásetur, at landsstýrismaðurin heilt ella fyri ein part kann sleppa einum áløgdum endurgjaldi.

At onkur fær álagt at rinda umhvørvisendurgjald, er ikki til hindurs fyri, at viðkomandi fær álagt revsitiltøk, t.d. gjald fyri rættarbrot. Hetta skilst á *stk. 5*.

Í teimum førum, har ið náttúrumargfeldislógini og geiralógir hava somu amboð, er útgangsstøðið, at amboðini í geiralógini skulu brúkast, um ikki reglurnar snúgva seg um ymsar tættir í viðurskiftunum, sum talan er um. Í tann mun geiralógum vantar reglur um umhvørvisendurgjald, kann umhvørvisendurgjald eftir náttúrumargfeldislógini brúkast.

Álagt umhvørvisendurgjald er ikki revsing og kann tí koma aftur at áløgdum gjøldum fyri rættarbrot ella øðrum revsitiltøkum.

**Til § 69.**
Revsing kann bara áleggjast fyri brot á ásetingarnar, sum ítøkiliga verða nevndar í § 69, sbr. *stk.1*. Treytin fyri skyld er tilætlan ella ósketni. Revsikarmurin fyri vanlig rættarbrot er bót ella fongsul upp í eitt ár.

Eftir *stk. 2*, t.e. tá ið talan er um grov rættarbrot, er revsingin sett at vera bót ella fongsul upp í tvey ár. Hvat ið krevst, fyri at eitt rættarbrot er at rokna sum grovt, veldst um eina ítøkiliga meting. Orðaljóðið í stk. 2 nevnir nakrar metingartættir, sum brúkast kunnu, tá ið metast skal, um rættarbrotið er grovt. Víst verður m.a. til týdningin, sum umhvørvisskaðin hevur, hvussu stórur hann er í vavi, um hann er óbótaligur, um roynt hevur verið at byrgja fyri ella tálma skaðanum,

hvussu stóra skyld tann, sum hevur framt rættarbrotið, hevur o.a. Aftur at tí kann orsøk vera at leggja serligan dent á, um rættarbrotið er brot á ásetingar í lógini, sum serliga miða eftir at verja ella varðveita serliga viðkvom ella hótt sløg (*species*) ella náttúrusløg, ella um rættarbrotið ber í sær álvarsligt inntriv í eitt verndarøki. Sum dømir um onnur grov rættarbrot kunnu eisini hugsast ólógligur innflutningur og útseting av fremmandum lívverum.

At eisini brot av ósketni á ásetingarnar í lógini kunnu handhevjast og revsast, sbr. stk. 1, endurspeglar álvaran aftan fyri endamálið við lógini, sum er at fremja burðardygt brúk og verja náttúrumargfeldið.

Í onkrum førum kann eitt brot vera fevnt av gerningslýsingini í bæði náttúrumargfeldislógini og eini geiralóg. Í slíkum førum er útgangsstøðið, at tað er revsiásetingin í geiralógini, sum brúkast skal, um ikki ásetingarnar snúgva seg um ymsar tættir í teimum revsiverdu viðurskiftunum, sbr. *stk. 3*.

Forboðið fyri dupultari revsing eftir ískoytissáttmála nr. 7 til tann evropeiska mannarættindasáttmálan art. 4 forðar fyri endurtiknari revsirættarsókn. Tað ber í sær, at eitt rættarbrot, sum longu er revsað, ikki kann revsast umaftur eftir somu ella samsvarandi revsiáseting. Hava revsiásetingarnar til endamáls at verja ymisk áhugamál, kunnu somu viðurskiftir revsast eftir fleiri revsiásetingum í sokallaðari idealkapping (*concursus idealis*). Hvørji áhugamál ið tann einstaka revsiásetingin miðar eftir at verja, veldst um eina ítøkiliga meting við støði í orðaljóði og lógarfyrireikandi arbeiði.

Hevur ein geiralóg grovt ósketni ella tilætlan sum treyt fyri skyld, kann eitt rættarbrot av ósketni bara revsast eftir náttúrumargfeldislógini, sum í § 69 eisini heimilar revsing, tá ið talan er um rættarbrot av ósketni.

Sum dømi kann nevnast eitt føri, har ið ein gerð ber í sær brot á reglurnar í bæði náttúrumargfeldislógini og løgtingslóg um aling av fiski v.m. Verður brotið eftir báðum lógum mett at vera framt av grovum ósketni, geldur revsiásetingin í løgtingslóg um aling av fiski v.m. § 25 sum geiralóg. Kann brotið bara sigast at vera framt av ósketni, kann revsing bara áleggjast við heimild í náttúrumargfeldislógini § 69, sum hevur ósketni sum treyt fyri skyld.

Í *stk. 4* er ásett, at um rættarbrotið er framt vegna felag ella annan løgfrøðiligan persón, kann tann løgfrøðiligi persónurin revsast sambært reglunum í lógarkapitli 5 í revsilógini.

**Til § 70.**
Eftir *stk. 1* ásetur landsstýrismaðurin í kunngerð, nær ið lógin kemur í gildi.

Stórir partar av lógini kunnu koma í gildi, uttan at nærri kunngerðir verða ásettar, men fyri summar partar av lógini kann tað vera viðkomandi at gera kunngerðir, áðrenn ásetingarnar í náttúrumargfeldislógini fáa gildi. *Stk. 2* gevur tí landsstýrismanninum heimild at áseta ymisk gildiskomumund fyri ymsar ásetingar í lógini ella ymsar bólkar av lívverum, um tað gerst viðkomandi.

**Til § 71.**
Í *stk. 1, 1. pkt,* er ásett, at avgerðir við heimild í ásetingum í náttúrufriðingarlógini, sum settar verða úr gildi, tá ið náttúrumargfeldislógin kemur í gildi, verða verandi í gildi, til landsstýrismaðurin tekur aðra avgerð. Av tí at náttúrumargfeldislógin ikki fevnir um øll tey somu viðurskiftini, sum náttúrufriðingarlógin, verða partar av náttúrufriðingarlógini verandi í gildi, eftir at náttúrumargfeldislógini kemur í gildi. Avgerðir við heimild í ásetingum í náttúrufriðingarlógini,

sum verða strikaðar, vera tó verandi í gildi, til landsstýrismaðurin tekur aðra avgerð. Her verður serliga hugsað um økisfriðingar og aðrar friðingar, sum samtyktar eru í teimum staðbundnu friðingarnevndunum og staðfestar av Yvirfriðingarnevndini. Eftir *2. pkt.* verða brot á slíkar avgerðir revsað eftir higartil galdandi reglum, t.e. eftir revsiásetingini í náttúrufriðingarlógini.

Í *3. pkt.* er ásett, at mál, sum eru til viðgerðar hjá verandi friðingarmyndugleikum eftir náttúrufriðingarlógini, tá ið náttúrumargfeldislógin kemur í gildi, skulu viðgerast og avgerast eftir higartil galdandi reglum. Tað ber í sær, at tær staðbundnu friðingarnevndirnar og Yvirfriðingarnevndin halda fram at viðgera tey mál, sum eru til viðgerðar, eftir higartil galdandi reglum, eftir at náttúrumargfeldislógin er komin í gildi.

Eftir *4. pkt.* galda §§ 31, stk. 4, 44 og 45, so langt tær passa, eisini fyri eldri avgerðir um friðing við heimild í higartil galdandi náttúrufriðingarlóg.

Eftir *stk. 2* fær landsstýrismaðurin heimild til í kunngerð at áseta skiftisásetingar fyri tillaging frá lóggávu, sum fer úr gildi, til náttúrumargfeldislógina.

**Til § 72.**
§ 72 ásetur neyðugar fylgibroytingar í løgtingslóg nr. 83 frá 25. mai 2009 um aling av fiski v.m., sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 14. desember 2012, og løgtingslóg um nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 15. mai 2014.

Broytingin í løgtingslóg um aling av fiski snýr seg um at broyta eina tilvísing til náttúrufriðingarlógina, so at tað í staðin verður víst til náttúrumargfeldislógina.

Broytingin í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m. snýr seg um broyta nakrar tilvísingar til friðingarnevndirnar eftir náttúrufriðingarlógini, so at tað í staðin verður víst til landsstýrismannin.

Heilsu- og innlendismálaráðið, 6. apríl 2018

**Sirið Stenberg**
landsstýriskvinna

/ Turid Arge